# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Fíggjarárið 2021

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

August 2022

# Innihaldsyvirlit


**0. FRAMLØGA 7**

**1. INNGANGUR 9**

**1.1 LANDSROKNSKAPURIN 2021 9**
**1.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 9**

**2. ALMENNAR VIÐMERKINGAR 13**

**2.1 SKIPAN AV ROKNSKAPARHALDINUM 13**
**2.2 MANGLANDI INNANHÝSIS EFTIRLIT 13**
**2.3 SKRÁSETING AV OGNUM 14**
**2.4 ÚTBJÓÐING AV VØRUM OG TÆNASTUM 15**
**2.5 TÍÐARAVMARKING AV LØNUM OG TÍÐARSKRÁSETING 15**
**2.6 LANDSSTÝRISMENN ERU SEINIR AT SVARA 16**

**3. LØGMANSFYRISITINGIN 17**

**3.1 LØGMANSSKRIVSTOVAN (LG 2021/202-111) 17**
**3.2 UMBYGGING Í TINGANESI (LG 2019/202-111) 17**
**3.3 DÁTUEFTIRLITIÐ (LG 2017/202-142) 18**

**4. FÍGGJARMÁL 19**

**4.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2014/100-001) 19**
**4.2 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (LG 2021/203-111) 20**
**4.3 LANDSINS OGNIR (LG 2020/203-111) 21**
**4.4 UMVÆLING AV ALMENNUM BYGNINGUM, LØGUJÁTTAN (LG 2021/203-111) 22**
**4.5 TALGILDU FØROYAR (LG 2018/203-111) 27**
**4.6 TALGILDU FØROYAR, RAKSTUR (LG 2021/203-151) 29**
**4.7 GJALDSTOVAN (LG 2021/203-151) 30**
4.7.1 GJALDSTOVAN, VANLIGT VIRKSEMI, UNDIRKONTA 20 30
4.7.2 BÚSKAPARSKIPAN LANDSINS, UNDIRKONTA 24 30
4.7.3 VAKTÆTLANARSKIPANIN, UNDIRKONTA 25 31
4.7.4 FELAGSFYRISITINGIN Í KVÍGGJARTÚNI, UNDIRKONTA 28 31
4.7.5 GJALDSTOVAN, INNTØKUFÍGGJAÐ VIRKSEMI, UNDIRKONTA 40 32
**4.8 DAGFØRING AV ROKNSKAPARRUNDSKRIVI (LG 2016/203-151) 32**
**4.9 KERVISGRANNSKOÐAN (LG 2021/203-151) 32**
**4.9.1 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ TAKS** 32

4.9.2 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ GJALDSTOVUNI 33
4.9.3 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ KT LANDSINS 34
4.9.4 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ TALGILDU FØROYUM 35
**4.10 TAKS (LG 2020/203-151) 35**
**4.11 LANDSBANKI FØROYA (LG 2020/203-151) 38**
**4.12 HAGSTOVA FØROYA (LG 2020/203-152) 39**
**4.13 YMSAR EFTIRLØNIR (LG 2021/203-181) 40**
**4.14 LANDSVERK (LG 2021/203-381) 42**
4.14.1 INNTØKUFÍGGJAÐ VIRKSEMI 43
4.14.2 ROYNDARVERKÆTLAN VIÐ ORKUSPARING Í LANDSINS BYGNINGUM 47
4.14.3 KONSORTIEAVTALA VIÐVÍKJANDI EYSTUROYARTUNLINUM 48
4.14.4 RÆTTARMÁL 50
**4.15 STUÐUL TIL INFRAKERVI Á ÚTOYGGJUM (LG 2021/203-381) 50**
**4.16 ASFALT- OG SKERVVERK, LØGUJÁTTAN (LG 2021/203-381) 51**
**4.17 STRANDFARASKIP LANDSINS (LG 2021/203-382) 52**
4.17.1 NÝGGJ KT-SKIPAN 57
**4.18 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAR (LG 2021/203-382) 62**
**4.19 AKSTOVAN (LG 2020/203-384) 62**
**4.20 FAS-SKIPANIN (LG 2021/220-521) 63**
**4.21 LØNARHÆDDARAVGJALD (LG 2020/220-522) 68**
**4.22 LOYVISGJALD Á ALIVINNU (LG 2020/220-522) 70**
**4.23 SKRÁSETINGARGJALD (LG 2021/220-522) 71**
**4.24 VEKTGJALD (LG 2021/220-522) 72**
**4.25 ONNUR GJØLD/AVGJØLD 73**

**5. FISKIVINNUMÁL 75**

**5.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (LG 2021/205-211) 75**
**5.2 VØRN, TILBÚGVING Á SJÓGVI OG VEÐURTÆN. (LG 2021/205-311) 76**
**5.3 UPPLÝSING UM GRIND (LG 2021/205-341) 78**
**5.4 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (LG 2017/205-342) 78**
**5.5 HAVSTOVAN (LG 2021/205-343) 79**
**5.6 FISKIVINNUROYNDIR (LG 2018/205-343) 81**
**5.7 AVGJALD Á FISKATILFEINGI (LG 2020/220-522) 81**

**6. UMHVØRVIS- OG VINNUMÁL 83**

**6.1 UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ (LG 2021/206-111) 83**
**6.2 MARITIMUR TÆNASTUDEPIL (LG 2020/206-111) 83**
**6.3 JARÐFEINGI (LG 2017/206-321) 84**
**6.4 BÚNAÐARSTOVAN, LØGUJÁTTAN (LG 2021/206-332) 84**
**6.5 BÚNAÐARSTOVAN (LG 2021/206-332) 85**
**6.6 LANDBÚNAÐARSTUÐUL, STUÐULSJÁTTAN (LG 2021/206-332) 89**
**6.7 ALMENN JØRÐ, SØLA (LG 2021/206-332) 92**
**6.8 SJÓVINNUSTÝRIÐ (LG 2020/206-351) 94**
**6.9 SJÓVINNUSTÝRIÐ, BYGNINGUR (LG 2015/206-351) 95**
**6.10 FØROYA ALTJÓÐA SKIPASKRÁ, FAS (LG 2021/220-521) 96**
**6.11 HAVBÚNAÐARROYNDIR (LG 2021/206-361) 102**
**6.12 EL-NEVNDIN (LG 2021/206-371) 103**
**6.13 BRÚKARAUMBOÐ (LG 2020/206-371) 104**

6.14 VINNUSTOVNURIN (LG 2017/206-371) 104
6.15 VINNUFRAMI (LG 2021/206-372) 104
6.16 ÍVERKSETARAHÚSIÐ Í KLAKSVÍK (LG 2021/206-372) 105
6.17 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2021/206-373) 106
6.18 UMHVØRVISSTOVAN (LG 2021/206-374) 111
6.19 HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN (LG 2017/206-375) 117
6.20 ARBEIÐS- OG BRUNAEFTIRLITIÐ (LG 2021/206-391) 117
6.21 BARSILSSKIPANIN (LG 2020/206-394) 120
6.22 BARSILSGRUNNURIN 121

7. UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁL 123

7.1 UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ (LG 2021/207-111) 123
7.2 UMSITING AV STUÐLI UNDIR § 7 (LG 2021/207-000) 124
7.3 UNDIRVÍSINGARSTÝRIÐ (LG 2020/207-231) 126
7.4 NÁM (LG 2021/207-231) 126
7.5 FÓLKASKÚLIN (LG 2021/207-232) 129
7.6 RÁSIN (LG 2020/207-232) 130
7.7 GLASIR (LG 2020/207-233) 130
7.8 LØNIR Á SERBREYTUNUM (LG 2018/207-233) 134
7.9 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK, LØGUJÁTTAN (LG 2018/207-233) 134
7.10 MIÐNÁM Í VESTMANNA (LG 2021/207-233) 135
7.11 MIÐNÁM Á KAMBSDALI (LG 2021/207-233) 138
7.12 SKÚLADEPIL VIÐ MARKNAGIL, LØGUJÁTTAN (LG 2020/207-233) 141
7.13 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (LG 2019/207-235) 142
7.14 UNDIRVÍSING Í FØROYSKUM FYRI FREMMANDMÆLT (LG 2021/207-235) 142
7.15 MUSIKKSKÚLAR (LG 2021/207-235) 143
7.16 VINNUHÁSKÚLIN (LG 2018/207-236) 146
7.17 SJÓNÁM (LG 2020/207-236) 146
7.18 FØROYA BRANDSKÚLI OG INNTØKUFÍGGJAÐ VIRKSEMI HJÁ VINNUHÁSKÚLANUM (LG 2021/207-236) 148
7.19 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (LG 2021/207-236) 150
7.20 GRANSKINGARRÁÐIÐ (LG 2020/207-236) 156
7.21 STUDNI (LG 2020/207-237) 156
7.22 YRKISDEPILIN (LG 2021/207-237) 166
7.23 TJÓÐPALLUR FØROYA (LG 2020/207-242) 170
7.24 TJÓÐSAVNIÐ (LG 2019/207-243) 170
7.25 TJÓÐSKJALASAVNIÐ (LG 2021/207-243) 171
7.26 LANDSBÓKASAVNIÐ (LG 2020/207-243) 172
7.27 MIÐLASTUÐUL (LG 2021/207-244) 172
7.28 KIRKJUGRUNNURIN OG TILTAKSGRUNNURIN (LG 2018/207-245) 173
7.29 ÍTRÓTTAHØLL Í SANDOYNNI (LG 2018/207-246) 174

8. HEILSUMÁL 177

8.1 HEILSUMÁLARÁÐIÐ (LG 2021/211-111) 177
8.2 ETISKA RÁÐIÐ (LG 2021/211-111) 178
8.3 FÓLKAHEILSURÁÐIÐ (LG 2020/211-201) 179
8.4 HEILSUTRYGDARVEITINGAR (LG 2020/211-202) 179

**9. ALMANNAMÁL 183**

**9.1 ALMANNAMÁLARÁÐIÐ (LG 2021/212-111) 183**
**9.2 FAMILJUFYRISITINGIN (LG 2019/212-141) 184**
**9.3 ALMANNAVERKIÐ (LG 2021/212-211) 184**
**9.4 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LG 2015/212-213) 188**
**9.5 INNHEINTING AV SKYLDUGUM BARNAPENINGI (LG 2021/212-213) 189**
**9.6 EFTIRGEVING AV FORSKOTSRINDAÐUM BARNAPENINGI (LG 2021/212-213) 192**
**9.7 STUÐUL TIL UPPIHALDSPENING (LG 2021/212-213) 192**
**9.8 EINKJUBARNASTYRKUR (LG 2014/212-213) 194**
**9.9 BARNAÍSKOYTI (LG 2015/212-213) 194**
**9.10 BÚSTOVNAR O.A., LØGUJÁTTAN (LG 2019/212-216) 194**
**9.11 ALMANNAVERKIÐ, TRIVNAÐARTÆNASTUR (LG 2018/212-216) 200**
9.11.1 FELAGSRAKSTUR Í TRIVNAÐARDEPLINUM 200
9.11.2 EIND 1 OG EIND 6 201
9.11.3 EIND 11 Í TRIVNAÐARTÆNASTUM 201
**9.12 FELAGSKASSAR (LG 2020/212-216) 202**
**9.13 ÍSKOYTI TIL HOYRITÓL SAMBÆRT § 18B (LG 2020/212-217) 202**
**9.14 ALMANNATRYGD (LG 2021/212-217) 204**
**9.15 ARBEIÐSFREMJANDI TILTØK (LG 2021/212-217) 206**

**10. FÍGGJARSTØÐA 209**

**10.1 FÍGGJARSTØÐA (LG 2021/300-000) 209**
10.1.1 KAPITALINNSKOT (LG 2021/300-102) 209
10.1.2 KEYPSSKÁLA SKRÁSETT VIRÐISBRØV 210
10.1.3 VIRÐISBRØV 211
10.1.4 ÚTLÁN 213
10.1.5 ÁOGN O.A. 213
10.1.6 TØKUR PENINGUR 215
10.1.7 SKULD 216
10.1.8 UMSITING AV KREDITORUM OG KREDITORSKIPANINI (LG 2021/300-201) 217
**10.2 ÚTJAVNINGARKONTA (LG 2021/300-203) 220**
**10.3 FYRISITING AV GJALDFØRI OG SKULD (LG 2021/300-104 OG 202) 220**
10.3.1 PORTEFØLJUSKIPANIN 220
10.3.2 GJALDFØRIÐ HJÁ LANDINUM 221
10.3.3 LANDSKASSASKULD - BRÆVALÁN 222

**11. ORÐALISTI 227**

# 0. Framløga

Sambært § 12, stk. 2, í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”, skal roknskapargrannskoðanin innan 8 mánaðir eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu leingja freistina.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2021 fyri Løgtingið til samtyktar.

Frágreiðingin er løgd fyri teir landsstýrismenn til viðmerkingar, sum hava umsitið málsøkini. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnunum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2021 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2021 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 31. august 2022

Beinta Dam
landsgrannskoðari

# 1. Inngangur

## 1.1 Landsroknskapurin 2021

§ 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini ásetir, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Sambært § 1, stk. 1, í Ll. nr. 33 frá 23. mars 1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan mai mánaður er liðin, leggja samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár fyri Løgtingið.

***Landsstýrið skal leggja fram samlaðan landsroknskap áðrenn 1. juni.***

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2021 var latin Løgtinginum 27. mai 2022.

Tað er eisini ásett í § 11, stk. 1, í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.", at landsstýrismaðurin í seinasta lagi fimm mánaðir eftir fíggjarárslok skal lata løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini tann árliga landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.

Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í K. nr. 22 frá 14. mars 2007 "um roknskaparverk landsins o.t."[1] Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðini, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

***Roknskapurin skal vera gjørdur í BSL.***

Aðalráðini og stovnar teirra skulu eisini støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setir upp.

***Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.***

## 1.2 Grannskoðan av roknskapinum

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

***Endamálið við grannskoðanini.***

- at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,

[1] Broytt við K. nr. 110 frá 14. juli 2017.

at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

*Ábyrgd grannskoðarans.*

### Landsgrannskoðanin

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheft í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnar.[2]

Grannskoðanin skal fevna um fíggjarliga grannskoðan, løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan og fyrisitingargrannskoðan. Harafturat skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger sjálv av, hvussu grannskoðanin verður útint. Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av fíggjarstøðu og avstemman.

### Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðara. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitini av grannskoðanunum. Seinnu árini hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum, sum er latin Løgtinginum saman við uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin.

### Frágreiðingar umbidnar av løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini at gera víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Dømi um slíka frágreiðing er notat “um fíggjarligu gongdina hjá Bústøðum/Húsalánsgrunninum seinastu 10 árini”, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í mars 2022.

### Aðrar frágreiðingar

Umframt ársfrágreiðingina ger Landsgrannskoðanin eisini frágreiðingar um ávís útvald evni ella øki. Dømi um tílíkar frágreiðingar eru, frágreiðing “um kanning av KT-trygdarstøðuni hjá stovnum landsins”, frá august 2020, frágreiðing “um fráfaringaravtalur hjá landinum” frá oktober 2020 og frágreiðing “um grannskoðan av lønum til leiðarar, settir seinastu árini”, frá desember 2021.

### Viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnum

Í § 12, stk. 1, í grannskoðanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava eina skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini. Vanligt er, at stovnsleiðslan frammanundan fær høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, og at tey skriv, sum verða send landsstýrismanninum, eru so røtt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

*Landsstýrismaðurin skal hava frágreiðingar til viðmerkingar.*

Í § 12, stk. 3, er ásett, at áðrenn frágreiðing um úrslitið av einari grannskoðan verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri viðkomandi landsstýrismann

[2] Tó ikki roknskapirnar hjá teimum, har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu takast við í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar.

Frágreiðingin skal sendast landsstýrismanninum til viðmerkingar til tess at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum, verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at landsstýrismaðurin eisini fær høvi at lýsa síni sjónarmið.

### Millumlanda samstørv

Landsgrannskoðanin er við í norðurlendskum samstarvi ímillum ríkisgrannskoðanirnar í Danmark, Finnlandi, Íslandi, Norra, Svøríki og Føroyum. Landsgrannskoðanin er eisini við í norðuratlantiskum samstarvi ímillum grannskoðanirnar í Íslandi, Grønlandi og Føroyum.

Sum skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum, er landsgrannskoðarin við á fundum ímillum skrivararnar hjá parlamentarisku grannskoðarunum í Norðurlondum.

Landsgrannskoðanin hevur umboð í grannskoðaranevndini, ið grannskoðar ES-stuðul frá Northern Periphery and Arctic Programme.

# 2. Almennar viðmerkingar

## 2.1 Skipan av roknskaparhaldinum

Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” og K. nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins o.t.” áseta, hvussu roknskaparhaldið hjá landinum skal vera skipað. Ein týðandi partur er, at stovnar o.o. gera eina roknskaparreglugerð[3], sum sigur, hvussu roknskaparhaldið á stovninum skal vera fyriskipað, og at reglugerðin verður dagførd. Stovnsleiðarin skal ansa eftir, at roknskaparreglugerðin við ábyrgdar- og heimildarreglum verður hildin.

***Kravið um reglugerð fyri roknskaparhaldið er frá 1995.***

Landsstýrismaðurin og aðalráðið hava skipað roknskaparøkið forsvarliga, tá ið allar roknskaparreglugerðir eru gjørdar og góðkendar, og tá ið eftirlit er við, at ásettu mannagongdirnar verða hildnar.

Grannskoðanir hjá Landsgrannskoðanini hava seinastu nógvu árini vístast, at roknskaparreglugerðirnar eru ikki dagførdar. Reglugerðirnar kunnu tí í nógvum førum ikki nýtast sum grundarlag undir at kanna eftir, at roknskaparøkið er forsvarliga skipað. Tær eru tí í besta føri til onga nyttu og í ringasta føri villleiðandi og spill av tilfeingi.

Aftur í hesari ársfrágreiðingini má Landsgrannskoðanin ásanna, at langt er ímillum dagførdar roknskaparreglugerðir.

## 2.2 Manglandi innanhýsis eftirlit

Í § 9 í roknskaparkunngerðini er ásett, at stovnsleiðararnir skulu góðkenna roknskapirnar viðvíkjandi stovnunum mótvegis hægri myndugleika. Tað, at hava ábyrgd av roknskapinum, merkir, at aðalráðini og stovnarnir undir teimum hava støðugt innanhýsis eftirlit, sum tryggjar, at ársroknskapurin er rættur, og at hann gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

Ein týðandi partur av innaneftirlitinum er tey tiltøk, sum leiðsla og starvsfólk seta í verk fyri at røkka málinum um, at raksturin er effektivur, at roknskapurin er rættur og álítandi, og at lógir og reglur eru hildnar.

Tað hendir seg javnan, at innanhýsis eftirlitið hjá stovnum ikki er nøktandi, og tað ger, at Landsgrannskoðanin ikki kann sanna, at roknskapurin er rættur.

***Innaneftirlit javnan ikki nøktandi.***

[3] § 5, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994: *“Landsumsitingin og teir landsstovnar v.m., sum koma undir § 2, stk. 1, skulu gera eina reglugerð um roknskaparhaldið í landsumsitingini ella á stovninum”.*

Aftur í hesari ársfrágreiðingini hevur Landsgrannskoðanin víst á manglandi eftirlit. Nøkur dømi um tað eru:

- Feilir í roknskapinum fyri 2019 hjá Búnaðarstovuni kundu verið fyribyrgdir, um greiðar mannagongdir vóru viðvíkjandi inntøkum. Kanning av inntøkunum vísir, at innaneftirlitið hevur ikki verið nóg gott.
- Skipanin hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er viðbrekin við ongum ella í besta føri veikum innaneftirliti, tá ið sama starvsfólk hevur ábyrgd av at rokna prísir út, gera eftirlit, og at gera fakturagrundarlagið, og tað kann vera óheppið, at stovnurin ikki hevur góðkenningarmannagongd, tá ið tey broyta prísir.
- Innaneftirlitið hjá Yrkisdeplinum hevur verið veikt. Um einføld eftirlit vóru í KT-skipanini, kundu tey spart stovninum fyri nógv handligt arbeiði, og byrgt upp fyri at feilir hendu, sum t.d. at sama upphædd kann vera goldin út fleiri ferðir.
- Landsgrannskoðanin kann ikki sannað, at roknskapirnir hjá Studna eru rættir, m.a. tí at stovnurin hevði ikki nóg væl skipað eftirlit við lestrarvirkni.

## 2.3 Skráseting av ognum

Sum liður í góðkenningini av roknskapum skal eftirlit vera við, at ogn og skuld og nýtsla av veittum játtanum er gjørd rætt upp. Ein afturvendandi trupulleiki hjá almennu stovnunum er, at teir ikki eru vísir í, nær og hvussu ognirnar skulu skrásetast.

Skilt skal vera ímillum ognir, ið eru útvegaðar fyri meira enn 50 t.kr., og ognir, ið kosta minni enn 50 t.kr.

*Ognir at skráseta í Búskaparskipan landsins*

***Keypsvirði yvir 50 t.kr. skal skrásetast í BSL.***

Ognir, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr., eru fevndar av § 20 í roknskaparkunngerðini, har ásett er, at yvirlit skulu gerast yvir ognir, so sum verkløg, jørð, bygningar, maskinur, akfør, innbúgv og annan virðismiklan útbúnað.

Sambært kunngerðini skulu ognirnar skrásetast í Búskaparskipan landsins, um ikki stovnar hava fingið loyvi at nýta egna búskaparskipan.

*Smærri ognir*

Ongar ávísar reglur eru um at skráseta smærri ognir við keypsvirði undir 50 t.kr.

***Skynsamt at vita, hvat stovnurin eigur.***

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at tað er skynsamt at føra yvirlit yvir smærri ognir, ikki minst KT-útbúnað, sum eisini hevur serstakar reglur um burturbeining.

***Serliga KT-útbúnað, sum hevur reglur um burturbeining.***

Í rundskrivinum “um eftirlit og at taka neyðug búskaparlig atlit” stendur, at landsstýrismenn og onnur, sum við heimiling ella við lóg hava fingið álagt ábyrgdina av einari játtan, hava skyldu at taka neyðug búskaparlig atlit.

At taka neyðug búskaparlig atlit kann m.a. bera í sær at hava ognaryvirlit, sum nøktar tørvin hjá stovninum, soleiðis at leiðslan veit, hvørjar ognir stovnurin eigur, og at tær eru til.

Ognaryvirlit kann vera eitt gott amboð, tá ið stovnur skal taka støðu til keyp ella sølu av t.d. innbúgvi og útbúnaði. Yvirlitið kann tryggja, at ognir, goldnar við skattakrónum, ikki fara fyri skeyti, og at allar ognir koma við, t.d. tá ið stovnur flytur í nýggj hølir. Eisini kundi verið skynsamt, at merkt ognir við navni á stovninum e.a.

*Dømi úr frágreiðingini*

Fíggjarmálaráðið hevur svarað Landsgrannskoðanini, at ráðið heldur seg til galdandi ásetingar í roknskaparkunngerðini, og hevur ongar ætlanir um at føra yvirlit yvir smærri ognir.

Umhvørvisstovan skrásetir útbúnað við útveganarvirði yvir 75 t.kr. í Búskaparskipan landsins. Í innanhýsis yvirliti hevur stovnurin skrásett ognir við útveganarvirði millum 20 t.kr. og 75 t.kr.

Glasir hevði ikki yvirlit yvir maskinur, innbúgv o.a. Leiðslan greiddi frá, at bygningurin var enn ikki yvirtikin frá Landsverki. Glasir avtalaði við Gjaldstovuna og Mentamálaráðið, at skúlin skuldi gera yvirlit yvir innbúgv og maskinur við virði oman fyri 50 t.kr., ið fóru at verða keyptar til nýggja skúlabygningin, og at gamalt innbúgv og maskinur, ið tey tóku við sær, eisini skuldu skrásetast.

Miðnám í Vestmanna hevði tríggjar ognir skrásettar sum støðisogn í Búskaparskipan landsins; t.e. bygningur, grundstykki og kopimaskina. Skúlin hevur annað ognaryvirlit, har serligur dentur er lagdur á at skráseta KT-útbúnaðin.

Fróðskaparsetrið hevur skrásett Lindbergs hús og tveir bilar í Búskaparskipan landsins. Fróðskaparsetrið hevur yvirlit yvir teldurnar, og hevði skrásett málning í egnari fíggjarskipan.

Í ársfrágreiðingini 2019 umrøddi Landsgrannskoðanin m.a., at Fróðskaparsetrið hevði ikki skrásett innbúgvið í Sjóvinnuhúsinum. Landsgrannskoðanin vísti á, at landið hevur goldið góðar 2 mió.kr. av løgujáttanini til Fróðskaparsetur Føroya fyri innbúgv til Sjóvinnuhúsið. Nú hevur Fróðskaparsetrið skrásett lutir, ið hava virði oman fyri 50 t.kr. í Búskaparskipan landsins. Samstundis vístu tey á, at einans ein lutur var útvegaður fyri yvir 50 t.kr. Fróðskaparsetrið hevur fingið lista frá Landsverki yvir innbúgvið, sum er keypt til Sjóvinnuhúsið.

## 2.4 Útbjóðing av vørum og tænastum

Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum “um keyp av vørum og tænastum” er ásett, at keyp av vørum og tænastum skulu bjóðast út alment á Keypsportalinum, um keypið er størri enn 500 t.kr. Eisini er ásett, at keyp fyri 50-500 t.kr. u/MVG kann avgreiðast við tilboðsfyrispurningi frá í minsta lagi tveimum veitarum, og at tílík keyp kunnu eisini verða boðin út á Keypsportalinum.

***Bjóða ikki keyp út.***

***Søkja ikki um undantak.***

Í hesari frágreiðingini sæst, at stovnar fylgja ikki altíð reglunum um útbjóðing av vørum og tænastum, og hava heldur ikki søkt um undantak frá at bjóða út. Dømi eru um, at ráðgevingaravtalur eru ikki bodnar út, í onkrum føri sigur stovnur seg ikki hava orku til at gera útbjóðingartilfar ella tilboðsfyrispurningar, eisini er dømi um, at stovnar halda ávísar veitarar vera bestar at gera uppgávurnar, ella tænastan er so serstøk fyri stovnin, at hon ikki kann bjóðast út millum fleiri.

Landsgrannskoðanin hevur eisini víst á, at einki forðar fyri, at biðja um prísir frá fleiri til keyp av vørum og tænastum, sum kosta undir 50 t.kr., út frá sjónarmiðinum um at fáa sum mest fyri pening skattgjaldarans.

## 2.5 Tíðaravmarking av lønum og tíðarskráseting

Í desember í ár eru liðin 5 ár síðani Fíggjarmálaráðið sendi út rundskriv, um “at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum”. Roknskaparmeginreglan hjá landinum er latingarmeginreglan, sum merkir, at ein útreiðsla skal verða skrásett, tá ið vøran ella veitingin verður framd. Lønarútreiðslur skulu tí sum meginregla verða tiknar við í tí roknskaparári, rætturin til lønina verður innvunnin.

Rundskrivið nágreinar, hvussu lønir skulu tíðaravmarkast, t.d. tá ið starvsfólk eiga fleiri enn 40 tímar ella skylda fleiri enn 30 tímar og uppspardar serstakar frívikur. Lønir, ið

standast av vaktum og ikki avgreiddum sáttmálabroytingum, verða sum meginregla altíð tíðaravmarkaðar, somuleiðis uppsagnarløn, tá ið starvsfólk verður fríttstillað í uppsagnartíðini.

***Halda ikki reglurnar um tíðaravmarking av lønum.***

Tó at rundskrivið kom í gildi í 2017, kann Landsgrannskoðanin í 2022 staðfesta, at enn eru fleiri stovnar og aðalráð, sum ikki halda reglurnar. Reglurnar verða tulkaðar ymiskt, og tíðaravmarkingin er tí ikki eins hjá øllum. Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi.

Í frágreiðingini framgongur, at ikki allir stovnar og ráð hava hóskandi tíðarskrásetingar, sum má sigast at vera grundarlag undir einihvørjari tíðaravmarking av arbeiðstímum.

***Fleiri stovnar vanta hóskandi tíðar-skráseting.***

Sambært roknskaparkunngerðini áliggur tað stovnsleiðarum at skipa fyri, at hóskandi skráseting av arbeiðstíð, fráveru, frítíð o.tíl. er á stovnunum, soleiðis at lønar-útgjaldingarnar eru rættar. Reglurnar um roknskaparverk landsins eru, sambært § 2 í kunngerðini, galdandi fyri allar stovnar, t.e. aðalráð, stovnar undir teimum, serligar grunnar o.a., umframt sjálvsognarstovnar, sum eru á játtanarlóg javnbjóðis teimum rættiligu stovnunum.

Uttan nøktandi skráseting av arbeiðstíð, kann grannskoðanin ikki sanna, at rokn-skapurin er rættur. Skrásetingin er m.a. ætlað at tryggja, at tímarnir goldið er fyri, eru arbeiddir, og at tilfeingi er fingið fyri útreiðsluna. Eisini skal skrásetingin virka til at tryggja, at møgulig yvirtíð og útgjald av serstakari fríviku er heimilað, at hvílutíð er hildin, at sáttmálaásetingar við skiftandi arbeiðstíðum verða fylgdar o.s.v.

## 2.6 Landsstýrismenn eru seinir at svara

Tá ið Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskap hjá stovni ella fyriskipan, letur Landsgrannskoðanin stovnsleiðsluni fyribilsfrágreiðing, har hon fær høvi at koma við viðmerkingum til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, at tey skriv, sum verða send landsstýrismanninum, eru so røtt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

***Striltið at fáa svar frá stovnsleiðslunum.***

Í fleiri førum gongur long tíð, áðrenn stovnsleiðslur svara okkara frágreiðingum, og tað seinkar okkara arbeiði.

Sambært § 12 í grannskoðanarlógini skal Landsgrannskoðanin lata avvarðandi lands-stýrismanni skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini, og verður landsstýris-maðurin biðin um viðmerkingar og fráboðanir um tiltøk og ætlanir, ið frágreiðingin hevur elvt til. Í § 20 í lógini er ásett, at øll skriv og viðmerkingar viðvíkjandi grannskoðan og gjøgnumgongd av roknskapum skulu svarast innan 6 vikur, um longri freist ikki verður ásett.

***Landsstýrismenn skulu svara innan 6 vikur.***

Áðrenn 1. september skal Landsgrannskoðanin hava latið løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um grannskoðanina, og tá skulu viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýris-monnunum verða við í frágreiðingini.

***Langa svartíðin hjá landsstýrismonnunum darvar okkara arbeiði.***

Ár undan ári hevur tað víst seg, at Landsgrannskoðanin, hóast áminningar, ikki fær svar frá landsstýrismonnunum upp á tær frágreiðingar, sum eru sendar teimum.

Tað, at so long tíð gongur at fáa svar, darvar arbeiðinum hjá Landsgrannskoðanini, og hevur m.a. við sær, at viðmerkingarnar frá landsstýrismanninum til frágreiðingina ikki eru fullfíggjaðar, tá ið árliga frágreiðingin um grannskoðanina verður løgd fyri løgtings-grannskoðararnar.

# 3. Løgmansfyrisitingin

## 3.1 Løgmansskrivstovan (LG 2021/202-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Løgmansskrivstovuni á høvuðskontu 2.11.1.02, við serligum denti á lønarviðurskifti og fíggjarstøðupostar.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 9.465 | 9.997 | 10.142 | 10.224 | 10.190 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2.821 | 3.177 | 2.820 | 2.555 | 3.663 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 208 | 174 | 54 | 324 | 162 |
| Leiga, viðlíkah. og skattur, avskr., o.a. | 58 | 48 | 52 | 91 | 59 |
| Søla av vørum og tænastum | -45 | 0 | -4 | 0 | -4 |
| Flytingarinntøkur úr útlandi | 0 | -54 | -71 | -6 | 0 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 7 | 0 | 2 | 49 | 15 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -286 | -298 | -303 | -1.059 | -821 |
| **Tilsamans** | **12.221** | **13.043** | **12.178** | **12.178** | **13.264** |

*Roknskaparreglugerð*
Roknskaparreglugerðin er seinast dagførd í juli 2017 og treingir til dagføringar, m.a. manglar frágreiðing um gjaldkort.

*Lønir*
Landsgrannskoðanin kannaði setanarmál; um lýsing, umsókn, prógv og setanarskriv vóru í málinum. Eisini kannaðu vit, um almenni setanarpolitikkurin er fylgdur. Einki var at finnast at.

*Ognir*
Í sambandi við grannskoðan av fíggjarstøðuni mælti Landsgrannskoðanin til at skráseta ognir, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr., í Búskaparskipan landsins. Sambært Løgmansskrivstovuni hava tey í mai 2022 skrásett ein málning av Mikines í Búskaparskipan landsins.

Landsgrannskoðanin mælti til at hava yvirlit yvir smærri ognir, vísandi til reglurnar um at taka neyðug búskaparlig atlit, og fyri at tryggja, at virðini eru til. Løgmansskrivstovan tekur ikki undir við tilmælinum.

***Løgmansskrivstovan heldur, tað er ikki neyðugt at hava yvirlit yvir smærri ognir.***

## 3.2 Umbygging í Tinganesi (LG 2019/202-111)

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin frá um grannskoðan av høvuðskontu 2.11.1.21 “Umbygging í Tinganesi”.

Í sambandi við umvælingar av bygningunum í Tinganesi var eitt mál ímillum Landsverk og eina fyritøku, ið legði nýtt teppi á í 2014 fyri slakar 200 t.kr. Eftir stutta tíð vísti tað

seg, at arbeiðið var ikki nøktandi, og drúgv togtogan var ímillum Landsverk og veitaran. Niðurstøðan var, at Landsverk skifti teppið, og kravdi veitaran eftir endurgjaldi.

Í 2021 greiddi Løgmansskrivstovan frá, at kostnaðurin fyri at leggja nýtt teppi á fór at verða lægri, enn mett, tí framleiðarin skuldi rinda fyri sjálvt teppið, og Løgmansskrivstovan skuldi rinda 36,4 t.kr. fyri áleggingina. Málið hevði verið kostnaðarmikið; tað byrjaði í 2014, og drúgva tíðin hevði havt við sær, at fleiri fólk høvdu brúkt nógva tíð upp á tað.

Landsverk hevði onnur endurgjaldskrøv ímóti sama veitara, og Løgmansskrivstovan helt, at meirútreiðslan upp á 124 t.kr., sum hon hevði havt av at skifta teppið, skuldi leggjast afturat og gerast partur av samlaðum kravi ímóti veitaranum.

***Endurgjaldskrav helst slept.***

Í august 2022 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at Landsverk metir, at tað neyvan verður nakað endurgjaldskrav, tí løgfrøðiliga er ov nógv arbeiði í tí samanborið við, hvat kann fáast í endurgjaldi.

## 3.3 Dátueftirlitið (LG 2017/202-142)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Dátueftirlitinum. Landsgrannskoðanin mælti til at gera mannagongdir, ið tryggja, at váðameting og KT-trygdarpolitikkur verða integreraðir partar av innaneftirlitinum.

Dátueftirlitið hevði bíðað við at skifta KT-útbúnaðin út og at dagføra netið og skipanina, tí eingin tænasta fór at verða veitt til verandi útbúnað eftir 2020, og stovnurin arbeiddi við at endurskoða KT-viðurskiftini.

Í 2019 greiddi Dátueftirlitið frá, at trygdarskjøl, váttanir og KT-trygdarpolitikkur vóru nútímansgjørd og avgreidd, men at enn manglaði at avgreiða eina trygdarskoðan.

Í 2020 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at sambært Dátueftirlitinum var trygdarskoðanin framvegis ikki gjørd. Dátueftirlitið hevði verið í drúgvum samskifti við Elektron og Formula, tí partarnir vóru ikki samdir um, hvørjar leiklutir teir høvdu, eitt nú dátuábyrgdari og dátuviðgeri.

Í 2021 greiddi Løgmansskrivstovan frá, at Dátueftirlitið og KT Landsins høvdu gjørt sáttmála um tænastustig av Landsnet-grundtænastum. Tað merkir m.a., at spurningurin, hvussu ábyrgdarbýtið var skipað millum Elektron, Formula og Dátueftirlitið, ikki longur var viðkomandi.

Dátueftirlitið hevði eisini dátuviðgerðaravtalu við KT Landsins, sum m.a. tilskilaði, at KT Landsins var dátuviðgeri hjá Dátueftirlitinum, og at bæði Elektron og Formula vóru undirdátuviðgerar. Harumframt var tilskilað í avtaluni, at dátuviðgerin, sum var KT Landsins, fyri egna rokning skal útvega árliga skoðanarváttan frá óheftum triðjaparti, um at dátuviðgerin (t.e. KT Landsins) og undirdátuviðgerar (t.e. m.a. Elektron og Formula) halda dátuverndarlógina umframt aðra lóggávu um dátuvernd.

Dátueftirlitið og Gjaldstovan gjørdu í juli 2021 avtalu um Trygdarpakkan, sum m.a. hevur við sær, at Gjaldstovan eina ferð um árið skipar fyri, at Dátueftirlitið fær eina skoðan av tí virksemi, sum liggur hjá stovninum.

Í august 2022 hevur Løgmansskrivstovan greitt frá, at sambært Dátueftirlitinum er trygdarskoðan ikki gjørd enn.

# 4. Fíggjarmál

## 4.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2014/100-001)

Í serstakari frágreiðing “um ávísar stovnar og grunnar og tilknýti teirra til fíggjarlóg og landsroknskap”, latin løgtingsgrannskoðarunum í oktober 2007, vísti Landsgrannskoðanin á, at fleiri landsstovnar vóru ikki við í fíggjarstøðuni.

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir høvdu tá í 10-15 ár javnan gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar vóru ikki við í fíggjarlógini og í landsroknskapinum, og at tað var ivasamt, um grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan vóru hildnar.

Árini eftir tað hildu løgtingsgrannskoðararnir fram við at vísa á týdningin av, at allir stovnar, grunnar, feløg o.o., sum ikki eru í fíggjarlógini og sum koma undir § 2, stk. 2, í lógini um landsins almenna roknskaparhald, verða tikin við í landsroknskapin.

Í 2013 setti Fíggjarmálaráðið í gildi K. nr. 95/2013 “um at lata inn roknskaparupplýsingar um alment virksemi til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit”. Endamálið við kunngerðini var at fáa til vega upplýsingar um alment virksemi, sum ikki er við í fíggjarlógini, men er fevnt av almennu roknskaparlógini.

Í uppskoti til samtyktar í februar 2014 fegnaðust løgtingsgrannskoðararnir um, at landsstýrismaðurin hevði ásett reglur um at útvega roknskapartøl frá feløgum, grunnum o.ø. uttan fyri fíggjarlógina, og at hann hevði gjørt avtalu við ALS og Trygdargrunn Fiskimanna um tað sama.

***Ikki allir landsstovnar við í landsroknskapinum.***

Landsroknskapurin fevnir nú um næstan allar landsstovnar og alment virksemi, sum landið varðar av. Somuleiðis er við gjaldføri o.ø. hjá landinum.

Dømi um almennar stovnar og virksemi, sum ikki eru við í landsroknskapinum, eru Føroya Realkreditstovnur og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, sum hava einar 2,5 mia.kr. í eginogn.

Í svari til løgmann í sambandi við Lm. nr. 37/2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað *“framhaldandi og áhaldandi verður arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fer sostatt fram í stigum. Bústaðir og Búnaðargrunnurin eru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt verður við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin.”*

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir “Eksternir grunnar”. Ætlanin var, at eginpeningurin í Bústøðum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframa í framtíðini verður tikin við í landsroknskapinum undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.” Sambært landsstýris-

manninum var eftir at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kundu verða tikin við í landsroknskapin.

***Landsroknskapurin avspeglar í minni mun veruliga virksemið, váðar o.a.***

Seinastu árini er alsamt meira virksemi hjá landinum lagt í virkiseindir, sum eru skildar frá landsfyrisitingini, t.d. í partafeløg. Flestu almennu reglur og fyriskipanir galda ikki fyri almennu partafeløgini. Feløgini eru heldur ikki partur av fíggjarlóg ella roknskapum, sum verða lagdir fyri Løgtingið. Landsroknskapurin avspeglar tí í minni mun veruliga virksemið, váðar o.a. hjá landinum.

Í 2016 segði Fíggjarmálaráðið seg vera samt við Landsgrannskoðanina um vandan, ið kann standast av, at ov nógv virksemi verður lagt í almenn partafeløg uttan fyri fíggjarlóg, har ikki sama gjøgnumskygni, almenn stýring og almennar reglur eru galdandi.

Fíggjarmálaráðið arbeiddi fram ímóti, at eginpeningurin í eksternu grunnunum fór at verða tikin við í landsroknskapin fyri 2017 undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Arbeitt var við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini fór at verða tikin til tilknýtið til landsroknskapin.

Landsstýrismaðurin greiddi í 2018 og aftur í 2019 frá, at tað var framhaldandi arbeitt ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Í 2018 var miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Tað bleiv ikki gjørt kortini.

Í september 2021 segði landsstýrismaðurin, at *"sitandi samgonga og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava sett sær fyri at fáa ein meira fullfíggjaðan almennan roknskap."*

## 4.2 Fíggjarmálaráðið (LG 2021/203-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Fíggjarmálaráðnum, á høvuðskontu 3.11.1.03, við serligum denti á lønarviðurskifti og fíggjarstøðupostar.

### Rakstur

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 9.929 | 9.996 | 9.718 | 11.533 | 11.791 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.379 | 1.191 | 1.504 | 1.322 | 1.432 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 87 | 191 | 117 | 120 | 137 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 45 | 0 | 12 | 55 | 70 |
| Søla av vørum og tænastum | -100 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tilskot til útlandið o.a. | 114 | 131 | 287 | 291 | 296 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 116 | 234 | 254 | 393 | 1.104 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -113 | -100 | -11 | -116 | -202 |
| **Tilsamans** | **11.457** | **11.643** | **11.880** | **13.598** | **14.628** |

*Roknskaparreglugerð*

Roknskaparreglugerðin hjá Fíggjarmálaráðnum er dagført í mai 2022.

*Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði setanarmál; um lýsing, umsókn, prógv og setanarskriv vóru í málinum. Eisini kannaðu vit, um almenni setanarpolitikkurin er fylgdur. Einki var at finnast at.

**Fíggjarstøða**

*Tíðaravmarkan v.m.*

Fíggjarmálaráðið hevur tíðaravmarkað lønir 2020 og 2021 í landsroknskapinum sambært ásetingunum í rundskrivinum um tíðaravmarkan av lønum.

*Partapeningur*

Partabrøvini hjá landinum eru skrásett undir ymiskum høvuðskontum. Partabrøv í P/f Elektron og niðurskrivaðu partabrøvini í gamla P/f Føroya Banka hava verið skrásett undir Fíggjarmálaráðnum síðani 2001. Í 2011 vórðu partabrøv í P/f Virðisbrævamarknaði Føroya skrásett undir Fíggjarmálaráðnum. P/f Virðisbrævamarknaður Føroya var tikið av í 2014.

Fíggjarmálaráðið hevur kunnað um, at ráðið er í samskifti við Gjaldstovuna um at gjøgnumganga goymsluna og skrásetingina av partabrøvum, herundir rættleikan, og um øll partabrøvini hjá landinum skulu vera undir landskassanum.

*Depotkonta*

Í mai 2022 er saldan á depotkontuni 322 t.kr. Fíggjarmálaráðið hevur heitt á Atlantic Airways um at fáa greiði á, hvørji partabrøv ikki eru innfríað, soleiðis at peningurin kann gjaldast eigarunum. Deponeringin av peninginum er galdandi í 20 ár frá 2. mars 2015 at rokna.

*Ognaryvirlit*

Í mai 2022 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at ráðið heldur seg til galdandi ásetingar í roknskaparkunngerðini, og hevur ongar ætlanir um at føra yvirlit yvir smærri ognir.

## 4.3 Landsins ognir (LG 2020/203-111)

Sambært fíggjarlógini varðar landið av oljutangum landsins, og landskassin fær 1,2 mió.kr. um árið í leiguinntøkum. Í fíggjarlógini fyri 2020 eru játtaðar 1,2 mió.kr. í inntøku.

**Undirkonta 20. Oljugoymslur o.a.**

Í frágreiðing í 2003 umrøddi Landsgrannskoðanin undirkontuna “Oljugoymslur o.a.” Inntøkan av goymslunum hevði tá verið óbroytt í 25 ár. Í 2001 var avtala gjørd, har oljufelagið bant seg til at gjalda 1,2 mió.kr. um árið fyri at leiga oljugoymslurnar móti at halda tær viðlíka og hava tilbúgving klára. Avtalan skuldi vera galdandi í 5 ár. Landsverk hevur greitt frá, at avtalan seinast er dagførd í 2007.

***Leiguinntøka óbroytt í 43 ár.***

Sambært Búskaparskipan landsins er inntøkan 1,2 mió.kr. um árið, og hevur verið óbroytt seinastu 43 árini. Landsverk veit ikki, hvussu komið er til leiguprísin, tí tað er so langt síðan, hann var ásettur. Landsverk helt, at leiguprísurin ikki var broyttur, tí at eingin verulig avgerð var tikin um, hvørt landið framhaldandi skuldi eiga tangarnar ella ikki.

Í 2021 gjørdi Landsverk avtalu við Fíggjarmálaráðið um, at stovnurin tekur upp samráðingar við oljufelagið um, hvat framhaldandi skal henda og fær gjørt eina nýggja avtalu.

Í september 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Effo hevur leigað, røkt og rikið oljutangar landsins í Sørvági og í Søldarfirði í 73 ár. Landið hevur ongar útreiðslur havt av leigumálunum, undantikið trygging av oljutangunum, 35 t.kr. árliga til og við 2002.

Fíggjarmálaráðnum kunnugt hevur landið, í øllum førum í nýggjari tíð, bert í einum føri arbeitt við málinum um at selja oljutangar landsins. Fíggjarlig heimild (játtan í fíggjarlógini) var til at selja tangarnar í 2006, 2007 og 2008. Landsstýrismaðurin fekk í 2007 politiska undirtøku fyri at fara undir eina tilgongd at selja oljutangar landsins.

Sambært sáttmálanum skuldu Landsverk og Effo samráðast um málið, áðrenn Landsstýrið kundi taka endaliga avgerð um, hvat skuldi henda. Oljutangarnir eru ein týðandi partur av goymsluskipanini hjá Effo. Um Effo ikki keypti tangarnar, var neyðugt at taka atlit at, at tað tekur tíð hjá felagnum at tillaga virksemi, fáa nýggjar oljutangar til vega o.t.

Samanumtikið vóru oljutangarnir ikki seldir, tí eingin nøktandi sølutilgongd var funnin. Síðani 2008 hevur tað ikki verið frammi aftur at selja oljutangarnar.

Fíggjarmálaráðið var samt við Landsverk um, at Landsverk eigur at taka upp samráðingar við Effo um at dagføra leiguavtaluna um oljutangarnar.

***Helst onga leiguinntøku av oljutangum frameftir.***

Í august 2022 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at oljutangarnir í Sørvági og í Søldarfirði eru góðkendir til 2024, men eru í ringum standi. Effo gevst tí við virkseminum í Sørvági í september 2022. Ráðið leggur afturat, at samskift verður við Effo um niðurtøku av tangunum og upprudding í tí sambandi, men tað er ikki avklárað enn. Leiguinntøkurnar fyri oljutangarnar í Sørvági fara sambært Fíggjarmálaráðnum at minka í 4. ársfjórðingi 2022, og í 2023 verða allarhelst ongar inntøkur. Effo hevur boðað frá, at felagið eisini fer at gevast heilt í Søldarfirði. Leiguinntøkurnar fyri Søldarfjørð fara so at minka í 2023, og í 2024 verða allarhelst ongar inntøkur.

## 4.4 Umvæling av almennum bygningum, løgujáttan (LG 2021/203-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin fyri Umvæling av almennum bygningum, sum er á høvuðskontu 3.11.1.56.

***470 mió.kr. í eftirsleipi.***

Í 2021 eru 22 mió.kr. játtaðar til at umvæla, viðlíkahalda og bjálva landsins bygningar, og Landsverk samstarvar við aðalráðini um, hvussu játtanin skal brúkast. Sambært Landsverki er árligi viðlíkahaldstørvurin 43 mió.kr., og eftirsleipið við at umvæla og viðlíkahalda landsins bygningar er umleið 470 mió.kr.

Í 2009 var felagsjáttan stovnað til umvæling av almennum bygningum. Játtanin var løgd til Landsverk at umsita, har byggi- og bygningsumsiting landsins var skipað, og serkunnleikin savnaður á einum staði.

Spurt, um tað eftirsíðan er broytt, hevur Fíggjarmálaráðið svarað, at umsitingin av øllum umvælingum meginregluliga er savnað á einum staði.

Í 2021 eru 22,6 mió.kr. brúktar, harav 19,3 mió.kr. eru goldnar privatum arbeiðstakarum og 3,3 mió.kr. fyri tænastur frá Landsverki.

Í innanvirkis roknskapinum er ein verkætlanarroknskapur fyri hvønn umvældan bygning/høli. Landsgrannskoðanin hevur fyrr víst á, at endamálið við verkætlanarroknskapum m.a. eigur at vera at kunna roknskaparlesarar um, hvat einstaka verkætlanin kostar, men tá ið umvælingar og umbyggingar eru goldnar av fleiri játtanum, verður einki gjøgnumskygni.

### Grannskoðan

Landsgrannskoðanin valdi við stakroyndum at kanna nakrar verkætlanir, herundir um reglurnar um útbjóðing eru hildnar, um kostnaðurin svarar til tilboð ella avtalur, um

somu bygningar eru umvældir við peningi frá øðrum játtanum, og um landið eigur umvældu bygningarnar.

Samanumtikið var úrslitið av grannskoðanini:

*Útboð*

Uppgávurnar eru ikki altíð bodnar út ímillum fleiri arbeiðstakarar, og møguleikin at biðja um undantak frá at bjóða út er ikki brúktur.

***Arbeiði ikki altíð boðið út, og biðið er ikki um undantak.***

*Kostnaður*

Samsvar er ikki altíð ímillum tilboð og endaligan kostnað. T.d. kom tilboð upp á slakar 1,7 mió.kr. til at umvæla Suðuroyar Sjúkrahús, men arbeiðið kostaði 2,7 mió.kr. Landsverk hevur gjørt avtalu við arbeiðstakaran um meir-/minniveitingar.

*Útreiðslur hildnar á fleiri játtanum*

Í fleiri førum eru útreiðslur til umvælingar av somu bygningum/hølum hildnar bæði á hesari játtanini og á øðrum játtanum. Landsgrannskoðanin hevur fyrr víst á, at tá ið útreiðslur til umvælingar av somu hølum eru bókaðar á ymiskar játtanir, sæst ikki, hvat ein umbygging ella umvæling hevur kostað.

Sambært Landsverki kann stovnurin til eina og hvørja tíð upplýsa neyva upphædd fyri ymisku verkætlanirnar. Tá ið útreiðslur eru hildnar á fleiri játtanum, er oftast talan um viðlíkahald ella umbyggingar, og Landsverk vísir á dømi viðvíkjandi bústovnum hjá Almannaverkinum.

Í 2020 var Fíggjarmálaráðið samt við Landsgrannskoðanina, at tað gruggar landsroknskapin, at útreiðslur viðvíkjandi einari og somu verkætlan eru spjaddar á ymiskar játtanir. Fíggjarmálaráðið hevði tikið tílík mál upp við Landsverk, og var semja um, at útreiðslur sum meginregla ikki skulu haldast á fleiri játtanum. Ráðið fór at meta um, hvussu reglur kunnu ásetast, tá ið tað snýr seg um viðlíkahald og játtanir.

***Spjaddar útreiðslur grugga roknskapin.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at enn eru ongar reglur ásettar fyri umvælingar og játtanir. Fíggjarmálaráðið og Landsverk hava fyri neyðini at gera ásetingar, sum lýsa markamót millum nýtslu á løgujáttanum og umvælingarjáttanini. Hesar kunnu verða ásettar í roknskaparreglugerðina fyri Landsverk. Landsstýrismaðurin vísir á, at Landsverk hevur gjørt vegleiðingina “Markamót - viðlíkahaldsbýtið ímillum Landsverk og landsins stovnar”.

***Neyðugt at lýsa markamót.***

*Umvælingar av bygningum hjá kommunum o.ø.*

Landið hevur eisini brúkt pening til at umvæla bygningar, sum kommunur brúka til røktarheim og læknamiðstøð. Landsverk hevur vístá, at landið eigur bygningarnar, og tí er álagt Landsverki at halda teir við líka, og vísir á, at Landsverk hevur onga ábyrgd av, ella ávirkan á, hvussu bygningarnir verða brúktir ella leigaðir út.

Sambært Heilsumálaráðnum eru avtalur nú fingnar um teir bygningarnar.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin vístá, at tað er av størsta týdningi at staðfesta ognarskapin av bygningum. Tó at tað er rætt, at Landsverk ikki kann ábyrgdast fyri, hvør leiga verður ásett til kommunur og kommunal samstørv at gjalda, so er tað uppgávan hjá Landsverki at ráðgeva Fíggjarmálaráðnum, hinum aðalráðunum og landsstovnum um hóskandi leiguprís og markamót viðvíkjandi viðlíkahaldi, sum skulu ásetast í leigusáttmálar við kommunur og kommunal samstørv um nýtslu av landsins bygningum. Landsstýrismaðurin vísir aftur á vegleiðingina um “Markamót – viðlíkahaldsbýtið ímillum Landsverk og landsins stovnar”.

***Týdningarmikið at staðfesta ognarskap á bygningum.***

## Stakroyndir

Niðanfyri eru viðmerkingar til einstøku stakroyndirnar.

### *Ítróttahøll í Sandoynni*

Á høvuðskontu 7.24.6.13 "Ítróttahøll í Sandoynni, løgujáttan", var peningur játtaður, fyrstu ferð í 2009, til at byggja ítróttahøll í Sandoynni. Høllin var bygd frá 2009 til 2012, og byggikostnaðurin var 28,4 mió.kr.

Viðmerkt var í fíggjarlógini 2013, at eingin játtan var sett av, tí høllin fór at verða liðug í 2012.

Í 2015 vóru 600 t.kr. játtaðar til at fáa ljóðviðurskiftini og onnur smærri brek rættað, soleiðis at høllin endaliga skuldi avhendast Sandoyar Skúlasambandi. Í 2017 vóru 485 t.kr. játtaðar til endaliga avhendan av høllini.

Í 2020 vóru játtaðar 1,3 mió.kr. í eykajáttan fyri juni til manglar og tinglýsing av veðbrævinum, sum skuldi geva Uttanríkis- og mentamálaráðnum veð í matrikklinum við ástandandi ítróttahøll. Tá arbeiðið var gjørt, skuldi høllin avhendast kommununum í Sandoynni, og veðbrævið tinglýsast.

Í 2021 játtaði Løgtingið 310 t.kr., av tí at arbeiðið var ikki liðugt í somikið góðari tíð, at Uttanríkis- og mentamálaráðið fekk tinglýst veðbrævið í 2020. Veðbrævið skuldi í staðin tinglýsast í 2021. Einki er brúkt av játtanini, men 1,4 mió.kr. eru brúktar av "Umvæling av almennum bygningum" til at umvæla ítróttahøllina.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kunnað um, at Fíggjarmálaráðið er av somu áskoðan sum Landsgrannskoðanin, at tað minkar um gjøgnumskygni um verkætlan fær fígging frá fleiri játtanum, og trupult er gera upp, hvat kostnaðurin av verkætlanini er.

Landsstýrismaðurin vísir á, at í 2020 var Fíggjarmálaráðið samt við Landsgrannskoðanina, at tað gruggar landsroknskapin, at útreiðslur viðvíkjandi einari og somu verkætlan verða spjaddar á ymiskar játtanir. Ráðið heldur, at sum meginregla skulu allar útreiðslur av einari verkætlan haldast av somu játtan. Er verklagslóg galdandi, skulu allar útreiðslur verða tiknar við í játtanina.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at verkætlanin var liðug í 2012, men trupult hevur verið at fáa kommununar í Sandoynni at yvirtaka høllina. Játtað hevur verið til ymisk viðurskifti síðani tá fyri at fáa avhenda høllina, seinast í 2022. Tað hevði tí verið frægast, um nýtslan til endamálið í 2021 var farin av løgujáttanini til Ítróttahøllina í Sandoynni, heldur enn av umvælingarjáttanini.

***Ítróttahøllin er nú avhendað kommununum í Sandoynni.***

Sambært landsstýrismanninum er tað tó eitt stórt framstig, at høllin endiliga er avhendað kommununum í Sandoynni, og frameftir ikki verður partur av bygningum landsins, og í mun til tað ger minni, at nýtslan í 2021 fór av umvælingarjáttanini.

### *Suðuroyar Sjúkrahús og Røktarheim*

Í 2021 eru um 2,5 mió.kr. brúktar til Suðuroyar Sjúkrahús og Røktarheim.

Tilboð eru fingin upp á 1,7 mió.kr. av teimum 2,7 mió.kr., sum arbeiðið kostar. Sambært Landsverki er torført at meta um kostnað av jørðarbeiði uttan um gomlu bygningarnar. Avtalur eru gjørdar um allar meir-/minniveitingarnar.

Samsvar er ímillum útgjøldini í Búskaparskipan landsins og innanhýsis verkætlanarskipanina hjá Landsverki.

Í mars 2022 hevur Heilsumálaráðið greitt frá, at samstarvsavtala er gjørd ímillum kommununar og ráðið. Sambært Heilsumálaráðnum er leigusáttmáli ímillum

Suðuroyar Sjúkrahús og Fámjins-, Hvalbiar-, og Tvøroyrar kommunu um leigu av læknamiðstøðini, sum landið eigur. Leigan er seinast dagførd í 2017.

*Klaksvíkar Sjúkrahús høvuðsbygningur*
Í 2021 eru brúktar 1,33 mió.kr. til Klaksvíkar Sjúkrahús, høvuðsbygningin.

Landsverk sendi tilboðsfyrispurningar til tvær fyritøkur um loft- og ljósútbúnað til fysioterapiøkið; tað kostaði um 120 t.kr. Aðrar umvælingar eru eisini gjørdar. Sáttmálaupphæddin fyri loft og ljósútbúna til køkin var um 300 t.kr., og vindeyguni kostaðu 266 t.kr.

*Norðoya Røktarheim*
Í 2021 eru 196 t.kr. brúktar til at umvæla Norðoya Røktarheim, og slakar 2 mió.kr. í 2020.

Ein fyritøka gav tilboð at reinsa ventilasjónskanalirnar fyri slakar 168 t.kr. Landsverk rindaði helvtina og Klaksvíkar Sjúkrahús rindaði helvtina.

Norðoya Røktarheim er partur av Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og landið eigur bygningarnar og grundøkið. Klaksvíkar kommuna brúkar stóran part av bygninginum, og ógreitt er, hvør hevur ábyrgd av hvørjum í sambandi við rakstur og viðlíkahald.

Í mars 2022 hevur Heilsumálaráðið greitt frá, at nýtslusáttmáli er gjørdur í 2018 millum Klaksvíkar Sjúkrahús og Norðoya Bú- og heimatænastu. Ráðið upplýsir, at Klaksvíkar Sjúkrahús arbeiðir við at dagføra sáttmálan.

*Mjørkadalur*
Í 2021 er ein mió.kr. brúkt til umvælingar í Mjørkadali. Uppgávurnar eru sambært Landsverki av ymiskum grundum ikki bodnar út. Sami arbeiðstakari, sum fyrr hevur gjørt umvælingar á ognunum, hevur gjørt arbeiðið. Kriminalforsorgin, sum leigar hølini, vil av ávísum orsøkum helst hava so fáar arbeiðstakarar sum møguligt inn á økið.

***Arbeiðið ikki bjóðað út.***

40 ára gomlu verjugarðarnir um oljutangarnar skrædnaðu á sumri 2021, tí var neyðugt at handla skjótt fyri at forða fyri dálking.

Landsgrannskoðanin vísti á rundskrivið “um keyp av vørum og tænastum” har ásett er, at um mett verður neyðugt við undantaki, kunnu stovnar senda Keypsportalinum fyrispurning um undantak.

Landsverk vísti á, at undantøk eru fyri løgu- og byggiverkætlanir, har lisitatiónslógin er galdandi, og at Bygningsviðlíkahaldið arbeiðir eftir lisitatiónslógini, har tað ber til.

***Landsverk vísir á undantaksreglur.***

Í august 2022 hevur Fíggjarmálaráðið svarað, at tað er rætt, at játtanarslagið er avgerandi fyri, um rundskrivið er galdandi. Ráðið vísir á, at *“Rundskrivið er ikki galdandi fyri løgu- og byggiverkætlanir. Fyri løgu- og byggiverkætlanir er licitatiónslógin galdandi (Ll. nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing v.m.). Tó kunnu løgu- og byggiverkætlanir verða lagdar út á Keypsportalin, eins og kommunur eisini kunnu nýta Keypsportalin.”*

Fíggjarmálaráðið leggur afturat, at *“Spurningurin er so, hvat er galdandi fyri slíkar verkætlanir sambært útbjóðingarlógini. Útbjóðingarlógin sigur ikki nakað um hvat skal bjóðast út, men um hvussu skal bjóðast út.”* Í juli 2020 svaraði Fíggjarmálaráðið Landsgrannskoðanini soleiðis: *“Sum meginreglu heldur Fíggjarmálaráðið, at verkætlanir eiga at verða bodnar út fyri at tryggja prís og kapping. Tað er serliga galdandi fyri størri viðlíkahaldsverkætlanir.*

*Tað kemur tó meira enn so fyri, at t.d. verkætlanin er lítil, ella at hon er torfør at lýsa uttan órímiligan kostnað. Sambært frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini og teimum*

***Landsstýrismaðurin vísir á kostnaðin at gera útbjóðingartilfar.***

*fundum, sum Fíggjarmálaráðið hevur havt við Landsverk, er tað okkara fatan, at Landsverk við valdu arbeiðshættunum í stóran mun hevur tryggjað sær, at verkætlanirnar eru framdar til hóskandi dygd og kostnað."*

*Maskinmiðstøðin í Kollafirði*

***Umvæling rindað av fleiri játtanum.***

Í 2021 eru 794 t.kr. brúktar av játtanini 3.11.1.56 til Maskinmiðstøðina. Harafturat eru pengar eisini brúktir av játtanini hjá Landsverki til umvælingar av Maskinmiðstøðini. Arbeiðið er ikki boðið út, men sama fyritøka, sum bjóðaði upp á hitaskipanina í 2020, fekk uppgávuna.

*Akstovan*

***Umvæling rindað av fleiri játtanum.***

Í 2021 er brúkt ein mió.kr. av játtanini 3.11.1.56 til Akstovuna á Drelnesi.

Tvey tilboð komu upp á at skifta takið. Fyritøkan, sum fekk arbeiðið, hevur eftirsíðan boðið upp á eykaveiting um at bjálva skrivstovubygningin v.m. Ein onnur fyritøka vann útboðið at klæða og mála bygningin. Arbeiðið var ikki liðugt í 2021, og heldur tí fram í 2022.

Sambært Búskaparskipan landsins eigur Akstovan fleiri bygningar, og frá 2017 til 2021 hevur Akstovan rindað 2,8 mió.kr. fyri umvælingar av bygningum av sínari játtan á høvuðskontu 3.38.4.01.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tá ið umvæling av almennum bygningum er savnað hjá Landsverki, kann tað tykjast undarligt, og enntá at tað ikki er í lagi, at stovnar nýta pening til viðlíkahald av egnari játtan. Men veruleikin er, at tað eru ov nógvir bygningar, sum ikki verða hildnir við líka, og tískil er helst grund til at góðtaka, at tað eru stovnar, sum fíggjarliga megna hesa uppgávu sjálvir.

*Tinganes*

Í 2021 eru um 500 t.kr. brúktar av játtanini 3.11.1.56 til bygningar í Tinganesi, t.e. til Bakkapakkhúsið, Skansapakkhúsið, HVS-arbeiði í Egholmshúsi og til at skifta torvhald og vindskeið Hjá Karl á Kák.

Í 2021 eru 2 mió.kr. játtaðar á høvuðskontu 2.11.1.21 "Umbygging í Tinganesi", og 0,5 mió.kr. eru brúktar.

Landsverk hevur greitt frá, at løgujáttanin "Umbygging í Tinganesi" er til størri umvælingar og umbyggingar, út frá Heildarætlanini frá 2010, ið er endurskoðað í 2021. Av játtanini 3.11.1.56 "Umvælingar av almennum bygningum" hevur Landsverk goldið vanligt viðlíkahald.

***Neyðugt við skilnaði ímillum størri verkætlanir og umvælingar.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at løgujáttanin "Umbygging í Tinganesi" eins og løgujáttanirnar til Landssjúkrahúsið og Bústovnar, hevur tær avbjóðingar, at verkætlanin fevnir um nógv byggistig, og talan er um nógvar bygningar. Tískil verður neyðugt við vanligum viðlíkahaldi á ávísum bygningum, samstundis sum verkætlanir eru í gongd fyri aðrar bygningar. Landsstýrismaðurin heldur, at tað er neyðugt at hava greiðan skilnað millum størri verkætlanir, serstakliga sambært verklagslóg, og annað viðlíkahald, soleiðis at kostnaðurin av verkætlanum kann gerast upp, og samanhaldast við játtanarheimildina.

*Bústovnar*

Í 2021 er peningur brúktur av játtanini 3.11.1.56 til umvælingar av bústovnum, t.d. í Torfinsgøtu 41 og Eirargarði 14 og 16, harav 843 t.kr. til Torfinsgøtu.

Av løgujáttanini "Bústovnar o.a." eru í 2018, 2019 og 2020 brúktar tilsamans 7,4 mió.kr. til Torfinsgøtu 41.

Sambært Landsverki fekk húsið stóran skaða eftir glopraregn í 2021, og fór at leka. Landsverk stóð fyri arbeiðinum at gera skaðan aftur, og gjørdi, sum vanligt, onnur arbeiði á staðnum samstundis.

Sambært Landsverki rindaði Almannaverkið nakað av arbeiðinum, sum Landsverk ikki hevur heimild at gera, men sum Landsverk eisini hevur ráðgivið um. Torfinsgøta 41 var høvuðsumvæld frá 2018 til 2020, tá ið landið keypti bygningin.

Í 2021 eru 467 t.kr. brúktar av játtanini 3.11.1.56 til umvælingar av Eirargarði 14-16.

Á løgujáttanini til Bústovnar er ein verkætlan, nevnd “Umvæling av Eirargarði 14-16”. Har er eingin peningur brúktur í 2021, men í 2019 og 2020 eru brúktar 2,3 mió.kr. hvørt árið.

Sambært Landsverki er Eirargarður partur av verkætlanini “Smærri verkætlanir”, á høvuðskontu 12.21.6.02 “Bústovnar, løgujáttan”, sum hevur fingið 33 mió.kr. játtaðar í árunum 2020 til 2023.

Landsverk vísti á, at víddin á Eirargarði er 2.800 m$^2$, býtt í 4 deildir, kjallara og útiøki, og tó at partar av bygninginum eru undir løgujáttan, kann ikki síggjast burtur frá restini. Landsverk hevur tí gjørt átrokandi arbeiðir í 2021, so sum fráveksling av hita/orkuveiting og atkomuviðurskiftir uttandura, tó at løgujáttan er til bygningin.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at løgujáttanin til Bústovnar, eins og løgujáttanirnar til Landssjúkrahúsið og Umbygging í Tinganesi, hevur tær av-bjóðingar, at verkætlanin fevnir um nógv byggistig, og talan er um nógvar bygningar. Tískil verður neyðugt við vanligum viðlíkahaldi á ávísar bygningar, samstundis sum verkætlanir eru í gongd fyri aðrar bygningar.

## 4.5 Talgildu Føroyar (LG 2018/203-111)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin verkætlanina Talgildu Føroyar. Játtanin er á høvuðskontu 3.11.1.61. Landsgrannskoðanin spurdi m.a., hvussu langt verkætlanin var komin samanborið við tíðarætlanina, um kostnaðarætlanin helt, og um fíggingin var komin upp á pláss.

Í 2016 vóru 10 mió.kr. játtaðar í verklagslóg til Talgildu Føroyar, og í 2017 var nýggj verklagslóg samtykt, galdandi til 31. desember 2023, har útreiðslurnar í mesta lagi kunnu verða 145 mió.kr. Útreiðslurnar hjá landinum kunnu í mesta lagi verða 85 mió.kr. Sambært verklagslógini er landsstýrismanninum heimilað at gera avtalur við fyritøkur, kommunur og grunnar um at fíggja part av verkætlanini.

Í 2016 vóru 5,9 mió.kr. nýttar, tí er samlaða upphæddin, sum kann nýtast til verkætlanina 150,9 mió.kr. Við árslok 2018 vóru tilsamans 57 mió.kr. nýttar, harav hevði landið goldið 47,5 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til verklagslógina frá 2017, er fíggingarleisturin hesin:

*t.kr.*

| | **Ár 2016 til 2020** |
|---|---|
| Landið | 90.000 |
| Ymiskir samstarvsfelagar | 19.500 |
| Peningastovnar | 15.000 |
| Kommunur | 25.500 |
| **Tilsamans** | **150.000** |

Seinkingar og ymiskar avbjóðingar hava gjørt, at ætlaði fíggingarleisturin var broyttur nakað. Sambært Talgildu Føroyum varð tillagaði fíggingarleisturin tá:

*t.kr.*

| | **Ár 2016 til 2020** |
|---|---|
| Landið | 90.214 |
| Ymiskir samstarvsfelagar | 17.200 |
| Peningastovnar | 9.000 |
| Kommunur | 10.600 |
| **Tilsamans** | **127.014** |

Í september 2021 høvdu 18 kommunur gjørt avtalu um at fíggja og verða partur av Talgildu Føroyum, og samlaði fíggjarkarmurin fyri verkætlanina var nú 138,7 mió.kr.

Tá vantaðu 11 kommunur, sum eftir ætlan skuldu fíggja verkætlanina við 3,1 mió.kr.

### Tíðarætlanin 2021

Leiðslan greiddi frá, at av tí at fíggingin var seinkað so nógv, var neyðugt at leingja verkætlanina við tveimum árum. Virkisskráin, sum var steðgað í 2018 vegna vantandi fígging, kundi nú setast í gongd aftur, men neyðugt var við meirfígging til verkætlanina, tí seinkingin hevði við sær, at verkætlanin dýrkaði. 10,5 mió.kr. eru játtaðar til Talgildu Føroyar í 2022, harav størsti parturin fer til menning av Virkisskránni. Seinkingin og meirfíggingin hevði eisini við sær, at neyðugt var at tillaga verandi verklagslóg.

Í 2021 var serligur dentur lagdur á, at fyrireika menning av Virkisskránni, at fáa fleiri tænastuveitarar at brúka Samleikan og Vangan, og at breiða loysnirnar út til borgarar. Í september 2021 høvdu fleiri enn 25.000 brúkarar fingið sær Samleikan, og Vangin hevði tá 40 tænastur frá 7 ymiskum tænastuveitarum. Harafturat var arbeitt saman við nógvum øðrum tænastuveitarum, privatum og almennum, um at leggja tænastur á Vangan.

Væntað var, at peningastovnarnir kundu taka Samleikan í nýtslu á teirra netbanka-skipanum við ársbyrjan 2022.

Virkisskráin var komin so langt, at klárt var at fara undir menning í oktober 2021. Verkætlanin var mett at kosta 12 mió.kr. Viðvíkjandi teimum írestandi tveimum pørtunum av upprunaligu heildarætlanini fyri Talgildu Føroyar, Heldin og Grundardátur, greiddi leiðslan frá, at:

- Heldin var brúkt meira og meira av teimum, ið ynskja at flyta dátur millum KT-skipanir, og var í 2021 uppstigað.
- Kravfesting var gjørd til nýggja tinglýsingarskipan, tinglýsing- og matrikkul-arkiv eru skannað inn, og skjølini eru tøk á internetinum, betringar eru gjørdar á fólkayvirlitsskipanina, og nýggjur portalur er gjørdur fyri kortskipanir, foroyakort.fo

### Støða 2022

Í august 2022 hevur Fíggjarmálaráðið greitt soleiðis frá:

*Virkisskráin*

Menningin av Virkisskránni byrjaði í oktober 2021, og verður væntandi liðug í 2. ársfjórðingi 2023. Verkætlanin kemur at kosta umleið 3 mió.kr. meira, enn upprunaliga mett, soleiðis at samlaði kostnaðurin verður 15 mió.kr.

*Samleikin*

Samleikin verður í dag brúktur av fleiri enn 40.000 borgarum, sum svarar til, at meira enn 90% av teimum, sum kunnu fáa sær Samleikan, hava fingið sær hann. Peninga-stovnarnir byrjaðu at brúka Samleikan á vári 2022 til sínar netbankaloysnir. Frá heysti

2022 verður Samleikin einasta loysn at rita seg inn á netbankan hjá peninga-stovnunum. 15 tænastuveitarar brúka nú Samleikan sum innritan til teirra tænastur. Tað eru um 10-15.000 innritanir við Samleikanum um døgnið.

*Vangin*
Tað eru 15 tænastuveitarar, sum bjóða tilsamans 80 ymiskar tænastur til borgarar á Vanganum, harav 4 kommunur, 1 fyritøka og 8 almennir stovnar. Umleið 15 kommunur og aðrir tænastuveitarar eru ávegis á Vangan.

*Heldin*
Heldin var liðugt uppstigað á vári 2022, soleiðis at hon nú lýkur krøvini til nýggjastu tøkni, tá ið talan er um at knýta KT-skipanir saman.

*Kommunur*
20 kommunur hava higartil gjørt avtalu um at fíggja sín part av verkætlanini Talgildu Føroyar. Parturin hjá teimum 9 kommununum, sum enn ikki hava gjørt avtalu, er 1,4 mió.kr.

*Talgilt borgara- og koyrikort*
Í 2021 var, saman við Akstovuni, farið í holt við at gera eina forkanning til talgilt koyrikort. Í forkanningini var vavið víðkað, soleiðis at verkætlanin eisini kom at umfata eitt borgarakort. Mett var, at verkætlanin fór at kosta 2 mió.kr. Fígging er nú fingin frá uttanhýsis sponsorum til verkætlanina á 1,5 mió.kr., og við at tillaga verkætlanina verður mett, at til ber at koma á mál við einari fyrstu útgávu av einum talgildum borgara- og koyrikorti. Verkætlanin verður eftir ætlan liðug, og loysnin tikin í nýtslu, um miðjan 2023.

## 4.6 Talgildu Føroyar, rakstur (LG 2021/203-151)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Talgildu Føroyar, rakstur, á høvuðskontu 3.15.1.09. Endamálið við Talgildu Føroyum er at talgilda tænastur til borgarar, vinnuna og almenna geiran. Í 2021 vóru allar loysnir, fyriuttan Virkisskráin, í fullum rakstri, og hevur tað við sær nýggjar rakstrarútreiðslur.

Fyrsta árið, Talgildu Føroyar fingu rakstrarjáttan, var 2020; tá var nettojáttanin 8,5 mió.kr. til rakstur í hálvt ár, og í 2021 var hon 15,75 mió.kr.

Roknskapartøl, Talgildu Føroyar, rakstur:

*t.kr.*

| **Heiti** | **2020** | **2021** |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | 2.359 | 2.488 |
| Keyp av vørum og tænastum | 10.295 | 13.249 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 332 | 1.824 |
| Søla av vørum og tænastum | -1.380 | -1.506 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -3.100 | -106 |
| **Tilsamans** | **8.505** | **15.949** |
| *Nettojáttan* | *8.500* | *15.750* |

Vangin og Samleikin vóru tiknir í nýtslu í oktober 2020. Í fíggjarlógini er viðmerkt, at arbeitt verður við, hvussu fíggingarmyndilin skal vera frameftir.

Talgildu Føroyar hava inntøkur av Mínboks, sum privatir og almennir stovnar, herundir kommunur brúka. Stovnarnir rinda stovningargjøld og nýtslugjøld fyri Mínboks. Stovningargjaldið er 16.000 kr., og nýtslugjaldið er 2 kr. fyri brøv millum 0-99 kb. Fyri hvørji 100 kb økist kostnaðurin við 2 kr.

## 4.7 Gjaldstovan (LG 2021/203-151)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapirnar hjá Gjaldstovuni á høvuðskontu 3.15.1.07, sum hevur 5 undirkontur. Gjaldstovan førir roknskap fyri játtanirnar í fíggjarlógini og ger landsroknskapin. Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og umsitur almennu lønarskipanina. Frá 2017 til 2021 hevur nettojáttanin ligið ímillum 27 og 30 mió.kr.

Roknskaparreglugerðin er góðkend í 2001. Gjaldstovan er í holt við at dagføra reglugerðina, sum eisini fevnir um Talgildu Føroyar. Sambært Gjaldstovuni verður arbeitt við einari nýggjari roknskaparreglugerð, sum tekur støði í nýggjum leisti til roknskaparreglugerðir. Gjaldstovan heldur, at tað gevur ikki meining at arbeiða út frá gamla rundskrivinum, sum í nógvar mátar ikki livir upp til dagsins veruleika.

### 4.7.1 Gjaldstovan, vanligt virksemi, undirkonta 20

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 15.813 | 16.885 | 17.495 | 18.171 | 18.582 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2.703 | 2.785 | 3.274 | 3.174 | 3.465 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 408 | 337 | 100 | 135 | 552 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur o.a. | 121 | 146 | 48 | 16 | 153 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | -146 | -168 | -362 | -442 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 0 | -260 | 0 | 0 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. | -1.785 | -1.889 | -1.971 | -1.861 | -3.133 |
| Flyting frá kommununum til landið | -1.170 | -1.198 | -1.257 | -1.243 | -1.284 |
| **Tilsamans** | **16.091** | **16.920** | **17.260** | **18.029** | **18.494** |

Gjaldstovan fær inntøkur frá m.ø. endurgjøldum fyri lønarumsiting og bókhaldstænastu fyri nakrar stovnar.

Í 2021 eru 3,4 mió.kr. bókaðar á St.kt. 14 “keyp av vørum og tænastum”, harav 319 t.kr. á umboðan o.t. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað um skjalprógv, so sum kvittanir, útgreining av endamáli v.m. eru til bókingarnar á umboðan. Einki var at finnast at.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað uppgerðir fyri uttanlandsferðir í 2021. Vit kannaðu, um ferðaendurgjøldini eru sambært galdandi reglum, og um neyðug prógv og skjøl eru viðheft. Einki var at finnast at.

Í 2021 hevur Gjaldstovan keypt útbúnað fyri 552 t.kr. Størsta einstaka upphæddin er til skrivstovuinnbúgv, sum er boðið út á Keypsportalinum.

Gjaldstovan hevur keypt teldur og telduútbúnað umvegis KT landins og fylgir rundskrivinum um burturbeining av KT-útbúnaði.

Í 2021 hevur Gjaldstovan arbeitt við at bjóða ein rammusáttmála út, fyri at samansjóða keyp av telduútgerð á ein betri og bíligari hátt. Teldukeypið var boðið út í november, og trý tilboð komu inn. KT Húsið vann útboðið, og nýggi rammusáttmálin er galdandi fyri árini 2022 til 2024.

### 4.7.2 Búskaparskipan landsins, undirkonta 24

Sambært roknskaparkunngerðini hevur Gjaldstovan skyldu at menna, reka og røkja Búskaparskipan landsins, og kann taka neyðugar avgerðir í tí sambandi. Allir stovnar hava skyldu at brúka Búskaparskipan landsins. Stovnarnir skulu lata skipanini upplýsingar og eftirkanna tað tilfar, teir fáa úr skipanini, samsvarandi teimum reglum,

ið Fíggjarmálaráðið hevur ásett í vegleiðingum o. ø. Stovnarnir rinda ikki fyri at brúka tænastuna.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Keyp av vørum og tænastum | 5.304 | 4.984 | 6.227 | 5.557 | 6.518 |
| Keyp av útbúnaði | 2.749 | 3.095 | 2.337 | 2.517 | 3.193 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -115 | -180 | -440 | -252 | -241 |
| Flyting frá kommununum til landið | 0 | 0 | -100 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **7.938** | **7.899** | **8.024** | **7.822** | **9.470** |

Búskaparskipan landsins er nógv útbygd seinastu árini fyri at lúka allar treytir um KT-trygd. Í 2021 vóru 8 mió.kr. játtaðar. Av teimum eru 1,9 mió.kr. farnar til viðlíkahald og rakstur, 2,2 mió.kr. til árlig lisensgjøld o.t., og 2 mió.kr. til samstarvsavtalur við m.a. Elektron, Klintra og Farpay. Elektron KT-skoðar skipanina. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað útreiðslur. Einki var at finnast at.

### 4.7.3 Vaktætlanarskipanin, undirkonta 25

Í 2016 tók Gjaldstovan yvir umsitingina av vaktætlanarskipanini. Starvsfólk á forsorgarstovnum, sjúkrahúsunum og í eldrarøktini brúka skipanina til at leggja til rættis vaktir og arbeiðstíðir.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir, keyp av vørum og tænastum v.m. | 1.482 | 1.542 | 1.637 | 1.610 | 1.838 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | 0 | 0 | 0 | -13 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -385 | -385 | -385 | -385 | -824 |
| Flyting frá kommununum til landið | -265 | -265 | -265 | -365 | -407 |
| **Tilsamans** | **833** | **893** | **987** | **860** | **593** |

### 4.7.4 Felagsfyrisitingin í Kvíggjartúni, undirkonta 28

Á undirkontu 28 eru bókaðar inntøkur og útreiðslur av matstovuni, útreiðslur til húsavørð og viðlíkahaldsútreiðslur av bygninginum.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.647 | 1.574 | 1.818 | 1.645 | 1.657 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.498 | 1.522 | 1.657 | 1.541 | 1.542 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 93 | 62 | 34 | 242 | 11 |
| Leiga, viðlíkah., o.a. rakst.útr. | 147 | 127 | 216 | 268 | 221 |
| Søla av vørum og tænastum | -278 | -342 | -434 | -317 | -346 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 96 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -95 | -180 | -340 | -344 | -345 |
| **Tilsamans** | **3.107** | **2.765** | **2.951** | **3.035** | **2.740** |

Í 2020 keypti Gjaldstovan útbúnað fyri 242 t.kr., harav ein bil fyri 236 t.kr.

Inntøkurnar hjá matstovuni hava ligið millum 278 t.kr. og 434 t.kr. seinastu 5 árini. Í 2021 vóru tær 346 t.kr. Starvsfólkanormeringin er hálvtannað starvsfólk. Á hesari játtanini er bókað løn til eitt fólk. Gjaldstovan kunnaði um, at stovnarnir í bygninginum í Kvíggjartúni býta útreiðsluna til hina hálvu ársløninа.

Ein kassi er í móttøkuni, har tað ber til hjá starvsfólkunum at keypa matseðlar. Kassin er gjørdur upp hvønn mánað, og undirliggandi skjøl eru við í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur skjøl. Einki var at finnast at.

### 4.7.5 Gjaldstovan, inntøkufíggjað virksemi, undirkonta 40

Í 2021 vóru inntøkurnar av skeiðsvirksemi 300 t.kr., sum eru bókaðar á undirkontu 40. Skeiðini eru fyri tað mesta í roknskapi, bókhaldi og fíggjarstýring. Eitt starvsfólk førir yvirlit yvir tilmeldingar og sendir listan til umsitingina, sum sendir rokningar fyri skeiðini.

Starvsfólk á Gjaldstovuni skipa fyri flestu skeiðunum, men stovnurin hevur eisini avtalur við uttanhýsis veitarar. Í 2021 vóru útreiðslurnar til uttanhýsis veitarar 206 t.kr.

Vit hava við stakroyndum kannað, um samsvar er millum tal av luttakaragjøldum og tal av luttakarum. Ein lítil munur var.

## 4.8 Dagføring av roknskaparrundskrivi (LG 2016/203-151)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Gjaldstovuni og KT Landsins, herundir at roknskaparreglugerðin, sum var góðkend av Fíggjarmálaráðnum í 2001, ikki var dagførd. Gjaldstovan hevði gjørt uppskot til nýggja roknskaparreglugerð eftir nýggjum leisti, sum Gjaldstovan sjálv hevði gjørt. Ætlanin var at nýggi leisturin skuldi gerast til eitt roknskaparrundskriv fyri landsumsitingina.

Í 2017 segði Fíggjarmálaráðið, at ráðið fór at gjøgnumganga uppskotini til dagført roknskaparrundskriv og dagførda roknskaparreglugerð saman við Gjaldstovuni, soleiðis at tey kundu setast í gildi og góðkennast á heysti 2017.

Í 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið hjá Gjaldstovuni og Fíggjarmálaráðnum at dagføra roknskaparrundskrivið var komið so mikið áleiðis, at tað væntandi kundi verða lýst tíðliga á heysti 2019.

Í 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at sambært § 4, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skuldi Fíggjarmálaráðið senda út rundskriv um roknskaparreglugerð saman við vegleiðing um, hvussu reglurnar skulu verða gjørdar. Ráðið hevði í samstarvi við Gjaldstovuna gjørt eitt uppskot til dagført rundskriv um roknskaparreglugerðir o.a. Arbeitt var nú við einari vegleiðing. So skjótt tað arbeiðið var liðugt, skuldi uppskotið sendast til hoyringar.

***Dagføringin av rundskrivinum enn ikki liðug.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið at gera vegleiðingina til roknskaparrundskrivið er enn ikki er komið á mál. Ætlanin er, at vegleiðingin verður partur av einari skápulón at gera roknskaparreglugerð, sum í mest møguligan mun skal koyra talgilt saman við Búskaparskipan landsins, undir hesum atgongdarstýring, stovnsleiðarar og stovnsnummur. Eyðvitað tekur tílíkt arbeiði tíð, men Fíggjarmálaráðið vónar, at roknskaparrundskrivið og fyribilsútgáva av vegleiðingini verða sett í gildi um ársskiftið.

## 4.9 Kervisgrannskoðan (LG 2021/203-151)

Kervisgrannskoðari grannskoðar hvørt ár skipanir og kervi hjá TAKS, Gjaldstovuni, KT Landsins og ávísum veitarum hjá KT Landsins. Um viðurskifti eru, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisgrannskoðarin ítøkilig tilmæli, sum eru raðfest soleiðis:

- Høg: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag sum skjótast.
- Miðal: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 6 mánaðir.
- Lág: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 12 mánaðir.

### 4.9.1 Kervisgrannskoðan hjá TAKS

KT-viðurskiftini hjá stovnum sum TAKS skulu skoðast árliga av KT-grannskoðara við viðkomandi royndum og útbúgving, og sum Fíggjarmálaráðið hevur góðkent.

Fyri árið 2021 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini hjá TAKS:

- Frágreiðing um gjøgnumgongd av KT-trygd (trygdargrannskoðan og støðulýsing),
- ISAE 3402 váttan um almennar KT-trygdarstýringar hjá P/f Formula fyri veiting av public 360, og
- ISAE 3000 váttan um almennar KT-stýringar hjá Elektron í mun til SLA-avtalu við TAKS.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at trygdarviðurskifti hjá TAKS eru raðfest á leiðslustigi, og gjørt er eitt stórt arbeiði til tess at hava eitt hóskandi trygdarstøði. TAKS hevur gjørt eitt munagott arbeiði við tey tilmæli, sum grannskoðanin vísti á í 2020 og 2021. Staðfestu veikleikarnir eru neyvari lýstir í frágreiðingini frá grannskoðaranum. TAKS fylgir í stóran mun krøvunum í trygdarrundskrivinum, hóast trygdarskoðanin vísir á trygdarveikleikar.

### 4.9.2 Kervisgrannskoðan hjá Gjaldstovuni

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt avtalu við leiðsluna á Gjaldstovuni um at grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýring hjá stovninum í mun til tænastuveitingar til stovnarnar, sum nýta skipanirnar hjá Gjaldstovuni (Búskaparskipan landsins), eins og tað verður gjørt fyri Elektron, sum er høvuðsveitari hjá Gjaldstovuni. Fyri árið 2021 hevur kervisgrannskoðarin gjørt fýra frágreiðingar um KT-viðurskiftini hjá Gjaldstovuni:

- Frágreiðing 2021, grannskoðan av almennum KT-stýringum á Elektron fyri Føroya Gjaldstovu,
- Frágreiðing 2021, um grannskoðan av almennum KT-stýringum á Føroya Gjaldstovu,
- ISAE 3000 váttan um almennar KT-stýringar hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2021 í mun til SLA avtalu við Gjaldstovuna, og
- ISAE 3000 váttan um almennar KT-stýringar hjá Føroya Gjaldstovu í veitingini av Búskaparskipan landsins (BSL) fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2021.

#### KT-stýringar á Gjaldstovuni

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at Gjaldstovan framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av KT-umhvørvi sínum á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini.

Veitingin frá Elektron, sum Búskaparskipan landsins í týðandi mun byggir á, er somuleiðis grannskoðað fyri árið 2021. Niðurstøðan er, at veitingin sum heild er í tráð við avtalaða trygdarstøðið, og við lýsing av trygdarstøðinum, sum Elektron hevur latið Gjaldstovuni. Einstakir veikleikar eru tó staðfestir og umrøddir í váttanini og frágreiðingini.

Sum heild er fatanin hjá kervisgrannskoðaranum, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT-stýringarnar hjá Gjaldstovuni við atliti at veitingini av Búskaparskipan landsins við undantaki av veikleikunum, sum eru nevndir í frágreiðingini, er trygdargott.

#### KT-stýringar á Elektron fyri Gjaldstovuna

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at tænastusáttmálin sum heild er nøktandi og verður fylgdur á trygdargóðan hátt av Elektron. Gjøgnumgongdin av útvaldum økjum innan almennar KT-stýringar vísti nakrar nýggjar veikleikar, sum góvu orsøk til nýggj tilmæli.

Eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur, sum Gjaldstovan nýtir hjá Elektron, er nøktandi, burtursæð frá teimum viðmerktu viðurskiftunum. Somuleiðis er niðurstøðan,

at Elektron, burtursæð frá einstøkum viðurskiftum, sum eru fevnd av tilmælunum, livir upp til ásetingarnar í SLA-avtaluni partanna millum.

### 4.9.3 Kervisgrannskoðan hjá KT Landsins

Kervisgrannskoðarin hevur í 2021 grannskoðað almennu KT-kontrollarnar í sambandi við, at Elektron veitir tænastur til KT Landsins og kundar stovnsins. Kervisgrannskoðarin hevur eisini grannskoðað KT-kontrollarnar v.m. í sambandi við KT-tænastur, sum Formula veitir KT Landsins. Grannskoðanin er framd sambært SLA-avtalum partanna millum.

#### P/f Elektron

Fyri 2021 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tvær frágreiðingar um KT-viðurskiftini ímillum KT Landsins og Elektron:

- Frágreiðing 2021, grannskoðan av almennum KT-eftirlitsskipanum á Elektron fyri KT Landsins, og
- ISAE 3000 váttan um almennar KT-stýringar hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2021 í mun til SLA-avtalu við KT Landsins.

Sum heild er niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum, at tá ið sæð verður burtur frá nøkrum viðmerktum viðurskiftum í frágreiðingini, er eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur, sum KT Landsins nýtir hjá Elektron, trygdargott. Kervisgrannskoðarin heldur eisini, at Elektron livir upp til ásetingarnar í SLA-avtaluni og dátaviðgerðaravtaluni partanna millum.

#### P/f Formula

Formula og KT Landsins gjørdu SLA-avtalu galdandi frá 1. september 2016, sum ásetir tænastustøðið fyri veitingina. Fyri 2021 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tvær frágreiðingar um KT-viðurskiftini millum KT Landsins og Formula:

- ISAE 3402 váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT-eftirlitsskipanir í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2021, og
- Frágreiðing um ISAE 3402 váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT-eftirlitsskipanir í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2021.

Kervisgrannskoðarin sigur, at sum heild eru flestu lýsingarnar av eftirlitum væl grundaðar við støði í teimum leiðreglum, ið eru settar í verk. Somuleiðis eru flestu eftirlitini tilevnað á hóskandi hátt, og eru í tráð við ásetingarnar í ISO 27002:2013 standardinum, ið Formula brúkar sum starvskarm fyri váttanina. Harafturat hava flestu eftirlitini virkað munadygt í árinum.

Sum heild hevur kervisgrannskoðarin staðfest, at tey eftirlit, sum Formula hevur sett í verk, hava virkað munadygt í árinum. Einstøk undantøk eru tó staðfest.

#### KT-eftirlitsskipanir á KT Landsins

Kervisgrannskoðarin og leiðslan á Gjaldstovuni hava avtalað, at kervisgrannskoðarin skal grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýringar hjá KT Landsins í mun til tænastuveitingarnar til stovnarnar, sum nýta Landsnet. Endamálið við grannskoðanini er at tryggja, at grundleggjandi og týðandi viðurskifti viðvíkjandi almennum KT-eftirliti eru í samsvari við trygdarásetingarnar hjá KT Landsins, umframt at meta um, hvørt nøktandi trygdar- og eftirlitsstig eru sett í verk.

Fyri 2021 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini á KT Landsins:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri KT Landsins í 2021,
- Frágreiðing 2021, grannskoðan av almennum KT-stýringum hjá KT Landsins, og
- ISAE 3000 váttan um almennar KT-stýringar hjá KT Landsins í veitingini av Landsneti fyri árið 2021.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er m.a., at KT Landsins framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av sínum KT-umhvørvi á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini.

Veitingarnar frá Elektron og Formula, sum Landsnet í týðandi mun byggir á, eru somuleiðis grannskoðaðar fyri árið 2021. Niðurstøðan er í báðum førum, at veitingarnar sum heild eru í tráð við tað avtalaða trygdarstøðið, og við tað lýsing av trygdarstøðinum, sum veitararnir hava givið KT Landsins. Einstakir veikleikar eru tó staðfestir og umrøddir í váttanunum og frágreiðingunum.

Sum heild er fatanin hjá kervisgrannskoðaranum, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT-eftirlitsskipanirnar hjá KT Landsins, við atliti at veitingini av Landsneti, er trygdargott, við undantaki av viðmerktu veikleikunum í frágreiðingini.

### 4.9.4 Kervisgrannskoðan hjá Talgildu Føroyum

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt avtalu við leiðsluna á Gjaldstovuni um at grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýring hjá Talgildu Føroyum í mun til tænastuveitingar til stovnar og fyritøkur, sum nýta Samleikan, Vangan, Mínboks og Heldina. Fyri árið 2021 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tvær frágreiðingar um KT-viðurskiftini hjá Talgildu Føroyum:

- Frágreiðing 2021, grannskoðan av almennum KT-stýringum á Talgildu Føroyum, og
- ISAE 3000 váttan um viðgerð av persónsupplýsingum hjá Talgildu Føroyum í veitingini av Samleikanum, Vanganum, Mínboks og Heldini fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2021.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er, at Talgildu Føroyar hava trygdargóða og nøktandi stýring á KT-umhvørvi sínum á flestu økjum, tá ið ræður um tær áðurnevndu fýra veitingar. Einstøk viðurskifti eru kortini staðfest, sum kundu verið styrkt í veitingunum.

## 4.10 TAKS (LG 2020/203-151)

Í 2021 grannskoðaði Landsgrannskoðanin roknskapin hjá TAKS á høvuðskontu 3.15.1.04, fyri m.a. at kanna, um stovnurin hevði sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit.

Endamál og uppgávur hjá TAKS vóru lýst í Ll. nr. 169/1997 “um Toll- og skatta-fyrisiting”. Har var m.a. ásett, at TAKS er líkningarvald, tekur sær av allari skatta-álíkning, og er toll- og avgjaldsvald. Toll- og Skattaráð Føroya skuldi fastleggja tey stevnumið, TAKS skuldi arbeiða eftir á toll-, avgjalds- og skattaøkinum.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at mett var, at tíðin var farin frá Toll- og Skatta-ráðnum, og hevði samgongan sett sær fyri at minka um talið av nevndum og ráðum. Tær yvirskipaðu uppgávurnar kundu leggjast til Fíggjarmálaráðið, men uppgávurnar annars verða lagdar til TAKS.

Við Ll. nr. 61/2022 “um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi” er Ll. nr. 169/1997 sett úr gildi 3. mai 2022, m.a. er Toll- og skattaráð Føroya tikið av.

### Roknskaparviðurskifti

Játtanin á høvuðskontu 3.15.1.04, undirkontu 20 er til umsitingina av TAKS. Partur av rakstrinum hjá TAKS eru inntøkur av ymiskum tænastugjøldum.

*Tænastugjøld uttan fyri avgreiðslutíð (reinførisváttanir)*

Inntøkurnar fyri reinførisváttanir hava ligið millum 175 t.kr. og 200 t.kr. um árið síðani 2015. Taksturin var 1.800 kr. fyri hvørja váttan.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar fakturar. Á øllum fakturunum var viðmerkt, at rokning var skrivað við loyvi í K. nr. 14/2010 “um tænastugjøld uttanfyri arbeiðstíð”. Landsgrannskoðanin helt, at tilvísingin var misvísandi, tí tær 1.800 kr., sum TAKS kravdi fyri reinførisváttanir, vóru ikki ásettar í K. nr. 14/2010.

***Ikki samsvar ímillum gjald og heimild.***

TAKS vísti á, at upphæddin var ásett við heimild í § 22 í Bek. nr. 515/2012 “for Færøerne om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme”. Har stendur, at Heilsumálaráðið ásetir prís- og lønarreguleringar. Upphæddin var ikki broytt, síðani uppgávan var løgd til TAKS at umsita.

Landsgrannskoðanin mælti til at rætta tilvísingarnar í fakturunum, soleiðis at samsvar var millum gjald og heimild.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at sambært TAKS fór tilvísingin á fakturunum at verða rættað. TAKS hevði ikki funnið nakað skjalatilfar um, hvussu tær 1.800 kr. vóru ásettar. TAKS fór at venda sær til Heilsumálaráðið um at eftirmeta kostnaðin.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið at rætta tilvísingina á fakturum er sett á skrá. Fak-skipanin, har rokningar verða upprættaðar og útskrivaðar í, skal tillagast. KT-deildin avgreiðir uppgávuna í mun arbeiðsorku og raðfesting.

*Tænastuavtala við Heilsutrygd*

TAKS hevði ikki gjørt skrivliga tænastuavtalu við Heilsutrygd. Í 2016 gjørdi TAKS eitt uppskot til tænastuavtalu, har eitt fast árligt gjald var ásett fyri KT-rakstur og umsiting, umframt broytiligt gjald fyri at senda út brøv. Landsgrannskoðanin mælti til, at avtala verður góðkend og undirskrivað av báðum pørtum.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at higartil hevði Heilsutrygd ikki skrivað undir tann partin, sum er um umsitingarkostnað til TAKS, tí tað er lógarásett, at TAKS skal gera hesa uppgávu. Heilsutrygd var tó sinnað at skriva undir part av avtaluni um, hvussu uppgávan verður umsitin (hvør hevur ábyrgd av hvørjum).

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tænastuavtalan er ikki undirskrivað enn. Heilsutrygd og TAKS eru komin til ta niðurstøðu, at umsitingar-kostnaðurin verður tikin úr avtaluni, men verður tikin við í eitt kunnandi fylgiskjal.

*Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarmál. Vit kannaðu eisini um tíðarskrásetingar eru í samsvari við innanhýsis reglurnar.

TAKS hevur skrivligar reglur um arbeiðstíðir, og flekstíð +37 og -15 tímar. Reglurnar eru ikki galdandi fyri tollararnar; teir skráseta bert, nær teir eru tøkir, og skráseta tímarnar á vikuuppgerðir.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar lønir hjá tollarum, um lýsingar, umsóknir, prógv, tilboð um setan og setanarbræv eru í lønarmálunum. Einki var at finnast at setanunum.

Tollararnir eru settir í tænastumannastørv ella tænastumannalíknandi størv. Sambært arbeiðstíðaravtalu frá 2017, er arbeiðstíðin 39,5 tímar um vikuna, og yvirtíð verður ikki roknað, fyrr enn vanligir arbeiðstímar eru arbeiddir. Sambært avtaluni verður yvirarbeiði gjørt upp í byrjaðum hálvum tímum hvønn dag. Í einum 8-viku skeiði skulu starvsfólk hava arbeitt 316 tímar, áðrenn yvirtíð verður roknað.

***Ófullfíggjað skráseting av arbeiðstíð.***

Tað er ikki í samsvari við roknskaparkunngerðina, at dagliga arbeiðstíðin ikki verður skrásett, og at skrásetingin av tímum út yvir vikunormin er ófullfíggjað. Landsgrannskoðanin kundi tí ikki við vissu siga, at lønirnar hava verið rættar.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hereftir fóru tollarar at stempla, soleiðis at arbeiðstíðin verður skrásett.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at TAKS arbeiðir við at loysa málið. Nú kunnu tollararnir skráseta, nær teir eru á vakt. Yvirtíð verður ikki enn skrásett í klokkuskipanini. TAKS samskiftir við Gjaldstovuna um, hvussu tað kann loysast.

## Peningastovnskontur

### *Kontur uttan fyri Búskaparskipan landsins*

Á ársyvirlitinum 2020 yvir kontur hjá TAKS í Suðuroyar Sparikassa var ein konta, sum ikki var skrásett í Búskaparskipan landsins. 31. desember 2020 var saldan 0 kr. Sambært TAKS var kontan stovnað í 2018 og ætlað til eftirlønargjøld, men kontan var ongantíð brúkt. TAKS hevði heitt á Suðuroyar Sparikassa, um at strika kontuna.

Landsgrannskoðanin mælti til, at loyvi verður fingið frá aðalráðnum, tá ið kontur hjá landinum verða stovnaðar, og at tær verða skrásettar í Búskaparskipan landsins.

### *Kontur, stovnaðar til avrokning av donskum eftirlønum*

Lógin um bundna eftirløn kom í gildi 1. januar 2014. Fleiri løntakarar høvdu danskar eftirlønarveitarar, og skattaskipanin kundi ikki ávísa lønir og eftirlønir til danskar kontur. Donsku eftirlønarveitararnir høvdu tá ikki áhuga í at stovna føroyskar kontur.

Fyri at avrokna eftirlønirnar, sum fóru um skattaskipanina, gjørdi TAKS munnliga avtalu við Elektron og Suðuroyar Sparikassa um at stovna kontur fyri hvønn einstakan danskan eftirlønarveitara. Loyvi var ikki fingið frá aðalráðnum til at stovna konturnar, og tær vóru ikki skrásettar í Búskaparskipan Landsins. TAKS eigur konturnar, sum vóru skrásettar í bankanum við einum øðrum kundanummari.

Sambært TAKS vóru konturnar “einans” snúningspunkt um eftirlønir, sum TAKS í roynd og veru ikki átti. Upp í 25 kontur hava verið skrásettar á kundanummarinum. Fleiri vóru stovnaðar í 2013, sum eftirsíðan eru gjørdar upp, og onkur nýggj var stovnað í 2018. Í 2021 vóru 8 tílíkar samlikontur aktivar.

Sambært TAKS hevði Suðuroyar Sparikassi ræði á kontunum; sparikassin stovnaði og gjørdi upp kontur eftir áheitan frá eftirlønarveitarunum. Tá ið broytingar vórðu gjørdar, boðaði Suðuroyar Sparikassi Elektron frá, sum gjørdi neyðugar broytingar í skattaskipanini. TAKS hevði ikki ávirkan á arbeiðið.

TAKS hevði eftirlit við, at samlikonturnar vórðu tømdar, men hevði einki eftirlit við, at kontunummurini hjá eftirlønarveitarunum vóru røtt. Út frá flytingunum bar heldur ikki til at gera eftirlit, tí einki móttakaranavn stóð á flytingunum, og kontunummarið, eftirlønin var flutt á, sást ikki altíð. Frá stovnan til 31. mai 2021 vóru 46,1 mió.kr. fluttar á og av teimum 8 kontunum, sum vóru aktivar í 2021.

TAKS hevði einki eftirlit við, um eftirlønirnar vóru fluttar til rætta móttakaran, tó at TAKS átti konturnar. Landsgrannskoðanin mælti til:

1. at TAKS setti í verk eitt virkið innaneftirlit, sum skuldi tryggja, at øll inn- og útgjøld vóru røtt, feilir vóru funnir og rættaðir, og í samráð við aðalráðið og Gjaldstovuna, tók støðu til, um konturnar skuldu skrásetast í Búskaparskipan landsins, ella
2. at TAKS fekk avtalur í lag við eftirlønarveitararnar um, at danskar eftirlønir, sum vóru avroknaðar um skattaskipanina, vórðu goldnar á kontur, sum veitararnir eiga.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at TAKS fór at senda donsku eftirlønarveitarunum skriv um, at eftirlønir verða goldnar á kontur, sum veitarin sjálvur eigur. Gjaldstovan tók undir við TAKS.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at av donsku eftirlønarveitarunum hava átta stovnað sær føroyska bankakontu. Ein veitari er eftir, men hann hevur kontu undir stovnan í BankNordik. Veitarin hevur tí biðið TAKS bíða við at niðurleggja samlikontuna hjá TAKS, inntil viðurskiftini eru komin upp á pláss.

*Fulltrúir til kontur*

Í fylgiskjali til roknskaparreglugerðina er yvirlit yvir, hvørji starvsfólk hava atgongd til netbankan, og hvørjar atgongdir tey hava. Fulltrúirnar og tænastuavtalurnar eru ikki dagførdar síðani 2018. Í apríl 2021 kunnaði TAKS um, at stovnurin fór at dagføra roknskaparreglugerðina og atgongdirnar í næstum.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at fylgiskjal til roknskaparreglugerðina og fulltrúirnar eru dagførd.

## 4.11 Landsbanki Føroya (LG 2020/203-151)

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin frá um grannskoðan av Landsbanka Føroya.

***Ikki góðkenda roknskaparreglugerð.***

Landsbankin hevði ikki góðkenda roknskaparreglugerð, men sambært stjóranum var uppskot gjørt, sum tó skuldi lagast til, áðrenn tað var sent Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsbankin hevur sent dagført uppskot til roknskaparreglugerð til Fíggjarmálaráðið. Ráðið væntar, at roknskaparreglugerðin kann verða góðkend í heyst.

Teldurnar eru knýttar í Landsnet og eru undir trygdartiltøkunum hjá Landsneti. Landsbankin tekur lut í Trygdarpakkanum hjá KT Landsins, og var í tí sambandi blivin skoðaður. KT-grannskoðarin hevði nøkur tilmæli. Sambært stjóranum arbeiddi Landsbankin við at loysa tey.

Umframt standardskipanir á Landsneti, nýtir Landsbankin skipanina PandaConnect til íløgurøkt. Landsbankin hevði bert rættindi til at spyrja í skipanini. Landsbankin fekk hvørt ár grannskoðaraváttan frá veitaranum.

***Skipan enn ikki góðkend.***

Sambært rundskrivi um KT-trygd frá apríl 2019, skulu aðrar skipanir, enn tær, sum KT Landsins veitir, góðkennast av Fíggjarmálaráðnum. Landsbankin bað í 2017 um formligt loyvi til at nýta PandaConnect, men hevði ikki fingið svar.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at formliga var ásett, at Fíggjarmálaráðið skal góðkenna KT-skipanir, men í roynd og veru viðger Gjaldstovan umsóknirnar og mælir

til góðkenningar. Góðkenningin av PandaConnect, sum egin búskaparskipan, og sum týðandi KT-skipan uttan fyri Landsnet, var framvegis til viðgerðar hjá Gjaldstovuni. Fíggjarmálaráðið hevði heitt á Gjaldstovuna um at skunda undir viðgerðina.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Gjaldstovan hevur arbeitt við at gera ein leist fyri, hvat viðgerð og tilmæli um góðkenning av egnari búskaparskipan skulu innihalda. Gjaldstovan hevur fleiri umsóknir um egnar búskaparskipanir til viðgerðar, og tað er ymiskt, hvussu langt tær eru komnar í viðgerðini.

Tað restar lítið í viðgerðini av PandaConnect-skipanini. Fíggjarmálaráðið væntar tí at fáa eitt tilmæli um góðkenning frá Gjaldstovuni í heyst.

## 4.12 Hagstova Føroya (LG 2020/203-152)

Hagstovan hevði dagført roknskaparreglugerðina, og sent hana til Fíggjarmálaráðið at góðkenna. Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at góðkenningin av reglugerðini hevði bíðað eftir dagføring av rundskrivinum um roknskaparreglugerðir o.a.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Hagstovan arbeiðir eftir dagførdari roknskaparreglugerð, ið er send Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar í november 2020. Ráðið væntar, at roknskaparreglugerðin kann verða góðkend í heyst.

Stovnurin hevur reglugerð um arbeiðstíð, arbeiðsstað og tíðarskráseting. Starvsfólk kunnu eiga ella skylda upp til 30 tímar, tá ið mánaðaruppgerð verður gjørd. Í oktober 2020 áttu og skyldaðu nøkur starvsfólk í meira lagi av tímum.

Landsstýrismaðurin kunnaði í juni 2021 um, at hann fór at mæla Hagstovuni til at nýta ásettu mørkini fyri +/-tímar í rundskrivinum um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Hagstovan hevur tikið tað til eftirtektar.

Teldurnar hjá Hagstovuni eru knýttar í Landsnet. Til hagtalsvirksemi nýttu tey skipanir, sum ikki liggja á Landsneti.

KT-viðurskiftini hjá stovnum sum Hagstovuni skulu skoðast árliga av KT-grannskoðara við viðkomandi royndum og útbúgving, og sum Fíggjarmálaráðið hevur góðkent. Skoðan er gjørd í 2020. KT-grannskoðarin hevði nøkur tilmæli.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at KT-viðurskiftini hjá Hagstovuni vóru skoðað í 2020 og 2021. Í KT-skoðanini fyri 2021 er staðfest, at 3 av 7 tilmælum í frágreiðingini frá 2020 eru rokkin og harvið lokað. Eingi nýggj tilmæli eru í frágreiðingini fyri 2021.

## 4.13 Ymsar eftirlønir (LG 2021/203-181)

### Grannskoðan av ymsum eftirlønum

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanirnar til eftirlønir, sum eru á høvuðskontu 3.18.1.02. Gjaldstovan umsitur og rindar út eftirlønirnar.

Játtan og nýtsla 2018 til 2021:

*t.kr.*

| Undirkonta | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| 01. Tænastumenn | 32.995 | 35.508 | 37.026 | 39.082 |
| 02. Læraraeftirlønir | 90.140 | 95.001 | 101.876 | 107.532 |
| 03. Endurgjald fyri læraraeftirlønir | -29.083 | -29.906 | -28.894 | -30.825 |
| 04. Eftirlønir innan heilsuverkið | 14.377 | 14.684 | 15.359 | 15.177 |
| 05. Postverk Føroya, eftirlønir | 8.667 | 9.293 | 8.733 | 9.335 |
| 06. Eftirløn landsstýrismanna | 3.491 | 3.494 | 3.960 | 4.056 |
| 07. Danskar eftirlønir | 1.580 | 1.570 | 2.776 | 6.430 |
| 08. Eftirlønir | 516 | 421 | 306 | 149 |
| **Tilsamans** | **122.682** | **130.065** | **141.142** | **150.935** |
| *Játtan* | *118.350* | *129.950* | *138.250* | *146.050* |
| ***Meirnýtsla*** | ***4.332*** | ***115*** | ***2.892*** | ***4.885*** |

*Umsiting*

Tá ið tænastumenn fara frá við eftirløn, fær Gjaldstovan boð frá avvarðandi stovni við upplýsingum um navn, tænastualdur og á hvørjum lønarstigi og eftir hvørjum sáttmála viðkomandi var løntur. Gjaldstovan roknar út og setir í verk eftirlønarútgjaldingina. Tá ið persónur doyr, fær Gjaldstovan boð frá Skiftirættinum.

Gjaldstovan hevur mannagongdir fyri, hvussu farast skal fram í ymisku eftirlønarmálunum, og málsviðgerðin er tongd at vitan og praksis, ið starvsfólkini hava nomið sær gjøgnum rúma tíð.

### Stakroyndir

*Tænastumenn*

Tænastumenn, sum eru farnir frá vegna aldur, sjúku e.ø., eftirsitandi hjúnafelagi hjá tænastumanni ella eftirsitandi børn hjá tænastumanni til tey eru fylt 21 ár, fáa eftirløn sambært Ll. nr. 32/1971 “um tænastumannaeftirlønir”.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum um eftirlønirnar til tænastumenn eru sambært lønartalvum, javning av eftirlønum, og um eftirlønarprosentið er rætt roknað.

*Læraraeftirlønir*

Á hesari undirkontuni eru eftirlønir til tænastumenn, sum hava verið starvssettir í føroyska skúlaverkinum og tey, sum hava verið sett við eftirlønarrætti sum tænastumenn í fólkaskúlanum.

Tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni 1997, eru eftirløntir eftir Ll. nr. 32/1971. Lærarar, sum eru eftirløntir áðrenn 30. juni 1997, eru eftirløntir eftir danskari lóg.

Landsgrannskoðanin kannaði eina læraraeftirløn, um eftirlønin er sambært lønartalvum, javning av eftirlønum, og um eftirlønarprosentið er rætt roknað.

*Eftirlønir innan heilsuverkið*

Landsgrannskoðanin kannaði eina eftirløn innan heilsuverkið, um eftirlønin er sambært lønartalvum, javning av eftirlønum, og um eftirlønarprosentið er rætt roknað.

*Postverk Føroya, eftirlønir*

Í sambandi við, at Postverk Føroya var yvirtikið í 1976, yvirtók stovnurin 76 tænastumenn, sum gjørdust starvsmenn við sama eftirlønarrætti sum tænastumenn. Í 2021 eru eftirlønir goldnar 62 móttakarum.

Eftirlønarskyldan er lógarbundin skylda, ásett í § 1 í Ll. nr. 45/1976. Ásett er, at eftirlønarbyrðan verður býtt millum statin og Føroya landsstýri í mun til eftirlønaraldur hjá starvsfólki í postverkinum áðrenn yvirtøkuna, og eftirlønaraldur hjá Postverki Føroya eftir yvirtøkuna. Játtanin í fíggjarlógini er til endamálið. P/f Posta rindar sjálvt tað, sum annars svarar til eftirlønir fyri sáttmálasett, t.e. tey sum eru sett í starv eftir yvirtøkuna.

Landsgrannskoðanin kannaði eina eftirløn innan Postverk Føroya, um eftirlønin er sambært lønartalvum, javning av eftirlønum, og um eftirlønarprosentið er rætt roknað.

*Eftirløn landsstýrismanna*

Eftirløn verður goldin landsstýrismonnum, ið hava rætt til eftirløn sambært Ll. nr. 10/1993 “um samsýning og eftirløn landsstýrismanna”.

Landsgrannskoðanin kannaði eina landsstýrismannaeftirløn, um eftirlønin er sambært lønartalvum, javning av eftirlønum, og um eftirlønarprosentið er rætt roknað.

*Eftirlønir*

Av hesari kontuni eru eftirlønir goldnar sambært samtykt Landsstýrisins og fíggjarnevnd Løgtingsins til tey, sum vóru í starvi hjá tí almenna 1. apríl 1949, og sum eftir 30 ára aldur hava starvast í minst 15 ár hjá tí almenna og fara úr starvi fyri aldur ella sjúku, ella eftirsitandi hjúnafelaga teirra.

Landsgrannskoðanin kannaði eina eftirløn, um eftirlønin er sambært lønartalvum, javning av eftirlønum, og um eftirlønarprosentið er rætt roknað.

*Samlað niðurstøða av stakroyndum*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur eftirlønarmál. Vit hava samanhildið eftir hvørjari lóg og samtyktum Gjaldstovan hevur goldið út eftir, og um eftirlønin er rætt roknað. Einki var at finnast at.

**Endurgjald fyri læraraeftirlønir**

Danski staturin endurrindar sín part av egineftirløn, hjúnafelagaeftirløn, barnaeftirløn og barnaískoytiseftirløn við støði í Ll. nr. 474/1997 “om ophævelse af lov om tjenestemænd m.fl. i folkeskolen på Færøerne”. Staturin endurrindar 80% av útreiðslunum til tænastumenn v.fl. í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá við eftirløn í seinasta lagi 31. desember 1987, herundir eftirsitandi, sum hava rætt til eftirlønina. Harafturat endurrindar Staturin 80% av tí parti av útreiðslunum, sum var vunnin 31. desember 1987.

Gjaldstovan sendir Moderniseringsstyrelsen mánaðarligt krav um endurgjald fyri læraraeftirlønir saman við yvirliti yvir endurgjaldsskyldugu. Í sambandi við endaligu uppgerðirnar av útgoldnu eftirlønunum ger Gjaldstovan endaliga uppgerð yvir upphæddirnar, sum Staturin skal rinda sín part av.

Einaferð um árið biður Gjaldstovan Landsgrannskoðanina um grannskoðanarváttan fyri, at kravdu upphæddirnar eru rættar, og at Gjaldstovan hevur fyrisitið hendan partin av eftirlønunum rætt.

Í mars 2022 hevur Landsgrannskoðanin, við støði í lógum, avtalum og grannskoðanarleiðbeining, kannað, um eftirlønarmóttakararnir uppfylla ásetingarnar, um útgoldnu eftirlønarupphæddirnar geva rætt til endurgjald, og um endurgjaldskrøvini eru rætt roknað.

Niðurstøðan var, at eftirlønarmóttakararnir hava rætt til eftirløn, og at útgoldnu eftirlønirnar geva rætt til endurgjald frá Statinum.

### Eftirlønarskyldur landskassans

Gjaldstovan hevur seinastu árini skrásett eftirlønarskyldurnar, og fekk fyri nøkrum árum síðani aktuar at meta um, hvat tað hevði kostað, um landið keypti seg leyst frá skyldunum.

***6 mia.kr. í eftirlønar-skyldum.***

Til roknskapin fyri 2019 roknaði aktuarurin eftirlønarskylduna til góðar 6 mia.kr., og hækkaði hon tá í høvuðsheitum orsakað av, at rentan lækkaði og livialdurin hækkaði.

Skyldan, sum danskir myndugleikar bera, er, sambært Landsroknskapinum mett til umleið 475 mió.kr.

## 4.14 Landsverk (LG 2021/203-381)

### Roknskaparviðurskifti

Landsverk hevur dagført roknskaparreglugerðina og sent hana til Fíggjarmálaráðið at góðkenna. Ráðið væntar, at roknskaparreglugerðin verður góðkend í heyst.

Landsverk ætlar at broyta reglugerðina, soleiðis at greitt verður frá um inntøkur, m.a. um heimildir, prísáseting, avsláttir og kredittir. Í 2021 kunnaði Landsverk um, at stovnurin fór at gera mannagongdir fyri sleip o.a. Reglur eru ikki gjørdar.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Undirkontur | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Landsverksskrivstovan | 8.027 | 6.581 | 7.764 | 8.406 | 9.188 |
| Landsvegahald | 45.078 | 44.934 | 44.704 | 45.154 | 52.120 |
| Havnir | 4.878 | 4.830 | 5.365 | 5.513 | 3.968 |
| Flogferðsla | 1.089 | 1.284 | 1.472 | 1.037 | 2.104 |
| Inntøkufíggjað virksemi, LV | -39 | 676 | -6.525 | -5.468 | -10.039 |
| Byggi- og bygningsumsiting | 3.454 | 3.064 | 7.430 | 13.866 | 2.871 |
| Royndarv.orkuspar. í lands. bygningum | -20 | 26 | 30 | -150 | 8 |
| **Tilsamans** | **62.466** | **61.395** | **60.241** | **68.358** | **60.221** |

Landsvegahaldið brúkti slakar 12 mió.kr. meira til keyp av vørum og tænastum í 2021 enn árið fyri, og 6 mió.kr. meira netto til útbúnað. Leiga, viðlíkahald v.m. eru hækkað 4,3 mió.kr.

Inntøkufíggjaða virksemið seldi fyri 10 mió.kr. minni í 2021 enn í 2020, og brúkti 13,5 mió.kr. minni til keyp av vørum og tænastum.

Hjá Byggi- og bygningsumsitingini eru stóru útreiðslurnar fyri løgfrøðiligar tænastur í sambandi við málið um Glasir, 6,8 mió.kr. í 2020 og 3 mió.kr. í 2019.

### *Egin fíggjarskipan*

***Ikki formligt loyvi til egna búskaparskipan.***

Fíggjarmálaráðið hevur ikki givið loyvi til, at Landsverk kann nýta egna fíggjarskipan, tó at hon hevur verið brúkt í nógv ár.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið skuldi seta seg í samband við Gjaldstovuna um møguligar búskaparskipanir, sum ikki vóru góðkendar, og biðja Landsverk um nýggja umsókn.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Gjaldstovan hevur arbeitt við at gera ein leist fyri, hvat viðgerð og tilmæli um góðkenning av egnari búskaparskipan skulu innihalda. Fíggjarmálaráðið hevur biðið Landsverk um at koma við dagførdari umsókn sambært umrøddu mannagongdini.

### 4.14.1 Inntøkufíggjað virksemi

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Landsverki á høvuðskontu 3.38.1.02, við denti á Inntøkufíggjaða virksemi á undirkontu 40.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini stendur m.a., at alt vøru- og tænastuvirksemi, t.d. á skerv- og asfaltverkum, sum Landsverk fremur fyri onnur og til sín sjálvs, verður skrásett undir inntøkufíggjaðum virksemi. Amboð/smiðjur fevnir um alt arbeiði at røkja amboð, sum Landsverk hevur um hendi, umframt at keypa nýggj amboð. Skerv- og asfaltverk fevnir um alt arbeiðið at reka og røkja hesi verk, og útreiðslur til at keypa asfalt og at framleiða tað. Raksturin av inntøkufíggjaðum virksemi skal hvíla í sær sjálvum.

Landsverk fer sambært viðmerkingunum frameftir at leggja seg eftir at hava størri avlop í inntøkufíggjaðum virksemi frá asfalt- og skervframleiðslu, sum kann verða nýtt til at endurnýggja verandi asfalt- og skervverk komandi trý árini. Eftir tað kann avlopið, vegna effektivari rakstur og lægri útreiðslur til viðlíkahald av framleiðsluverkunum, gerast enn størri, og kann nýtast m.a. til hægri játtan til Landsvegahald.

#### Rakstur

Roknskapartøl fyri Inntøkufíggjað virksemi 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 76.017 | 87.333 | 93.102 | 121.759 | 108.483 |
| Rakstrarinntøkur | -81.595 | -86.906 | -102.623 | -129.728 | -119.369 |
| Løguútreiðslur | 0 | 0 | 247 | 0 | 0 |
| Flytingarútreiðslur | 0 | 0 | 4 | 30 | 0 |
| Flyt. mill. alm. myndugleikar | 5.539 | 249 | 2.746 | 2.471 | 848 |
| **Tilsamans** | **-39** | **676** | **-6.525** | **-5.468** | **-10.039** |

*Lønir*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað lønarmál, um lýsingar, umsóknir, kravd prógv v.m. og setanarskriv eru í málinum. Eisini kannaðu vit, um lønirnar eru í samsvari við galdandi lønarsáttmálar. Einki var at finnast at.

Í frágreiðingini 2020 umrøddu vit m.a. longu arbeiðsvikurnar. Landsstýrismaðurin kunnaði um, at sambært Landsverki slapst ikki undan nógvu yvirtímunum, vegna vantandi manning. Landsverk hevur greitt frá, at stovnurin roynir at skipa so fyri, at hvílutíðirnar eru hildnar, men tað er torført at fáa nóg mikið av fólki og at fáa arbeiðsfólk at støðast. Landsverk leggur dent á at gera fastlønaravtalur við flestu arbeiðsfólkini.

*Keyp*

Keyp av vørum, m.a. bitumen, norskum skervi, eykalutum til maskinur og betong til Hundsarabotn, er hækkað frá 21,6 mió.kr. í 2017 til 42,1 mió.kr. í 2020, og er lækkað aftur til 38,8 mió.kr. í 2021.

Maskinmiðstøðin hevur í 2019 boðið keyp av búnum og trygdarútgerð út á Keypsportalinum.

Landsverk hevur goldið slakar 200 t.kr. fyri vinnu- og produktábyrgdartrygging. Stovnurin heldur, at neyðugt er at hava tílíka trygging, og bjóða tey hana út hvørt ár.

*Keyp av tænastuveitingum annars*

Í 2021 eru 6,3 mió.kr. goldnar til ein arbeiðstakara, uttan at uppgávurnar eru bodnar út.

***Uppgávur eru ikki bodnar út.***

Sambært Landsverki hava tey, eftir at stovnurin seldi sína boriútgerð, roynt at fingið samstarv í lag við arbeiðstakarar, sum eru einastu av sínum slagi í landinum, ið hava neyðugu útgerð til boring og spreinging. Latingarnar hava ikki verið nøktandi, og

Landsverk vísir á, at um feilir henda í fyrsta liðinum, ávirkar tað alla framleiðsluna. Landsverk metti tað tí ikki vera fíggjarliga ráðiligt at gera vanligt útboð og vanligan sáttmála. Landsverk heldur seg nú hava ment ein leist at gera útboð eftir, sum hevur verið grundarlag undir vanligum almennum útboði, ið bleiv avgreitt í februar 2022.

*Keyp av útbúnaði*

Landsverk bjóðaði keyp av málingabili út á Keypsportalinum, og í desember 2020 gjørdi stovnurin sáttmála um bilin. Prísurin var 3,2 mió.kr., harav 2,5 mió.kr. skuldu rindast beinanvegin. Bilurin skuldi koma úr útlondum, og írestandi upphæddin skuldi rindast við lating av bilinum ella 15. februar 2022. Orsakað av m.a. koronu, kom bilurin ikki áðrenn 15. februar. Sambært Landsverki hava tey nú fingið bilin (mai 2022).

*Umvælingar av Maskinmiðstøðini í Kollafirði*

***Umvæling av Maskinmiðstøðini ikki boðin út.***

Útreiðslur til umvælingar av Maskinmiðstøðini eru bókaðar á Inntøkufíggjað virksemi, harvið ber ikki til at síggja samlaða kostnaðin. Sambært Landsverki er samlaði kostnaðurin 276 t.kr., og umvælingin er ikki boðin út, tí tey brúktu ein arbeiðsgevara, sum longu var á staðnum, fyri at spara tíð og pening.

Umvælingar av Maskinmiðstøðini eru eisini goldnar av kontuni “Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum”. Landsverk vísir á, at tað er ein sjálvstøðug verkætlan, sum fremur orkusparingar, og tí ikki hevur nakað við vanligan rakstur ella íløgur at gera.

Av løgujáttanini “Umvæling av almennum bygningum” eru slakar 800 t.kr. goldnar í 2021 vegna Maskinmiðstøðina. Í 2020 eru 1,8 mió.kr. goldnar vegna orkuskipan, málaraarbeiði o.a. í Maskinmiðstøðini.

***Spjaddar bókingar gera, at gjøgnum-skygnið hvørvur.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at gjøgnumskygnið í roknskapinum hvørvur, tá ið útreiðslur fyri umvælingar av einum og sama bygningi eru spjaddar á fleiri játtanir v.m.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fíggjarmálaráðið er av somu áskoðan sum Landsgrannskoðanin, at tað minkar um gjøgnumskygni, um verkætlan fær fígging frá fleiri játtanum, og trupult er gera upp, hvat kostnaðurin av verkætlanini er. Ráðið heldur, at sum meginregla skulu allar útreiðslur av einari verkætlan haldast av somu játtan. Er verklagslóg galdandi, skulu allar útreiðslur verða tiknar við í játtanina. Tað kann tó ikki útilokast, at serligar umstøður kunnu gera seg galdandi.

*Umvæling og viðlíkahald av maskinum, innbúgvi o.ø.*

***Arbeiðið ikki bjóðað út.***

Útreiðslurnar eru slakar 7 mió.kr., harav eru 3,8 mió.kr. goldnar fyritøku, uttan at bjóða arbeiðið út. Landsverk greiddi frá, at stovnurin roynir at halda lív í gomlum niðurslitnum skerv- og asfaltverkum. Landsverk hevur ikki arbeiðsorku til, at tey sjálvi kunnu gera umvælingarnar, og kundu gjørt eitt slag av rammuavtalu. Landsverk biður fyritøku, ið kennir skipanina, soleiðis at framleiðslan ikki steðgar.

*Leiga av økjum v.m.*

Sáttmálin um leigu á Sundi, ið er ímillum P/f Asfaltverkið og Tórshavnar kommunu, er frá juli 2004. Leigan er 78 t.kr. um hálvárið fyri 7.797 m$^2$. Upprunaliga var sáttmálin galdandi til 1. juli 2009, og kundi sigast upp av báðum pørtum við 6 mánaða freist til at halda uppat 1. í einum mánað.

Landsverk leigar eisini 4.276 m$^2$ fyri 85,5 t.kr. um árið sambært sáttmála frá mars 2011, sum er galdandi til 1. juli 2024, og kann tá sigast upp av báðum pørtum við 6 mánaða freist til at halda uppat 1. í einum mánað.

Fyri leigu av undirlendi í Øravík rindar Landsverk 15,8 t.kr. um árið til hagapartin Vestur í haga. Landsverk rindar Búnaðarstovuni 140 t.kr. um árið fyri lendi á Velbastað, Hundsarabotni og í Mjørkadali.

*Inntøkur*
Inntøkurnar eru settar saman av sølu av eykalutum, umvælingum og leigu av maskinum hjá Maskinmiðstøðini, sølu frá skervverkunum, asfaltverkunum og bitumengoymsluni. Landsverk hevur gjørt reglur um avsláttur, og nakrir stórir keyparar hava sett trygdir.

Søla seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Søla | -81.595 | -86.906 | -102.623 | -129.629 | -119.369 |

Av samlaðu søluni eru størstu upphæddirnar:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Maskinumsiting | -7.919 | -4.368 | -4.834 | -4.918 | -17.603 |
| Goymsla maskinums. | -2.936 | -6.590 | -6.466 | -9.009 | -4.370 |
| Skervverk | -31.213 | -33.870 | -40.883 | -39.047 | -37.534 |
| Asfaltverk | -37.490 | -40.580 | -48.233 | -74.550 | -59.017 |

Sambært Landsverki skuldi avlopið av at framleiða skerv og asfalt verið brúkt til at endurnýggja amboðini, men tað hevur í langa tíð verið brúkt til at bøta um vegir o.a. Fyri at nøkta tørvin, og fyri at fáa sum mest burturúr, má Landsverk endurnýggja útbúnaðin. Tað hevði loyst seg nógv betur at framleitt, um útgerðin ikki var so gomul.

Í 2021, 2022 og væntandi eisini í 2023 verður peningur játtaður á løgujáttan til at endurnýggja og nútímansgera skerv- og asfaltverk. Ætlanin er í framtíðini at hava eitt asfaltverk, sum skal vera á Sundi, og eitt flytført skervverk.

Eina til tvær reisur um árið ásetir Landsverk prísir á skervi, har allir kostnaðir eru roknaðir við, eisini keyp av amboðum og maskinum til framleiðsluna. Maskinmiðstøðin roknar út prísir fyri mánaðarliga leigu av maskinum og flutningstólum.

## Fíggjarstøða
Bygningar, maskinur, bilar og amboð eru skrásett í egnu fíggjarskipanini.

*Skuldarar*
Skuldarakontan í egnu búskaparskipanini stemmar við Búskaparskipan landsins 31. desember 2021. Skuldarar seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tænastu- og vøruskuldarar o.t. | 15.116 | 16.400 | 25.073 | 16.869 | 13.943 |

*Goymslur*
Landsverk hevur talt goymslurnar av gróti, skervi o.ø. við dronu í 2020 og í 2021. Virðini eru ikki skrásett í roknskapinum. Landsverk hevur ikki talt goymsluna av eykalutum v.m. á Maskinmiðstøðini. Stovnurin hevur smávegis lutir á goymslu aðrastaðni í landinum.

*Peningastovnskontur*
Landsverk hevur stemmað peningastovnskonturnar av við Búskaparskipan landsins pr. 31. desember 2021.

## Roknskaparmeginreglur
Landsverk hevur broytt roknskaparmeginreglurnar fyri Inntøkufíggjaða virksemið fleiri ferðir seinastu árini.

Frá 2006 til 2017 keypti Inntøkufíggjaða virksemið øll arbeiðstól og leigaði tey út til hinar deildirnar. Leigan var ásett út frá kostnaðinum av at halda tólini og at gera íløgur í nýggj arbeiðstól.

Í 2017 broytti Landsverk roknskaparmeginregluna, og vísti á, at leiguprísurin stóð ikki mát við standin á amboðunum. Smiðjurnar høvdu ásett takstir fyri viðlíkahald o.a. Tá ið árið var av, var yvirskot hjá smiðjunum, og tí lagaðu tey kostnaðin til.

Í september 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, í sambandi við løgujáttanina til Asfaltverk, at aðalmálið hjá Fíggjarmálaráðnum var, at Inntøkufíggjaða virksemið skuldi skipast sambært ætlan, sum tekur hædd fyri langtíðarkostnaðinum, eisini løgukostnaðinum.

Fíggjarmálaráðið hevði tí álagt Landsverki at hava yvirskot at samsvara samlaða kostnaðinum av virkseminum, og sambært ráðnum er endamálið við inntøkufíggjaða virkseminum ikki at skula rinda fyri meirnýtslu á øðrum kontum. Sambært landsstýrismanninum er løgujáttan ætlað til at umvæla og endurnýggja verandi asfaltverk og skervverk. Fíggjarmálaráðið ætlaði at taka spurningin um verklagslóg upp í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2022.

Í 2021 hevur Landsverk staðfest, at broytingin í 2017 hevði ikki virkað sum ætlað og broytti mannagongdina aftur. Landsverk boðaði ikki roknskapargrannskoðanini frá broytingini.

Eftir hesa broytingina eigur Inntøkufíggjaða virksemið (Maskinmiðstøðin) maskinurnar. Maskinmiðstøðin gjørdi kostnaðin av maskinum og bilum upp, og ásetti fasta mánaðarliga leigu fyri hvørt flutningstól. Inntøkufíggjaða virksemið leigaði maskinurnar út til hinar deildirnar fyri 16,4 mió.kr.

***Ikki nøktandi at broyta roknskapar-meginreglur ferð eftir ferð.***

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at tað er ikki nøktandi, at Landsverk broytir roknskaparmeginreglur ferð eftir ferð. Tølini frá ári til ár kunnu tá ikki samanhaldast, og gjøgnumskygni verður hareftir. Broyting av roknskaparmeginreglum brýtur samanhangin í roknskapinum, og aðalreglan er, at slíkar broytingar kunnu einans gerast, um nýggi hátturin má haldast at geva rættvísari mynd av roknskapinum, ella t.d. um lógarbroytingar krevja tað. Tá ið roknskaparmeginregla av einihvørjari orsøk verður broytt, eigur leiðslan at boða frá tí í roknskapinum og grundgeva fyri broytingunum. Aðalráðið skal góðkenna tílíka broyting, og Gjaldstovan og roknskapargrannskoðanin skulu hava boð um broytingina.

Í juni 2022 hevur Landsverk sagt, at tey eru samd við grannskoðanina um, at broytingin er gjørd uttan rætta kunning. Sera vánaliga støðan á maskinparkini, sum var heilt niðurslitin, loypti kvøkk á nýggju leiðsluna á Landsverki, sum mátti handla skjótt.

Við árslok 2021 eru 4,5 mió.kr. fyri keyp av flutningsamboðum v.m. flutt frá Inntøkufíggjaða virkseminum til Landsvegahaldið, tó at Inntøkufíggjaða virksemið hevur leigað amboð út alt árið. Flytingin ger eisini, at avlopið hjá Inntøkufíggjaða virkseminum hækkar frá 5,5 mió.kr. til 10 mió.kr.

Í juni 2022 hevur Landsverk greitt frá, at Fíggjarmálaráðið gav boð um, at maskinur og amboð skulu bókast á deildina, tey hoyra til. Landsverk vísir á, at her brýtur stovnurin við sítt broytta roknskaparprinsipp, tó at talan bert er um flytingar millum undirkontur á somu høvuðskontu.

Landsgrannskoðanin er ikki ósamd, at flytingar millum undirkontur gera ikki, at Landsverk fer út um játtanina á høvuðskontuni.

Stovnar, ið samsvarandi játtanarreglunum hava fingið loyvi til inntøkufíggjað virksemi, skulu skilja tað virksemið frá vanliga virkseminum. Í viðmerkingunum í fíggjarlógini er m.a. ásett, at alt vøru- og tænastuvirksemi, t.d. á skerv- og asfaltverkum, sum Landsverk fremur fyri onnur og til sín sjálvs, verður skrásett undir inntøkufíggjaðum virksemi. Amboð/smiðjur fevnir um alt arbeiði at røkja amboð, sum Landsverk hevur

um hendi, umframt at keypa nýggj amboð. Skerv- og asfaltverk fevnir um alt arbeiðið at reka og røkja hesi verk, og útreiðslur til at keypa asfalt og at framleiða tað.

Tað kann undra, at Landsverk alt árið sendir rokningar frá Inntøkufíggjaða virkseminum til m.a. Landsvegahaldið, og við ársenda flytur útreiðslur fyri keyp av amboðum, ið verða leigað út, á Landsvegahaldið.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið hevur umrøtt ymisk roknskaparlig viðurskifti við Landsverk, undir hesum um skráseting av keypi av rakstrartólum. Fíggjarmálaráðið heldur, at rakstrartól skulu bókast á tað rakstrarstað, har tólini verða brúkt.

***FMR gav boð um, at rakstrartól skuldu bókast á deildir, har tey hoyra heima.***

Ráðið er ikki vitandi um, at Landsverk hevur broytt roknskaparmeginreglur viðvíkjandi tólum og rakstri av teimum, og fer at taka málið upp í sambandi við rakstrarjáttanina hjá Landsverki í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2023.

### Maskinmiðstøðin í Kollafirði

Maskinmiðstøðin er partur av inntøkufíggjaða virkseminum; hon keypir maskinur og amboð, og umvælir tey.

Landsverk kunnaði um, at Fíggjarmálaráðið hevur gjørt vart við, at raksturin av Maskinmiðstøðini eigur at vera partur av Landsvegahaldinum og ikki av Inntøkufíggjaða virkseminum. Stovnurin er ikki samdur við Fíggjarmálaráðið, og spurdi, hvat Landsgrannskoðanin helt. Landsgrannskoðanin tekur ikki støðu til, antin virksemið hjá Maskinmiðstøðini er partur av Inntøkufíggjaða virkseminum ella Landsvegahaldinum.

***Ikki samd um, hvar raksturin av Maskinmiðstøðini eigur at vera.***

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2022 er eingin broyting í virkseminum, og sambært Búskaparskipan landsins er Maskinmiðstøðin enn partur av Inntøkufíggjaða virkseminum og fakturerar leigu av flutningsamboðum v.m. til Landsvegahald. Vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

## 4.14.2 Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Landsverki, undirkontu 23 “Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum”. Í fíggjarlógini 2021 vóru játtaðar 3.060 t.kr. í útreiðslum og 3.060 t.kr. í inntøkum.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 0 | 590 | 619 | 340 |
| Keyp av vørum og tænastum | -20 | -1.109 | -1.132 | -1.318 | -913 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 0 | -35 | 348 | 481 | 535 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 1.063 | 312 | 69 | 46 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | 0 | -134 | 0 | 0 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 0 | 107 | 47 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **-20** | **26** | **30** | **-150** | **8** |

Lønarútreiðslurnar eru til Landsverk. Góðar 1,3 mió.kr. eru komnar inn fyri avsláttur av oljukeypi í 2020, og slakar 1,2 mió.kr. eru brúktar.

Landsgrannskoðanin vísti enn eina ferð á, at tað var ikki í samsvari við roknskaparreglurnar at bóka inntøkur á útreiðslukontu. Landsverk hevði sett fyrispurning til Gjaldstovuna um málið, og um mannagongdin var skeiv, var hon rættað.

Útreiðslurnar vóru spjaddar til t.d. Suðuroyar Sjúkrahús, Umhvørvisstovuna, Kringvarpið og Maskinmiðstøðina hjá Landsverki. Landsgrannskoðanin vísti enn eina ferð á, at tað er ein óskikkur at spjaða útreiðslur hjá einum stovni á fleiri játtanir. Tað ger m.a. at gjøgnumskygni í roknskapinum hvørvur, og at einki yvirlit er yvir, hvat umvæling

***Bókingarnar ikki í samsvari við roknskaparreglurnar.***

av einum bygningi kostar. Hevur Løgtingið játtað stovnum meira til olju og el, enn stovnarnir brúka, eigur tað at síggjast aftur í nýtsluni hjá einstaka stovninum.

Í 2019 kunnaði Landsverk um, at tey umhugsaðu at flyta sparingina í oljukeypinum til "Viðlíkahald av almennum bygningum". Eingin broyting var gjørd. Landsverk vísti á, at stovnurin kundi ikki gera av, hvar sparingin skuldi bókast, og at málið skuldi setast á skrá til fund við Fíggjarmálaráðið og seinni við Gjaldstovuna.

***Tilmæli ikki fylgd.***

Landsgrannskoðanin hevur áður mælt til at rinda avslátturin fyri oljukeyp á kontu hjá Gjaldstovuni, og at skjøl vóru løgd við øllum bókingunum. Landsverk tók undir við tilmælinum, men mannagongdin var enn ikki broytt.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið fór at taka málið upp við Landsverk og Gjaldstovuna, herundir um royndarverkætlanin skuldi halda fram, hvussu hon skuldi skipast, hvussu orkusparingin bókingartøkniliga skuldi umsitast, hvussu orkusparingin verður nýtt til ætlaða endamálið, og hvussu tað skuldi fremjast játtanarliga.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at komið er ikki á mál við hesum. Landsverk fer at royna at fáa avklárað viðurskiftini við Gjaldstovuna í vetur.

### 4.14.3 Konsortieavtala viðvíkjandi Eysturoyartunlinum

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin konsortieavtalu, sum Landsverk í 2018 hevði gjørt við fyritøku.

Eingin roknskapur var gjørdur fyri konsortie. Eitt yvirlit frá mai 2021 vísti, at tilsamans vóru inntøkurnar 76,9 mió.kr. og útreiðslurnar 49,2 mió.kr.

#### Viðmerkingar til konsortieavtaluna

***Landsgrannskoðanin fekk ikki nøktandi svar.***

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri umførum spurt Landsverk og Fíggjarmálaráðið, hvussu konsortieavtalan frá 2018 nú var skipað, uttan at hava fingið nøktandi svar.

Í juni 2021 greiddi Landsverk frá, at fakenterprisuavtalan var galdandi, og at konsortieavtalan var galdandi, men eindin var ikki til sum juridisk eind ella samtak, men heldur var talan um avtalu at leggja asfalt á.

Serskildur roknskapur var ikki gjørdur fyri konsortie. Í skipanini hjá Landsverki var konsortie bert til fyri at halda skil á serliga avsláttrinum, sum er nevndur í fakenterprisu-avtaluni.

6. februar 2018 skrivaði Landsverk undir trygd á 6.082 t.kr. fyri Eysturoyartunnilin sambært ABF06. Eysturoyartunnilin var liðugur í 2020, og har var, sambært Landsverki, ein ósemja um prísregulering av bitumen í asfaltinum, sum í ringasta føri kundi kosta Landsverki 0,5 mió.kr. Um krav um manglar ikki er sett innan eitt ár eftir avhendan, lækkar trygdarupphæddin sambært Landsverki til 811 t.kr., sum verður galdandi 5 ár eftir avhendan.

Sambært Landsverki skuldi konsortie ikki vera partur av roknskapinum hjá Landsverki, men leiðslan fór at spyrja Gjaldstovuna/Fíggjarmálaráðið um hendan eventualskyldan skuldi nevnast í teksti. Um veitarin fór konkurs, mátti Landsverk finna onkran annan at gera arbeiðið liðugt.

Í pkt. 1.1 í konsortieavtaluni stendur, at avtalan er gjørd í sambandi við, at ein sáttmáli skuldi gerast við byggiharran um at asfaltera Eysturoyartunnilin. Konsortieavtalan var einans galdandi fyri hesa arbeiðstøkuna og møguligar broytingar innan karmarnar av avtaluni ella av øðrum arbeiði, sum partarnir átaka sær, og sum báðir partar góðtaka. Avtalan kundi á ongan hátt leingjast til at fevna um aðrar arbeiðstøkur.

Avtalan skuldi koma í gildi, tá hon var undirskrivað, og halda á til endalig avrokning var gjørd partanna millum og allar skyldur vóru loknar yvir fyri byggiharranum, og møgulig trygdartíðarskeið vóru endað.

Spurt, um endalig avtala var gjørd partanna millum, svaraði Landsverk, at Sandoyar-tunnilin eisini var fataður av enterprisuni sambært "Fagenterpriseaftale".

Privati veitarin skuldi leggja asfalt út, og Landsverk skuldi lata asfalt sambært sjálvstøðugari avtalu ímillum partarnar.

Spurt, hvat hugtakið sjálvskuldari fyri øllum latingum frá Landsverki merkti, svaraði Landsverk, at í praksis sendi Landsverk rokning til privata veitaran fyri asfaltið, sum sendi rokning til arbeiðstakaran fyri lidna arbeiðið.

Limirnir í konsortieleiðsluni skuldu útnevnast í einum sjálvstøðugum ískoyti til avtaluna. Kallast skuldi til fundir við avtalaðum millumbili, ella tá ið ein av konsortielimunum bað um tað.

Konsortie skuldi stovna peningastovnskontu í sínum navni, og allar upphæddir, sum byggiharrin ella aðrir triðjapartar rindaðu í sambandi við sáttmálan, skuldu beinanvegin rindast á kontuna hjá konsortienum. Ongar útgjaldingar skuldu gerast av peninga-stovnskontuni, uttan at tað var til at uppfylla sáttmálan. Landsverk visti ikki um nakra kontu, sum var serstøk fyri konsortie.

Sambært konsortieavtaluni fóru møguligar felagsútreiðslur hjá samtakinum at verða, sum vóru nágreinaðar nærri í serstakari avtalu, býttar ímillum partarnar. Landsverk greiddi frá, at tað merkti, at talan kundi vera um break-down í asfaltframleiðsluni, har Landsverk rindar fyri bíðitíðina, sum lastbilarnir hava við asfaltverkini.

Hvørgin parturin kundi fáa gjald fyri annað enn tað, sum var ásett í avtaluni, t.e. ávikavist asfaltálegging og lating av asfalti.

Partarnir skuldu í felag vísa á eitt felag ella persón at taka sær av roknskapunum hjá konsortienum og syrgja fyri, at roknskapur, konta og skjøl viðvíkjandi konsortienum vera hildin í góðum ordan v.m. Avrit av nevndu roknskapum og skjøl skuldu sendast limunum í konsortienum.

Eingin roknskapur var gjørdur, og eingin persónur var at taka sær av tí.

***Eingin roknskapur gjørdur.***

Samtaksleiðslan skuldi áseta treytirnar fyri grannskoðan av roknskapinum hjá samtakinum og øllum øðrum fíggjarligum viðurskiftum. Ríkisgóðkent grannskoðanar-virki skuldi grannskoða roknskapin. Spurt, hvussu hesar treytir eru uppfyltar, hevur Landsverk svarað, at tey skuldu spyrja grannskoðanarvirkið um tað, og at vitanin um tað var burtur á Landsverki.

Sambært avtaluni skal ein nærri avtalað upphædd "reserverast" sum innanhýsis trygd fyri, at partarnir fremja sín avtalaða part av verkætlanini. Upphæddin skuldi rindast á eina serskilda kontu í navninum á konsortienum. Landsverk visti ikki um, at upphæddin var rindað á serskilda kontu.

Í 2021 segði landsstýrismaðurin, at Fíggjarmálaráðið harmaðist um, at Landsgrann-skoðanin ikki hevði fingið nøktandi svar um, hvussu konsortieavtalan var skipað. Ráðið fór saman við Landsverki at lýsa málið betur fyri at fáa greiði á spurningum og ivamálum.

***Nú sigur landsstýris-maðurin, at konsortie-avtalan hevur ikki verið virkin.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsverk hevur greitt frá, at avtalan millum partarnar ikki hevur verið virkin sum so, og at samstarvið millum

konsortiepartarnar og NCC hevur verið skipað sum vanlig avtala um veiting av vørum og tænastum.

Landsverk hevur sum undirveitari latið asfalt til útleggjara við einari veitingartrygd og avtalaðum avsláttri og sent honum rokningar, meðan útleggjarin hevur lagt asfaltið á, somuleiðis við veitingartrygd, og sent rokningar til NCC.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at asfalteringin í Sandoyartunlinum er nær um liðug, og arbeiðið hevur gingið væl.

### 4.14.4 Rættarmál

Landsverk hevði í 2020 trý rættarmál í sambandi við byggimál.

***Enn eingin semja um viðurskifti hjá Tekniska Skúla í Klaksvík.***

Landsverk hevði stevnt ARK99 eftir 1,4 mió.kr., av tí at ósemja var um ráðgevarafeil í sambandi við verkætlan hjá Tekniska Skúla í Klaksvík. Landsverk hevði skotið upp fyri sínum sakførara, at hann skuldi royna at finna eina semju.

Sambært landsstýrismanninum er semja ikki funnin enn. Nýggj roynd verður gjørd at finna semju, og hildið verður fram við gerðarrættarmálinum, íroknað málið um lekan. Sýn og meting hevur verið viðvíkjandi takinum.

MT Højgaard hevði stevnt Landsverki eftir góðum 5 mió.kr. í sambandi við verkætlanina Glasir. Málið var í fyrstu fasu, og Landsverk fyrireikaði svar til fyrsta kæruritið frá MT Højgaard.

***Uppskot til semju um Glasir.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsverk lat svar til kærurit í 2021. Síðani hevur verið bíðað eftir MT Højgaard. Í summar hevur Landsverk latið uppskot til semju, men higartil hevur ikki borið á mál.

***Manglar á Hamragarði fyri 11 mió.kr.***

Landsverk hevði stevnt TG-Verk Føroyar eftir 11 mió.kr. orsakað av feilum og manglum í sambandi við bygging av Hamragarði í Vági.

Í 2021 svaraði landsstýrismaðurin, at Landsverk hevði staðfest nógvar manglar við klimaskerminum, og síðsti parturin av sakarmálinum snúði seg um hesar manglar. Umvælingarnar vóru ikki gjørdar enn. Fyri tað fyrsta hevði stríðsmál verið við arbeiðstakaran um at umvæla manglarnar. Um manglarnir skuldu umvælast, áðrenn sakarmálið var avgreitt, var neyðugt við játtan til endamálið. Síðani var avbjóðingin eisini, at eldraøkið í síni heild var lagt til kommunurnar.

***Hamragarður ikki formliga latin kommununum.***

Verkætlanin var ongantíð endaliga og formliga latin kommununum í Suðuroy, tí bygningurin enn hevði umrøddu manglarnar. Landsverk væntaði tí, at tá ið sakarmálið var liðugt, og umvælingin var framd, kundi formliga handanin fara fram.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at gongd er í málinum, men enn er ikki greitt, hvat endaliga úrslitið verður.

## 4.15 Stuðul til infrakervi á útoyggjum (LG 2021/203-381)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað “Stuðul til infrakervi á útoyggjum”. Stuðulsjáttanin er á høvuðskontu 3.38.1.18, og er til at veita stuðul til Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun. Freistin at søkja er 1. november í árinum fyri, at stuðulin er játtaður í fíggjarlógini.

Í 2019 bað Samferðslumálaráðið Landsverk fáa uppgerðirnar frá kommununum váttaðar av grannskoðara, áðrenn stovnurin endurrindar útreiðslurnar.

Játtanin í 2021 var 700 t.kr. *Ein* kommuna fekk 300 t.kr. í stuðli. Sambært Landsverki hevði stovnurin ikki havt ávirkan á, at øll játtanin ikki er brúkt í 2021, tí einasti umsøkjari, ið leyk treytirnar, fekk upphæddina, viðkomandi søkti um. Eisini vísti landsstýrismaðurin á, at tað var ikki nøktandi, at øll játtanin ikki var brúkt.

***Ikki brúkt alla játtanina.***

Játtanin í 2022 var hækkað til 1 mió.kr., eftir at freistin fyri at søkja um stuðul var farin. Í 2022 hava tveir umsøkjarar søkt um tilsamans 652.500 kr.

Fíggjarmálaráðið hevur kunnað um, at ráðið fer at seta seg í samband við Landsverk um møguliga grannskoðaraváttan av verkætlanaruppgerðum og um, hvussu Landsverk kunnar útoyggjakommunur og avvarðandi kommunur um stuðulsskipanina.

## 4.16 Asfalt- og skervverk, løgujáttan (LG 2021/203-381)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin á høvuðskontu 3.38.1.22 “Asfalt og skervverk, løgujáttan”.

Í 2018 var eingin játtan í fíggjarlógini, men 24,5 mió.kr., sum landið rindaði fyri Asfaltverkið á Sundi, eru bókaðar sum útreiðsla, og 15,8 mió.kr. fyri “leigugjøld”, sum Landsverk áður hevði goldið, vóru bókaðar sum negativar útreiðslur.

Í 2019 eru 7,5 mió.kr. játtaðar við eykajáttanarlóg í desember, harav eru 6.331 t.kr. av óbrúktari játtan fluttar til 2020. Í 2021 eru játtaðar 10 mió.kr. og 11 mió.kr. í 2022.

Roknskapar- og játtanartøl 2018 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Asfaltverkið á Sundi | 8.782 | 1.169 | 8.286 | 6.415 |
| Skervverk | 0 | 0 | 0 | 3.502 |
| **Tilsamans** | **8.782** | **1.169** | **8.286** | **9.917** |
| *Játtan* | *0* | *7.500* | *6.331* | *10.000* |

29. apríl 2022 samtykti Løgtingið Ll. nr. 56/2022 “um at endurnýggja asfaltverk og skervverk hjá Landsverki”, har játtanin í mesta lagi kann vera 34,5 mió.kr. Lógin fer úr gildið 1. januar 2025.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a., at asfalt- og skervverk eru samansett av fleiri eindum (modulum), sum kunnu skiftast út hvør sær, og at bert ein av eindunum hevur kostnað hægri enn 10 mió.kr.

Í álitinum frá Fíggjarnevndini stendur m.a., at løguætlanin frá 2021 til 2023 er 34,5 mió.kr., og at 16 mió.kr. eru brúktar, soleiðis at samlaði kostnaðurin verður 50,5 mió.kr.

***Samlaði kostnaðurin fyri verkini væntandi 50,5 mió.kr.***

### Asfaltverkið á Sundi

Í 2021 er játtanin býtt á tvær undirkontur, t.e. Asfaltverkið á Sundi og Skervverk.

Í 2020 rindaði Landsverk 752 t.kr. fyri skúrar á Sundi, stoyping og hegn. Eisini rindaði stovnurin 565 t.kr. fyri ein skúr. Uppgávurnar vóru ikki bodnar út.

Sambært Landsverki setti stovnurin seg í samband við ymiskar fyritøkur, og einans ein fyritøka sýndi áhuga fyri stoypingini v.m. Landsverk kannaði, hvør kundi lata teimum nýggj høli til arbeiðsfólkið skjótt. Arbeiðseftirlitið hevði bannað stovninum at brúka Asfaltverkið, m.a. av tí at starvsfólkahølini ikki luku dagsins krøv, og tí var umráðandi at fáa verkið í gongd aftur sum skjótast. Týdningarmikið var, at seljarin m.a. kundi lata skjalprógv, ið byggimyndugleikin kravdi.

Í 2020 rindaði Landsverk 1,7 mió.kr. til fyritøku fyri niðurtøku av gomlum staklutum. Tvær fyritøkur bjóðaðu upp á uppgávuna. Landsverk tók av tilboðnum á 440 t.kr.; hitt tilboðið var 932 t.kr.

Arbeiðseftirlitið kravdi, at gongubrúgvar, rekkverk og stigar skuldu umvælast ella skiftast, um asfaltverkið skuldi kunna setast í gongd aftur. Landsverk helt tað ikki vera skilagott at bjóða tað arbeiðið sum tilboðsarbeiði, tí bóðu tey somu fyritøku gera tað fyri tímaløn.

Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar í rundskrivinum “um keyp av vørum og tænastum”.

### Skervverkið

Í 2018 bjóðaði Landsverk keyp av mobilum forknúsara út, og Dansk Grusgrav Materiel ApS vann útboðið. Tilboðsprísurin var 4.876 t.kr.

Sambært ordradagfesting í mars 2019 skuldi fyritøkan lata útgerð fyri 7.365 t.kr. Harav skuldu 2.210 t.kr. rindast forút og restin sambært avtalu.

Seinni skuldi Landsverk keypa fleiri knúsieindir, ið skuldu bindast saman við forknúsaranum, og helt stovnurin tað vera skilabest ikki at bjóða keypið út alment. Sambært Landsverki kunnaðu tey Fíggjarmálaráðið um avgerðina.

Landsverk vísti á, at eindirnar skulu helst kunna bindast saman. Steðgar t.d. ein eind, skulu hinar ikki halda fram við at koyra. Tað gera tær ikki, um stýringar ikki kunnu bindast saman, og er hetta antin ikki gjørligt ella sera torført, um talan er um ymisk merkir frá ymiskum veitarum. Í mai 2022 hevur Landsverk kunnað um, at øll útgerðin er latin.

Landsgrannskoðanin hevur í juni 2022 biðið landsstýrismannin um yvirlit ella uppgerð av samlaða kostnaðinum av skervverkinum.

Sambært Landsverki eru allar nýgerðir bókaðar á løgujáttanina. Umvælingar av gomlum tólum, eru goldnar av Inntøkufíggjaða virkseminum.

## 4.17 Strandfaraskip landsins (LG 2021/203-382)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Strandfaraskipum landsins. Játtanin er á høvuðskontu 3.38.2.01.

### Roknskaparviðurskifti

Fleiri útskiftingar hava verið í leiðsluni hjá Strandfaraskipum landsins seinastu tíðina. Bæði stjóri og fíggjarstjóri vóru fyribilssettir.

Roknskaparreglugerðin hjá Strandfaraskipum landsins er frá 2017. Stovnurin var í holt við at dagføra reglugerðina.

Í 2021 gjørdi Landsgrannskoðanin vart við, at innanvirkis roknskapurin hjá Strandferðsluni vísir ikki, hvat t.d. umvæling av einum skipi kostar. Einki er broytt í roknskapinum tí viðvíkjandi. 40-ára klassingin av Ternuni í 2020 og 2021 kostaði sambært Strandferðsluni 21,2 mió.kr.

Vísandi til reglurnar í roknskaparkunngerðini mælti Landsgrannskoðanin til at umhugsa at gera innanvirkis roknskapir í Búskaparskipan landsins, soleiðis at til ber at síggja, t.d. hvat stórar umvælingar ella umbyggingar kosta. Strandferðslan arbeiðir við málinum.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina um, at innanvirkis roknskapir í Búskaparskipan landsins eru stýringsamboð, sum eisini kunnu nýtast til at vísa samlaða kostnaðin av verkætlanum. Fíggjarmálaráðið fer at fylgja málinum upp.

***Innanvirkis roknskapir eru stýringsamboð.***

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 82.653 | 84.317 | 92.157 | 94.976 | 96.540 |
| Keyp av vørum og tænastum | 108.690 | 108.426 | 121.145 | 126.658 | 122.337 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 1.159 | 2.739 | 1.848 | 4.763 | 3.101 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 22.710 | 27.806 | 29.106 | 29.992 | 47.943 |
| Ymsar rakstrarútr. og avskr. | 269 | 590 | 968 | 1.410 | 1.393 |
| Søla av vørum og tænastum | -67.372 | -72.116 | -76.573 | -63.985 | -71.877 |
| Tilskot til einstaklingar | 295 | 305 | 315 | 309 | 311 |
| Rentuútreiðslur, gjøld, bøtur o.a. | 0 | 0 | 0 | -60 | 92 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 14 | 13 | 26 | 34 | 440 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -667 | -702 | -825 | -825 | -845 |
| **Tilsamans** | **147.752** | **151.379** | **168.167** | **193.272** | **199.435** |

*Lønir*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað lønarmál, um lýsingar, umsóknir, prógv v.m., tilmælir um setan og setanarskriv eru í málunum. Eisini kannaðu vit, um umsóknir eru komnar innan ásettu freist, um settu starvsfólkini lúka treytirnar í lýsingunum, og um ásetta lønin er í samsvari við treytirnar í lýsingunum v.m. Landsgrannskoðanin hevði onkra viðmerking, sum Strandferðslan hevur tikið undir við.

*Keyp v.m.*

Strandferðslan sendir oftast tilboðsfyrispurningar til veitarar í Føroyum. Tríggir veitarar eru til umvælingar av skipum, og stovnurin tekur sum oftast av lægsta tilboðnum.

Í 2021 bjóðaði stovnurin reingerðingina av Ternuni og Teistanum út, og hevur, í sambandi útbjóðingina, gjørt ítøkiliga lýsing av tilgongdini og staðfest, at við verandi mannagongdum, verður reingerð ikki send til útboð aftur.

*Orkukeyp*

Strandferðslan viðmerkti í roknskapargóðkenningunum frá januar til mai í ár, at stovnurin fer at mangla pening til oljukeyp.

Í 2021 vóru útreiðslurnar 32,1 mió.kr. og í 2020 vóru tær 36,3 mió.kr. Strandferðslan væntar, at útreiðslurnar til orku helst blíva einar 88,5 mió.kr. í 2022[4].

*M/s Erla Kongsdóttir*

Til viðlíkahald av Erlu Kongsdóttir í 2021 eru brúktar 1,2 mió.kr., harav slakar 900 t.kr. eru fyri at skifta rútar. Rútarnir í skipinum vóru ikki í tí standi, teir skuldu vera, og sambært Strandferðsluni hava tey sent krav um endurgjald til skipasmiðjuna, sum bygdi skipið, men enn er einki goldið.

***SSL sent endurgjaldskrav til skipasmiðju.***

Spurd, hvussu stórt kravið er, og um tað er skrásett í Búskaparskipan landsins, hevur Strandferðslan svarað, at tveir fakturar fyri tilsamans 1.081 t.kr. eru ikki skrásettir í Búskaparskipan landsins, men eru sendir til GS-Marine.

Í august 2022 vísir Fíggjarmálaráðið á, at útreiðslur og inntøkur skulu skrásetast sambært meginreglunum í roknskaparkunngerðini og meginreglunum annars í landsroknskapinum. Allir fakturar eiga tí meginregluliga at vera skrásettir í roknskapinum. Er talan um inntøkur ella útreiðslur, sum eru óvissar í upphædd, og um tær yvirhøvur

[4] Í eykajáttanarlóg august 2022 hevur Løgtingið játtað 29,2 mió.kr. til Strandferðsluna til oljukeyp og til ein túr eyka um vikuna til Herjólf III í 6 vikur.

kunnu gjøgnumførast, er ikki vist, at tað gevur eina rættvísandi mynd at skráseta tílíkar inntøkur og útreiðslur. Rættarmál eru eitt dømi um tað. Fíggjarmálaráðið fer at fylgja málinum.

*Umvæling av leigaðum hølum*

Í 2021 er leigukostnaðurin fyri skrivstovubygningin 1.229 t.kr., harav góðar 700 t.kr. eru til umvælingar og umbyggingar. Strandferðslan hevði tørv á fundarhøli, og gjørdi tí broytingar í bygninginum í samstarvi við eigaran. Eigarin vildi ikki rinda fyri broytingarnar.

Uppsagnartíðin í sáttmálanum er hálvt ár, men eingin tíðarfesting er av, hvussu leingi leigusáttmálin er í gildi. Landsgrannskoðanin vísti á, at tað kann vera ein bági at hava brúkt góðar 700 t.kr. upp á hølini, uttan at stovnurin hevur trygd fyri at leiga longur enn eitt hálvt ár, og heldur ikki hevur avtalu um endurrindan av møguligum útreiðslum til umbygging.

***Umhugsa at leingja uppsagnartíðina á leigumálinum.***

Í august 2022 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at ráðið er samt við Landsgrannskoðanina um, at Strandferðslan átti at havt tryggjað longri uppsøgn av leigusáttmálanum í sambandi við umvælingarútreiðslurnar, sum stovnurin helt. Ráðið leggur afturat, at Strandferðslan fer at kanna møguleikan at broyta leigusáttmálan. Fíggjarmálaráðið fer at fylgja málinum upp.

*Inntøkur*

Strandferðslan bókar inntøkurnar í egnari búskaparskipan. Sølufakturarnir eru ikki lagdir við í Búskaparskipan landsins, og fakturanummurini í Búskaparskipan landsins eru ikki tey somu, ið eru skrásett í búskaparskipanini hjá stovninum, harvið er gjøgnumskygnið ikki nóg gott.

Landsgrannskoðanin hevur áður gjørt vart við, at tað er ikki nøktandi, at fakturanummur í Búskaparskipan landsins ikki eru veruligu fakturanummurini. Sambært Strandferðsluni eru tey í holt við at kanna, hvussu tað kann loysast.

*Kassar og gjaldterminalar hjá bussum*

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at gjaldterminalar skuldu setast í allar bussar, sum ikki høvdu gjaldterminal, og sambært Strandferðsluni er tað gjørt.

Landsgrannskoðanin og Strandferðslan umrøddu spurningin viðvíkjandi inntøkunum. Sambært busssáttmálunum mótrokna arbeiðstakararnir inntøkurnar av ferðaseðlasølu í mánaðarligu uppgerðunum av koyringini, tað merkir, at busseigararnir krevja inntøkurnar frá ferðandi, meðan Strandferðslan eigur rættin til tær.

***Betri eftirlit við inntøkum.***

Strandferðslan vísti á, at bussførararnir skráseta inntøkurnar í FARA-skipanina, og inntøkurnar koma á tann hátt í skipanina hjá Strandferðsluni. Strandferðslan ásannar tó, at tørvur er á betri eftirliti við umsitingini av billetterings- og gjaldskipanum í einstøku bussunum.

Sambært Strandferðsluni kemur dagførd eftirlitsskipan í gildi frá 15. september 2022, sum partur av góðskueftirlitsætlanini fyri Bygdaleiðir 2022 - 2024. Ein partur av hesum eftirliti verður ófráboðað eftirlit, har Strandferðslan, sambært galdandi sáttmálum, hevur heimild til at sekta busseigarar fyri tænastubrek, um nevndu viðurskifti ikki eru í lagi.

*Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar, útr.*

Í 2021 eru útreiðslurnar av innanhýsis flytingum millum almennar stovnar 440 t.kr., harav eru 202 t.kr. fluttar til Fíggjarmálaráðið.

Í mai 2021 avtalaðu ráðið og Strandferðslan at seta ein arbeiðsbólk við neyðugari vitan og sakkunnleika at greina arbeiðssetning um framtíðina hjá Strandferðsluni. Uppskot

var um manning av arbeiðsbólkinum, og at eitt skrivaratoymi frá Fíggjarmálaráðnum skuldi vera hjáknýtt arbeiðsbólkinum.

***Fíggjarmálaráðið bað Gjaldstovuna rinda ráðnum upphædd av játtanini hjá Strandferðsluni.***

Í apríl 2022 hevur Fíggjarmálaráðið flutt 202 t.kr. frá Strandferðsluni til ráðið. Í útgjaldingarskjalinum stendur um flytingina: *"Avtalað er, at Strandfaraskip landsins endurrindar fyri útreiðslur ísv. arbeiðið hjá arbeiðsbólki at skriva frágreiðingina um "Strandferðslan frameftir" í 2021 og 2022. Fyri 2021 er talan um at endurrinda fyri útlegg av útreiðslum hjá Fíggjarmálaráðnum og fyri avseting sambært fyribilsuppgerð av samsýning til limirnar í arbeiðsbólkinum."*

Sambært hjálagdari uppgerð í Búskaparskipan landsins eru útreiðslurnar tilsamans 354 t.kr., harav 303 t.kr. til fundir og fyrireiking og 50 t.kr. til arbeiðsmarknaðargjøld og útlegg.

Sambært Strandferðsluni løgdu tey merki til upphæddina, tá ið tey skuldu góðkenna ársroknskapin, og spurdu Fíggjarmálaráðið, hví so var. Fíggjarmálaráðið svaraði, at ráðið skuldi senda stovninum ein teldupost við frágreiðing. Telduposturin kom ikki, og Strandferðslan gjørdi av at góðkenna roknskapin. Strandferðslan heldur tað vera ein trupulleika, at ráðið av sínum eintingum skrásetur í roknskapin hjá stovninum, eftir at stovnurin er liðugur at bóka.

Spurd, hvar tær 152 t.kr. eru bókaðar, hevur Strandferðslan svarað, at upphæddin er ikki bókað á játtan, sum Strandferðslan hevur atgongd til.

***Munnlig avtala um at Strandferðslan skal rinda.***

Landsgrannskoðanin hevur biðið Fíggjarmálaráðið um avrit av avtaluni um, at Strandferðslan skuldi rinda útreiðslurnar. Í august 2022 hevur Fíggjarmálaráðið svarað, at eingin skrivlig avtala var gjørd ímillum Fíggjarmálaráðið og Strandferðsluna um, at stovnurin skuldi rinda, men tað framgongur av arbeiðsskjali frá 2021, at tað var ætlanin. Broytingar eru hendar í leiðsluni, og tað kann hugsast, at núverandi leiðsla ikki hevur verið nóg væl vitandi um avtaluna.

Við útgjaldingarskjali frá mars hevur Fíggjarmálaráðið flutt 30.175 kr. frá Strandferðsluni til ráðið í 2022 við innanhýsis flytingum millum almennar stovnar. Í skjalinum er viðmerkt m.a., at *"Sambært avtalu við SSL er tað SSL, sum skal avhalda útreiðslurnar fyri arbeiðið hjá Samferðslubólkinum."*

Sambært almennu kontuvegleiðingini verða standardkontur 71 og 76 brúktar at halda stýr á útreiðslumillumrokningum, tá ið peningur til eitt ávíst endamál verður játtaður undir einum øðrum endamáli enn sjálv uppgávuloysnin. Skjalið til hesar bókingar er E.K. 28[5], sum báðir stovnarnir skulu skriva undir. Til hesa bókingina hevur Fíggjarmálaráðið brúkt E.K. 6.2.[6]

Landsgrannskoðanin undrast á, at Fíggjarmálaráðið gevur Gjaldstovuni boð um at flyta útreiðslur hjá ráðnum til Strandferðsluna uttan um Strandferðsluna, sum hevur ræðisrættin á játtanini.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið ásannar, at góðkenningarmannagongdin av innanhýsis flytingum millum stovnar ikki hevur verið í lagi í tveimum førum; í einum føri í 2021, og einum í 2022. Ráðið harmast um mistøkini og fer at tryggja, at tílíkt ikki kemur fyri aftur.

[5] Skjal til flyting millum stovnar, sum báðir partar skulu skriva undir.
[6] Útgjaldingarskjal frá stovni til Gjaldstovuna við gjaldsboðum.

**Fíggjarstøða**
Tøl úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Immateriellur og mat. útbúnaður | 197.541 | 181.582 | 165.624 | 152.700 | 136.089 |
| Goymslur | 4.582 | 5.483 | 4.428 | 5.355 | 4.193 |
| Tænastu- og vøruskuldarar | 4.194 | 3.934 | 3.300 | 3.012 | 3.520 |
| Virðisbrøv og tøkur peningur | 761 | 2.012 | 594 | 1.131 | 906 |
| Stuttfreistað skuld | -1.936 | -2.846 | -3.330 | -3.871 | -3.644 |

Í Búskaparskipan landsins hevur Strandferðslan skrásett akfør og skip. Stovnurin ætlaði at kanna, um onkur minni bygningur skuldi skrásetast í Búskaparskipan landsins og eisini at dagføra yvirlitið yvir flutningsfør og bilar.

*Rakstrargøgn*
Spurd, um hardware, sum stovnurin hevur keypt frá KT-veitara, eru á goymslu hjá stovninum, svaraði Strandferðslan, at útgerðin liggur í kjallaranum. Landsgrannskoðanin hugdi at goymsluni. Útgerðin er útreiðsluførd í roknskapinum, tó at hon ikki er tikin í nýtslu.

*Goymslur*
Goymslan er fyri størsta partin goymsla av olju hjá skipunum. Stovnurin hevur onga klædnagoymslu longur, tí starvsfólk fáa pløgg av goymslu hjá veitaranum, sum vann seinasta útboðið um keyp av klæðum.

*Tænastu- og vøruskuldarar*
Tænastu- og vøruskuldarar eru 3,5 mió.kr. netto í 2021. Upphæddin er hækkað við 400 t.kr. frá 2020. Frá 2019 til 2020 lækkaði áognin við 300 t.kr. Avsetingin móti tapi er 131 t.kr., og er ikki broytt seinastu árini.

Strandferðslan hevur stemmað skuldarar av pr. 31. desember 2021. Millum áognirnar eru 44 t.kr., sum Tórshavnar kommuna skyldar. Strandferðslan hevur í longri tíð roynt at fáa kommununa at rinda, men uttan úrslit.

*Peningastovnskontur*
Strandferðslan hevur fleiri peningastovnskontur. Stovnurin hevur stemmað konturnar av um ársskifti.

*Stuttfreistað skuld*
Av stuttfreistaðu skuldini í 2021 eru 1,7 mió.kr. lønaráognir, 1 mió.kr. er avsett til ógoldnar rokningar vegna KT og slakar 900 t.kr. eru MVG.

*Tíðaravmarkingar av lønum*
Skuldin vegna tíðaravmarkan av lønum hjá sjófólkunum í 2021 er 1,7 mió.kr., í 2020 var hon 2,8 mió.kr. Eingin tíðaravmarkan er gjørd av tímum hjá starvsfólkum á landi.

Strandferðslan hevur ásett, at starvsfólk kunnu hava +40/-20 tímar flekstíð.

1. mai 2022 eiga fleiri starvsfólk feriur á fyri 2021/2022. Strandferðslan kunnaði um, at fleiri starvsfólk høvdu ikki hildið feriu í 2021, m.a. vegna koronufarsóttina.

Í frítíðarlógini er m.a. ásett, at minst 24 dagar av frítíðini skulu gevast samanhangandi í tíðini 2. mai til 30. september (frítíðarskeiðið). Frítíð út yvir teir 24 dagarnar kann verða givin uttan fyri frítíðarskeiðið, tó seinast 1. mai árið eftir.

Í august 2022 hevur Strandferðslan víst á reglur hjá stovninum um flekstíð. Sambært Strandferðsluni er álagt øllum leiðarum og starvsfólkum at tryggja, at feriur verða hildnar sambært galdandi lóg. Strandferðslan leggur afturat, at tey hava strammað

viðurskiftini upp seinastu árini, og at tað er við at koma í rættlag. Eisini vísa tey á, at stovnurin hevur ongan stjóra havt í fimm mánaðir og ongan fíggjarleiðara í tveir mánaðir. Tað hevur lagt trýst á leiðararnar, sum eru eftir í leiðslubólkinum, og hevur beinleiðis havt við sær, at leiðarar í fyrisitingini hava ikki fingið møguleika at halda gamla feriu, og lítil ella eingi útlit eru til at halda feriu í summar.

### 4.17.1 Nýggj KT-skipan

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin nýggju skipanina hjá Strandferðsluni.

Strandferðslan fór í 2018 undir at gera nýggja ferðaseðla- og bíleggingarskipan, kallað BPS, tí FARA-ferðaseðla- og bíleggingarskipanin nøktaði ikki allar tørvir hjá stovninum. Sambært Strandferðsluni var samskiftið við FARA vorðið ov stirvið, síðani fyritøkan var keypt av einum enskum felagi, og uppstiging av FARA-skipanini hevði í longdini kostað meira enn ein nýggj skipan.

Flestu av verandi KT-veitarum søgdu seg, sambært Strandferðsluni, ikki kunna átaka sær slíka uppgávu. Stovnurin spurdi seg eisini fyri hjá donskum ferjufeløgum, hvar til bar at finna veitara. Ein donsk fyritøka bjóðaði sær at lata eina skipan, ið Strandferðslan ynskti, fyri 18 mió.kr.

Tá ið samanum kom valdi Strandferðslan Sp/f Norliga sum veitara. Eingin skrivlig avtala var gjørd við veitaran um, hvør veitingin er, hvussu nógv hon kostar, ella nær hon skal veitast, men sambært Strandferðsluni høvdu partarnir avtalað at gera eina skipan, sum nøktaði tørvin hjá stovninum.

***Eingin skrivlig avtala gjørd, áðrenn verkætlanin byrjaði.***

Sambært Strandferðsluni tók loysnin støði í tilboðstilfarinum frá veitaranum. Fyri at skapa fíggjarligt rúm til at gera skipanina, fann Strandferðslan ein veitara, sum kundi gera loysnina, sum danska fyritøkan hevði skotið upp, í smáum. Sambært Strandferðsluni kundi veitarin gera arbeiðið bíligari, tí hann kravdi ikki alla upphæddina fyri menningarkostnaðin beinanvegin, men skuldi heldur fáa hana inn við árligum gjøldum, tá ið skipanin var tikin í nýtslu. Árliga gjaldið skuldi verða áleið 2 mió.kr.

Strandferðslan hevði ikki skjalfest nakra samlaða avtalu, tí talan var um fleiri deilmál, og Strandferðslan vildi ikki binda seg til ein stóran kostnað og langa avtalu, uttan at kunna tryggja sær, at veitarin kundi loysa uppgávuna. Tá ið ein grundskipan var gjørd, skuldi endalig avtala gerast um at gera skipanina lidna, umframt víðari rakstur.

Sambært Strandferðsluni skuldi veitarin gera avtalu við Elektron um skipanina og um rakstur av servarum. Servararnir skuldu standa hjá Elektron. Strandferðslan skuldi síðani rinda haldaragjald fyri nýtslu av skipanini. Rakstrarligar uppgávur sum t.d. backup fóru at verða partur av avtaluni. Strandferðslan fór at fáa atgongd til allar dátur úr skipanini, sum skuldu innganga í greiningar hjá stovninum.

#### Verklagslóg, útbjóðing, kostnaður v.m.

***Eingin verklagslóg.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at í § 1, stk. 5, í K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan” er ásett, at KT-verkætlanir verða tiknar við undir rakstrarjáttan. Sambært § 7 skulu størri KT-verkætlanir, t.e. verkætlanir fyri 5 mió.kr. ella meira, hava heimild í og fremjast sambært verklagslóg.

Í september 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at verkætlanin var gjørd í stigum, og var uppstigað til betri tólbúnað og skráir, eftir at farið var undir at menna bíleggingarskipanina, og tað dýrkaði verkætlanina nakað. Allur tólbúnaður var fingin til vega, og skráir vóru lidnar, soleiðis at tað bar til at royndarkoyra nú, og seta skipanina í verk í 2022 fyri bæði Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Landsstýrismaðurin ásannaði, at tá ið komið var so væl áleiðis við verkætlanini, var tað helst ov seint at gera eina verklagslóg, og vísti landsstýrismaðurin á, at rakstrarjáttanin hjá Strandferðsluni fevndi eisini um at menna og reka KT-skipanir, og tessvegna var heimild til at brúka pening til endamálið.

***Skipanin ikki boðin út.***

Landsgrannskoðanin vísti eisini á, at útveganin av nýggjari KT-skipan var ikki boðin út á Keypsportalinum.

Strandferðslan greiddi frá, at stovnurin hevði tørv á einari nýggjari ferðaseðlaloysn, og at um bíðað var ov leingi við loysnini, kundi tað blíva hættisligt fyri framhaldandi rakstur hjá stovninum. Strandferðslan setti seg í samband við verandi veitarar av KT-skipanum stovnsins umframt aðrar veitarar, og bað um prísir frá fimm veitarum upp á menning av skipan, rakstur í fimm ár, umframt alt hardware. Tríggir veitarar svaraðu.

Úrslitið var, sum fyrr nevnt, at ein donsk fyritøka bjóðaði sær at lata eina skipan, og lat Strandferðsluni eina frágreiðing við uppskoti til loysn. Danska fyritøkan kundi gera arbeiðið fyri 17,8 mió.kr., FARA 10,1 mió.kr. og Sp/f Norliga 3,9 mió.kr.

Í september 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Strandferðslan metti, at verkætlanir hjá stovninum kundu vera av slíkum slag og vavi, at tær ikki hóska serliga væl til at bjóða út á Keypsportalinum. Tað var partvíst rætt, t.d. tá ið talan er um eykalutir til skip, sum ikki verða framleiddir í Føroyum.

Landsstýrismaðurin var annars samdur við Landsgrannskoðanina, at KT-verkætlanin átti at verið boðin út á Keypsportalinum. Í øllum førum tá fyrireikingarnar til at menna bíleggingarskipanina vóru lidnar.

Vísandi til §§ 6 og 7 í roknskaparkunngerðini, helt Landsgrannskoðanin, at KT-verkætlanin roknskaparliga átti at verið greinað soleiðis, at eftirlit kann vera við, hvussu nógv skipanin kostar hvørt árið, hvussu nógv hon kostar tilsamans, og um kostnaðarætlanin hevur hildið.

Strandferðslan vísti hinvegin á, at verkætlanin higartil hevði verið eitt menningarprosjekt, sum í sambandi við pilottest og útrulling nú fór at verða umskipað, soleiðis at fíggjarstýringin fór at verða umsitin av fíggjardeildini, og fíggjarleiðarin var í tí sambandi innsettur sum partur av stápsfunktiónini.

Samlaður kostnaður fyri útveganina av KT-skipanini sást ikki í roknskapinum. Frá 2018 til apríl 2021 vóru hesar útreiðslur til KT-skipan:

*kr.*

| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Veitarin | 89.195 | 623.822 | 3.444.375 | 1.553.860[7] | 5.711.252 |
| Ráðgevi | | | 544.073 | 612.129 | 1.156.202 |
| Annar veitari | | | 50.000 | | 50.000 |
| Annar veitari | | | 96.000 | | 96.000 |
| **Tilsamans** | **89.195** | **623.822** | **4.134.448** | **2.165.989** | **7.013.454** |

Í samlaðu upphæddini eru tær 1,2 mió.kr., sum eru metti kostnaðurin sambært Projection 2021[8], ikki við. Rakstrarútreiðslur til Elektron eru heldur ikki taldar við.

Í september 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at í fyrireiking av verkætlanini vórðu tørvslýsing og útgreining gjørdar av skipanini. Menningin hevði støði í fyrireikingini, og Strandferðslan hevði nú gjørt støðulýsing av skipanini í mun til upprunaligu tørvslýsingina og eftirfylgjandi tillagingum av skipanini. Yvirlit var gjørt yvir funkur og eindir á skipanini, sum var klárt til pilottest og tað, sum var eftir at menna. Til víðari menning

[7] Sambært Búskaparskipan landsins, St.Rk. 1560 “Telduútbúnaður og KT-menning”.
[8] BPS kostnaðarmeting frá veitaranum 21. desember 2020.

vóru játtaðar 1,85 mió.kr. fyri 2021, og tí fór tað ikki at ávirka raksturin restina av árinum.

*Eingin menning av skipanini síðani summarið 2021.*

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at eingin menning er farin fram síðani summarið 2021, tá ið Strandferðslan fyribils steðgaði verkætlanini. Síðani hevur verið arbeitt við, hvat skal gerast.

### Sáttmálaviðurskifti o.a.

*Roknskaparreglugerðin ásetir krøv um sáttmála.*

Í roknskaparreglugerðini hevði Strandferðslan ásett, at sáttmáli átti at gerast, tá slagið av keypi gjørdi, at neyðugt var at hava trygd fyri, at partarnir vóru samdir um treytirnar. Sáttmálin ásetir skyldur og rættindi hjá pørtunum mótvegis hvørjum øðrum og verður undirskrivaður av báðum pørtum. Eisini var ásett, at innan ávís øki t.d. KT, eru standardsáttmálar gjørdir.

Strandferðslan helt, at menningartíðin higartil hevði víst, at veitarin kundi lyfta uppgávuna; Strandferðslan var sloppin undan at gera langtíðar bindingar, áðrenn stovnurin hevði sæð úrslit. Strandferðslan hevði fingið roynt samstarvið og partar av skipanini, verið við til at formgeva skipanina, og var sloppin undan framtíðar broytingum o.s.fr.

Landsgrannskoðanin skilti ikki grundgevingina fyri ikki at gera sáttmála, tá ið avtalan var inngingin.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Strandferðslan ásannaði, at formligu viðurskiftini kundu verið skipað betur í menningartilgongdini, men at tað var átrokandi neyðugt at fara undir at menna eina dagførda bíleggingarskipan. Strandferðslan legði seinastu hond á at gera formligan sáttmála við veitaran fyri restina av verkætlanini.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Strandferðslan í verandi støðu ikki vil binda seg til ein sáttmála við veitaran, tí stovnurin er ikki er nøgdur við týðandi partar av høvuðssáttmálanum.

### Treytir um nóg stóran fíggingarmøguleika

*Roknskaparreglugerðin ásetir krøv fyri val av veitara.*

Í roknskaparreglugerðini hjá Strandferðsluni vóru ásett krøv fyri val av veitara, m.a. at tann veitarin, sum verður valdur framum, átti at lúka treytir um m.a. at hava nóg stórar fíggingarmøguleikar.

*Strandferðslan ikki mett um fíggjarligu orkuna.*

Landsgrannskoðanin ivaðist í, um Strandferðslan kundi hava ætlað um fíggjarligu orkuna hjá felagnum, sum stovnurin ætlaði at gera eina langtíðaravtalu við, havandi í huga at felagið hevði havt negativan eginpening øll árini síðani 2016; t.e. í tvey ár, áðrenn Strandferðslan fór í samstarv við felagið.

Sambært landsstýrismanninum hevði Strandferðslan ikki mett um fíggjarligu orkuna hjá smápartafelagnum, sum hevði ment skipanina, men hevði stiðjað seg til tilvísingar, sum veitarin hevði.

Landsstýrismaðurin greiddi frá, at Strandferðslan hevði biðið veitaran um nýggjastu fíggjartølini, og Strandferðslan legði dent á, at nýggjur sáttmáli fór ikki at verða undirskrivaður, fyrr enn fíggjartølini fyrilógu, og fór at krevja eitt kravsprógv frá felagnum, sum skuldi tryggja, at Strandferðslan frameftir ikki fór at verða fyri fíggjarligum missi, um veitarin av onkrari orsøk ikki røkti sínar skyldur mótvegis Strandferðsluni.

Sambært Strandferðsluni var eitt av krøvunum frá stovninum til sáttmálan við veitaran, at smápartafelagið í framtíðini skuldi grannskoðast av ríkisgóðkendum grannskoðara.

Fíggjarmálaráðið var samt við Landsgrannskoðanina, at sjálvandi skuldi sáttmáli verið undirskrivaður, áðrenn farið var undir KT-verkætlanina. Bíleggingarskipanin fór nú at verða royndarkoyrd, og innført á øllum leiðum í 2022. Tá ið Strandferðslan nú kravdi,

at roknskapurin hjá smápartafelagnum skuldi grannskoðast av ríkisgóðkendum grannskoðara, verður fyrsta fíggjarár 2021. Tá er skipanin longu implementerað. Sambært Fíggjarmálaráðnum átti langtíðarsáttmáli (rakstrarsáttmáli) helst ikki at verða gjørdur, áðrenn roknskapurin fyri 2021 var liðugur.

Í august 2022 hevur Fíggjarmálaráðið víst á, at veitarin hevur latið Strandferðsluni grannskoðaðan roknskap fyri 2020, og at Strandferðslan hevur ikki biðið um ella móttikið roknskap fyri 2021.

### Gjald fyri ráðgeving

Sambært Búskaparskipan landsins var ein ensk fyritøka ráðgevi hjá Strandferðsluni viðvíkjandi útvegan av KT-skipan. Tann, sum umboðar ensku fyritøkuna er sami persónur, sum umboðar veitaran.

Strandferðslan svaraði ikki spurninginum, um í hvørjum málum enska fyritøkan ráðgav stovninum. Stovnurin segði einki um, hvat innihaldið í ráðgevingini frá fyritøkuni fevndi um. Landsgrannskoðanin skilti ikki, hví Strandferðslan rindaði triðjaparti fyri partar av skipanini, sum veitarin hevði bundið seg til at gera.

Í september 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Strandferðslan ásannaði, at fakturar frá ensku fyritøkuni vóru ikki nøktandi lýstir.

***Fíggjarmálaráðið heldur tað vera óheppið, at SSL rindar triðjaparti fyri skipan, ið veitarin skal fremja.***

Fíggjarmálaráðið helt, at viðurskiftini ímillum veitaran og ensku fyritøkuna vóru ógreið, og at tað var óheppið, at Strandferðslan rindaði triðjaparti fyri eina skipan, ið veitarin skuldi fremja. Fíggjarmálaráðið vísti eisini á, at ársfrásøgnin hjá smápartafelagnum/-veitaranum fyri 2020 lýsti ikki virksemi felagsins á nakran hátt; t.d. er eingin starvsfólkakostnaður, og roknskapurin verður ikki grannskoðaður. Fíggjarmálaráðið helt tað als ikki vera nøktandi.

Fíggjarmálaráðið legði afturat, at Strandferðslan hevði kravt, at roknskapurin hjá smápartafelagnum skuldi grannskoðast, bæði fyri inniverandi ár og frameftir.

### Avstemman millum skipanir

Sambært Strandferðsluni skuldi BPS-skipanin stýra øllum inntøkum stovnsins.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu stemmað var av millum BPS, fíggjarskipanina og Búskaparskipan landsins. Strandferðslan svaraði, at stovnurin var í holt við at samstarva við veitararnar um, hvussu øll skjøl fara frá BPS skipanini til Navision. Sambært Strandferðsluni fór tað at verða stemmað av regluliga við at eftirkanna høvuðsupphæddir og mannagongdir, og at gera testir.

Strandferðslan greiddi frá, at *"krav var sett til [veitaran], at skipanin skal lúka ISAE 3402 og skal váttast og undirskrivast á hvørjum ári av ríkisgóðkendum grannskoðara. Í verandi løtu er [veitarin] í ferð við at leggja hetta arbeiðið til rættis saman við grannskoðanarvirki. Tað vil tryggja, at allar mannagongdir eru væl skrásettar og lætt grannskoðaðar".* Strandferðslan legði afturat, at *"tøl, leypandi støðufrágreiðingar v.m. til Búskaparskipan landsins verða gjørdar í samstarvi við Gjaldstovuna. Hetta arbeiðið byrjar fyrst eftir, at royndarkoyringin er byrjað, so stovnurin hevur nakað av data at fyrihalda seg til".*

Landsstýrismaðurin kunnaði um, at fyri at tryggja peningarenslið ímillum bíleggingarskipanina, Navision og Búskaparskipan landsins, hevði Strandferðslan vent sær til Gjaldstovuna fyri at tryggja, at hesin parturin var í samsvari við krøvini til markamót millum egnar búskaparskipanir og Búskaparskipan landsins.

Landsstýrismaðurin vísti á, at krøv um ISAE 3402 og grannskoðanarváttan máttu metast at vera í samsvari við reglurnar um egnar búskaparskipanir.

### Fíggjarlig stýring av verkætlanini

*Óvanligt at gera nýggja skipan uttan kostnaðarætlan.*

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er sera óvanligt, at farið er undir at gera eina nýggja skipan uttan fyrst at gera kostnaðarætlan. Landsgrannskoðanin vísti eisini á, at innaneftirlitið var ikki nøktandi, tá ið fíggjardeildin so at siga ikki hevði verið við í verkætlanini.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu Strandferðslan tryggjaði sær at fáa ta skipan, sum ætlanin var, og hvussu stovnurin tryggjaði sær, at peningur ikki kom at mangla aðrastaðni í rakstrinum.

Í mai 2021 greiddi Strandferðslan frá, at *"higartil hava allar útreiðslur verið innan fyri karmarnar hjá SSL. Tá ið ivamál hevur verið, hevur SSL steðgað við gjaldingunum inntil greiða er fingin á støðuni, so at SSL ongantíð hevur verið í tí støðu, at vanta pening til uppgávurnar, ið SSL vanliga røkir".*

Strandferðslan greiddi frá, at nú stovnurin var komin til seinna partin í menningarætlanini, var eykajáttan fingin til tað, so at skipanin kundi koyra fyrst í 2022. Royndarkoyringar og útvaldar leiðir fóru longu at verða næstu mánaðirnar.

Landsgrannskoðanin vísti á, at í eykajáttanaruppskotinum stóð, at biðið verður um eykajáttan til eykakostnað fyri bíleggingarskipanina.

Strandferðslan greiddi frá, at *"kostnaðurin higartil er kendur og kostnaðurin frameftir er avtalaður í endaliga sáttmálanum. Í skrivandi løtu er síðsta hond løgd á sáttmálan so ynski, krøv v.m. samsvara kostnaðinum og fíggjarætlanini hjá Strandferðsluni. Endaligu tølini eru tí fyrst klár, tá ið sáttmálin er liðugur og báðir partar hava góðtikið hann. Fíggjardeildin skal sum nevnt, verða størri partur av projektinum, har fíggjarleiðarin eisini er vorðin partur av stýringsbólkinum"*.

Landsgrannskoðanin bað Strandferðsluna um kostnaðarætlanina, sum stovnurin segði var gjørd.

Í mai 2021 sendi Strandferðslan yvirlitið "BPS Menning og kostnaður". Yvirlitið vísti, at metti kostnaðurin fyri 2021 var 3,7 mió.kr., fyri 2022 var hann 4,9 mió.kr. og fyri 2023 var kostnaðurin 2,9 mió.kr. Útreiðslurnar vóru til veitaran, við undantaki av 1,2 mió.kr. fyri 2021 og 1,2 mió.kr. fyri 2022, ið vóru hald og support til FARA.

Landsgrannskoðanin helt, at yvirlitið var ikki ein kostnaðarætlan, har til bar at samanbera ætlaða upphædd og faktiska upphædd árini 2018 til 2020. At síggja til var skjalið ein yvirskipað meting av útreiðslum næstu trý árini.

Svarið frá Strandferðsluni var ónøktandi. Verkætlanin byrjaði í 2018, uttan at kostnaðarmeting var gjørd av verkætlanini, sum ger tað møguligt at halda kenda kostnaðin upp ímóti ætlaða kostnaðinum.

Í september 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at fyri at tryggja neyvari stýring frameftir, hevði Strandferðslan m.a. gjørt av, at fíggjarleiðarin fekk ein virknan leiklut í fíggjarstýringini av verkætlanini, og altjóða viðurkendur prosjektleistur skuldi verða brúktur at stýra verkætlanini.

Landsstýrismaðurin legði afturat, at KT-verkætlanin átti at verið boðin út á Keyps-portalinum, sáttmáli gjørdur við veitara fyri alla verkætlanina, og fíggjarstýring og verkætlanarstýring kundi verið betri. Fíggjarmálaráðið metti, at flestu viðurskifti vóru komin í rættlag.

*Verkætlanin fyribils steðgað.*

Í august 2022 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at verkætlanin er fyribils steðgað, og at Strandferðslan kannar, hvat víðari skal henda við verkætlanini.

## 4.18 Stuðul til útoyggjar (LG 2021/203-382)

Í 2021 eru 1,5 mió.kr. játtaðar til "Stuðul til útoyggjar" á høvuðskontu 3.38.2.21. Heimild at rinda stuðulin er í Ll. nr. 86/1998 "um útjavningarstuðul til útjaðaraøki". Stuðulin er latin til Strandfaraskip landsins, Atlantsflog og Posta.

Atlantsflog og Posta hava fingið stuðul sambært váttaðum uppgerðum frá grannskoðarum. Niðanfyri er yvirlit frá Atlantsflogi og Posta yvir, hvussu nógv hvørt øki hevur fingið í stuðli:

*kr.*

| Øki | Atlantsflog | Posta |
|---|---|---|
| Fugloy | 0 | 7.336 |
| Svínoy | 0 | 7.690 |
| Hestur | 0 | 2.180 |
| Kalsoy | 0 | 10.338 |
| Mykines | 259.009 | 1.206 |
| Nólsoy | 0 | 16.902 |
| Skúvoy | 0 | 15.206 |
| Stóra Dímun | 265.991 | 916 |
| **Tilsamans** | **525.000** | **61.774** |

### Strandfaraskip landsins

Strandferðslan hevur í sínum roknskapi yvirlit yvir, hvussu nógv stovnurin hevur flutt til tey øki, sum hava rætt til útjavningarstuðul sambært lógini:

*kr.*

| Øki | Ikki leigutúrar | Leigutúrar | Sertúrur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Fugloy/Svínoy | 75.988 | 286.594 | | 362.582 |
| Hestur | 27.811 | | | 27.811 |
| Kalsoy | 97.050 | | | 97.050 |
| Mykines | 127.690 | | | 127.690 |
| Nólsoy | 33.579 | | 62.500 | 96.079 |
| Skúvoy | 26.604 | 106.875 | | 133.479 |
| Stóra Dímun | 195 | | | 195 |
| **Tilsamans** | **388.917** | **393.469** | **62.500** | **844.885** |

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, at stuðulin er latin sambært reglugerð hjá Innlendismálaráðnum, t.e. at:

- stuðul er bert latin til fastbúgvandi á oyggj/bygd, sí §§ 1, 2 og 5,
- vørubólkar og stødd/vekt eru sambært § 3, og at
- stuðul er latin til farmatúrar eftir tørvi sambært § 3, stk. 2.

Av stakroyndunum, vit kannaðu, vóru allir móttakararnir búsitandi á útoyggj sambært Landsfólkayvirlitinum. Tó hevur Strandferðslan eisini skrásett 8 t.kr. fyri flutning av olju til fólk, ið ikki eru fastbúgvandi á útoyggj.

***Vegleiðing er ikki í samsvari við lóg.***

Síðani 2011 hevur Strandferðslan brúkt vegleiðing frá Innlendismálaráðnum um at loyva stuðul til at flyta oljutunnur hjá ikki fastbúgvandi, um samlaða árliga upphæddin ikki fer upp um 20 t.kr. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir víst á, at vit undrast á ta tulkingina.

Burtursæð frá viðmerkingunum omanfyri var einki at finnast at stuðlinum til Strandferðsluna.

## 4.19 Akstovan (LG 2020/203-384)

Roknskaparreglugerðin var seinast dagført í 2016, og góðkend av ráðnum. Sambært Akstovuni var ætlanin at dagføra reglugerðina. Landsgrannskoðanin mælti til at áseta

reglur um fríar arbeiðsbúnar, t.d. í roknskaparreglugerðina, næstu ferð hon verður dagførd.

Landsstýrismaðurin mælti í 2021 Akstovuni til at nýta ásettu mørkini fyri +/- tímar í rundskrivinum um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at uppskot til nýggja roknskapar-reglugerð er sent Fíggjarmálaráðnum. Í uppskotinum eru reglur um arbeiðsbúnar, og mørkini fyri +/- tímar.

### KT-viðurskifti

KT-grannskoðari skoðaði skipanirnar og KT-kervið í 2020. KT-grannskoðarin vísti á fleiri veikleikar, harav nakrir vóru álvarsligir og høvdu høga raðfesting. Teir høgt raðfestu veikleikarnir eiga at fáast í rættlag beinanvegin, ella so skjótt tilber. Stjórin kunnaði um, at tey arbeiddu við at bøta um veikleikarnar. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin fær veikleikarnar, sum KT-grannskoðarin vísti á, í rættlag, so skjótt tilber.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at fleiri av ávístu veikleikunum vóru loystir, men framvegis var arbeitt við at fáa aðrar veikleikar í rættlag.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at árliga skoðanin fyri 2022 er latin Akstovuni í juli mánað. Tað eru framvegis staðfestir veikleikar, sum hava høga raðfesting.

## 4.20 FAS-skipanin (LG 2021/220-521)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað FAS-skipanina við tí endamáli at kanna, um umsiting og eftirlit hjá TAKS tryggja, at roknskapurin er rættur. Vit hava eisini kannað um inntøkur og útreiðslur verða stemmaðar av.

### Um FAS-skipanina o.a.

TAKS umsitur inn- og útgjøld í FAS-skipanini. TAKS hevur í Vinnuskránni skrásett feløg, ið eiga og reka skip, sum eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS). Tey feløgini kunnu fáa skattin av hýruni hjá manningunum afturbornan.

Sambært § 8 í ásetingarlógini og § 63a í skattalógini rinda manningar á FAS-skipi o.l., 35% av hýruni í skatti. Reiðarí fáa afturborið goldna skattin av hýru, eftirløn, frítíðarløn, samsýning o.ø. Afturberingarprosentið er ásett í K. nr. 120/2008 “um áseting av aftur-beringarprosenti til reiðaravirkir, ið eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni FAS.”

Roknskapar- og játtanartøl 2017 til 2021 á høvuðskontu 20.52.1.04 “FAS-skipan”:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Skattaafturbering | 209.874 | 257.548 | 218.713 | 207.459 | 185.222 |
| Skattainntøka | -237.195 | -228.664 | -217.969 | -210.795 | -189.019 |
| **Munur** | **-27.320** | **28.885** | **744** | **-3.335** | **-3.797** |
| *Játtan* | *0* | *0* | *0* | *0* | *0* |

***Ikki javnvág ímillum inntøku og afturbering.***

Roknskapartølini vísa, at javnvág er ikki ímillum inntøkur og útreiðslur.

### Vantandi reglur

Landsgrannskoðanin spurdi, um tørvur var á at áseta nærri reglur fyri skip í FAS eftir § 63a, stk. 7, í skattalógini og nærri reglur fyri, hvørji skip koma undir ta í § 63a, stk. 1, nevndu skipan í skattalógini. T.d. treytir til stødd av skipi, hvar tað kann sigla og eigara-viðurskifti.

***Tørvur á nærri reglum.***

Landsgrannskoðanin spurdi eisini, um tørvur var á nærri reglum um afturbering eftir § 63a, stk. 8, í skattalógini, t.d. reglum fyri skráseting av reiðaravirkjum, ið hava rætt til afturbering, kravi til prófførslu, mynstringarlistar og sannan av manntali, sum er umfatað av skipanini.

TAKS svaraði, at tað eru ongar ásetingar uttan afturberingarprosentið, og tað hevur stovnurin at halda seg til, og umsitur eftir tí.

### *Uppruna viðmerkingar til lógaruppskotið um FAS*

***Viðmerkingar til upprunalógina siga, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur.***

Sambært viðmerkingunum til upprunaliga lógaruppskotið frá 1992 *"kann [Føroya landsstýri] áseta nærri reglur fyri, hvørji skip kunnu koma undir skipanina, her verður t.d. hugsað um, hvørjar treytir verða settar viðvíkjandi stødd á skipi, hvar tað kann sigla, eigaraviðurskifti o.s.fr. Hetta verður neyðugt, fyri við vissu at kunna siga, hvør hevur rætt til ta uppskotnu afturberingina."*

Uppruna lógarviðmerkingar lýsa eisini heimild til við kunngerð at áseta nærri reglur fyri afturberingini eftir § 63a. *"Her verður einamest hugsað um reglur fyri skráseting av teimum reiðaravirkjum, ið rætt eiga til afturbering og krav til prófførslu og sannan av tí manntali, sum er umfatað av skipanini (mynstringarlistar o.l.)*."

Í sambandi við tvískatting verður í uppruna lógarviðmerkingunum lagdur dentur á, at "*Inntøka sum eitt virki, ið er heimahoyrandi í einum sáttmálabundnum ríki, hevur av skiparakstri í altjóða samferðslu, kann bert verða skattað í tí sáttmálabundna ríkinum, har sum veruliga leiðslan hevur sæti."*..."*Tí eigur at verða ansað eftir, at annað land ikki fer við skattinum hjá manningini, meðan reiðaravirkið fær afturberingina*."..."*Tí er sett í § 63a, at treytin fyri at fáa afturberingina er, at reiðaravirkið antin er skrásett í Føroyum, ella hevur fastan rakstrarstað í Føroyum*."

Nevndu reglur eru ikki gjørdar, hóast tær eru av týdningi fyri ástøði í umsiting av § 63a í skattalógini. Manglandi reglur hava við sær, at fyrisitingin ikki nóg neyvt kann umsita neyðugar fíggjarligar fyrimunir við FAS-skipanini, sum upprunaliga ætlað.

Í august 2022 tekur Fíggjarmálaráðið undir við TAKS um, at *"TAKS heldur tað vera ógreitt, hvønn fíggjarligan fyrimun talan er um og fyri hvønn. TAKS hevur ikki umsitingarligar trupulleikar við hesum."*

### *Skráseting av V-tali til FAS og P-tali*

***79 skip skrásett í FAS.***

Í januar 2022 fingu 31 feløg afturborið skatt. Í januar 2022 vóru 79 skip skrásett í FAS-skipanini, t.v.s. at feløg kunnu reka fleiri skip við sama V-tali, og ávísa hýru til manningarnar á fleiri skipum við sama V-tali.

Skip kunnu koma og fara hjá sama felag, uttan at TAKS skal broyta í Vinnuskránni, tí felagið hevur eitt FAS V-tal. Tað er tí torført at fáa eina heildarmynd av skrásetingunum av skipunum í Vinnuskránni.

***Mæla til at hava virknar skrásetingar og rudda upp í Vinnuskránni.***

FAS V-tøl kunnu vera virkin í Vinnuskránni, tó at einki veruligt virksemi er, t.d. tí skip eru seld. Landsgrannskoðanin mælti til at hava virknar skrásetingar til virksemið, og støðugt rudda upp í FAS V-tølum í Vinnuskránni.

TAKS tekur tilmælið til eftirtektar og fer at rudda óvirkin V-tøl úr skipanini. Eisini verður IMO-nummarið hjá skipunum skrásett saman við skipanavninum, og TAKS fer árliga at kanna hjá Sjóvinnustýrinum, hvørjar broytingar eru. Skipanin hjá TAKS við skipanøvnum verður tá dagførd samsvarandi.

Hýrur til manningarnar kunnu bert rindast um eitt góðkent avrokningarstað, um hvør einstakur av manningini er skrásettur við føroyskum p-tali. Skattskyldan hjá persónum,

sum eru undir avmarkaðari skattskyldu til Føroyar, er eyðmerkt í skattaskipanini við serskildari skattakotu[9], sum er knýtt at p-talinum.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum skrásetingar í skattaskránni av manningum, ið eru úr *øðrum* londum enn Norðurlondum.

Stakroyndirnar vístu, at manningin rindaði 35% í skatti, og at nettohýran var ávíst aftur á peningastovnskonturnar hjá feløgunum, sum hýran var goldin av. Sambært TAKS ber ikki til, av tekniskum orsøkum, at rinda hýrur á útlendskar peningastovnskontur, og tí verður nettolønin, eftir avtalu millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara, flutt aftur til feløgini, sum síðani skulu rinda manningini hýruna.

Í august 2022 tekur Fíggjarmálaráðið undir við, at *"TAKS hevur greitt frá, at tey praktisku viðurskiftini, ið eru avtalað ímillum arbeiðsgevara og arbeiðstakara viðvíkjandi avrokning av nettoupphæddini, eru ikki viðurskifti, ið TAKS hevur ábyrgd av ella skal hava eftirlit við."*

TAKS sendir ikki kontuavrit yvir løn ella árligar skattauppgerðir til útlendsku manningarnar. TAKS ger tó skattauppgerðir fyri hvørt p-tal, og tær liggja á deildini í Klaksvík. Tað kemur fyri, at reiðarí spyrja eftir skattauppgerðum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at TAKS tekur støðu til, hvørjir váðar kunnu hótta FAS-skipanina. Í mai 2022 hevur TAKS svarað, at stovnurin hevur ikki serskilda meining um, hvat kann hótta FAS-skipanina.

### Eftirlit við feløgum og skipum í FAS

Landsgrannskoðanin spurdi TAKS, hvørji eftirlit stovnurin hevur gjørt í 2021 hjá feløgum, ið hava FAS-skrásett skip. Eisini spurdu vit, um stovnurin hevur ávísan leist at fremja eftirlitini eftir, og um hvørja niðurstøðu TAKS er komið til í hesum sambandi.

***Einki virkiseftirlit í 2021.***

TAKS hevði eingi úrslit ella niðurstøður at vísa á, tí Virkiseftirlitið gjørdi eingi eftirlit í 2021, og eingin serstakur leistur er til FAS-eftirlit.

TAKS kunnaði um, at í 2019 og 2020 vóru seks eftirlit gjørd. Eitt eftirlit var viðvíkjandi afturbering, meðan hini høvdu sjóneykuna á, um virksemið var fevnt av lógini um tonsaskatt. Sambært TAKS er eitt eftirlit viðvíkjandi FAS-afturbering gjørt seinastu trý árini.

Í august 2022 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at ráðið fer at taka málið upp við TAKS at fáa greiði á, um eftirlitið er nøktandi.

#### *Vanligt eftirlit við afturberingum (útgjaldseftirlit)*

TAKS hevur virkisgongd nevnd "Vanligt eftirlit FAS afturbering". Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta eftirlitini betur, og at dagføra vegleiðingina um skjalfesting av eftirlitum. Vit vístu á týdningin, at tey, sum fremja eftirlit, vita, t.d. hvørji pass skulu kannast og hví. Neyðugt er eisini at vita, hvørjir hýrusáttmálar og manningar- og mynstringarlistar eru fyri tíðarskeiðið, søkt verður um afturbering fyri. TAKS tók undir við tilmælinum.

Landsgrannskoðanin hevur trupult við at síggja samanhang ímillum vanliga eftirlitið við FAS-skipanini, og at TAKS tekur støðu til skattskyldu hjá norðurlendingum, t.d. hvar skipini sigla, og hvar tey loysa sínar uppgávur. Uppgávurnar eru nevndar í viðmerkingunum til § 63a, stk. 4, í skattalógini, ið noktar afturbering, um avsláttur verður givin í skattinum.

[9] Persónar, ið sigla við skipum í FAS, eru skrásettir í skattaskipanini við skattakotu 28.

Spurt, hví dupultskattaviðurskifti eru partur av vanliga eftirlitinum við afturbering, og um TAKS sjálvvirki letur 35%-skattin hjá manning frá sær, uttan at krav eftir skatti er komið úr útlondum, svaraði TAKS, at orsøkin er, at í ávísum førum eigur annað sáttmálaland rættin til skattin.

Í mai 2022 hevur TAKS kunnað um, at "*TAKS hevur sambært niðanfyristandandi avtalu, skyldu at bjóða skatt í ávísum førum. Sáttmáli um at krevja inn og føra yvir skatt (protokol 2 í sáttmála millum tey norðurlendsku londini um hjálp í skattamálum) §12, punkt 3: Um so er at skattur skal verða afturrindaður av inntøku í einum sáttmála-bundnum ríki, sum er fingin í einum øðrum sáttmálabundnum ríki, og síðstnevnda ríkið ikki hevur sett fram umbøn um yvirføring, tá skal hetta ríkið, innan afturrindan verður gjørd, kunna um afturrindingina. Um fyrstnevnda ríki ikki, innan 30 dagar eftir at henda fráboðan er send, hevur fingið tílíkt svar um yvirføring, kann afturrindan verða gjørd.*"

***Føroyar skulu eiga rættin til skattainn-tøkurnar, um aftur-bering kann latast út til reiðarí.***

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at skipanin við afturbering byggir á *flutning við skipi í altjóða ferðslu* og tað fylgir dupultskattasáttmálanum við Norðurlond og við Stóra-bretland, um at skattur verður goldin, har skipið hevur tjóðarprógv, ávikavist har felagið er heimahoyrandi, t.v.s. at rætturin til skatting liggur í Føroyum, bæði hjá reiðaríi og manning. Føroyar skulu eiga rættin til skattainntøkurnar, um afturbering kann latast út til reiðarí.

## Stakroyndir

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað FAS-skrásett feløg og saman-hildið lønir sambært almennu roknskapunum hjá feløgunum og lønir sambært FAS V-tølum.

Í ársroknskapunum hjá FAS-skrásettu feløgunum eru oftast sosial gjøld og eftirlønir íroknað lønarútreiðslunum. Í FAS-lønarskrásetingunum eru eftirlønir ikki íroknaðar. Lønartølini kunnu geva ábending um, at skeivleikar eru, ið kunnu vera grundarlag undir nærri kanning av lønum í FAS V-tali. Vit bóðu TAKS um viðmerkingar, men TAKS viðmerkti ikki einstøku spurningarnar. Tey svaraðu generelt, at útgreiningar av lønum í roknskapunum vísa, at fulla upphæddin, sum er farin ígjøgnum skattaskipanina, er í roknskapunum og regulerað fyri skattaafturbering.

Niðanfyri eru úrslit av stakroyndunum:

- Felag fekk afturbering, eftir at skipið var strikað úr FAS. Landsgrannskoðanin bað TAKS um viðmerkingar, men fekk ikki svar.
- Skip var skrásett í FAS-skipanini. Skipið var eldri enn 20 ár, tá ið reiðaríið vendi sær til Sjóvinnustýrið, og tað leyk ikki treytirnar fyri skráseting í FAS eftir 20 ára regluni.
- Felag rak skip, sum var skrásett í FAS-skipanini í desember 2020, og fór úr aftur skipanini beinanvegin. Felagið fekk 540 t.kr. afturbornar í desember 2020, svarandi til skatt av 1,5 mió.kr. í hýrum. Felagið er ikki strikað sum FAS-skrásett í Vinnuskránni. Eginpeningurin var negativur við 4,7 mió.kr. sambært roknskapinum 2020.
- Felag var skrásett hjá TAKS til afturbering. Sambært skattaskipanini eru í 2020 goldnar 3,8 mió.kr. í lønum og 1,3 mió.kr. í skatti. Eftir 2020 hevur felagið ikki fingið afturbering.
- Felag hevði einki virksemi eftir mai mánað 2020, og samlaðar FAS-lønir og aðrar lønir í ársroknskapi felagsins eru góðar tvær mió.kr. lægri, enn samlaðu uppgivnu hýrurnar til TAKS.
- Felag var skrásett í Vinnuskránni, og hevði fleiri skip, sum bareboat leigað skip. Skipini eru sambært Teyggjuni seld av landinum í 2021.
- Felag hevur fleiri skip í skattaskipanini við FAS V-tali. Tað sæst ikki, hvørjum skipi hýran stavar frá.
- Felag hevur bareboat leigað skip, og fylgir skipanini til 2025 við atliti at skatti av hýrum til persónar, ið eru fult skattskyldugir til Føroyar.

Landsgrannskoðanin mælti til at steðga afturberingini, tá ið skip verða strikað úr FAS-skipanini, til nærri kanningar kunnu gerast av seinastu útgjaldingunum.

***Mælt til at steðga afturbering, tá ið skip verða strikað úr FAS.***

Sambært TAKS er skipanin sett upp soleiðis, at TAKS fær ikki sjálvvirkandi fráboðan um skip, sum fara úr FAS. Sambært TAKS, hava tey ikki havt eftirlit við tílíkum støðum.

Í nøkrum málum er einki skjalatilfar skrásett, og einki eftirlit er skrásett. Dømi er um, at skip er í FAS-skipanini stutt tíðarskeið, og at TAKS hevur ikki gjørt eftirlit av virkseminum fyri stutta tíðarbilið, skipið var í skipanini. Sambært TAKS, fáa tey onga fráboðan um, nær skip fara úr skipanini, og tað krevur eitt eftirlit, fyri at svara spurningum.

Í øllum málunum hevur Landsgrannskoðanin biðið um viðmerkingar til roknskapartølini, men TAKS hevur ikki svarað. Í einum málið hevur TAKS tó boðað frá, at felagið verður mótroknað fyri ov nógva afturbering.

Landsgrannskoðanin mælti til, at TAKS vísir størri varsemi í sambandi við afturberingar, og at stovnurin hevur neyvt eftirlit við hýrum, fyri at tryggja, at talan er um rætta manning, rætta hýru, rætt tíðarskeið og rætt grundarlag til avgreiðslu av afturbering.

***Mælt til størri varsemi í sambandi við afturbering.***

Í mai 2022 sigur TAKS, at tey eiga at fáa fráboðan beinanvegin, tá ið skip fara úr FAS-skipanini. Eftirlit eiga at verða gjørd, um lønir fara um skattaskipanina, eftir at skip eru strikað úr skipanini, fyri at fáa eina frágreiðing um, hví so er.

### Munur ímillum inn- og útgjøld

Skattainntøkan frá FAS-skipanini er ikki altíð ájøvn við FAS-afturberingina. Niðanfyri er talva, sum vísir munin ímillum inntøkur og útreiðslur frá 2012 til 2018.

*t.kr.*

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainnt. frá FAS | -185.978 | -217.964 | -226.180 | -247.223 | -247.376 | -237.195 | -228.665 | -1.590.581 |
| FAS-endurgjald | 186.586 | 217.964 | 226.440 | 248.137 | 247.010 | 209.874 | 257.548 | 1.593.559 |
| Munur | ***608*** | ***0*** | ***260*** | ***913*** | ***-366*** | ***-27.320*** | ***28.885*** | ***2.978*** |

Afturberingin hevur verið 3 mió.kr. størri enn goldni skatturin. Munir eru hvørt ár uttan í 2013. Stórir munir eru í 2017 og 2018, sum í høvuðsheitum stava frá einari Skatta- og avgjaldskærunevndaravgerð frá apríl 2018[10].

Landsgrannskoðanin undrast á, at afturberingin kann vera størri enn skatturin av inntøkunum, og bað um viðmerkingar frá TAKS. Vit hava ikki fingið svar.

Í 2020 og 2021 er skatturin størri enn afturberingin:

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Skattainntøka frá FAS-skipanini | -217.969 | -210.795 | -189.019 | -617.783 |
| FAS-endurgjald | 218.713 | 207.459 | 185.222 | 611.394 |
| ***Munur*** | ***744*** | ***-3.335*** | ***-3.797*** | ***-6.388*** |

TAKS hevur m.a. víst á, at skipanin við afturbering er neutral fyri landskassan. Talvan vísir, at tað hevur ikki verið galdandi, tá ið ávikavist 3,3 mió.kr. og 3,8 mió.kr. eru goldnar meira í skatti, enn borið er aftur til feløgini, og at í fleiri ár er borið meira aftur, enn tað, sum er goldið inn í skatti.

Sambært TAKS, eru munirnir millum inn- og útgjøld orsakað av, at persónskattur er fyribilsskattur, og at endaskattur og FAS-skattur eru 35%, ið verða afturborin av útgoldnari løn, sum er endaliga staðfest. Broytingar fyri eldri ár kunnu ikki takast við í uppgerðina fyri eitt ávíst ár, og persónar kunnu hava fleiri skattskyldur sama ár. Eisini verða krøv sett fram ímóti reiðaríum og mótroknað í komandi afturberingum.

[10] Skatta- og avgjaldskærunevndin, mál nr.: 17/00117.

Sambært TAKS vóru tey í holt við at forrita lista til at stemma av millum inn- og útgjaldskonturnar. Arbeiðið skuldi verið liðugt síðst í mai 2022.

**Samanumtikið**
Samanumtikið er skipanin við ávísing av lønum um FAS V-tøl og afturbering av skatti einføld og sjálvvirkandi hjá TAKS. Tá ið skipanir eru einfaldar og sjálvvirkandi, er tað av avgerandi týdningi, at viðkomandi innaneftirlit eru sett í verk, til tess at forða fyri at svik verður framt, og til tess at feilir verða funnir og rættaðir.

Skattalógin § 63a, stk. 1, nr. 1, ásetir, at afturbering til reiðaravirki er av løn fyri tænastu umborð á skipi skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS.

***Vandi fyri afturbering fyri skip, sum ikki eru í FAS.***

Av tí at feløg og ikki skip verða skrásett í Vinnuskránni, kann vandi vera fyri, at goldin skattur verður afturborin fyri skip, sum ikki eru í FAS. Skipanarliga er einki, sum forðar fyri, at feløg kunnu ávísa lønir til eitt og hvørt aktivt p-tal, umvegis FAS V-tal, og soleiðis fáa afturbering.

TAKS fær roknskapir hjá feløgum inn til álíkningar hvørt ár. Roknskapirnir vísa virksemi hjá feløgum, og eru amboð at tryggja rætta afturbering.

Grannskoðanin hevur víst, at feløgini, ið hava útlendska manning umborð á skipunum, fáa afturbering og nettohýru ávísta aftur á egna kontu. Útlendingar uttanfyri Norðurlond í FAS-skipanini fáa hvørki kontuavrit ella skattauppgerðir sendandi frá TAKS. Landsgrannskoðanin heldur, at ávísur váði kann vera í mannagongdini, og at tað hevur týdning, at eftirlitini hjá TAKS eru virkin.

***Eftirlit við FAS eru ikki raðfest.***

Stakroyndirnar og eftirlitini hjá TAKS vísa m.a., at eftirlit við FAS verður ikki raðfest. Gjørd eftirlit eru ikki skjalfest neyvt, og onkur eftirlit ikki liðugt viðgjørd.

Samsvar er ikki millum skrásetingarnar í Føroya Altjóða Skipaskrá og skrásetingarnar hjá TAKS. Tað er ikki vist, at samsvar eigur at vera, men TAKS hevur møguleika at samstarva við Føroya Altjóða Skráseting um FAS-skip og skrásetingar.

Sjálvt um talan er um eina nettojáttan 0 kr., hava nettoúrslitini bæði verið undirskot og yvirskot, og tí hevur tað alstóran týdning, at TAKS áhaldandi stemmar av ímillum inntøkurnar og útreiðslurnar.

Í mai 2022 hevur TAKS greitt frá, at tey saman við Elektron fara at taka dátur úr lønar- og skattaskipanini, viðvíkjandi inn- og útgjøldum av FAS-skatti. Ætlanin er, at tað skal verða grundarlag undir afturvendandi avstemman av FAS-skatti og afturbering.

## 4.21 Lønarhæddaravgjald (LG 2020/220-522)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av lønarhæddaravgjaldi, høvuðskonta 20.52.2.10.

Ll. nr. 193/1993 “um lønarhæddaravgjald” er galdandi fyri virkir, sum móti samsýning lata heilsu-, tryggingar- og peningastovnstænastur. Lønarhæddaravgjald er álagt tí virksemi, ið er frítikið at gjalda meirvirðisgjald.

**Útrokning av lønarhæddaravgjaldi**
Eftir hvønn ársfjórðing roknaði útrokningarskipanin sjálvvirkandi lønarhæddaravgjaldið. Útrokningin var gjørd, við at skipanin las ávísan teig í fyribilsskattaskránni, har fyribilsskrásett inntøka av egnum virki var skrásett.

Vinnudeildin, sum umsitur lønarhæddaravgjaldið, fekk ikki boð frá Virkisdeildini, um ella hvussu nógv skattskylduga inntøkan hjá virkjum fór at verða broytt eftirfylgjandi. Sambært TAKS hevði hækking av lønarhæddaravgjaldinum avmarkaðan týdning, av tí at gjaldið verður drigið frá sum útreiðsla í roknskapunum.

Í 2021 mælti Fíggjarmálaráðið TAKS til at broyta mannagongdirnar soleiðis, at Virkisdeildin boðar Vinnudeildini frá, tá ið hon broytir skattskyldugar inntøkur hjá virkjum, sum rinda lønarhæddaravgjald.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at avtalað er við Virkiseftirlitið hjá TAKS, at tá ið tey gera rættingar størri enn 50 t.kr., boða tey Vinnudeildini frá, sum síðani rættar lønarhæddaravgjaldið.

### Feilur í útrokningarskipanini

Í januar 2020 varð TAKS varugt við feil í útrokningarskipanini. Sambært TAKS stavaðu tær 5,4 mió.kr. í meirinntøkum í 2020 í høvuðsheitum frá rættingum av uppgerðum fyri 2016, 2017 og 2018. TAKS sendi virkjunum krøv í februar og mars 2020. TAKS hevði eisini gjørt rættingar í fyribilsupphæddunum 2020, sum skuldu verða javnaðar, tá ið álíkningin var gjørd fyri árið.

Sambært Fíggjarmálaráðnum eru allar rættingar avgreiddar. Árliga eftirlitið er hert, soleiðis at uppgerðirnar verða kannaðar av tveimum persónum.

### Stakroyndir

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar avrokningar hjá fyritøkum í heilsuvinnuni, eftir at TAKS hevði gjørt rættingar í januar 2020.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at TAKS ikki javnan tryggjaði, at feløgini, sum høvdu blandað virksemi, høvdu rætt býtið ímillum avgjaldsskylduga partin og restina av virkseminum, umframt avlop ella hall. Tað er ikki óvanligt, at lutfallið millum virksemini broytist ár frá ári.

Í februar 2021 kunnaði TAKS um, at tað vóru ikki nógv virkir, ið høvdu blandað virksemi, og var býtið skeivt hjá onkrum, var tapið fyri landskassan avmarkað, tí fyritøkurnar í nógvum førum eisini rindaðu MVG. Sambært TAKS hevði stovnurin fyri nøkrum árum síðani kannað ávísa vinnu í sambandi við blandað virksemi, og stovnurin var nú í holt við eina umfatandi kanning av býtinum hjá øðrum virkjum.

TAKS vísti á, at stovnurin hevði ikki orku til at kanna øll virkir, men ger kanningar so hvørt sum orka og raðfesting loyvir tí.

***Ikki orku at kanna øll virkir.***

Í august 2022 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at TAKS hevur eitt mál um blandað virksemi til viðgerðar hjá Kærustovninum. Eftirlitsorkan er ikki økt, og einki nýtt er um stakroyndir annars.

### Innaneftirlit

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum umrøtt, at TAKS brúkti eina talgilda kekklistaskipan at stýra afturvendandi vanligu uppgávunum innan ásettar freistir. Saman við eftirlitinum við játtanini var kekklistaskipanin týðandi partur av innaneftirlitinum.

Ein eins týðandi partur av innaneftirlitinum eru tey tiltøk, sum leiðslan og starvsfólk seta í verk og fremja fyri at røkka málinum um, at raksturin er málsøkin og effektivur, at roknskapurin er rættur og álítandi, og at lógir og reglur eru hildnar.

Í 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at tað týdningarmesta var, at eftirlitið gjørdi sannlíkt, at avroknaðu lønarhæddaravgjøldini vóru røtt. Í samskifti við TAKS fór Fíggjarmálaráðið at tryggja, at eitt minstakrav verður fyri eftirliti við øllum skattum og avgjøldum, herundir við lønarhæddaravgjaldinum.

Sambært landsstýrismanninum ætlaði Fíggjarmálaráðið, at kunning um eftirlit frameftir verður fastur partur av skránni á regluligu stovnsfundunum við TAKS.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at skipað kunning er ikki sett í verk, men Fíggjarmálaráðið ætlar framvegis, at TAKS kunnar regluliga um eftirlit á stovnsfundum við ráðið.

## 4.22 Loyvisgjald á alivinnu (LG 2020/220-522)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. grannskoðan av høvuðskontu 20.52.2.14 “Loyvisgjald á alivinnu”.

Alivinnan rindar loyvisgjald eftir Ll. nr. 64/2014. Sambært átekning í fíggjarlógini er staðfesti mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært Fish Pool Index brúktur til útrokning av avgjaldsgrundarlagnum.

TAKS hevði ikki skrivligar mannagongdir fyri eftirliti av, um loyvisgjald, sum fyritøkur geva upp, var rætt.

***Einki eftirlit.***

TAKS hevði ikki gjørt annað eftirlit viðvíkjandi loyvisgjaldi, enn at starvsfólk hugdu at skrásettu uppgerðunum. Eingi sjálvvirkandi eftirlit vóru við, at t.d. prísurin var rættur, at avgjaldið var rætt roknað, ella at samlaða kilotalið av laksi faldað við prísinum gav rætt loyvisgjald.

Roknskapartøl 2016 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tøkugjald á alivinnu | -160.881 | -158.108 | -136.361 | -139.996 | -81.813 | -196.157 |
| *Játtan* | *-108.000* | *-138.000* | *-160.000* | *-164.000* | *-175.000* | *-133.000* |

Loyvisgjaldsinntøkurnar vóru lægri í 2020 enn undanfarin ár, orsakað av lágum prísum.

Eftir umbøn frá fyritøku hevði TAKS í februar 2021 lækkað loyvisgjøldini hjá fyritøkuni fyri 2020 við 3,7 mió.kr. Fyritøkan helt seg ikki hava skyldu at gjalda, tí fiskurin var undantikin avgjaldi sambært § 2, stk. 5, í lógini, tá ið hann ikki kundi seljast fyri marknaðarvirði.

TAKS var ikki samt við fyritøkuna, um at fiskurin ikki var seldur fyri marknaðarvirði, og fyritøkan hevði kært avgerðina til Skatta- og avgjaldskærunevndina.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið var av somu áskoðan sum TAKS, at ítøkiliga málið var rættiliga prinsipielt. Málið var ikki endaliga avgreitt enn av Skatta- og avgjaldskærunevndini.

***Mál um tøkugjald lagt fyri Føroya Rætt.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at viðvíkjandi tøkugjaldi og tí málinum, sum var mett rættiliga prinsipielt, fekk TAKS viðhald hjá Kærustovninum, men alifelagið hevur síðani lagt avgerðina fyri Føroya Rætt, og har er málið ikki avgreitt enn.

Í nøkrum førum høvdu alifyritøkur biðið TAKS rætta somu uppgerð fleiri ferðir, og munurin var fleiri mió.kr.

Dømi vóru um at virki bóðu TAKS rætta fyrr senda uppgerð, m.a. tí at feilur var í fyrru uppgerðini ella uppgivni kiloprísurin ikki svaraði til miðal altjóða marknaðarvirði. Tað vóru feilir, sum TAKS kundi havt uppdagað, um stovnurin hevði eftirroknað uppgerðirnar. TAKS ætlaði at taka eftirlit við loyvisgjøldum við í raðfestingini av eftirlitsorkuni.

TAKS vísti á, at stovnurin spurdi vanliga ikki fyritøkurnar, hví tær gjørdu broytingar í áður innsendum uppgerðum. TAKS eftirroknaði ikki hvørja einstaka uppgerð, og tískil hevði TAKS ikki broytt nakað í innsendu uppgerðunum.

Landsgrannskoðanin samanhelt miðalprísirnar 2018 til 2020, ið virkini høvdu givið upp til TAKS, við miðalprísirnar hjá Fish Pool Index. Í nógvum førum var munur á prísunum, bæði pluss og minus.

TAKS vísti á, at talan var um feilir, ið ganga báðar vegir, og tá ið samanlíknað verður við samlaðu inntøkurnar fyri 2018, 2019 og 2020, helt TAKS, at talan var ikki um stórar feilir, tá ið talan var um 0,025%.

Landsgrannskoðanin vísti á, at TAKS hevur ábyrgd av, at inntøkurnar sum stovnurin umsitur, eru rættar, og Landsgrannskoðanin var ikki samd við TAKS, at feilirnir verða minni, tá ið teir ganga báðar vegir.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at umsiting av og eftirlit við loyvisgjøldum ikki var nøktandi, og í so máta gjørdi tað ongan mun, at feilir gingu báðar vegir. Fíggjarmálaráðið heitti á TAKS um at fáa umsiting og eftirlit í rættlag.

## 4.23 Skrásetingargjald (LG 2021/220-522)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av skrásetingargjøldum av motorakførum á høvuðskontu 20.52.2.19. Endamálið við grannskoðanini var at kanna, um skrásetingargjøldini eru kravd inn sambært lóg og kunngerðum, um gjøldini eru røtt skrásett í Búskaparskipan landsins, og um umsitingin er nøktandi.

Akstovan krevur inn skrásetingargjøld og gjøld fyri burturbeining sambært Ll. nr. 33/2008 “um avgjøld við skráseting av motorakførum”, K. nr. 34/1983 “um skráseting av motorakførum o.ø”, K. nr. 112/2015 “um skjøl og upplýsingar, sum skjalprógva upprunavirðið á innfluttum, brúktum motorakfari” og K. nr. 45/2010 “um útgjald av burturbeiningargjaldi á motorakførum”.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Undirkonta | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| 01. Skrásetingargjald | -163.334 | -179.206 | -179.514 | -172.804 | -155.175 |
| 02. Gjald fyri burturbeining av bili | 6.820 | 7.540 | 7.155 | 7.665 | 7.620 |
| 03. Inntøkur, burturbeiningargjøld | -12.390 | -13.500 | -13.780 | -12.805 | -12.859 |
| **Tilsamans** | **-168.904** | **-185.166** | **-186.139** | **-177.944** | **-160.414** |
| *Játtan* | *-160.000* | *-164.000* | *-175.000* | *-188.000* | *-185.000* |

***Lægri inntøkur í 2020 og 2021.***

Í 2020 og 2021 hava inntøkurnar verið lægri enn játtanin. Sambært Akstovuni er orsøkin í 2020, at færri akfør vóru skrásett orsakað av koronustøðuni og í 2021, at elakfør og onnur umhvørvisvinarlig akfør gjalda lægri skrásetingargjald.

Fyri akfør, sum eru skrásetingarskyldug eftir ferðslulógini, verður ásett skrásetingargjald, sum er eitt virðisgjald og $CO_2$-avgjald. Undantikin virðisavgjaldi eru m.a. hýru- og skúlaakfør, neyðsendarakfør og líkvognar, nøkur sløg av bussum og lastbilum umframt akfør, sum bert nýta ravmagn ella vetni til framdrift. Undantikin $CO_2$-avgjaldi

eru motorsúkklur, neyðsendarakfør og líkvognar, lastbilar og bussar yvir avísa vekt og ellisakfør.

*Mannagongdir*

***Roknskaparreglugerð ikki dagført.***

Akstovan hevur skrivligar mannagongdir fyri, hvussu skrásetingargjaldið verður roknað. Stovnurin hevur roknskaparreglugerð frá 2016, sum ásetir hvussu stovnurin umsitur skrásetingargjaldið. Akstovan er í holt við at endurskoða reglugerðina.

Akstovan hevur KT-skipan, sum bilasølurnar fáa atgongd til við egnum brúkaranavni og loyniorði, har tær kunnu fyribilsskráseta akfør. Bilasølurnar leggja neyðugar upplýsingar um einstaka akfarið í skipanina, t.e. merki, slag, skrokknummar, tollingarnummar, fakturavirði og farmagjald v.m. Harafturat leggja bilasølurnar inn upplýsingar um keypara av akfarinum. Neyðug skjøl skulu vera viðheft, m.a. fakturi, $CO_2$ útlát, fraktskjøl, útfylt oyðublað til fráboðan av skráseting.

Táið Akstovan hevur fingið upplýsingar umvegis skipanina, kannar hon, um tær eru rættar, og síðani roknar skipanin skrásetingargjaldið sjálvvirkandi. Akstovan kunnar bilasølurnar um, hvussu nógv tær skulu gjalda. Áðrenn nummarpláturnar til akfarið verða útflýggjaðar, skal skrásetingargjald, burturbeiningargjald og vektgjald vera goldið.

*Inngjøld*

Vanliga rinda bilasølurnar gjøldini vegna bileigaran. Táið goldið verður við kassan, kann gjaldkort nýtast, men Akstovan mælir til, at goldið verður við bankaflyting. Akstovan ansar eftir, at samsvar er ímillum upplýsingarnar um akfarið og inngjaldið.

*Burturbeiningargjald*

Øll motorakfør, undantikið motorsúkklur og prutl, rinda 5 t.kr. í burturbeiningargjaldi til Akstovuna, táið tey verða skrásett. Táið motorakfør verða beind burtur, skal tann parturin av skrokkinum, sum skrokknummarið er sligið í, fylgja við. Akførini kunnu bert latast inn til góðkenda móttøkustøð. Eigarin letur Akstovuni nummarspjøldrini, og Akstovan flýggjar eigaranum frámeldingarváttan, sum handar móttøkustaðnum váttanina. Eigarin fær 4 t.kr., og móttøkustøðin sendir Gjaldstovuni rokning fyri burturbeiningargjald saman við burturbeiningar- og frámeldingarváttan. Verður motorakfar strikað úr akfarsskránni og flutt av landinum, kann eigarin fáa part av virðisgjaldinum afturgoldið. Akstovan rindar eigaranum burturbeiningargjaldið.

*Stakroyndir*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað skrásetingargjald fyri akfør, sum eru skrásett í 2021. Vit kannaðu, um virðisgjaldið og $CO_2$ avgjaldið var rætt roknað. Vit kannaðu eisini, um virðisgjald, $CO_2$ avgjald og burturbeiningargjald var goldið og skrásett í Búskaparskipan landsins. Einki var at finnast at.

## 4.24 Vektgjald (LG 2021/220-522)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað vegskatt (vektgjald) av motorakførum á høvuðskontu 20.52.2.22. Endamálið var at kanna, um vektgjøldini verða kravd sambært lógini og kunngerðum, um gjøldini eru rætt skrásett í Búskaparskipan landsins, og um umsitingin er nøktandi.

Sambært Ll. nr. 38/1982 “um veg- og umhvørvisgjald av motorakførum o.a.” krevur Akstovan inn veg- og umhvørvisgjald. Vektgjald ella umhvørvisgjald verður rindað av øllum gjaldskyldugum akførum. Av gjaldskyldugum akførum, ið eru lagað til at nýta aðra drívmegi enn bensin, verður harumframt rindað útjavningargjald.

Vektgjaldið fellur til gjaldingar tvær ferðir um árið, 2. januar og 1. juli. Umvegis vegskattaskipanina í Búskaparskipan Landsins sendur Akstovan boð til Elektron um at skriva rokningar út. Akfarseigarar rinda vektgjøldini v.m. á peningastovnskontu hjá Akstovuni.

Akstovan hevur mannagongdir fyri, hvussu vektgjaldið verður umsitið. Akstovan tilskrivar, bókar og stemmar av vektgjaldið. Verður skuld avskrivað, ella goldið verður út vegna striking í akfarsskránni e.t., verður útgoldið umvegis útgjaldsskipanina hjá Gjaldstovuni.

Gjaldstovan kannar hvønn mánað, at saldan sambært vegskattaskipanini stemmar við saldu í fíggjarstøðuni.

*Stakroyndir*
Fyri at sanna um gjøldini eru røtt, kannaði Landsgrannskoðanin við stakroyndum skrásetingar í akfarsskránni. Vit kannaðu, um røtt upphædd var álíknað í samsvari við slag og $CO_2$ útlát, um upphæddirnar eru sambært galdandi lóg, og um mannagongdirnar verða fylgdar. Einki var at finnast at.

## 4.25 Onnur gjøld/avgjøld

**Avgjald av kapitaleftirlønum** (LG 2017/220-521)
Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum umrøtt grannskoðan av umsitingini hjá TAKS av avgjaldi av kapitaleftirlønum. Samanumtikið tryggjaði umsitingin at rættar upphæddir vóru goldnar. Tá ið stjórin góðkendi mánaðarroknskapirnar, váttaði hann mótvegis Fíggjarmálaráðnum, at allar inntøkur vóru við, og at roknskapurin var rættur og álítandi.

Landsgrannskoðanin vísti á, at TAKS onga vissu hevði fyri, at øll, sum skuldu rinda avgjald, rindaðu landskassanum avgjøldini. Landsgrannskoðanin hevur áður umrøtt spurningin, um at grannskoðarin hjá eftirlønarveitarum árliga kundi váttað, at mannagongdir og bókhald vóru hóskandi skipað við atliti at útrokning og avrokning av avgjøldunum.

Sambært TAKS høvdu tey í longri tíð ynskt at fingið váttan frá grannskoðara í lóggávuna, men komið var ikki á mál.

Landsstýrismaðurin ætlaði at fáa tað inn í lógina, næstu ferð rentutryggingarlógin var broytt, tó var enn eingin broyting gjørd í rentutryggingarlógini.

**Brennioljugjald** (LG 2019/220-522)
Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av inntøkum av brennioljugjaldi og endurrindan av brennioljugjaldi til ávísar bátar og virkir. Inntøkurnar eru skrásettar á høvuðskontu 20.52.2.13 “Brennioljugjald” í landsroknskapinum og greinaðar á standardkontu 53 “Stuðul til vinnu” og standardkontu 61 “Skattur og avgjøld”.

Um 325 virkir og bátar vóru í januar 2020 skrásett hjá TAKS at fáa oljuavgjald endurrindað. Í 2019 vóru 13 mió.kr. endurrindaðar teimum, sum sambært § 2, stk. 3 og 4, í lógini, høvdu rætt til at fáa endurrindað brennioljugjaldið, ið tey høvdu goldið oljufeløgunum.

Virkini sendu umsóknir til TAKS um at fáa alt ella partvíst brennioljugjald endurrindað. Tá ið umsókn var gingin á møti, skrásetti TAKS viðkomandi virki við ávísari kotu í Vinnuskránni, og so leingi TAKS ikki fekk fráboðan um broyting, stóð skrásetingin óbroytt.

Landsgrannskoðanin bað TAKS um at fáa skjøl viðvíkjandi trimum feløgum, sum vóru skrásett at hava rætt til endurrindan av brennioljugjaldi. Landsgrannskoðanin fekk útskriftir av MVG-uppgerðum fyri juni og oktober 2019.

***Ber ikki til at sanna, at endurgjaldið er rætt.***

Av tí at MVG-uppgerðirnar eru sendar TAKS umvegis Vinnugluggan, vóru eingi undirskjøl við. Av hesari orsøk, og av tí at TAKS einki eftirlit hevði havt, kundi Landsgrannskoðanin ikki sanna, at endurrindanin av brennioljugjaldi var røtt.

### **Ferðaavgjald** (LG 2019/220-522)

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum m.a. umrøtt grannskoðan av inntøkum av ferðaavgjøldum. Sambært § 1 í Ll. nr. 37/1988 “um ferðagjald” skulu 65 kr. rindast fyri hvørt ferðafólk, sum verður flutt av landinum. Ferðafólkaflutningsfeløg krevja avgjaldið inn og rinda tað til TAKS.

TAKS hevði ikki nýtt heimildina at kanna um upplýsingarnar, sum flutningsfeløgini lótu inn, vóru rættar. TAKS hevði seinast verið á eftirlitsvitjan hjá flutningsfeløgum í 2011.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at TAKS ikki tryggjaði sær, at flutningsfeløgini góvu rætt upp, t.d. við at nýta eftirlitsheimildina.

Landsgrannskoðanin hevur áður reist spurningin um at áleggja ferðaflutningsfeløgunum at útvega grannskoðanarváttan frá sínum grannskoðarum um, at avroknaðu ferðaavgjøldini eru røtt. TAKS kunnaði um, at stovnurin hevði latið Fíggjarmálaráðnum málið um grannskoðanarváttan at seta á løglista.

Samanumtikið kundi Landsgrannskoðanin ikki sanna, at avroknaðu ferðaavgjøldini vóru røtt, tá ið TAKS ikki hevði gjørt eftirlit hjá ferðaflutningsfeløgunum.

***TAKS hevur nú gjørt eftirlit.***

TAKS hevur í 2021/2022 verið á eftirlitsvitjanum hjá stóru flutningsfeløgunum. Eingir týðandi feilir vórðu funnir.

### Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í september 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at TAKS hevði boðað Fíggjarmálaráðum frá, at í 2021 var eftirlitsøkið styrkt við einum starvsfólki. Fíggjarmálaráðið ætlaði, at frameftir skuldi kunning um eftirlit verða fastur partur av skránni á regluligu stovnsfundunum við TAKS.

Enn vóru ongar broytingar gjørdar í ávikavist rentutryggingarlógini, lógini um serligt avgjald um brenniolju, lógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi, og ferðagjaldslógini. Fíggjarmálaráðið hevði ikki nakað nýtt at leggja afturat í málinum um grannskoðaraváttan.

Í august 2022 hevur Fíggjarmálaráðið víst á, at ráðið svaraði Landsgrannskoðanini í august 2020, at tað er týdningarmikið, at eftirlitið sannlíktger, at avroknaðu ferðaavgjøldini eru røtt. TAKS hevur greitt frá, at stovnurin ger stakroyndir eftir orku og raðfesting. Fíggjarmálaráðið fylgir upp, at TAKS fremur eitt nøktandi eftirlit við øllum skattum og avgjøldum, herundir við ferðaavgjøldunum.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at skipað kunning er ikki sett í verk, men Fíggjarmálaráðið ætlar framvegis, at TAKS kunnar regluliga um eftirlitið á stovnsfundum við ráðið.

# 5. Fiskivinnumál

## 5.1 Fiskimálaráðið (LG 2021/205-211)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Fiskimálaráðnum á høvuðskontu 5.11.1.05, við denti á lønarviðurskiftini, útvaldar rakstrarútreiðslur og fíggjarstøðuna, umframt stuðulsfíggjaða virksemið.

### Rakstur

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 9.600 | 10.372 | 10.610 | 10.786 | 10.543 |
| Keyp av vørum og tænastum+útb. | 4.072 | 4.456 | 4.550 | 2.884 | 2.790 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur o.a. | 788 | 798 | 820 | 904 | 910 |
| Søla av vørum og tænastum | -29 | -24 | -28 | -24 | -5 |
| Stuðul til annað virksemi | 0 | 15 | 0 | 0 | 0 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | -86 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 84 | 69 | 74 | 95 | 36 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | 0 | 0 | -21 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **14.518** | **15.686** | **16.004** | **14.645** | **14.188** |

Fiskimálaráðið hevur dagført roknskaparreglugerðina í desember 2021.

Landsgrannskoðanin kannaði seinastu setanarmálini, og samanhelt útgoldnar lønir við lýsingar, umsóknir, prógv o.a. viðkomandi fyri størvini. Einki var at finnast at.

### Fíggjarstøða

Tøl úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Jørð | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| Bygningar, løgur o.t., netto | 10.243 | 9.941 | 9.639 | 9.337 | 9.035 |
| Banka- og girokontur | 47 | 69 | 36 | 51 | 49 |
| Ikki inntøkuført - granskingarstuðul | -86 | -86 | -131 | -131 | 0 |
| Skuld, annað | -49 | 0 | -57 | -534 | -520 |

Fiskimálaráðið hevur skipað eftirlit við skuldarum og ognarum, og stemmar regluliga av við uttanhýsis skjøl.

*Ognaryvirlit*

Fiskimálaráðið hevur yvirlit yvir støðisogn og smærri ognir, sum t.d. teldur, prentarar og sjónvørp. Harumframt hevur ráðið yvirlit yvir fartelefonir og teldlar.

*Peningastovnskonta*

Fiskimálaráðið hevur egna peningastovnskontu til inngjøld fyri royndarfiskiloyvir og til smærri keyp. Kontan verður stemmað av hvønn mánað. Landsgrannskoðanin mælti til

***Mælt til at rinda rokningar um BSL.***

at rinda rokningar um Búskaparskipan landsins, heldur enn av egnari peningastovnskontu.

*Stuðulsfíggjað virksemi*
Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini fatar høvuðskontan eisini um stuðulsfíggjað virksemi, ið eru verkætlanir, sum ráðið eitt nú umsitur vegna Norðurlendska Ráðharraráðið.

Fiskimálaráðið hevur skrásett inntøkur og útreiðslur viðvíkjandi stuðulsfíggjaðum virksemi á undirkontu 45. Í 2020 og 2021 er einki bókað á kontuna.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Stuðulsfíggjað virksemi | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Keyp av vørum og tænastum | 3 | 280 | 0 | 0 | 0 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | -315 | -61 | -21 | 0 | 0 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 0 | 0 | 21 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **-312** | **218** | **0** | **0** | **0** |

Landsgrannskoðanin mælti til, at Fiskimálaráðið fylgir ásetingunum í roknskaparkunngerðini um innanvirkis roknskapir.

## 5.2 Vørn, Tilbúgving á sjógvi og Veðurtæn. (LG 2021/205-311)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapirnar hjá MRCC og Tórshavn Radio á høvuðskontu 5.31.1.06, og roknskapin hjá Veðurstovuni á høvuðskontu 5.31.1.07. Veðurtænastan er yvirtikin 1. november 2021.

Endamálið við grannskoðanini er m.a. at kanna um vanligar roknskaparreglur eru hildnar, um lønirnar eru rættar, kanna útreiðslurnar við stakroyndum, og hyggja at fíggjarstøðupostunum.

### Rakstur
Roknskapar- og játtanartøl 2021:

*t.kr.*

| | MRCC | | Tórshavn Radio | | Veðurtænastan | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | **R2021** | **J2021** | **R2021** | **J2021** | **R2021** | **J2021** |
| Lønir v.m. | 5.036 | 4.803 | 4.334 | 4.663 | 1.547 | 3.322 |
| Keyp av vørum og tænast. | 1.400 | 1.293 | 1.218 | 1.712 | 3.675 | 3.864 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 1.328 | 1.208 | 667 | 250 | 1.893 | 0 |
| Leiga, viðlíkah. og skattur | 0 | 0 | 223 | 0 | 12 | 0 |
| Søla av vørum og tænast. | -247 | 0 | 0 | 0 | -240 | 0 |
| Inn. flyt. m.. alm. stovn. (útr.) | 0 | 0 | 0 | 0 | 127 | 0 |
| Inn. flyt. m. alm. stovn. (innt.) | 0 | 0 | -127 | -100 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **7.517** | **7.304** | **6.315** | **6.525** | **7.014** | **7.186** |

Vørn hevur ikki góðkenda roknskaparreglugerð, men roknskaparmannagongdir eru umrøddar í góðsku- og trygdarhandbókini hjá stovninum. Í 2021 hevur Fiskimálaráðið boðað Vørn frá, at ráðið góðkennir ásetingarnar um roknskaparreglugerð, sum eru í góðsku- og trygdarhandbókini.

*Lønir og starvsfólkaviðurskifti*
Starvsfólkini á MRCC og Tórshavn Radio eru tænastumenn ella í tænastumannalíknandi størvum. Tey eru lønt sambært Tænastumannaavtaluni, og arbeiða eftir vaktarskipan, sum er løgd fyri eitt ár ísenn. Í góðsku- og trygdarhandbókini er m.a. ásett, at yvirtímar skulu avspákast.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarmál; um setanarskriv vóru í málunum, um lønarsatsir eru rættir, uppgerð yvir vaktargjøld, yvirtíð o.a., og um lønarútgjaldingarnar samsvaraðu við tíðarskrásetingar. Einki var at finnast at.

Starvsfólkini áttu tilsamans 975 tímar á við ársenda 2020; nøkur eiga nógvar tímar á. Landsgrannskoðanin mælti til at orða reglur um, hvussu nógvar tímar starvsfólk kunnu skylda ella eiga á. Leiðslan hevur gjørt uppskot um mannagongdir, sum eru sambært rundskrivi nr. 9007/2017 frá Fíggjarmálaráðnum "um at tíðaravmarka lønir í roknskapinum".

### *Keyp av útgerð*

Vørn bjóðar vanliga øll keyp yvir 50 t.kr. út ímillum minst tveir veitarar. Stovnurin bjóðar keyp yvir 500 t.kr. út sambært rundskrivinum "um keyp av vørum og tænastum". Tá ið um størri keyp av samskiftisútgerð ræður, heldur leiðslan, at stovnurin er somikið tongdur at veitaranum og tænastusáttmála við hann, at ikki ber til at senda hesi keyp í útboð.

Viðvíkjandi tænastusáttmálum ásetir rundskrivið "um keyp av vørum og tænastum" í pkt. 4.2. *"at fyri afturvendandi veitingar verða gjørdir sáttmálar við veitara, sum í minsta lagi skulu verða fyri eitt ár í senn og í mesta lagi trý ár. Eru eyðsýndir fyrimunir við longri sáttmála enn 3 ár, kann hetta verður viðgjørt sum fyrispurningur um undantak."*

***Bjóða ikki alt út.***

Vørn vísti á, at av tí at stovnurin arbeiðir við tilbúgving, krevja tey dygdargóða tænastu frá veitarunum. Vørn brúkar ofta somu veitarar til ávís økir, men hevur ikki gjørt tænastusáttmálar við allar.

## Fíggjarstøða

Úr fíggjarstøðuni á høvuðskontu 5.31.1.06:

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t. | 0 | 46 | 1 |
| Skuld, sum er greidd til útgjaldingar | -255 | 0 | 0 |
| Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t. | -102 | -238 | -238 |
| Skuld, annað | -50 | 0 | 0 |

### *Verkætlan*

MRCC hevur 238 t.kr. standandi á "ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t.", sum eru til verkætlanina ARCSAR undir EU Horizon 2020.

Verkætlanin er ætlað at vara í 5 ár, men orsakað av koronu er freistin longd við einum ári. Um peningur er eftir, tá ið verkætlanin er liðug, skal hann rindast stuðulslataranum aftur.

### *Ognaryvirlit*

Vørn hevur skrásett skip og akfør í Búskaparskipan landsins. Eisini hevur stovnurin yvirlit yvir tekniska útgerð, men hevur ikki yvirlit yvir aðrar ognir.

## KT viðurskifti

Grannskoðanarvirki hevur skoðað KT-skipanirnar hjá Vørn í 2021. Niðurstøðan var, at "*Skoðanin hevur givið okkum fatan av, at trygdarviðurskiftini hjá Vørn ikki til fulnar samsvara við krøvini í trygdarrundskrivinum, og hava vit í skoðanini staðfest veikleikar".*

Leiðslan hevur kunnað um, at Vørn arbeiðir við at lúka krøvini, ið grannskoðarin hevur vístá.

## 5.3 Upplýsing um grind (LG 2021/205-341)

Játtanin er á høvuðskontu 5.34.1.04, og er m.a. til at gera upplýsandi tilfar um grind, at gjalda fyri at møta á fundum í NAMMCO og á øðrum hvalafundum, og luttøku annars í arbeiðinum hjá NAMMCO.

Roknskapar- og játtanartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ferðing og flutningur uttanlands | 14 | 69 | 15 | 19 | 0 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 183 | 38 | 78 | 42 | 90 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 8 | 14 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **205** | **121** | **93** | **61** | **90** |
| *Játtan* | *220* | *170* | *170* | *170* | *170* |

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað keyp av tænastuveitingum annars. Einki var at finnast at.

## 5.4 Fiskiveiðieftirlitið (LG 2017/205-342)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. KT-skipanir hjá Fiskiveiðieftirlitinum.

Fiskiveiðieftirlitið hevur nógvar dátur, sum hava stóran týdning fyri stovnin sjálvan og fyri samfelagið sum heild. Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Vørn hevði arbeitt miðvíst við at betra KT-trygdina, og við at broyta mannagongdir á økinum. Stovnurin hevði sett eitt KT-trygdarráð. Vørn ætlaði at fáa arbeiðið liðugt áðrenn næstu grannskoðan, men av tí at tað varð drúgvari enn væntað, komu tey ikki á mál, tó at m.a. váðameting og dátuflokking vóru gjørd.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið við dátutrygd hjá Vørn helt støðugt fram og gekk væl. KT-grannskoðanin var komin við raðfestum tilmælum, og Vørn hevði sett viðmerkingar, evstamark og ábyrgdarpersónar á tey høgt og miðal raðfestu tilmælini. Einki tilmæli var farið um evstamark.

***Arbeiða miðvíst við KT-trygd.***

Í juli 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Vørn og KT-trygdarráðið arbeiða miðvíst við KT-trygd. Í vár keypti stovnurin nýggja skipan til at halda skil á skjølum og mannagongdum, og hon fer at hjálpa væl.

Sambært landsstýrismanninum vitjaði Dátueftirlitið stovnin á heysti 2021, har nógv samskifti var. Dátueftirlitið segði m.a.: *"Grundað á upplýsingarnar í málinum metir Dátueftirlitið, at hóast tað manglar í, er Vørn komið væl ávegis í tilgongdini at lúka treytirnar, ið dátuverndarlógin ásetir. Dátueftirlitið heitir yvirskipað á Vørn um at halda á við arbeiðinum at halda ásetingarnar í dátuverndarlógini.*"

Landsstýrismaðurin vísir á, at Vørn hevur avtalu við grannskoðaravirkið, um at verða KT-grannskoðað eina ferð um árið. Seinasta skoðanin endaði í mai 2022. Hann leggur afturat, at síðani KT-skoðanina í 2021 eru fleiri punkt lokað. Trý punkt í nýggju skoðanini eru raðfest "høgt", og tey eru við at vera avgreidd. Vørn gjørdi eina váðameting í 2021, men hon eigur at betrast. Stovnurin er í holt við eina tilbúgvingarætlan, og í tí sambandinum verður váðametingin eisini endurskoðað. Í apríl 2022 hevur Vørn gjørt dátuviðgerðaravtalu við KT-veitara.

## 5.5 Havstovan (LG 2021/205-343)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Havstovuni. Játtanin er á høvuðskontu 5.34.3.01.

Havstovan ger kanningar av føroyska havumhvørvinum, ráðgevur og kunnar um hesi viðurskifti. Havstovan skal á hvørjum ári lata landsstýrinum upplýsingar viðvíkjandi støðuni í fiskastovnunum á føroysku landleiðunum og á sjóleiðum uttan fyri føroysku landleiðirnar, sum føroysk fiskifør gagnnýta, og skal gera vísindaligar tilráðingar og metingar samsvarandi endamálinum í lógini um sjófeingi.

### Rakstur

Roknskapar- og játtanartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Undirkonta 20. Vanligt virksemi | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 12.045 | 12.873 | 13.785 | 14.184 | 14.924 |
| Rakstrarútreiðslur | 1.710 | 1.889 | 2.110 | 2.139 | 1.750 |
| Søla av vørum og tænastum | -538 | -325 | -736 | -799 | -535 |
| Tilskot til einstaklingar | 0 | 0 | 4 | 0 | 0 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 0 | 0 | 3 | 0 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 9 | 7 | 9 | 47 | -129 |
| **Tilsamans** | **13.226** | **14.443** | **15.170** | **15.573** | **16.010** |
| *Játtan* | *13.156* | *14.448* | *15.116* | *15.508* | *15.985* |

Roknskaparreglugerðin er frá 2021, og fatar um øll roknskaparhaldini, sum stjórin á Havstovuni varðar av.

*Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um lønirnar vóru rættar, t.e. um lýsingar, umsóknir og prógv eru í málunum, og um lønirnar eru sambært galdandi sáttmálum. Eisini kannaðu vit, um almenni starvsfólkapolitikkurin er hildin. Einki var at finnast at.

Havstovan hevur tíðarskrásetingarskipan, har starvsfólk skráseta nær tey koma, og nær tey fara. Starvsfólkini skráseta annars arbeiðsuppgávurnar handligt, harvið kann leiðslan fylgja við, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til.

Stovnurin rindar bert yvirtíð í heilt serligum førum, og eftir avtalu við leiðara frammanundan. Starvsfólk kunnu skylda tímar, ið svara til í mesta lagi tvær arbeiðsvikur. Í september 2021 áttu starvsfólk tilsamans 3.000 tímar á, og onkur skyldaði 232 tímar. Í desember 2020 áttu starvsfólk tilsamans 2.327 tímar á.

***Ikki tíðaravmarkað lønir.***

Havstovan hevur ikki fylgt reglunum um tíðaravmarkingar av lønum í roknskapunum 2020 og 2021. Sambært rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum skulu tímasaldur tíðaravmarkast, tá ið starvsfólk eiga fleiri enn 40 tímar ella skylda fleiri enn 30 tímar.

Havstovan hevur greitt frá, at arbeiðsbyrðan er býtt ójavnt gjøgnum árið. Fleiri starvsfólk hava siglt við havrannsóknarskipinum, sum gevur nógv eykaarbeiði eftirfylgjandi. Tað er m.a. orsøkin til, at starvsfólk eiga frítíð á til at avspáka seinni.

Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar um tíðaravmarking av lønum. Landsstýrismaðurin hevur í juli 2022 upplýst, at Fiskimálaráðið fer at heita á stovnin um at fylgja ásetingunum.

*Keyp*

Havstovan hevur ikki brúkt Keypsportalin, men stovnurin hevur biðið um tilboð frá fleiri, tá ið tey hava keypt vøru ella tænastu, ið kostar ímillum 50 og 500 t.kr. Í einstøkum

førum hevur stovnurin vent sær beinleiðis til kendan veitara, t.d. í sambandi við serútgerð til kanningarstovu.

*Inntøkur*
Inntøkur seinastu fimm árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Søla til privat | -4 | 0 | 0 | 0 | -154 |
| Søla av tænastum, leigu v.m. alment | -533 | -325 | -736 | -799 | -382 |
| **Tilsamans** | **-538** | **-325** | **-736** | **-799** | **-535** |

Havstovan fær inntøkur fyri verkætlanir, sum stovnurin o.o. eru við í. Umframt gjald fyri kostnaðin av verkætlanum, fær Havstovan umsitingargjald, sum vanliga er 20% av samlaða kostnaðinum ella 25% av lønarútreiðslunum.

Starvsfólk á Havstovuni taka onkuntíð lut í verkætlanum, sum onnur standa fyri. Inntøkan er tongd at hvørjari einstakari verkætlan, men minstakravið er, at inntøkan svarar til kostnaðin, sum stovnurin hevur av at lata starvsfólk luttaka. Undantak kann vera, at verkætlan er liður í vanliga virkseminum hjá stovninum ella partur av at førleikamenna starvsfólk.

## Fíggjarstøða
Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2020 | 2021 |
|---|---|---|
| Bygningar, løgur o.t., netto | 15.911 | 15.112 |
| Onnur áogn | 2.866 | 262 |
| Banka- og girokontur | 42 | 40 |
| Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t. | -6.131 | -3.158 |

“Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t.” er stuðul til ymiskar verkætlanir, sum ikki eru endaliga gjørdar upp.

Havstovan hevur tvær peningastovnskontur. Stovnurin ger konturnar upp hvønn mánað.

Onnur peningastovnskontan er skrásett á høvuðskontuni “Havstovan”, og verður sambært stovninum brúkt til verkætlan, nevnd Nordic WOCE.

Hin peningastovnskontan er á høvuðskontu 5.34.3.04 “Havrannsóknarskip”. Loyvda hámarkið á kontuni er 50 t.kr., tó stóðu 2,1 mió.kr. á kontuni 31. desember 2021.

## KT-viðurskifti
Havstovan hevur nógvar upplýsingar og dátur, sum hava stóran týdning fyri stovnin og fyri samfelagið sum heild. Havstovan er ikki við í Landsneti, m.a. av tí at tey halda kostnaðin vera ov høgan. Stovnurin hevur egið KT-kervi, og hevur tveir KT-vørðar at umsita tað.

Havstovan hevur tríggjar servarar. Stovnurin tekur back-up av øllum dátunum eina ferð um árið, og goymir tær í bankaboks. Stovnurin endurskapar dáturnar minst eina ferð um árið.

Í KT-handbók hevur Havstovan mannagongdir viðvíkjandi nýtslu av kunningartøknini. Sambært stovninum var KT-grannskoðari í holt við at skoða KT-skipanina, herundir eisini mannagongdirnar.

## 5.6 Fiskivinnuroyndir (LG 2018/205-343)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin Fiskivinnuroyndir. Játtanin er á høvuðskontu 5.34.3.07.

Samanumtikið fylgdi umsitingin skrivligu mannagongdunum í viðgerð av umsóknum og lýsti stuðulin alment. Niðurstøðurnar av stakroyndunum, ið Landsgrannskoðanin gjørdi, vóru m.a.:

Verkætlan 0176 fekk 50%, ella 150 t.kr. í august 2018. Síðani datt hon niðurfyri, serliga orsakað av, at verkætlanarleiðarin fór í annað starv, og eingin tók yvir.

Í juli 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at verkætlanin er endaliga lokað. Tær 150 t.kr. eru inntøkuførdar í juli 2022.

Verkætlan 0180 hevði stórt sæð gingið eftir ætlan, og var nærum liðug. Í februar 2019 vóru treytirnar fyri at fáa útgjaldið sendar umsøkjaranum, har mint var á at senda inn endaliga frágreiðing, samandrátt, roknskap og umbøn um seinasta gjald.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at endalig frágreiðing var ikki latin inn. Útgoldnar vóru 127,5 t.kr. Umbøn um síðsta útgjald var ikki komin, hóast áminning. Í 2018 eru 22,5 t.kr. settar av í fíggjarstøðuni til verkætlanina.

Í juli 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at verkætlanin er liðug og gjøgnumførd, men umsøkjarin hevur enn ikki latið ráðnum endaliga grannskoðaða roknskapin og frágreiðingina. Sambært umsøkjaranum verður umbidna tilfarið latið ráðnum í næstum.

Landsstýrismaðurin vísir á, at tá ið peningur verður játtaður til fiskivinnuroyndir, er tað ein sannroynd, at ikki allar verkætlanir verða fullførdar. Tá ið Fiskimálaráðið endaliga hevur staðfest, at ein verkætlan er liðug ella steðgað og ikki verður tikin upp av nýggjum, verður hon gjørd upp, og avsetta upphæddin í fíggjarstøðuni afturførd.

Støðan hevur verið ógreið hjá gomlum verkætlanum, tí hevur Fiskimálaráðið gjøgnumgingið verkætlanirnar seinasta heyst og verið í sambandi við umsøkjararnar. Í tí sambandinum hevur ráðið, í juli 2022, givið boð um at flyta aftur allar verkætlanir, ið ikki eru fullførdar.

***Fiskimálaráðið hevur ruddað upp í gomlum verkætlanum.***

## 5.7 Avgjald á fiskatilfeingi (LG 2020/220-522)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av avgjaldi á fiskatilfeingi. Avgjaldið er ásett við lóg og játtað á høvuðskontu 20.52.2.15, undirkontu 01.

Sambært K. nr. 67/2012 “um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum” skal allur fiskur og øll fiskavøra, sum verður landað, umskipað ella uppskipað í Føroyum, ella á føroysku landleiðunum, um eina góðkenda innvigingarskipan. Vektarseðlar skulu sendast Vørn talgilt í tí sniði, sum Vørn ásetir, í seinasta lagi yrkadagin eftir landingar.

Vørn nýtti KT-skipanina Høgguslokkin til at halda skil á vektarseðlum og avrokningum. Stovnurin hevði skrivliga tænastuavtalu við KT-veitaran, ið hevði ment skipanina saman við stovninum.

Í januar 2021 skoðaði grannskoðanarvirki allar KT-skipanirnar hjá Vørn, herundir Høgguslokkin. Skoðanin staðfesti nakrar veikleikar, sum vóru neyvt lýstir í frágreiðingini. Vørn fylgdi í ávísan mun krøvunum í rundskrivinum, tó at skoðanin vísti á fleiri trygdarveikleikar.

Skoðanin staðfesti eisini, at Vørn hevði fleiri fakskipanir, herundir Høgguslokkin, har stovnurin ikki hevði serskilt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum. Grannskoðarin mælti til at fáa viðurskiftini við veitararnar í rættlag, gera ella dagføra avtalur, og harvið fáa góðkenning frá Fíggjarmálaráðnum til skipanirnar, ið eru uttan fyri KT Landsins.

Í juli 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at KT-grannskoðarin í januar 2021 vísti á, at avtalurnar við veitararnar vóru ikki nøktandi. Fiskimálaráðið hevur arbeitt við m.a. at gera dátuviðgerðaravtalur við veitarar, sum eru dátuviðgerar. Avtalurnar tryggja, at viðgerðirnar eru í samsvari við nýggju dátuverndarlógina.

Sami KT-veitari er veitari av fleiri týðandi fakskipanum, tænastuveitingum og rakstri av KT-umhvørvinum hjá Vørn. Vørn hevur fingið uppskot til nýggja høvuðsavtalu, galdandi fyri allar veitingarnar, og sambært landsstýrismanninum verður arbeitt við at gera fylgiskjøl, sum nágreina allar veitingarnar. Við hesum grundarlagi eru fyritreytirnar at lúka KT-trygdarrundskrivið, sum KT-grannskoðarin vísir á, við at koma í rættlag, og góðkenning frá Fíggjarmálaráðnum kann fáast til vega eftirfylgjandi.

# 6. Umhvørvis- og vinnumál

## 6.1 Umhvørvis- og vinnumálaráðið (LG 2021/206-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum á høvuðskontu 6.11.1.06, við serligum denti á lønarviðurskifti og fíggjarstøðupostar.

### Rakstur

Roknskapartøl 2020 og 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2020 | 2021 |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | 11.166 | 11.988 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2.200 | 1.855 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 414 | 158 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur o.a. | 55 | 0 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 330 | 428 |
| **Tilsamans** | **14.164** | **14.429** |

Roknskaparreglugerðin hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum er dagført í oktober 2021.

Landsgrannskoðanin kannaði setanarmál; um lýsing, umsókn, prógv og setanarskriv vóru í málinum. Eisini kannaðu vit, um almenni setanarpolitikkurin er fylgdur. Einki var at finnast at.

### Fíggjarstøða

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur ikki ognir skrásettar sum støðisogn í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin mælti til at skráseta ognir, ið kosta 50 t.kr. ella meira, í Búskaparskipan landsins.

Ráðið hevur yvirlit yvir KT-útbúnað, men tað er ikki dagført. Umhvørvis- og vinnumálaráðið umhugsar at gera yvirlit yvir ognir, hvørs virði er minst 4.000 kr. Landsgrannskoðanin mælti til, at ráðið hevur yvirlit yvir smærri ognir, fyri at tryggja sær, at virðini eru til og við atliti at reglunum um at taka neyðug búskaparlig atlit.

## 6.2 Maritimur tænastudepil (LG 2020/206-111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin Maritima tænastudepilin. Játtanin er á høvuðskontu 6.11.1.06, undirkontu 26.

Í 2020 vóru 500 t.kr. játtaðar til tænastudepilin, m.a. til samskipan og saman við vinnuni at skipa fyri miðvísari marknaðarføring av maritimum tænastum, sum føroyskar fyritøkur og stovnar hava at bjóða. Einki var brúkt av játtanini.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísti á, at 2020 á mangan hátt var eitt serligt ár, og av tí at tað ikki var møguligt at ferðast, bar ikki til at skipa fyri nøkrum av ætlaðu tiltøkunum.

***Játtanin er við til at fíggja part av Vakstrarforum.***

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ráðið, umvegis játtanina til Maritima tænastudepilin í 2022, er við til at fíggja part av Vakstrarforum. Í Vakstrarforum eru nógvar frágreiðingar og tilmæli, harav fleiri kunnu roknast eisini at gagna maritimu vinnunum. Ráðið vísir serliga til frágreiðingina "Vakstrarmøguleikar í maritimu veitaravinnunum".

## 6.3 Jarðfeingi (LG 2017/206-321)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Jarðfeingi.

Roknskaparreglugerðin hjá stovninum var ikki góðkend.

**Inntøkur**
Fyri tænastur, ið Jarðfeingi gjørdi fyri feløg og stovnar í Føroyum, tók stovnurin samsýning, ið svaraði til tímaløn hjá starvsfólki +110%. Stovnurin tók 890 kr. um tíman fyri granskingararbeiði. Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta prísásetingarmannagongdirnar í roknskaparreglugerðina.

Í 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at ráðið hevði umrøtt málið við Jarðfeingi, og Jarðfeingi tók undir við at seta takstirnar í roknskaparreglugerðina.

Í uppskotinum um roknskaparreglugerð, sum ráðið fekk, stóð: *"Samsýningar fyri veittar tænastur verða í høvuðsheitum ásettar við støði í tímaløunum hjá starvsfólkum, ið veita tænasturnar, og einum gjaldi til felags útreiðslur hjá stovninum. Samsýningarnar kunnu tó vera hægri, t.d. í summum granskingarverkætlanum, har ein felags tímasatsur verður avtalaður fyri allar partarnar í verkætlanini"*.

Í 2020 boðaði Umhvørvis- og vinnumálaráðið frá, at ráðið fór at taka málið uppaftur við Jarðfeingi.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var framvegis, at prísásetingin fyri tænastur hjá Jarðfeingi í sambandi við granskingarverkætlanir skal standa í roknskaparreglugerðini, tá ið farið verður undir at endurskoða reglugerðina.

***Prísáseting ikki við í roknskaparreglugerðini.***

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at ráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at prísásetingin eigur at standa í roknskaparreglugerðini. Reglugerðin er ikki dagførd, men vónandi verður komið á mál við tí í ár.

## 6.4 Búnaðarstovan, løgujáttan (LG 2021/206-332)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað løgujáttanina hjá Búnaðarstovuni. Játtanin er á høvuðskontu 6.33.2.08.

Sambært § 6b í Ll. nr. 34/2013 "um Búnaðargrunn" eru 5.148 t.kr. markaðar til ábøtur á bygningar hjá Búnaðarstovuni í Kollafirði. Við eykajáttanarlóg í 2020 vóru 5.148 t.kr. játtaðar til endamálið. Við flyting av óbrúktari játtan, var tøka játtanin áleið 5 mió.kr. í 2021.

Í eykajáttanarlóg mars 2021-3 vóru 2,5 mió.kr. játtaðar til at umvæla fjós og løðu hjá Búnaðarstovuni. Umvælingin verður fíggjað við, at Búnaðargrunnurin flytur landskassanum 2,5 mió.kr. á høvuðskontu 56.33.2.12 "Niðurlaðing av Búnaðargrunninum".

Í Ll. nr. 84/2022 “um at taka festið Heygsgarð úr festiskipanini” er m.a. ásett, at festið, Heygsgarður í Kollafirði, verður tikið úr festiskipanini, og innistandandi upphædd á festikontuni hjá garðinum í Búnaðargrunninum skal markast til ábøtur og nýgerð á Heygsgarði.

Landsverk hevur í samstarvi við Búnaðarstovuna gjørt eina raðfesta verkætlan fyri umvæling, viðlíkahald og umbygging av bygningunum hjá stovninum. Kostnaðarmetingin at skifta tak á fjósbygningunum er 4 til 5 mió.kr.

***Búnaðarstovan sigur, at byggireglugerðin dýrkar umvælingarnar.***

Búnaðarstovan kunnaði um, at eftir at BK 17 reglugerðin[11] er komin í gildi, eru krøvini økt, so kostnaðurin av at skifta tak á løðuni og fjósinum verður helst 10 mió.kr. Ætlanin er í fyrstu syftu at skifta takið á løðuni og síðani at skifta vindeygu. Búnaðarstovan vónar at finna eina bíligari loysn. Í 2020 og 2021 eru um 340 t.kr. brúktar til projektering.

## 6.5 Búnaðarstovan (LG 2021/206-332)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving á høvuðskontu 6.33.2.01 og Búnaðarstovuna á høvuðskontu 6.33.2.03.

Endamálið við Landbúnaðarroyndum og -ráðgeving er at kanna, menna og royna nýggjar vinnumøguleikar í landbúnaðinum, at menna verandi vinnur, eins og at miðla dagførda vitan um hesi viðurskifti.

Búnaðarstovan er skipað sambært Ll. nr. 45/2007 “um landsjørð”, og fyrisitur almennu jørðina, ið ikki er fyrisitin av ella skrásett sum ogn hjá øðrum almennum stovni. Stovnurin virkar sambært reglugerð frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum frá januar 2021.

Stovnurin umsitur festi, traðir o.a. lendi, eins og studningsjáttanina til landbúnaðarvinnuna, og røkir norðurlendskar og altjóða uppgávur. Búnaðargrunnurin fíggjar raksturin av jarðarumsitingini. Í 2021 er játtanin hækkað við 1 mió.kr. at styrkja jarðarumsitingina.

### Rakstur

Búnaðarstovan hevur gjørt uppskot til roknskaparreglugerð, sum er sent til Umhvørvis- og vinnumálaráðið at góðkenna.

Roknskapar- og játtanartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving | 3.248 | 3.038 | 3.537 | 3.642 | 3.638 |
| Búnaðarstovan | 3.222 | 3.061 | 3.378 | 3.489 | 4.532 |
| **Tilsamans** | **6.471** | **6.099** | **6.915** | **7.131** | **8.170** |
| *Játtan* | *5.900* | *6.207* | *6.958* | *7.132* | *9.086* |

Inntøkurnar eru fyri leigu av hølum til Fiskaaling, og søla av seyðakjøti og nakað av neytakjøti.

#### *Søla av seyðakjøti*

Í 2021 fletti Búnaðarstovan 163 seyðir, harav 126 lomb. Sølan er partvís skjalfest, t.v.s at kontanta sølan er ikki skjalprógvað við rokningum. Landsgrannskoðanin mælti til at leggja skjøl við t.d. fylgiseðil, har vekt og prísur standa á. Búnaðarstovan hevur selt kjøt av landinum uttan MVG; onkuntíð hava keyparar heintað vøruna í Føroyum. Landsgrannskoðanin mælti til at halda MVG-reglurnar, og at tryggja, at heimild er at útflyta seyðakjøt á henda hátt.

[11] K. nr. 72/2016 “um bygningskunngerð 2017”.

Sambært stovninum er fjallløn hægri enn hjá bóndum annars, tí tey hava fleiri og longri fjalldagar. Í 2021 lat Búnaðarstovan 44 lomb í fjallløn og 40 lomb í flettingarløn. Miðalvektin var ávikavist 18 og 15 kg.

Roknskapartøl 2017 til 2021, bókað á stað 0200 “Fjós/seyð”:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 7 | 7 | 46 | 39 | 32 |
| Keyp av vørum og tænastum | 177 | 140 | 102 | 100 | 125 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 1 | 45 | 0 | 0 | 39 |
| Søla av vørum og tænastum | -103 | -109 | -48 | -110 | -92 |
| **Tilsamans** | **82** | **84** | **101** | **29** | **104** |

***Fjallløn framgongur ikki í roknskapinum.***

Tað kann gera roknskapin misvísandi, at seyður, latin sum fjallløn, ikki sæst sum partur av roknskapinum, hvørki sum inntøka ella útreiðsla. Um alt var bókað, hevði sølan í 2021 verið einar 244 t.kr., og samsýningarnar einar 139 t.kr.

Spurd, hví sølan av seyðakjøti var munandi lægri í 2019 samanborið við hini árini, svaraði Búnaðarstovan, at tað var hendur ein feilur, soleiðis at stovnurin hevði ikki sent rokningar fyri 53 t.kr. fyri sølu av seyðakjøti.

Inntøkan átti at verið 101 t.kr. og nettoúrslitið 48 t.kr. Eftirsíðan hevur Búnaðarstovan sent vantandi rokningarnar, og sambært stovninum hava tey tikið stig til, at slíkt mistak ikki skal henda aftur.

***Bókingin av søluni er ikki nøktandi.***

Samanumtikið hevur Búnaðarstovan ikki havt nøktandi mannagongdir í sambandi við søluna. Eingi skjøl eru fyri kontanta sølu, og sumt er bókað eftir flytingum í peninga-stovni, uttan at tað sæst av kontuavritinum, hvør tað er, sum hevur goldið.

Feilir eru hendir í 2019, sum kundu verið fyribyrgdir, um greiðar mannagongdir vóru viðvíkjandi inntøkum. Kanningin av inntøkunum vísir, at innaneftirlitið hevur ikki verið nóg gott, tá ið leiðslan hevur góðkent roknskapirnar við munandi manglum.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Búnaðarstovan hevur tikið neyðug stig fyri at tryggja, at slíkir feilir ikki koma fyri aftur.

### *Útleigan av landsjørð*

***Leiguprísir ikki dagførdir.***

Leigugjøldini eru ásett í K. nr. 95/2007 “um umsiting av landsjørð”. Í 2021 eru inntøkurnar 921 t.kr. Sambært kunngerðini skulu prísirnir á landsjørð endurskoðast í minsta lagi triðja hvørt ár. Kunngerðin hevur verið óbroytt síðani 2013, og sambært Búnaðarstovuni eru tey nú í samskifti við aðalráðið um dagføring av kunngerðini.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeitt verður við at dagføra leiguna.

Í 2021 yvirtók Búnaðarstovan umsitingina av festileigu og leigu av traðum v.m. frá Búnaðargrunninum. Búnaðarstovan hevur kravt leiguupphæddir sambært kunn-gerðini. Tað hevði við sær, at leigararnir fingu væl størri rokningar enn áður, tí Búnaðargrunnurin hevði ongantíð dagført prísirnar. Nógvir leigarar vóru ónøgdir við hækkaða prísin, og tveir kærdu til Umhvørvis- og vinnumálaráðið.

Búnaðarstovan hevur kunnað um, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur givið stovninum viðhald.

### *Keyp*

Í desember 2021 hevur Búnaðarstovan útreiðsluført 178 t.kr. fyri gerð av traktorvegi, tó at arbeiðið ikki var gjørt í mai 2022.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært Búnaðarstovuni er orsøkin til seinkingina, at veðurlíkindini vóru sera ólagalig í vetur, umframt at arbeiðstrýstið í entreprenørvinnuni var sera stórt. Búnaðarstovan hevur kunnað um, at arbeiðið nú er gjørt.

***Arbeiðið í 2022 er útreiðsluført í 2021.***

Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísir á, at sambært játtanarskipanini § 13, stk. 1, ber ikki til at flyta játtan til seinni fíggjarár. Útreiðslan av arbeiðinum, sum er framt í 2022, átti at verið hildin av játtanini fyri 2022.

Spurd, um stovnurin biður um tilboð, tá ið tey keypa fyri størri upphæddir, svaraði Búnaðarstovan, at tey bóðu um tilboð frá fleiri veitarum, tá ið tey keyptu ein bil. Stovnurin hevur keypt amboð og umvælt ognirnar uttan at biðja um prísir frá fleiri.

***Mælt til at halda reglur um útbjóðing.***

Búnaðarstovan sigur, at orsøkin til at uppgávurnar ikki eru bodnar út, er, at tey kendu veitararnar. Í eina førinum var bert ein veitari í landinum av ávísari fjósútgerð. Onkuntíð eru tað uppgávur, sum krevja serliga vitan ella serligar førleikar. Búnaðarstovan vísir á, at arbeiðstakararnir, ið hava umvælt bygningarnar kenna til umstøðurnar, og stovnurin hevur valt teir í samráði við Landsverk. Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar um keyp av vørum og tænastum.

*Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur lønarmál. Einki var at finnast at; tó hevði eitt starvsfólk, sum hevði verið í starvi í eitt ár, ikki skrivað undir setanarbræv. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Búnaðarstovan hevur ikki skrivligar reglur um, at starvsfólk kunnu skylda tímar ella eiga tímar á. Nøkur starvsfólk skyldaðu ímillum 60 og 118 tímar. Í mai 2022 vóru skyldugu tímarnir hjá teimum flestu lækkaðir munandi.

***Ikki tíðaravmarkað lønir.***

Búnaðarstovan hevur ikki tíðaravmarkað lønir í landsroknskapinum, sum ásett er í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum. Landsgrannskoðanin mælti til at halda ásetingarnar um tíðarskrásetingar og -avmarkingar.

## Fíggjarstøða

*Peningastovnskontur og kassi*

Búnaðarstovan hevur peningastovnskontu og kassa. Landsgrannskoðanin vísti á, at tað kann vera neyðugt at gera kassan upp oftari, tá ið sølan er upp á tað mesta, t.d. um heystið.

*Ognaryvirlit og goymslur*

Bygningarnir hjá Búnaðarstovuni eru skrásettir í ognarskránni í Búskaparskipan landsins, umframt nakrar gamlar maskinur og ein bilur.

Stovnurin hevur yvirlit yvir kríatúr; í løtuni eru áleið 160 seyðir, 7 ross og 4 neyt. Sambært Búnaðarstovuni fer stovnurin at gera yvirlit yvir smærri ognir.

Búnaðarstovan hevur goymslu av súrhoyggi og av ull, sum kemur inn um summarið, og fer útaftur gjøgnum veturin.

*Kreditorar og onnur skuld*

Ógoldið keyp er m.a. góðar 200 t.kr. fyri rokning 31. desember 2021. Arbeiðið var ikki gjørt vegna vánalig veðurlíkindi, og rokningin er bókað 22. februar 2022, men verður ikki goldin, fyrr enn arbeiðið er gjørt. Í juni 2022 hevur Búnaðarstovan kunnað um, at arbeiðið verður gjørt nú.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at sambært roknskaparreglunum áttu tær 200 t.kr. at verið støðlaðar í fíggjarstøðuni 2021 og útreiðsluførdar, tá ið arbeiðið verður gjørt.

*Varðveitingar og trygdir*

31. desember 2021 stóðu slakar 4,8 mió.kr. á peningastovnskontuni. Peningurin er gjald frá Tórshavnar kommunu fyri mist bit, skerda fóðurframleiðslu v.m., fyri eitt øki á Glyvursnesi, sum Tórshavnar kommuna hevur langtíðarleigað til golfvøll sambært § 7a, stk. 1, í Ll. nr. 45/2007 "um landsjørð".

Sambært sáttmála frá juni 2019 er endurgjaldið fyri nýggjan virkisbygning, nýggjan bø, úthegn v.m. aðrastaðni á festinum. Festarin stendur fyri arbeiðinum vegna festið, men hevur ikki kunnað farið undir nýgerðina, orsakað av at gróttøkan til havnarútbyggingina hevur drigið út.

Sambært Búnaðarstovuni eru festarin, Tórshavnar kommuna og Búnaðarstovan samd um at støðla endurgjaldið í Búskaparskipan landsins, og um at Búnaðarstovan kann leysgeva rokningar til festaran, so hvørt arbeiði eru framd. Sambært Búnaðarstovuni hevur TAKS skrivliga góðkent, at stovnurin bókar MVG-upphæddirnar í sín MVG-roknskap.

Búnaðarstovan kunnaði um, at Gjaldstovan hevur eisini góðtikið, at stovnurin bókar MVG'ið sum keyps-MVG hjá landinum. Landsgrannskoðanin undrast á, at MVG av tænastum, sum festibóndin keypir frá arbeiðstakarum, skal bókast sum útreiðsla hjá landskassanum.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið fer at kanna málið nærri.

## Inntøkufíggjað virksemi

Skeiðsvirksemi og móttøka og søla av ull eru skrásett á inntøkufíggjað virksemi. Í 2021 hevur tó nærum einki skeiðsvirksemi verið.

Roknskapartøl 2017 til 2021, ullarmóttøka:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 255 | 266 | 390 | 341 |
| Keyp vørur, útb. v.m. | 6 | 84 | 83 | 84 | 48 |
| Søla av vørum og tænastum | -6 | -186 | -7 | -93 | -135 |
| Stuðul til vinnu | 0 | 150 | 160 | 199 | 164 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | 0 | 0 | -311 | -368 | -227 |
| **Tilsamans** | **0** | **303** | **191** | **212** | **191** |

Upphæddirnar á "Stuðul til vinnu" eru keyp av ull. Búnaðarstovan er samd við Landsgrannskoðanina, at keypið av ull eigur at bókast sum vørukeyp. Innanhýsis flytingarnar eru flytingar frá vanliga virkseminum hjá "Landbúnaðarroyndum og -ráðgeving".

## Stuðulsfíggjað virksemi

Landsgrannskoðanin kannaði roknskapin fyri Nora Klyngesamarbejde, sum stjórin á Búnaðarstovuni er leiðari fyri. Í 2017 gjørdi Búnaðarstovan umsitingarsáttmála við NORA um stuðul til verkætlanina.

Játtanir, útgjøld og nýtsla av stuðli:

*t.kr.*

| Ár | Játtað | Goldið | Brúkt | Støðlað |
|---|---|---|---|---|
| 2017 | 500 | 0 | 143 | 0 |
| 2018 | 499 | 450 | 400 | 0 |
| 2019 | 500 | 749 | 593 | -156 |
| 2020 | 0 | 50 | 57 | -149 |
| 2021 | 0 | 0 | 30 | -119 |
| **Tilsamans** | **1.499** | **1.249** | **1.222** | |

Í 2017 eru 143 t.kr. brúktar. Av tí at eingin stuðul er goldin út, hevur Búnaðarstovan goldið upphæddina av rakstrinum. Um upphæddin var støðlað í 2017, hevði skuldin 31. desember 2021 verið slakar 24 t.kr., ístaðin fyri núverandi óbrúkta stuðul, 119 t.kr.

Roknskapartøl 2017 til 2021, Nora Klyngesamarbejde:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ferð. og flutn., alment sett - uttanlands | 0 | 25 | 62 | 0 | 0 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 23 | 70 | 200 | 0 | 0 |
| Umboðan o.tíl. | 0 | 21 | 44 | 0 | 0 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 120 | 283 | 286 | 57 | 30 |
| Flytingarinntøka úr útlandinum annars | 0 | -400 | -593 | -57 | 30 |
| **Tilsamans** | **143** | **0** | **-1** | **0** | **0** |
| *Fíggjarstøða 31. desember* | *0* | *0* | *-156* | *-149* | *-119* |

Frá 2017 til 2021 eru tænastuveitingar keyptar fyri 776 t.kr., tað mesta er konsulent-honorar til tríggjar útlendskar veitarar. Einki er viðmerkt á rokningunum, hvat "honorarið" er fyri.

Av størru útreiðslunum annars eru 200 t.kr. fyri ferðir til Íslands og Grønlands. Verkætlanin hevur goldið 62 t.kr. í 2019 fyri ferðaútreiðslur hjá starvsfólkum á stovninum.

Í mai 2019 hevur Búnaðarstovan fakturerað 51 t.kr. til Sermersooq Business Council og Innovative Oplevelser, sum eru mótroknaðar ferðaútreiðslunum.

## 6.6 Landbúnaðarstuðul, stuðulsjáttan (LG 2021/206-332)

Landsgrannskoðanin hevur í 2021 grannskoðað "Stuðul til mjólkarframleiðslu" og "Stuðul til neytakjøt". Játtanin er á høvuðskontu 6.33.2.10 "Landbúnaðarstuðul", undirkontur 01 og 02.

Í 2021 eru 18,5 mió.kr. játtaðar, og tilsamans 17,9 mió.kr. eru latnar í stuðli.

Stuðul verður latin sambært K. nr. 76/2018 "um stuðul til landbúnaðin", har m.a. er ásett, at umsøkjari skal vera bókhaldsskyldugur og meirvirðisgjaldsskrásettur. Búnaðarstovan kannar ikki umsøkjarar, sum stovnurin veit hava vinnuligan rakstur. Um nýggjur umsøkjari er, spyr Búnaðarstovan TAKS.

Játtan og roknskapur 2021:

*t.kr.*

| Heiti | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| 01. Stuðul til mjólkarframleiðslu | 7.220 | 7.188 |
| 02. Stuðul til neytakjøt | 1.100 | 1.142 |
| **Tilsamans** | **8.320** | **8.330** |

### Stuðul til mjólkarframleiðslu

§ 2 í kunngerðini ásetir, at studningurin til mjólk verður útgoldin mjólkarvirki sambært váttaðum innvigingarlista, og at flutningsstudningur verður veittur eftir somu treytum sum mjólkarstudningurin.

Meginfelag Búnaðarmanna (MBM) er einasti móttakari av mjólkarstuðli, og virkið sendir Búnaðarstovuni mánaðarligar innvigingarlistar. Studningurin fyri hvønn litur verður roknaður út við at býta samlað litratal av mjólk upp í upphæddina í fíggjarlógini. Búnaðarstovan hevur ikki annað eftirlit við útgoldna stuðlinum.

Spurd, um tey hava umhugsað at biðja MBM um grannskoðanarváttan fyri, at grundarlagið undir stuðlinum er rætt, og at stuðulin er skrásettur serskilt í roknskapinum hjá felagnum, svaraði Búnaðarstovan, at tey fara at senda MBM fráboðan um herdu eftirlitskrøvini um at senda Búnaðarstovuni roknskap, ið sýnir, hvussu mjólkarstudningurin er býttur ímillum mjólkarbøndurnar.

### Stuðul til neytakjøt

Stuðul til neytakjøt er viðgjørdur í § 3 í K. nr. 76/2018. Eingin upphædd er ásett, og Búnaðarstovan rindar tí ákontugjøld í árinum og javnar upphæddirnar, tá ið árið er endað, og tey hava upplýsingar um, hvussu nógv kjøt skal hava stuðul. Búnaðarstovan vísti á, at arbeiðshátturin gevur stovninum óneyðugt eykaarbeiði.

Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja reglunum í kunngerðini um stuðulsfíggjað virksemi, um at kravdir roknskapir o.a. verður latið stovninum.

Búnaðarstovan hevur kunnað um, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið arbeiðir við at orða nýggja reglugerð fyri stuðulsveitingina til neyta- og kálvakjøt. Í uppskotinum verður m.a. ásett nærri orðing um treytirnar í § 21 ella § 22 í kunngerðini "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan".

### Stuðul til grønmetisframleiðslu

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin stuðul til grønmetisframleiðslu. Játtanin er á høvuðskontu 6.33.2.10, undirkontu 11.

Í fíggjarlógini 2018 og 2019 var ikki ásett, hvat endamálið við grønmetisstuðlinum var, hvør kundi søkja, ella hvørjar treytir skuldu áleggjast stuðulsmóttakarum. Tó stendur í viðmerkingunum í fíggjarlógini 2017, at játtanin var til at stuðla verkætlanum og royndum við føroyskari grønmetisframleiðslu. Í ætlanunum hjá landsstýrinum um nýggjan landbúnaðarpolitikk, var eitt av málunum at økja framleiðsluna av dygdargóðum føroyskum landbúnaðarvørum, harundir at framleiða grønmeti.

Fyrstu ferð játtað var til grønmetisframleiðslu var í 2017. Tá vóru 400 t.kr. játtaðar. Í 2018 vóru 700 t.kr. játtaðar, og 800 t.kr. í 2019.

Búnaðarstovan vísti á, at talan var um verkætlanarstuðul og ikki mongdarstuðul; eisini vísti stovnurin á, at eingin materiell heimild var at vísa á; bert samskifti og heimildarskriv frá Fiskimálaráðnum.

Í 2021 vísti Umhvørvis- og vinnumálaráðið til kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan, sum í § 9, stk. 1, ásetir, at *"heimild til lógarbundnan stuðul og stuðulsjáttan skal greitt síggjast í serstakari heimildarlóg"*. Í § 9, stk. 2, er ásett, at *"fyri stuðulsjáttanir kann í ávísum førum vera nóg mikið við heimild í sjálvari játtanini"*. Í tílíkum førum skal verða sagt frá hesum í viðmerkingunum til játtanina.

***Eingin heimildarlóg um stuðul til grønmetisframleiðslu.***

Umhvørvis- og vinnumálaráðið helt tað vera óheppið, at eingin serstøk heimildarlóg var, og at einki stóð í fíggjarlógartekstinum um, hvussu grønmetisstuðul kundi veitast. Játtanin er upprunaliga veitt í broytingaruppskoti til fíggjarlógaruppskotið 2017. Í álitinum frá Fíggjarnevndini stendur, at *"Játtan á 400 t.kr. er til at stuðla verkætlanum og royndum við føroyskari grønmetisframleiðslu. Í ætlanunum hjá landsstýrinum um ein nýggjan landbúnaðarpolitikk, er eitt av málunum at økja um framleiðsluna av dygdargóðum føroyskum landbúnaðarvørum, harundir at framleiða grønmeti"*.

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ráðið í desember 2020 hevur gjørt eina reglugerð um játtan av stuðli til grønmetisframleiðslu.

### Krøv um grannskoðan v.m.

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin eisini krøvini til grannskoðan v.m. av roknskapum hjá móttakarunum av landbúnaðarstuðli.

Búnaðarstovan hevði ikki fingið grannskoðaðan roknskap, men hevði hugt ígjøgnum skjølini, sum stuðulsmóttakararnir sendu inn, og gjørt sína meting, áðrenn hon rindaði stuðulin út.

Landsgrannskoðanin vísti á, at í § 22, stk. 2, í kunngerðini "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan" er ásett, at roknskapur, sum ikki er fevndur av stk. 1, verður grannskoðaður av góðkendum grannskoðara sambært ásettum reglum, uttan so, at stuðul bert verður latin eina ferð og er minni enn 100 t.kr.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevði umrøtt málið við Búnaðarstovuna, og Búnaðarstovan helt framvegis, at krav um grannskoðan var at leggja eyka umsitingarbyrðar á bøndurnar, eisini vísandi til at summar av stuðulsupphæddunum vóru so smáar, at tað ikki fór at loysa seg at søkja um stuðul.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Búnaðarstovan samdust um at endurskoða reglugerðina fyri stuðulsveitingar og at umhugsa, hvørt eitt minstamark fyri stuðulsveiting eigur at verða ásett. Eisini var umrøtt at taka upp við Fíggjarmálaráðið, um kravið til grannskoðaðan roknskap í ávísum førum kann takast av.

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið víst á, at Fíggjarmálaráðið hevur broytt ásetingarnar í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan. Krøvini um grannskoðaðan roknskap eru nú fyri stuðulsjáttanir, sum eru 500 t.kr. ella hægri, meðan tað fyri stuðulsjáttanir úr 100 t.kr. og upp til 500 t.kr. ístaðin kann latast víðkað gjøgnumgongd sambært §§ 9-11 í kunngerð um grannskoðanarváttanir o.a.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið leggur afturat, at kravið um grannskoðaðan roknskap er fyri at fyribyrgja m.a. misnýtslu av almennum skattapengum, og skal tryggja, at játtaði stuðulin er farin til rætta endamálið.

***Eftirlit skal m.a. tryggja, at stuðul fer til ætlaða endamálið.***

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum eru tað tó føri, har hesin tryggleiki ikki fæst við at seta krav um grannskoðaðan roknskap, sum dømi nevnir ráðið mongdarstuðul, t.d. kilo-stuðul fyri framleitt neytakjøt ella framleiddum $m^3$ av stráfóðri. Í teimum førunum verða ístaðin gjørdar stakroyndir fyri at tryggja, at samsvar er ímillum upplýsingarnar í umsóknini og veruligu umstøðurnar. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur umrøtt tað við Fíggjarmálaráðið, sum er samt í, at í hesum førum er grannskoðaður roknskapur ikki trygd fyri, at stuðulin fer til ætlaða endamálið.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísir á, at síðani Landsgrannskoðanin gjørdi vart við málið, hevur Búnaðarstovan lagt stóra áherðslu á, at kunngerðin verður fylgd. Búnaðarstovan hevur m.a. lýst við tí á heimasíðuni.

### Føroysk húsdjór og Føroysk ross

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin stuðul til Føroysk húsdjór og til Føroysk ross.

Stuðulin er játtaður á høvuðskontu 6.33.2.10 "Landbúnaðarstuðul", undirkontu 10 "Føroysk húsdjór" og undirkontu 13 "Føroysk ross".

Heimild at lata stuðul er í lógini um landbúnaðarstuðul og í Ll. nr. 18/1961 "um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m." Í kunngerðini "um landbúnaðarstuðul" eru ásettar nærri reglur.

Í 2020 hækkaði játtanin til landbúnaðarstuðul við 500 t.kr., harav 50 t.kr. vóru til Felagið Føroysk Ross, at ala og skráseta serføroyska rossið. Frammanundan hava 50 t.kr. verið markaðar til sama endamál á undirkontuni "Føroysk húsdjór".

Í fíggjarlógini var ikki ásett, hvat endamálið við stuðlinum til Føroysk húsdjór var, hvør kundi søkja, ella hvørjar treytir skuldu verða lagdar við stuðlinum. Stuðul var latin eftir

umsókn til verkætlanir, ið høvdu til endamáls at menna, styrkja ella bøta um einstøku stovnarnar av føroyskum húsdjórum, umframt at verja og varðveita tey og teirra serligu eyðkenni, soleiðis at tey ikki forkomast ella fara fyri skeyti.

*Stuðul til Búnaðarstovuna*

Av stuðlinum til Føroysk húsdjór í 2020 flutti Búnaðarstovan 117 t.kr. til sín sjálvs á høvuðskontu 6.33.2.01 "Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving". Sambært Búnaðarstovuni var talan um afturbering fyri útreiðslur, eisini útreiðslur í sambandi við landsseyðasýningina 2020. Eingin umsókn lá til grund fyri flytingini av stuðulsjáttanini til Búnaðarstovuna.

Sambært Búnaðarstovuni var tað, sum stovnurin hevði fingið stuðul til, uppgávur og virksemi, sum vóru uttan fyri vanliga raksturin hjá stovninum. Aðalráðið hevur álagt stovninum uppgávurnar.

Landsgrannskoðanin undraðist á, hvussu ein uppgáva, ið aðalráðið hevði lagt til stovnin at røkja, kundi liggja uttan fyri vanliga raksturin hjá stovninum. Tað tyktist, sum at Búnaðarstovan hevði misskilt sína uppgávu sum stuðulsumsitari.

Landsgrannskoðanin vísti á, at Búnaðarstovan brúkti stuðulsjáttan til at fíggja sítt virksemi, uttan at taka atlit at gegninum í stuðulsviðgerðini, og uttan at ásetingarnar í heimildarlógini vóru fylgdar. Roknskapurin gav ikki rætta mynd av virkseminum hjá stovninum, tá ið reglurnar um játtanarslag ikki vóru hildnar, eisini gruggaði tað roknskapin, at stovnurin brúkti aðrar játtanir enn rakstrarjáttanina at reka stovnin við.

***Seyðasýningar eru partur av vanliga rakstrinum.***

***Ráðið skal góðkenna umsóknir frá Búnaðarstovuni um stuðul.***

Í 2021 lat landsstýrismaðurin Búnaðarstovuni eitt formligt skriv um stovnsbygnað og skipanarreglur fyri stovnin. Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Búnaðarstovan vóru samd um, at skipanarreglurnar vóru greiðar, og at seyðasýningar v.m. vóru vanligur rakstur hjá stovninum. Um stovnurin luttekur í verkætlanum, sum kunnu stuðlast av stuðulsjáttanum, sum hann umsitur, skulu hesar umsóknir latast Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til góðkenningar, áðrenn stuðul kann gjaldast Búnaðarstovuni.

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ráðið hevur gjørt ella dagført hesar reglugerðir:

- Reglugerð 7. desember 2020 fyri at veita stuðul til grønmetisframleiðslu í Føroyum.
- Reglugerð 1. desember 2021 fyri at veita stuðulsjáttan til føroysk seyðaskinn.
- Reglugerð 17. juni 2022 fyri veiting av stuðli til føroyskt framleitt neyta- og kálvakjøt.
- Reglugerð 3. mai 2022 fyri játtan til verkætlanir innan framburð og menning á landbúnaðarøkinum (nýggj játtan 2022).

## 6.7 Almenn jørð, søla (LG 2021/206-332)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin fyri sølu av almennari jørð. Játtanin er løgujáttan á høvuðskontu 6.33.2.11.

Søla av almennari jørð er heimilað í § 9 í Ll. nr. 45/2007 "um landsjørð". Búnaðarstovan kann selja burtur av landsjørð til almenn endamál, so sum grundstykkir til húsabygging, handils- og ídnaðar-, havbúnaðar-, ítróttar- og frítíðarendamál o.a. Áðrenn jørð verður seld, skal festarin verða eftirspurdur.

Sambært § 6 hevur Búnaðarstovan heimild at selja festara innistøðuna, sethús, fjós og aðrar bygningar við hóskandi undirlendi, sum hoyra til festið. Neyvari reglur um fyrisiting av lógini eru ásettar í K. nr. 95/2007 "um umsiting av landsjørð".

Tá ið festarar keypa bygningar á festum við hóskandi grundøki, kann tað sambært § 11, stk. 2, í lógini gerast við, at festarin rindar fyri grundstykkið. Í § 11, stk. 3, er ásett, at tá ið festari selur ella avhendir bygningarnar, sum hann hevur yvirtikið eftir stk. 2, skal helvtarpeningur gjaldast inn á festikontuna. Festarin, búgvið eftir festaran, veðhavari ella keypari á tvingsilssøluni skal rinda helvtarpeningin.

### Játtanar- og roknskaparviðurskifti

Í § 5 í Ll. nr. 34/2013 "um Búnaðargrunn" er ásett, at ágóðin av søluni skal flytast Búnaðargrunninum og verða bókaður á kontu hjá avvarðandi festi.

Búnaðarstovan hevur greitt frá, at tað er ymiskt, hvussu nógv almenn jørð verður seld einstaka árið, og at tað er trupult at meta nágreiniliga um upphæddina. Eisini er torført at meta um, hvussu stórar upphæddir talan verður um, í sambandi við at festarar yvirtaka bygningar á festum. Sambært Búnaðarstovuni er ásetta upphæddin í fíggjarlógini ein leyslig meting, og nettojáttanin er 0 kr.

Í fíggjarlógini 2020 vóru játtaðar 10 mió.kr. í inntøkum og 10 mió.kr. í útreiðslum. Meirinntøkan var 1,8 mió.kr. Í 2021 vóru eisini játtaðar 10 mió.kr., og meirinntøkan var 1 mió.kr.

Roknskapartøl 2016 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Keyp av vørum og tænastum | -42 | -59 | -118 | -133 | 41 | -131 |
| Ymsar rakstrarinntøkur | -1.402 | -1.129 | -1.224 | -1.443 | -1.287 | -1.577 |
| Søla av løgu o.ø. | -21.194 | -8.874 | -9.430 | -13.763 | -10.565 | -21.729 |
| Stuðul til annað virksemi | 16.306 | 13.540 | 12.972 | 14.708 | 10.054 | 24.482 |
| **Tilsamans** | **-6.332** | **3.478** | **2.201** | **-632** | **-1.758** | **1.045** |

Keyparar rinda Búnaðarstovuni fyri keyp av almennari jørð. Búnaðarstovan bókar søluna á "Søla av løgu o.ø." Stovnurin flytir peningin til Búnaðargrunnin, og bókar upphæddirnar á "Stuðul til annað virksemi".

### *Prísáseting*

Landsjørðin verður seld fyri fastan prís uttan alment útboð frammanundan, og verður í høvuðsheitum seld kommunum til byggilendi.

Sambært § 7 í K. nr. 95/2007 "um umsiting av landsjørð" selur Búnaðarstovan landsjørð fyri ein frammanundan ásettan prís sambært fylgiskjali A. Prísirnir skulu endurskoðast í minsta lagi triðja hvørt ár. Prísirnir eru á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni, har meginreglurnar fyri prísásetingini eisini síggjast.

***Ráðið heldur ikki, at neyðugt er at endurskoða prísirnar á jørð.***

Sambært Búnaðarstovuni sendu tey ymiskt tilfar til Fiskimálaráðið í mai 2017 í sambandi við endurskoðan av kunngerðini. Seinni boðaði Fiskimálaráðið stovninum frá, at eftir gjøgnumgongd av tilfarinum í sambandi við endurskoðan av kunngerðini, var ráðið komið til ta niðurstøðu, at tørvur ikki var á at broyta hana, og soleiðis heldur ikki at lýsa kunngerðina av nýggjum.

Búnaðarstovan heldur, at broytta mynstrið í undirstøðukervinum, og tann ávirkan tað hevur á áhugan fyri útbyggingum og jarðarkeypi, hevur við sær, at flokkingin av ávísum bygdum í ávikavist Øki 1 til Øki 5 sambært fylgiskjali A í kunngerðini um umsiting av landsjørð, eigur at verða dagførd.

### Mannagongd fyri sølu av jørð

Búnaðarstovan hevur víst á, at treytin, fyri at jørð kann seljast til kommunur, er, at heimild er fyri tí í galdandi byggisamtykt fyri lendið, sum kommuna ætlar at keypa. Kommunur skulu eisini vísa í verki, at tær veruliga ætla at brúka jørðina til ætlaða

endamálið innan ávísa tíðarfreist, t.e. fyri at kommunur ikki keypa jørð at leggja inn undir seg, tá ið útlit eru fyri, at jarðarprísurin fer at hækka.

Búnaðarstovan hevur eftirlýst greiðari heimild í verandi lóg, fyri at kunna forða fyri, at kommunur leggja jørð inn undir seg. Stovnurin hevur samskift við aðalráðið um, hvussu sølan av almennari jørð skal skipast.

Sambært Búnaðarstovuni er semja við Umhvørvis- og vinnumálaráðið um, at ein treyt fyri at selja jørð er, at heimild fyri virkseminum, sum ætlanin er at nýta lendið til, er í galdandi byggisamtykt fyri lendið, tí kommunurnar eru skipanar- og planmyndugleiki sambært Ll. nr. 13/1954 "um býarskipanir og byggisamtyktir".

***Búnaðarstovan eftirlýsir greiðari reglur fyri sølu.***

Búnaðarstovan hevur víst á, at jørð kann í serligum førum seljast øðrum sambært § 9 í Ll. nr. 45/2007 "um landsjørð". Heimildin er víð, og tí sóknast Búnaðarstovan eftir greiðari reglum at arbeiða eftir.

Í § 9 í K. nr. 83/2011 "um løgujáttan" er ásett, at allar løgur, sum skulu seljast, skulu lýsast alment til sølu. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur váttað fyri Búnaðarstovuni, at søla av landsjørð ikki er fevnd av ásetingini í § 9 í kunngerðini um løgujáttan, orsakað av materiellu heimildini givnari sambært Ll. nr. 45/2007 "um landsjørð".

Hinvegin hevur Búnaðarstovan avvíst umsóknum frá privatum persónum, sum hava søkt um at keypa eitt ítøkiligt grundstykki aðrastaðni, og víst til eitt notat frá 2006 frá Vinnumálaráðnum um, at jørð í slíkum førum bert skal seljast til kommunur.

Búnaðarstovan vísti á, at stovnurin er í einari tvístøðu ímillum politiska viljan og siðvenjuna um, at einans kommunur kunnu keypa almenna jørð, tó at løgfrøðiliga er heimild til at selja til ein og hvønn.

**Samanumtikið**

Landsgrannskoðanin hevur kannað sølurnar av almennari jørð í 2020. Allar sølurnar eru í samsvari við reglurnar í § 9 í Ll. nr. 45/2007 "um landsjørð" og K. nr. 95/2007 "um umsiting av landsjørð".

Sølan av almennari jørð tykist at liggja í fastari legu. Kommunur og avvarðandi aðalráð kenna mannagongdirnar, tó at lógarverkið ikki nágreinar øll viðurskifti í sambandi við sølu av almennari jørð. Ivamál stinga seg upp, tí sambært § 9 í lógini "um landsjørð" hevur Búnaðarstovan víðar heimildir til at selja landsjørð.

Landsgrannskoðanin er samd við Búnaðarstovuna, at tørvur er á at áseta manna-gongdir, soleiðis at borgarar hava somu atgongd til keyp av almennari jørð.

## 6.8 Sjóvinnustýrið (LG 2020/206-351)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av roknskapinum hjá Sjóvinnustýrinum. Játtanin er á høvuðskontu 6.35.1.08.

Sjóvinnustýrið virkar sambært Ll. nr. 165/2001 "um trygd á sjónum", har tilskilað er, at landsstýrismaðurin kann leggja tær heimildir, hann sjálvur hevur sambært lógini, til Sjóvinnustýrið at fyrisita.

*Lønarviðurskifti*

Ávís starvsfólk hjá Sjóvinnustýrinum hava vakt eina viku í senn, orsakað av at reglurnar hjá ISPS[12] krevja vaktarskipan 24 tímar um samdøgrið. Skipanin er útgreinað í

[12] The International Ship and Port Facility Security Code.

setanarsáttmálum hjá hvørjum einstøkum starvsfólki, og samsýningin er sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um lønirnar vóru rættar við at samanhalda tær við lýsingar, umsóknir, setanarsáttmálar v.m. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar enn tær, sum eru nevndar niðanfyri.

Ein var settur í starv í 2020 og løntur sambært 36. lønarflokki í tænastumannaavtaluni, uttan at starvið var tænastumannastarv, og Lønardeildin hevði góðkent lønar- og setanartreytirnar. Viðkomandi fekk vaktargjøld, tó at tað ikki var útgreinað í setanarskrivinum, sum annars var ásett í starvsfólkahandbókini.

Sambært Sjóvinnustýrinum var vaktargjald ikki í setanarskrivinum hjá sýnsstarvsfólkum, til tess at stovnurin kundi seta starvsfólk, sum av ávísari orsøk ikki ynsktu at vera við í vaktarskipanini, ella av aðrari orsøk ikki skuldu vera í vaktarskipanini.

Sambært Sjóvinnustýrinum byrjaði eitt kærumál í 2020 ímillum Sjóvinnustýrið/ Lønardeildina og Starvsfelagið um vaktarskipanina, har hesin spurningurin eisini var við. Sjóvinnustýrið bíðaði eftir avgerð í kærumálinum og fór at rætta starvsfólkahandbókina samsvarandi.

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at avgerð er tikin í kærumálinum. Sambært avgerðini hevur kærarin rætt til samsýning fyri vaktina, sum hann sambært vaktarskipanini hevði.

*Fíggjarstøða*
Sambært Búskaparskipan landsins stóðu góðar 12 t.kr. á kontuni “Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t.”, ið høvdu staðið har síðani 2008, sum flyting frá felagnum Skipating.

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at upphæddin bleiv avgreidd í 2021.

## 6.9 Sjóvinnustýrið, bygningur (LG 2015/206-351)

Í 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at ætlanin var at byggja Sjóvinnustýrinum nýggj skrivstovuhøli í Vágum. Verklagslóg var samtykt fyri tilsamans 9,9 mió.kr. Landsverk stóð fyri byggiverkætlanini, og eftir ætlan skuldi bygningurin verða klárur at flyta inn í á heysti 2019.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Landsverk og Vága kommuna høvdu gjørt gerðabýti, soleiðis at landið yvirtók grundøkið, har bygningurin til Sjóvinnustýrið skal staðsetast, og kommunan yvirtók grótbrotið í Sandavági frá Landsverki. Byggingin av nýggjum umsitingarbygningi til Sjóvinnustýrið var boðin út sum heildararbeiðstøka, og avtala gjørd við byggifyritøku. Arbeitt var við at fáa neyðug loyvir frá Vága kommunu.

***Byggingin er nú byrjað.***

Í juli 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at farið var undir útgrevsturin í november 2021. Stoypiarbeiðið byrjaði í vár, og ætlanin er, at niðasta hædd er liðugt stoypt innan summarferiuna.

## 6.10 Føroya Altjóða Skipaskrá, FAS (LG 2021/220-521)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Føroya Altjóða Skipaskráseting (FAS) við støði í Ll. nr. 78/1992 “um Føroyska Altjóða Skipaskrá” (FAS-lógin).

Grannskoðanin er framd við atliti at innaneftirliti og fyrisiting í sambandi FAS-skrásetingar hjá Sjóvinnustýrinum, og fatar eisini um innanhýsis skipan av viðgerðini av umsóknum, innanhýsis mannagongdir í málsviðgerðum, fyrisiting av undantøkum og stakroyndir í málsviðgerð.

Í sambandi við grannskoðanina hevur Landsgrannskoðanin lagt dent á at kanna virkin eftirlit, herundir hvat Sjóvinnustýrið ger fyri at tryggja eins viðgerðir í tilgongdini til skrá-seting í FAS, málsgongd, skrásetingar, kekklistar o.l. Eisini hava vit umrøtt skattligar váðar og vandan fyri óregluligum virksemi.

### Sjóvinnustýrið

Sjóvinnustýrið umsitur lógina um Føroyska Altjóða Skipaskrá. Í januar 2022 vóru 79 skip skrásett í FAS.

Eftirlitsskipanir hjá Sjóvinnustýrinum eru alt frá innanhýsis skipanum til altjóða skipanir og altjóða sáttmálar, ið fevna um føroyskt skrásett skip, manningar og umsiting. Stovnurin er undir støðugum eftirliti uttanífrá sambært altjóða krøvum[13], umframt at altjóða skipaeftirlit er í havnum (Port State Control). Det Norske Veritas v.fl. útinna klassaeftirlit av skipum.

Sjóvinnustýrið er ISO 9001[14] góðkent, og brúkar góðskustýring eftir ISO 9001 standardi. FORCE International skuldi skoða Sjóvinnustýrið í mai 2022, og tá skuldi stovnurin hava gjørt uppskot um batar, so sum at gera fundarfrásagnir í málum um skrásetingar í FAS. Sjóvinnustýrið ger eina ferð um árið innanhýsis skoðan av arbeiðsgongdum, og ger eftirmetingar eftir skoðanina, sum ISO 9001-grannskoðarin lesur.

Føroyar eru bundnar av samtyktum hjá IMO[15], sum eru grundarlag undir altjóða sjóvinnu. IMO skoðar Sjóvinnustýrið sjeynda hvørt ár sambært “IMSAS, Flagstate Audit” [16].

Í juni 2022 hevur Sjóvinnustýrið kunnað um, at tað er umráðandi fyri alt virksemi í FAS-skipanini, at flaggstaturin Føroyar, støðugt er hvíttlistaður í Paris MoU[17]. Tað er av týdningi, at skipini, ið sigla undir FAS og føroyska flagginum, eru væl rikin, og ikki verða afturhildin.

Samanumtikið verður virksemið hjá Sjóvinnustýrinum støðugt eftirkannað við skoðanum av óheftum stovnum og feløgum, eisini umborð á skipum, skrásettum í FAS, hetta fyri at virka í samsvari við altjóða krøv.

Spurt, sigur Sjóvinnustýrið, at lóggávan, ið tey varða av, ásetir ikki heimildir til Sjóvinnu-stýrið at taka atlit at skattligum váðum. Stovnurin hevur tí hvørki førleikar ella heimildir at taka støðu til, hvørjir skattligir váðar eru, og um vandar eru fyri óregluligum virksemi tí viðvíkjandi.

[13] Maritime Labour Convention, MLC, konventión fyri sjófólk ratifiserað fyri Føroyar, altjóða arbeiðara organisatión International Labour Organisation, ILO.
[14] ISO 9001 er standardur, sum hevur til endamáls at tryggja, at fyritøkan framhaldandi lýkur altjóða treytir.
[15] International Maritime Organization.
[16] IMO Member State Audit Scheme: Flagstate Audit, 7. hvørt ár, næstu ferð í 2024.
[17] The Paris memorandum of understanding on Port State Control.

### Roknskapur v.m.

Skattainntøkurnar og afturberingarnar eru skrásettar á høvuðskontu 20.52.1.04 "FAS-skipanin", á hvør sína undirkontu. Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Skattaafturbering | 209.874 | 257.548 | 218.713 | 207.459 | 185.222 |
| Skattainntøka | -237.195 | -228.664 | -217.969 | -210.795 | -189.019 |
| **Munur** | **-27.320** | **28.885** | **744** | **-3.335** | **-3.797** |

Javnvág er ikki ímillum skattainntøkur av hýrum og afturbering til reiðarí. Seinastu tvey árini hava inntøkurnar verið hægri enn afturberingarnar.

FAS-skipanin bleiv broytt 1. august 2017, og § 63a, stk. 1, nr. 2, í skattalógini[18] var strikað; tað hevði við sær, at FAS-líknandi skipanin, við skattaafturbering fyri bareboat leigað skip, steðgaði. Skip, sum framløgudagin vóru bareboat leigað, fingu skattafyrimunir til og við 31. desember 2018. Bareboat leigað skip, eru leigaði skip uttan manning, har manningin er skrásett í øðrum londum (avmarkað skattskylda).

Fyri skip, sum vóru bareboat leigað til Føroya, skuldi skipanin tó ikki fara úr gildi fyrr enn 31. desember 2025, tá ið tað snýr seg um skatt av hýrum til persónar, sum eru fult skattskyldugir til Føroya. Eftir 2025 er eingin serstøk skattaskipan fyri onnur reiðarí og skip uttan fyri FAS.

### Mannagongdir og innaneftirlit v.m.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu Sjóvinnustýrið leggur til rættis, útinnir og skjalfestir innaneftirlit v.m., og um møguleiki var at styrkja eftirlitið innan verandi heimildir í FAS-skipanini.

Sjóvinnustýrið svaraði, at ein arbeiðsbólkur arbeiðir við at bøta um samstarvið við TAKS. Tað, ið Sjóvinnustýrið kann gera, er at spyrja reiðarí, ið flagga inn, hvussu nógvur lønarraksturin, eftir ætlan, fer at vera, og leggja upplýsingarnar fyri TAKS. Sjóvinnustýrið vísir á, at tað er ein avbjóðing, tí um reiðarí hevur fleiri skip, skrásetir TAKS øll skipini hjá eigaranum undir einum, meðan Sjóvinnustýrið skrásetir hvørt skip sær.

Sambært Sjóvinnustýrinum verður innaneftirlit t.d. framt, tá ið stovnurin viðger fyrispurningar um innflaggingar. Maritimi ráðgevin leggur øll skjølini fyri innflaggingartoymið, ið síðani tekur avgerð um innflagging. Skjølini verða løgd í journalina, og fundarfrásøgn verður løgd í málið.

Sjóvinnustýrið vísir á, at fundurin hjá innflaggingartoyminum er partur av innaneftirlitinum við FAS. Sjóvinnustýrið hevur skrivligar mannagongdir, ið greitt lýsa uppgávur, og hvat gerast skal, t.d. hvussu innflagging fer fram, og hvør arbeiðssetningurin er. Noktan av skráseting verður førd í journalina.

Landsgrannskoðanin spurdi, um Sjóvinnustýrið hevur sett mál fyri innaneftirlit, hvørji tey eru, um tey eru rokkin, og um tey eru skjalfest. Sjóvinnustýrið svaraði, at "*ein persónur á Sjóvinnustýrinum fylgir við í øllum havnastatseftirlitum, ið verða framd á føroysk skip. Viðkomandi kannar, um reiðaríið fær viðmerkingar, og um reiðaríið fylgir upp uppá viðmerkingarnar. Verður tað ikki fylgt upp uppá viðmerkingarnar, kann talan verða um, at Sjóvinnustýrið sjálvt má afturhalda skipinum, til viðmerkingarnar eru tiknar til eftirtektar og rættaðar.*"

Sambært Sjóvinnustýrinum fær stovnurin tey skjøl frá reiðaríum o.ø., stovnurin biður um. Reiðarí senda ofta undirskrivaðar hýrusáttmálar. Stovnurin skrásetir ikki hýrusáttmálarnar í journal, og teir eru ikki partur av innaneftirlitinum. Sjóvinnustýrið hevur

[18] Ll. nr. 122/2017 "um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt".

onkuntíð biðið um hýrusáttmálar v.m. í sambandi við MLC (Maritime Labour Convention) klagur. Í teimum førum hevur talan verið um ivamál, hvørt reiðarí gjalda rætta hýru til manning. Manningar kunnu í trúnaði klaga til Sjóvinnustýrið.

Sjóvinnustýrið brúkar skrivligu mannagongdirnar sum kekklistar í sambandi við málsviðgerð og skjalprógv fyri, at stýrið hevur skjalfest avgerðirnar í journalskipanini. Starvsfólk notera frávik, um mannagongdir ikki eru fylgdar. Sambært Sjóvinnustýrinum fara tey at bøta um mannagongdirnar, við at gera fundarfrásagnir í øllum málum, eisini í málum um skráseting í FAS.

### Undantøk til 20 ára aldursmark

***Mannagongdir um umsiting eru ikki gjørdar.***

Skip, sum eru 20 ár ella eldri, tá ið søkt verður, kunnu ikki skrásetast í FAS sambært § 4a í Ll. nr. 78/1992[19]. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvussu § 4a, stk. 1-3, í lógini skal umsitast.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið fer saman við Sjóvinnustýrinum at áseta nærri reglur í kunngerð um, hvussu undantakið í § 4a, stk. 1-3, í lógini skal umsitast.

***Útgangsstøðið er hægst 20 ár.***

Eftir mai 2011 skulu serlig atlit tala fyri skráseting av skipi, ið er eldri enn 20 ár. Útgangsstøðið er, at tílík skip ikki kunnu skrásetast.

Sambært viðmerkingum til FAS-lógina, skulu undantøk frá aldursmarki eftir § 4a, fyrisitast við afturhaldni: *"Undantøk kunnu einans gerast, um hesi kunnu metast sum ein liður í menningini av FAS. Í hesum liggur m.a., at ynski er at lækka miðalaldurin á FAS-flotanum, umframt at fáa fleiri dygdargóð skip og reiðarí skrásett í FAS.*

*Dømi um serlig atlit, sum tala fyri at loyva skráseting av skipum, eldri enn 20 ár, er, um eitt reiðarí ynskir at skráseta fleiri dygdargóð skip, men okkurt av hesum er eldri enn 20 ár. Harumframt kann tað vera eitt viðkomandi atlit, um skrásetingin av einum skipi, eldri enn 20 ár, er ein liður í skrásetingini av øðrum yngri skipum. Nevndu atlitini eru ikki úttømandi, men onnur viðkomandi atlit kunnu eisini takast við í eina fyrisitingarliga meting."*

Landsgrannskoðanin hevur kannað FAS-skrásetingina hjá felag, har Sjóvinnustýrið hevur skrásett skip, eldri enn 20 ár.

Dømi um skrásetingar í FAS viðvíkjandi skipum hjá Sp/f Northern Survey:

| FAS skrásett | Skipanavn | Byggiár | OZ NR. | Strikað FAS |
|---|---|---|---|---|
| 23.12.2009 | Northern Karoline | 1950 | OZ 2086 | 22.06.2020 |
| 16.11.2011 | Northern Franklin | 1985 | OZ 2102 | 30.10.2014 |
| 27.05.2015 | Northern Cecilia | 1974 | OZ 2157 | 02.03.2021 |

Northern Karoline var 59 ár, tá ið skipið var FAS-skrásett, sum var áðrenn 20 ára aldursmarkið var ásett. Northern Franklin var 26 ár og Northern Cecilia 37 ár, tá ið skipini vórðu skrásett, t.e. eftir at 20 ára aldursmarkið var ásett.

Sjóvinnustýrið metti, at heimild var í lógini til at geva undantak at skráseta Northern Cecilia og Northern Franklin, hóast 20 ára aldursmarkið var galdandi; tí viðmerkingarnar til lógaruppskotið søgdu, at aldursmarkið ikki skuldi verða til bága fyri verandi eigarar.

Landsgrannskoðanin vísti til lógarviðmerkingarnar, *at "Heimildin skal fyrisitast við afturhaldni"..."Undantøk kunnu einans gerast, um hesi kunnu metast sum ein liður í*

[19] Sí Lm. nr. 54/2011 "um broyting í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá."

*menningini av FAS"* og eisini verður sligið fast, at "*Í einhvørjari fyrisitingarligari meting, við støði í hesi áseting, er aldurin á skipinum altíð viðkomandi".*

Landsgrannskoðanin heldur, at møguleikin fyri undantøku frá lógarkravi í einari altjóða FAS-skipan inniber krav um eina gjøgnumskygda og skipaða tilgongd.

***Mannagongdir, sum tryggja gjøgnum-skygni, mangla.***

### Málsviðgerð

Landsgrannskoðanin hevur kannað nøkur skjøl í málsviðgerðini hjá Sjóvinnustýrinum í føri, har stovnurin "ætlar" at skráseta skip í FAS eftir reglunum um undantøk.

Í 2018 søkti eitt reiðarí um at skráseta sjey skip, eitt yngri enn 20 ár og seks eldri enn 20 ár. Sjóvinnustýrið svaraði reiðarínum, at tey sjey skipini kundu ikki skrásetast í FAS.

Í 2019 lat sama reiðarí Sjóvinnustýrinum nýggja umsókn. Tá svaraði Sjóvinnustýrið, at reiðaríið fekk ikki loyvi at skráseta fimm av teimum eldru skipunum, sum vóru ímillum 35 og 55 ára gomul.

Av hinum báðum skipunum bjóðaði Sjóvinnustýrið reiðarínum at byrja tilgongd at skráseta yngra skipið í FAS. Sjóvinnustýrið skuldi, sum part av skrásetingartilgongdini, kanna, um reiðaríið kundi fáa onnur skip skrásett samstundis. Eisini boðaði Sjóvinnustýrið frá, at tey mettu, at eitt skip eldri enn 20 ár, leyk krøvini at fáa undantaksloyvi til at verða skrásett í FAS, samstundis sum tað skipið, ið var undir 20 ár, og at tann skrásetingartilgongdin kundi eisini byrja. Skipið bleiv ikki skrásett í FAS.

Reiðaríið lat eisini TAKS umsókn um at verða skrásett við loyvi til at fáa afturbering. TAKS skrásetti reiðaríið til at fáa skattaafturbering fyri eldra skipið við fráboðanini frá Sjóvinnustýrinum um "viðgerð eftir undantaksreglunum" sum skjalprógv.

***TAKS skrásetti reiðarí til afturbering av skatti, tó at skipið ikki var skrásett í FAS.***

Landsgrannskoðanin heldur, at nevnda dømi vísir, at neyðugt er við samstarvi ímillum avvarandi myndugleikar, fyri at tryggja, at reiðarí, sum søkir um afturbering, veruliga er skrásett í FAS.

***Neyðugt er við samstarvi ímillum avvarandi myndug-leikar.***

Sjóvinnustýrið sigur, at málsviðgerðin, ið Landsgrannskoðanin vísir á, er ikki vanlig, tá ið talan er um umsóknir um innflagging. Her er talan um eina málsviðgerð, ið bleiv aktuell, tá tonsaskattalógin[20] var broytt, og "skatta-FAS[21]" tikið av.

Eftir at tonsaskattalógin bleiv broytt, kravdi TAKS, sambært Sjóvinnustýrinum, av skipum, ið skuldu halda fram í "skatta-FAS", at tey luku treytirnar fyri upptøku í FAS. Fleiri reiðarí lótu tí Sjóvinnustýrinum umsókn um upptøku í FAS, tó at tey í veruleikanum ikki ynsktu upptøku. Sjóvinnustýrið leggur afturat, at innflaggingartoymið viðgjørdi allar umsóknirnar. Nøkur fingu loyvi at flagga inn og onnur ikki. Mál av hesum slagi koma ikki fyri longur.

Landsgrannskoðanin vísti á, at málsviðgerðin, ið er nevnd frammanfyri, hevur við sær, at reiðarí fáa afturbering frá TAKS, uttan at neyðuga skrásetingartilgongdin hjá Sjóvinnustýrinum er lokin.

***Vantandi samstarv kann gera, at reiðarí fáa afturbering av órøttum.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin vístá, at "*FAS-skipanin er ein skipan, ið snýr seg um skráseting av skipum og um skattligar fyrimunir fyri tey, ið skráseta síni skip í henni. Tað eru Sjóvinnustýrið og TAKS, sum umsita ávikavist skipaskrásetingar og skattligu viðurskiftini.*

*Tað var Ll. nr. 86/1983 "um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)", sum var broytt í 2017 (LM-003/2017) fyri at tryggja, at tað einans vóru skip, ið vóru skrásett í FAS, sum fingu skattligar fyrimunir í Føroyum t.v.s. skip við tjóðskaparbrævi, sum*

[20] Ll. nr. 51/2005 "um skatt av reiðarívirksemi".
[21] "skatta-FAS" er internt heiti fyri reiðarí skrásett hjá TAKS til afturbering, men vóru ikki skrásett í FAS-skipanini hjá Sjóvinnustýrinum.

*Sjóvinnustýrið gevur út. Í sambandi við viðgerðina í Løgtinginum bleiv ásetingin um gildiskomu broytt, so skiftistíðin bleiv longd.*

***Umráðandi, at TAKS hevur eftirlit.***

*Sambært § 63a í skattalógini fáa reiðarí afturbering av skatti fyri løn o.a., ið er rindað persónum við tænastu umborð á FAS skipum. Harvið er tað umráðandi, at TAKS ansar eftir, at tað einans er fyri tænastu umborð á skipum, sum eru skrásett í FAS (vanlig skráseting ella bareboat) tvs. bert tey, ið hava eitt tjóðskaparbræv frá Sjóvinnustýrinum, sum fáa skattaafturbering frá TAKS.*

*TAKS hevur í 2021 upplýst fyri Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, at TAKS viðger reiðarí, og at tað er ein møguleiki, at TAKS framyvir heldur skuldi viðgjørt skip ístaðin fyri reiðarí. Á tann hátt hevði tað borið betur til at fylgt við í lønarviðurskiftunum hjá einstøku skipunum.*

***Aðalráðini vilja hava skipað samstarv.***

*Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið hava heitt á Sjóvinnustýrið og TAKS um at skipa eitt samstarv, sum skal tryggja, at einans reiðarí, sum hava rætt til afturbering, fáa afturbering.*

*Sjóvinnustýrið og TAKS hava longu økt um samstarvið og hava havt fleiri gevandi samstarvsfundir.*

*Sjóvinnustýrið hevur í august 2022 upplýst fyri Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, at Sjóvinnustýrið og TAKS eru byrjað uppá arbeiðið at gera eina samstarvsavtalu, men hetta arbeiðið er ikki komið í mál, men at tey nú fara at byrja uppá arbeiðið aftur."*

## Skattligur váði fyri landskassan

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at Sjóvinnustýrið og TAKS einki samstarv ella samband hava í sambandi við umsitingina av FAS. Tað, at reiðarí fáa skattligan fyrimun við at hava skip skrásett í FAS-skipanini, hevur ávirkan á landsroknskapin. Harafturat kunnu skattaviðurskiftini fáa fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan, reiðarí og manning.

***Skatting av manningum.***

Tá ið talan er um flutning við skipi, ið er í altjóða ferðslu, er eingin ivi um, at manningin skal skattast, har skipið hevur tjóðarprógv, eitt nú í Føroyum (við 35% av hýrunum). Tað tryggjar eisini, at afturberingin til reiðarí ikki er goldin út av órøttum, og seinni verður tilsíðissett og kravd afturgoldin.

Í teimum førum skip er skrásett í FAS, men ikki er í altjóða ferðslu o.l., kunnu skattaviðurskifti hjá manningum verða avgjørd eftir, hvat slag av virksemi skipið rekur. Hýrur kunnu tá verða skattaðar, har løntakari er heimahoyrandi, ella har hýran er forvunnin. Í § 63a, stk. 1, nr. 1, í skattalógini stendur m.a., at afturberingin til reiðaravirki verður veitt av løn, sum persónur ella felag, við fullari skattskyldu til Føroya, rindar persónum, skattskyldugum í Føroyum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at rúm tíð kann ganga, til møguligt er at staðfesta, um FAS-skrásett virksemi ikki lýkur treytirnar fyri at fáa skattaafturbering. Tað kann í ringasta føri gera, at annað land krevur landskassan eftir skatti hjá manning.

Dupultskattasáttmálar eru ímillum lond, ið eru samd um, hvør leisturin fyri skatting skal vera. Um Føroyar ikki hava dupultskattasáttmálar, er eingin trygd fyri rættinum til skattin.

Í juni 2022 hevur Sjóvinnustýrið kunnað um, at *"Sjóvinnustýrið hevur ikki heimild at taka onnur atlit í málsviðgerð av umsóknum um innflagging enn tað, ið stendur í FAS lógini. FAS lógin nevnir ikki, at talan skal vera um altjóða skipaferðslu, og hevur Sjóvinnustýrið tí onga heimild at krevja, at skipið siglir í altjóða ferðslu, tá ein umsókn verður viðgjørd. Í viðmerkingunum til FAS lógina er orðingin "altjóða kapping" nevnd.*

*Hóast orðingin "altjóða kapping" ikki er sett inn í sjálvan lógartekstin, metir Sjóvinnustýrið, at talan er um eina treyt, ið skal verða lokin, fyri at skip kunnu verða upptikin í FAS."*

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at í sambandi við uppruna uppskotið til FAS skipan[22] er í viðmerkingunum til § 63a í skattalógini soljóðandi orðing, at *"Inntøka sum eitt virki, ið er heimahoyrandi í einum sáttmálabundnum ríki, hevur av skiparakstri í altjóða samferðslu, kann bert verða skattað í tí sáttmálabundna ríkinum, har sum veruliga leiðslan hevur sæti."..."Tí eigur at verða ansað eftir, at annað land ikki fer við skattinum hjá manningini, meðan reiðaravirkið fær afturberingina."..."Tí er sett í § 63a, at treytin fyri at fáa afturberingina er, at reiðaravirkið antin er skrásett í Føroyum, ella hevur fastan rakstrarstað í Føroyum".*

Í § 63a í skattalógini er einki sum forðar fyri, at allar skrásetingar í FAS eisini geva rætt til afturbering av skatti. Ætlanin má hava verið, at ivamál ikki kundi blíva, hvar skattur skuldi gjaldast, sambært upprunaviðmerkingunum, har m.a. er ásett: *"tí eigur at verða ansað eftir, at annað land ikki fer við skattinum hjá manningini, meðan reiðaravirkið fær afturberingina".* Landsgrannskoðanin heldur, at tað við hesari orðingini ber til at tryggja javnvágina í FAS-skipanini ímillum skattainntøkur og skattaafturbering.

Dupultskattaavtalur við onnur lond stýra neyvt, hvar skattur skal gjaldast, og frá byrjan av var støðan tikin, at Føroyar skuldu eiga rættin til skattainntøkurnar, áðrenn nøkur afturbering kundi latast. Talan skal vera um inntøkur av skiparakstri í altjóða samferðslu, og at leiðslan skal liggja í Føroyum.

***Kann vera trupult hjá skattamyndugleikunum at hava eftirlit við skattaafturberingum.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum víst á, at *"Skattalógin ásetur, hvat virksemi gevur rætt til skattaafturbering. Dupultskattaavtalur hava somuleiðis ávirkan á, hvar skattur skal gjaldast. Yvirskipað er at siga, at TAKS umsitur skattalóggávuna, og skal tryggja, at skattur ikki verður afturborin av órøttum. Tað hevur tó víst seg, at tað kann vera trupult hjá skattamyndugleikanum at hava eftirlit við, at virksemið hjá skipum í FAS veruliga hevur rætt til skattaafturbering sambært skattalógini og dupultskattaavtalum. Tað er umráðandi, at skattamyndugleikarnir í hvørjum einstøkum máli ítøkiliga meta um og taka støðu til, hvørt reiðaríið hevur rætt til afturbering av skatti."*

Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið hava saman við ávikavist Sjóvinnustýrinum og TAKS sett gongd á eitt greiningar- og samstarvsátak. Endamálið er at fáa í lag eitt betri samstarv millum Sjóvinnustýrið og TAKS, ið skal hjálpa skattamyndugleikanum at tryggja, at afturbering av skatti ikki fer fram av órøttum.

### *Óbeinleiðis avleiðingar*

TAKS kann fáa avbjóðingar av FAS-skráseting, um afturborið er av órøttum, og peningur tí skal heintast aftur til landskassan. Í teimum førum, onnur lond eiga skattin av lønum, ið eru goldnar í Føroyum, er ikki loyvt at bera skatt hjá manning aftur. Hevur TAKS borið reiðaríi skatt aftur, ið er móttikin av órøttum, skal afturberingin krevjast aftur. Fær TAKS av onkrari orsøk ikki afturberingina afturgoldna frá reiðaríi, kemur landið at rinda skattin aftur tvær ferðir[23].

***Sjóvinnustýrið tekur eingi atlit at skattligum viðurskiftum.***

Sjóvinnustýrið hevur greitt frá, at stovnurin tekur eingi atlit at skattligum viðurskiftum, tá ið tey viðgera umsóknir um innflagging.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað er vanligt í øðrum londum við altjóða skipaskráum, at tað eru skattamyndugleikarnir, ið bera skattin aftur, ið hava

[22] Ein samlaður lógarpakki til íverksetan av FAS skipanini. Tingmál nr. 55/1991: Føroysk Altjóða Skipaskrá; 52: Broyting í Ásetingarlógini; 53: Broyting í skattalógini; 54: Broytingar í lóg um manning av skipum og 56: Broytingar í lóg um sjóvinnu.

[23] Dømi er um, at afturgjalding ikki kundi fara fram vegna fyrning av skattakravi eldri enn trý ár. Harvið misti landskassin kravið eftir skatti, og skatturin var útgoldin tvær ferðir.

eftirlit við, at virksemið hjá reiðaríum veruliga hevur rætt til afturbering. Soleiðis er skipanin eisini bygd upp í Føroyum.

***Endurskoða FAS lógina.***

Um ásetingarnar í FAS-lógini og skattalógini ikki samsvara, er neyðugt at broyta ásetingarnar. Tað eigur ikki at vera soleiðis, at FAS-skráseting í sær sjálvum inniber eitt krav um afturbering av skatti. Uttanríkis- og vinnumálaráðið er saman við Sjóvinnustýrinum farið undir eina endurskoðan av FAS-lógini.

*Óreglulig viðurskifti*

Í 2021 blivu tvey mál kend í Føroyum, ið snúgva seg um FAS-skipanina og óreglusemi.

Hvítvask í Kongo-málinum: Sambært Kringvarpi Føroya rindaði kinesiskt felag 80 mió.USD í mutursgjaldi til fyrrverandi forseta í Kongo fyri rættindi til námsvinnu í landinum. Feløg í Kongo-málinum eru: Egal, Sp/f All Oceans Logistics, Sp/f El Nino, Sp/f Coete og Sp/f Kubilai Khan. Skip í nevndu feløgum í FAS vóru: El Nino, Luna og Kubilai Khan. Sjóvinnustýrið upplýsti, at søkt var eisini um at skráseta marglætisskipið Enigma, ið fekk noktað skráseting í FAS.

Namibiamálið: Málið snúði seg um, at Sp/f Tindhólmur, sum íslendska felagið Samherji átti, hevði skip skrásett í FAS. Reiðaríið hevði uppgivið hýrur til íslendska manning á fiskiskipum í Namibia at vera vunnar á FAS-skrásettum skipi, og fekk tí afturbering. Felagið hevur fingið afturbering, sum ikki er í samsvari við § 2 í Ll. nr. 78/1992 ”um Føroyska Altjóða Skipaskrá”, og tí er afturborið av órøttum.

*Samanumtikið*

Bæði føroysk og útlendsk reiðarí brúka FAS-skipanina. Tað kann vera torført at tryggja eina altjóðagjørda FAS-skipan ímóti misnýtslu, serliga um einki veruligt samband er við reiðarí, uttan við føroyskum umboðsfólki.

***Einans føroyskir eigarar í FAS.***

Í juni 2022 hevur Sjóvinnustýrið greitt frá, at í FAS eru allir eigarar føroyskir. Sjóvinnustýrið veit, at fleiri reiðarar búgva uttanlands, og at í summum førum er torført at fáa fatur á eigarum. Tað er púra vanligt í altjóða skipaskrásetingum, at skipini, ið eru partur av flagginum, ikki koma til landið. Sjóvinnustýrið er í løtuni í holt við at gera uppskot til broytingar í FAS-lógini, har m.a. kravið til umboðsfólk verður ásett í lógini, um eigarar eru búsitandi uttanlands, og um at umboðsfólkið fær størri ábyrgd og heimildir, eins og at umboðsfólkið skal taka ímóti stevning fyri reiðaran.

***Størri ábyrgd á umboðsfólk.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sum fyrr nevnt, eru Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Sjóvinnustýrið í holt við at endurskoða ásetingar í FAS-lógini. Ætlanin er at áseta í FAS-lógini meira ítøkilig og herd krøv til umboðsfólk hjá eigarum, sum eru búsitandi uttanlands, soleiðis at umboðsfólk í størri mun kunnu ábyrgdast, um viðurskifti mótvegis myndugleikum ikki fara rætt fram. Um størri ábyrgd fer at hvíla á umboðsfólkum kann væntast, at tey í størri mun enn nú fara at tryggja sær, at tey ikki umboða feløg, har vandi er fyri sambandi við ivasamt virksemi.

## 6.11 Havbúnaðarroyndir (LG 2021/206-361)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað stuðulsjáttanina til Havbúnaðarroyndir, á høvuðskontu 6.36.1.04.

Ll. nr. 73/2009 “um at hækka partapeningin í P/f Fiskaaling” heimilar landsstýrismanninum at veita stuðul av árligu játtanini í fíggjarlógini til nevndu endamál. Lógin ásetir endamálið við at veita stuðul og heimilar gerð av sáttmála ímillum ráðið og móttakara av stuðli. Sambært sáttmálanum skal avrikslisti gerast fyri sáttmálaskeið.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Havbúnaðarroyndir (stuðulsj.) | 15.500 | 9.700 | 9.400 | 8.900 | 8.900 |

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um stuðulsveitingin er samsvarandi galdandi fíggjarlóg, heimildarlóg og fyriskipanum, verandi ásetingum í sáttmála og sáttmálatreytum. Einki var at finnast at.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tryggjar sær í sáttmála við stuðulsmóttakara, at ráðið fær árligan ávegis avrikslista saman við grannskoðaðum ársroknskapi. Við at biðja um grannskoðaðan stuðulsroknskap umframt verkætlanarroknskap tryggjar ráðið sær, at játtaður stuðul er nýttur til endamálið.

## 6.12 El-nevndin (LG 2021/206-371)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá El-nevndini. Játtanin er á høvuðskontu 6.37.1.10. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur roknskaparhaldið hjá El-nevndini.

El-nevndin hevur eftirlit við virkjum til framleiðslu av elmegi, elinnleggingum, eltilfari og løggildum elinnleggjarum, og nevndin skal fremja upplýsingarvirksemi um eltrygd. El-nevndin skal veita fyrisitingini sakkøna hjálp og tryggja, at fyrisitingin hevur neyðugt innlit á økinum.

1. januar 2022 komu nýggjar lógir í gildi um elektriskan útbúnað, tilfar, løggilding v.m. El-nevndin gjørdi lógarfyrireikandi arbeiði og uppskot til kunngerðir sambært nýggju lógunum. Tá ið fyrisitingin í januar 2022 flutti til Arbeiðseftirlitið, bað Umhvørvis- og vinnumálaráðið um at fáa hækka játtanina 100 t.kr. til eitt hálvtíðarstarv.

Fimm limir eru í nevndini. Formaðurin er løgfrøðingur, og hinir limirnir eru: rakstrarleiðarin hjá SEV, Landsverkfrøðingurin, ein góðkendur elinnleggjari, sum Føroya elinnleggjarfelag tilnevnir, og ein limur við elfrøðiligari útbúgving. Landsstýrið tilnevnir formannin og seinasta nevndarlimin.

Nevndarlimirnir kunnu sambært lógini fáa árliga samsýning og endurgjald fyri skjalprógvaðar ferðaútreiðslur. Nevndarsamsýningin er ásett í 2003, og góðkend av Lønardeildini. Nevndin kann fáa sær neyðug hjálparfólk. Landskassin rindar útreiðslurnar av virkseminum hjá El-nevndini.

Í 2000 hevur nevndin, við heimild í § 6, stk. 4, í Ll. nr. 134/1993 “um sterkstreymsútbúnað”, gjørt reglugerð, sum lýsir arbeiðið hjá El-nevndini, og landsstýrismaðurin hevur góðkent reglugerðina.

Roknskapar- og játtanartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 125 | 245 | 178 | 152 | 126 |
| Keyp av vørum og tænastum | 37 | 34 | 37 | 5 | 23 |
| **Tilsamans** | **162** | **279** | **215** | **157** | **149** |
| *Játtan* | *186* | *311* | *350* | *350* | *350* |

Í lønarútreiðslunum eru samsýningar til nevnd og skrivara. Formaðurin fær 2.000 kr. um mánaðin, skrivarin 4.000 kr., og hinir tríggir nevndarlimirnir fáa 1.000 kr. hvør. Í 2021 fekk formaðurin, umframt nevndarsamsýningina, 25 t.kr. fyri at gera uppskot til nýggja lóg. Arbeiðið var gjørt í 2020, og tímalønin er konsulentløn sambært BLF-sáttmálanum.

Spurt, hvussu landsstýrismaðurin og ráðið verða kunnað um arbeiðið hjá El-nevndini, svaraði Umhvørvis- og vinnumálaráðið, at El-nevndin ger ikki ársfrásøgn e.l. Formaðurin í nevndini er løgfrøðiligur ráðgevi í Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, og nevndin førir gerðabók og skrivar fundarfrásagnir.

## 6.13 Brúkaraumboð (LG 2020/206-371)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Brúkaraumboðnum. Játtanin er á høvuðskontu 6.37.1.15.

Brúkaraumboðið virkar eftir Ll. nr. 19/2008 “um marknaðarføring”. Sambært § 4 í K. nr. 103/2012 “um virksemi Brúkaraumboðsins” letur stovnurin hvørt ár landsstýrismanninum frágreiðing um virksemi sítt í farna árið.

Seinasta frágreiðingin, sum stovnurin hevði latið, var fyri árini 2017/2018. Frágreiðing fyri 2019/2020 var í umbúna.

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at Brúkaraumboðið í juli 2021 hevur gjørt frágreiðing um virksemið 2019/2020.

## 6.14 Vinnustovnurin (LG 2017/206-371)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Vinnustovninum.

Vinnustovnurin hevði ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at nýta egna búskaparskipan, men hevði í februar 2018 søkt um loyvi. Í 2020 greiddi Umhvørvis- og vinnumálaráðið frá, at samskifti hevði verið við Gjaldstovuna, men Gjaldstovan hevði ikki vent aftur um eina niðurstøðu.

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at frá tí at Fjarskiftiseftirlitið, sum var fyrsti stovnur í nú samanlagda Vinnustovninum, var sett á stovn, hevur stovnurin havt egna búskaparskipan. Tað var gjørt í samráði við Gjaldstovuna, av tí at skipanin hjá Gjaldstovuni ikki var hóskandi til so nógvar skuldarar, sum Vinnustovnurin hevur.

***Ikki formligt loyvi til egna búskaparskipan.***

Hóast formligt loyvi ikki fyriliggur, er sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum eingin ivi um, at loyvi til at hava egna búskaparskipan er avtalað. Fyri at fáa formligu viðurskiftini í rættlag, sendi ráðið fyri nøkrum árum síðani Fíggjarmálaráðnum umbøn um formliga góðkenning. Enn er formliga loyvið ikki givið, og tað tykist heldur ikki sum, at gongd er í málinum.

## 6.15 Vinnuframi (LG 2021/206-372)

Fíggjarætlanin hjá Vinnuframa verður tikin við í fíggjarlógina. Játtanin er stuðulsjáttan á høvuðskontu 6.37.2.02. Vinnuframi virkar sambært Ll. nr. 81/2001 “um Vinnuframagrunn”, og hevur sjálvstøðugan roknskap í landsroknskapinum sum eksternur grunnur.

Endamálið hjá Vinnuframa er at styrkja og fjøltátta føroyskt vinnulív og menna burðardyggar føroyskar fyritøkur. Grunnurin hevur roknskaparreglugerð, sum er góðkend av aðalráðnum í 2021.

Sambært lógini kann stuðul latast eftir umsókn til fyritøkur til tiltøk, sum við framtíðini í huga betra um kappingarevnini ella økja um altjóðagerðingina hjá fyritøkunum.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum kann stuðul frá Vinnuframa ikki nýtast til rakstur ella íløgur, og ráðið tryggjar sær, at tann reglan er hildin, við at krevja, at umsøkjari í umsóknini skal lýsa endamálið við stuðlinum.

Í 2021 er játtanin 3,2 mió.kr., eins og hon hevur verið í fleiri ár. Umhvørvis- og vinnumálaráðið rindar játtaðar stuðulsupphæddir út í einum, tá ið ráðið hevur fingið avrit av grannskoðaðum roknskapi og grannskoðanarprotokoll v.m. fyri árið fyri.

Sambært K. nr. 125/2011 "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan" skal stuðulslatari útinna sítt eftirlit við at gjøgnumganga ársfrágreiðing, roknskap, grannskoðanarprotokoll v.m.

Umhvørvis- og vinnumálaráð hevur gjøgnumgingið tilfarið frá grunninum og grannskoðaranum. Serliga eru tað grannskoðanarprotokoll og virksemisætlan, sum eru grundarlag undir eftirlitunum.

Landsgrannskoðanin hevur lisið roknskap og protokoll hjá Vinnuframa fyri 2020. Stuðulin frá landinum er inntøkuførdur, og sambært serstakari notu hevur grannskoðarin kannað stuðulin frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, og greitt frá stuðlinum í grannskoðanarprotokollini. Einki var at finnast at.

## 6.16 Íverksetarahúsið í Klaksvík (LG 2021/206-372)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av stuðulsjáttanini á høvuðskontu 6.37.2.11 "Íverksetarahúsið í Klaksvík". Endamálið við Íverksetarahúsinum er at birta upp undir íverksetan av nýggjum vinnum og at menna verandi vinnur.

Vinnuframi umsitur játtanina, og rindar Íverksetarahúsinum árliga stuðulin, tá ið grannskoðað ársfrásøgn fyri árið frammanundan er móttikin, og avtala er gjørd fyri virksemið í játtanarárinum.

Eingin serstøk lóg er um virksemið hjá Íverksetarahúsinum. Sambært viðtøkunum velja Vinnumálaráðið, Klaksvíkar kommuna, og høvuðssponsorurin eina trímannanevnd, og landsstýrismaðurin velur formannin ímillum hesi trý. Løgtings- og kommunustýrislimir kunnu ikki veljast í nevndina, og eingin nevndarlimur kann sita longur enn átta ár. Nevndin setur stjóra.

Í 2021 var játtanin 1,1 mió.kr., eins og hon hevur verið fleiri ár. Vinnuframi rindar stuðulin í tveimum; fyrra gjaldið tíðliga í fíggjarárinum og seinna gjaldið, tá ið grannskoðaður roknskapur v.m. er móttikin.

Í roknskapinum er ikki stórvegis frágreiðing um virksemið, tó fær Vinnuframi eina ársfrágreiðing, ið lýsir virksemið, sum hevur verið í árinum. Vinnuframi fær ikki avrit av fíggjarætlan ella virksemisætlan, og Vinnuframi hevur ikki gjørt avtalu við Íverksetarahúsið fyri játtanarárið.

Vísandi til viðmerkingarnar í fíggjarlógini mælti Landsgrannskoðanin til, at Vinnuframi ger avtalu við Íverksetarahúsið fyri játtanarárið, og at landsstýrismaðurin góðkennir avtaluna. Mælt var eisini til, at Vinnuframi umhugsar at biðja Íverksetarahúsið um fíggjarætlan, at samanbera við ársroknskapin.

***Mælt til at gera avtalu við Íverksetarahúsið, sum landsstýrismaðurin góðkennir.***

Vinnuframi tekur undir við tilmælunum, og fer at orða eina avtalu og frameftir at biðja um fíggjarætlan, áðrenn fyrsta útgjald.

Landsgrannskoðanin hevur lisið roknskapin og protokollina fyri 2020. Stuðulin frá landinum er inntøkuførdur í roknskapin hjá Íverksetarahúsinum, og inntøkurnar eru

útgreinaðar í grannskoðanarprotokollini. Burtursæð frá tilmælunum omanfyri, var einki at finnast at.

## 6.17 Rúsdrekkasøla landsins (LG 2021/206-373)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Rúsdrekkasøluni á høvuðskontu 6.37.3.01. Játtanin er nettojáttan.

Rúsdrekkasølan er landsfyritøka undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Stovnurin hevur einkarrætt til innkeyp og sølu av rúsdrekka, og virkar sambært Ll. nr. 20/1992 "um innflutning og sølu av rúsdrekka" og K. nr. 144/1992 "um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu landsins". Rúsdrekkasølan hevur átta handlar kring landið, umframt eina høvuðsgoymslu og høvuðsskrivstovu.

Í § 18 í játtanarskipanini er ásett, at ber virksemi handilsligan dám, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva, at tað verður framt eftir ræðisreglunum, galdandi fyri landsfyritøkur. Sambært § 21 skal loyvi at reka landsfyritøku vera greitt í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið. Í kunngerðini um rakstrarjáttan er somuleiðis ásett í § 13, stk. 2, at í viðmerkingunum skal vera greitt frá landsfyritøkuni, herundir bygnaði, slag av virksemi, og hvussu stórt virksemið ætlandi verður.

Viðmerkingarnar í fíggjarlógini vísa til lógina og kunngerðina, sum Rúsdrekkasølan arbeiðir eftir, og at 8 sølubúðir eru. Landsgrannskoðanin ivast í, um viðmerkingarnar eru í samsvari við ásetingarnar í játtanarreglunum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið heldur, at teksturin í játtanarskipanini sipar til stovnar, sum hava borgaravendar tænastur og sum fáa eina árliga játtan í fíggjarlógini. Rúsdrekkasøla landsins er ein handil og sostatt ikki ein "vanligur" stovnur við borgaravendum tænastum, umframt at játtanin hevur eitt avlopskrav.

Í játtanarskipanini § 11 stendur soleiðis: "*Viðmerkingarnar til fíggjarlógaruppskotið skulu hava tilvísingar til lógarásetingar, sum gera av, hvussu játtanin verður nýtt, lýsing av teimum úrslitum, miðað verður eftir við játtanini, og upplýsingar um nádd úrslit o.t. Stk. 2. Inntøkur og útreiðslur verða vístar í fleirárs yvirlitum, sum fevna um síðstu roknskapirnar, fíggjarlógina, fíggjarlógaruppskotið og veruligar fíggjarætlanir fyri fylgjandi fíggjarár.*"

Landsstýrismaðurin vísir á*, at "sambært omanfyristandandi skal stovnurin lýsa hvussu játtanin skal nýtast, lýsa tey úrslit miðað verður eftir og upplýsa um nádd úrslit. Játtanin hjá Rúsdrekkasøluni er negativ og hóskar á tann hátt ikki beinleiðis inn í henda karm. Í viðmerkingunum til játtanina er víst til lógarásetingar sum lýsa uppgávurnar hjá einkarsøluni sum m.a. er at hava fjølbroytt úrval av rúsdrekka á goymslu, hava sølustøð kring landið. Út frá hesum hava vit mett, at viðmerkingarnar í fíggjarlógini hava verið fullgóðar. Tað hevur Fíggjarmálaráðið eisini mett og hevur góðtikið okkara viðmerkingar til játtanina.*
*Vit fara tó at umhugsa um teksturin eigur at verða broyttur til fíggjarlógina fyri 2023."*

## Rakstur

Virksemið hjá stovninum verður fíggjað við inntøkum av at selja rúsdrekka. Í fíggjarlógini er krav um avlop av rakstrinum. Í 2021 var kravið 16.048 t.kr., og í 2022 er tað 18.600 t.kr.

Roknskapar- og játtanartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir | 16.608 | 13.607 | 14.357 | 15.126 | 16.604 |
| Keyp av vørum og tænastum | 96.769 | 99.729 | 105.691 | 107.964 | 118.807 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 2.950 | 3.611 | 1.857 | 3.048 | 1.244 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 3.046 | 3.081 | 3.092 | 3.147 | 3.178 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | -67 | -37 | 517 | 197 | 13 |
| Søla av vørum og tænastum | -133.161 | -135.991 | -141.513 | -145.745 | -159.792 |
| Ymsar rakstrarinntøkur | -96 | -69 | -61 | -103 | -58 |
| Rentur | 0 | 6 | 2 | 14 | 24 |
| **Tilsamans** | **-16.951** | **-16.063** | **-16.058** | **-16.352** | **-19.980** |
| *Játtan, netto* | *-16.848* | *-16.048* | *-16.048* | *-16.048* | *-16.048* |

Roknskaparreglugerðin er dagført í 2020 og góðkend av aðalráðnum.

Stjórin góðkennir roknskapin í Búskaparskipan landsins, og hann tekur undir við tilmælinum frá Landsgrannskoðanini um, at hann hvønn mánað kannar, um saldurnar stemma við búskaparskipanina hjá Rúsdrekkasøluni.

### *Lønir*

Kravið um lønarkarm er ikki galdandi fyri landsfyritøkur. Við árslok 2021 starvaðust 67 fólk hjá Rúsdrekkasøluni, svarandi til 47,3 ársverk. Áleið helvtin eru fastlønt, og restin er tímalønt. Í 2021 vóru lønarútreiðslurnar 16,6 mió.kr.

***Starv ikki lýst leyst.***

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur starvsfólkamál, um lýsingar, umsóknir við prógvum, tilboð um setan, setanarskriv o.a. vóru í málunum. Eisini kannaðu vit, um lønirnar eru sambært galdandi sáttmála og lønarflokk. Landsgrannskoðanin hevði nakrar viðmerkingar, sum stovnurin hevur svarað.

Í einum máli vísti Landsgrannskoðanin á, at tað er ikki nøktandi, at størv ikki eru lýst leys, og mælti til, at setanarpolitikkur landsins verður fylgdur.

### *Keyp av vørum og tænastum*

Rúsdrekkasølan brúkar ikki ferðaavrokningarskipanina hjá Gjaldstovuni, men hevur egin ferðauppgerðarskjøl.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar uppgerðir, og samanumtikið eru fleiri ferðauppgerðir ikki skjalfestar, onkrar eru ikki váttaðar av leiðara ella stjóra, og í tveimum førum eru dagpengar ikki goldnir fyri allar dagarnar. Stovnurin ætlar at bøta um eftirlitið við ferðauppgerðum, soleiðis at einki verður avgreitt, uttan at tey hava kannað uppgerðina og váttað, at hon er røtt.

Sambært Rúsdrekkasøluni fylgja tey rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um keyp av vørum og tænastum. Tey biðja um tilboð frá minst tveimum veitarum, ella bjóða út um Keypsportalin.

Landsgrannskoðanin tók nakrar stakroyndir av rokningum, størri enn 50 t.kr., fyri at kanna um Rúsdrekkasølan hevur biðið um tilboð. Bert í einum føri hevði stovnurin biðið um tilboð frá fleiri veitarum.

***Ikki boðið keyp út.***

Landsgrannskoðanin mælti til, at Rúsdrekkasølan heldur seg til rundskrivið um keyp av vørum og tænastum.

***Tíðaravmarking skal vera røtt.***

Onkrar rokningar eru goldnar í einum fíggjarári, har vøran ella tænastan er latin í seinni fíggjarári, og tað er ikki í samsvari við roknskaparkunngerðina. Stjórin vísti á, at tey fylgja ásetingunum í kunngerðini, men tað er ikki altíð lætt.

Nøkur starvsfólk hava fartelefonir frá Rúsdrekkasøluni, og stovnurin rindar fyri keyp og nýtslu. Ásetingar eru í roknskaparreglugerðini um, at leiðari skal góðkenna telefon-nýtsluna mánaðarliga.

Rúsdrekkasølan letur búnar til starvsfólkini í handlunum, og stovnurin hevur reglugerð fyri nýtsluni. Búnarnir skulu latast aftur, tá ið starvsfólk fer úr starvi.

Rúsdrekkasølan hevur ikki innanhýsis reglur um gávur. Í 2020 lat stovnurin jólagávur fyri 995 kr. til hvørt starvsfólk, og í 2021 fyri 1.200 kr.

Sambært rundskrivi “um tryggingarviðurskifti landsins” skal landið bert tekna ávísar tryggingar. Rúsdrekkasølan hevur skrokktryggjað bilarnar, og teknað tryggingar fyri leysafæ, heldur enn at rinda fyri vaktartænastu. Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar í rundskrivinum um tryggingarviðurskifti landsins.

*Inntøkur*

Rúsdrekkasølan selur til privat, skeinkistøð, matstovur, útgerðarfeløg, tollfríar sølur, almennar stovnar o.o. Stovnurin kann lata skeinkiloyvishavarum avsláttur.

Rúsdrekkasølan hevur møguleika at stilla prísirnar, fyri at røkka avlopskravinum. Vinningurin av hvørjari vøru er sambært stovninum ymiskur, og KT-skipanin roknar vinningin út sjálvvirkandi. Lutfalsliga hægri vinningur verður roknaður av vørum, sum kosta nógv at keypa inn. Landsgrannskoðanin hevur kannað nakrar sølutransaktiónir. Einki var at finnast at.

## Fíggjarstøða

Úr fíggjarstøðuni við árslok:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Goymslur | 14.884 | 11.303 | 11.607 | 13.936 | 14.480 |
| Tænastu- og vøruskuldarar o.t. | 744 | 965 | 950 | 665 | 690 |
| Onnur áogn | 1.555 | 6.613 | 5.224 | 4.500 | 0 |
| Tíðaravmarking | 3.404 | 0 | 0 | 0 | 3.170 |
| Banka- og girokontur | 38 | 206 | 505 | 16 | 203 |
| Forskotskassar | 169 | 169 | 169 | 169 | 169 |
| Skuld, sum er greidd til útgjaldingar | -7.096 | -4.933 | -2.234 | -4.306 | -1.665 |
| MVG, netto | -1.086 | -1.537 | -1.688 | -1.627 | -1.129 |
| Ymsar ikki avgreiddar skyldur | -1.782 | -2.167 | -3.478 | -4.115 | -4.936 |

Tíðaravmarkingin í 2021, sum er 3.170 t.kr., er ávegis peningur frá gjaldkortsølu. Undanfarin ár er ávegis peningur bókaður sum onnur áogn.

Ymsar ikki avgreiddar skyldur 4.936 t.kr. er tíðaravmarking fyri lønir, 763 t.kr., og útistandandi egiðpant 4.174 t.kr.

*Ognaryvirlit og leigumál*

Rúsdrekkasølan eigur ongan bygning. Stovnurin eigur tríggjar bilar, sum ikki eru skrá-settir í Búskaparskipan landsins. Sambært stjóranum eru bilarnir merktir við búmerkinum hjá Rúsdrekkasøluni.

Í roknskaparreglugerðini er ásett, at allur útbúnaður, sum hevur týdning fyri dagliga raksturin, skal skrásetast í einum yvirliti, vegleiðandi upphæddin er útveganarvirði hægri enn 20 t.kr. Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nakrar ognir á høvuðsskrivstovuni á Skálatrøð. Einki var at finnast at.

Rúsdrekkasølan hevur tilsamans 11 leigumál. Landsgrannskoðanin samanbar goldnu leiguna í 2021 við leigukostnaðin sambært sáttmálunum. Í tveimum førum var árliga goldna leigan lægri, enn sáttmálin ásetir.

### *Goymsla*

Goymslan er virðisásett við støði í kostprísi. Støddin á avgjøldunum er ásett, alt eftir um talan er um vín, spiritus ella øl.

Við árslok 2021 var virðið á goymsluni sambært búskaparskipanini hjá Rúsdrekkasøluni 14.480 t.kr. Upphæddin samsvarar við Búskaparskipan landsins.

Búskaparskipanin er sett upp til FIFO meginregluna, t.v.s. at vørurnar, sum eru keyptar fyrst, blíva seldar fyrst. Umframt høvuðsgoymsluna hevur Rúsdrekkasølan vørur í handlunum, sum hava ymiskan kostprís, og kostprísurin á samlaðu goymsluni svarar til ein miðalprís av øllum, sum er á goymslu.

Rúsdrekkasølan ger goymsluteljingar javnan, og við árslok telja tey alla vøruna og bóka staðfestar munir burtur.

Landsgrannskoðanin hevur gjørt nøkur goymslueftirlit í 2021, og staðfesti nakrar munir.

### *Peningastovnskontur, netbanki, kassar og gjaldkort*

Rúsdrekkasølan hevur fýra peningastovnskontur, og stemmar konturnar av mánaðarliga. Landsgrannskoðanin hevur samanhildið ársyvirlitini frá bankunum við bókhaldið og Búskaparskipan landsins. Einki var at finnast at.

Rúsdrekkasølan hevur netbanka, nøkur starvsfólk hava lesiatgongd, og tvey starvsfólk í felag kunnu avgreiða flytingar.

Landsgrannskoðanin hevur gjørt kassaeftirlit á nøkrum deildum í 2021. Einki var at finnast at.

Stovnurin hevur Eurocard, sum verður brúkt til at rinda við á netinum. Í roknskaparreglugerðini eru ongar reglur um umsiting og nýtslu av gjaldkortum. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa viðurskiftini í rættlag.

### *Vøru- og tænastuáogn*

Við árslok 2021 var vøru- og tænastuáognin 690 t.kr.; elsta skuldin var frá juni 2021.

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vøru- og tænastuskuldarar | 744 | 965 | 950 | 665 | 690 |

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar fakturar á skuldaralistanum við árslok 2021. Einki var at finnast at.

Í K. nr. 144/1992 er ásett, at loyvt er at selja upp á borg til skeinkiloyvishavarar. Sambært Rúsdrekkasøluni skulu kundar veita trygd, tá ið keypt verður upp á borg.

***Handhevja ikki reglurnar um bert at selja upp á borg til skeinkiloyvishavarar.***

Á listanum eru fleiri skuldarar, sum ikki hava skeinkiloyvi, m.a. kommunur og almennir stovnar. Landsgrannskoðanin mælti til, at Rúsdrekkasølan heldur ásetingina í kunngerðini, ella at stig verða tikin til at broyta kunngerðina.

### *Kreditorar*

Við árslok 2021 var skuld, sum er greidd til útgjaldingar, 1.665 t.kr.

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Kreditorar | 7.096 | 4.933 | 2.234 | 4.306 | 1.665 |

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nakrar kreditorar pr. 31. desember 2021, og samanhelt saldurnar við kontuavrit frá kreditorunum. Einki var at finnast at.

*Tíðaravmarking av lønum*

Sambært rundskrivinum um tíðaravmarkingar av lønum skulu tímar tíðaravmarkast, um starvsfólk eiga meira enn 40 tímar á, ella skylda meira enn 30 tímar. Uppspardar serstakar frívikur skulu tíðaravmarkast, men ikki vanlig feria.

***Ikki røtt tíðar-avmarking av lønum.***

Rúsdrekkasølan hevur tíðaravmarkað lønir, og eisini tíðaravmarkað tímasaldur minni enn 40 tímar, vanliga feriu og serstøku frívikuna fyri inniverandi feriuár.

Sambært stjóranum tíðaravmarkaði stovnurin lønir, áðrenn rundskrivið kom í gildið. Tá vóru ongar leiðreglur, og tey valdu at taka støði í leisti, sum privata vinnan brúkar.

*Tíðaravmarkingar av egnum panti*

Egiðpant er pant, sum Rúsdrekkasølan sjálv leggur á vørur. Rúsdrekkasølan tíðar-avmarkar munin ímillum egiðpant-sølu og egiðpant-keyp. Í 2021 var munurin 798 t.kr., og við árslok 2021 var saldan í fíggjarstøðuni 4.174 t.kr.

Yvirlit yvir saldurnar frá 2013 til 2021:

***Yvirskot av panti.***

| | *kr.* |
|---|---|
| **Ár** | |
| 2013 | 169.432 |
| 2014 | 305.734 |
| 2015 | 415.947 |
| 2016 | 377.224 |
| 2017 | 475.823 |
| 2018 | 399.144 |
| 2019 | 469.294 |
| 2020 | 763.175 |
| 2021 | 797.904 |
| **Tilsamans** | **4.173.677** |

Sum tað sæst í yvirlitinum, er øll árini kravt meira inn í egnum panti, enn goldið er út. Upphæddirnar hava verið støðugt hækkandi síðani 2018, og sambært stjóranum kann ein orsøk vera, at fleiri einnýtisíløt eru seld, og at fólk ikki bera tey aftur.

*Meirvirðisgjald*

Rúsdrekkasøla landsins er MVG-skrásett, og størsti parturin av søluni er MVG-skyldug, tó at nakað er MVG-frí søla.

Samlað MVG-avrokning fyri 2021:

| | *kr.* |
|---|---|
| **MVG fyri árið 2021** | |
| Sølu-MVG | 38.582.797 |
| Keyps-MVG | 32.584.577 |
| **At gjalda** | **5.998.220** |
| *MVG-frí søla* | *9.365.022* |

MVG-skyldug og MVG-frí søla verða bókaðar á somu sølukontur í roknskapinum. Í skipanini eru ávísir keyparar settir upp til, at sølan skal vera MVG-frí, men til ber eisini manuelt at áseta, at sølan skal verða MVG-skyldug.

## Egin búskaparskipan

Rúsdrekkasølan brúkar egna búskaparskipan til skrásetingar av keypi og sølu, herundir eisini MVG og umsitingarkostnað av stovnsrakstrinum. Kontubrúgv er ímillum egnu skipanina og Búskaparskipan landsins. Við ársenda blíva rakstrarpostarnir settir til 0, og javnin settur inn av nýggjum.

Rúsdrekkasølan hevur áður greitt frá, at roknskapartíðarskeiðini í egnu búskaparskipanini blivu ikki stongd, og tí bar til at bóka í farnum tíðarskeiði, eftir at stovnurin hevði sent roknskapartølini til Gjaldstovuna. Tann mannagongdin er óbroytt. Sambært stjóranum er neyðugt at bóka í farnum tíðarskeiði, um tey skulu hava ein rættvísandi roknskap.

*Mælt til at steingja roknskapartíðarskeið.*

Tá ið Rúsdrekkasøla landsins bókar í farnum mánaðarroknskapum, eru mánaðarroknskapirnir í Búskaparskipan landsins ikki rættir. Landsgrannskoðanin mælti til at steingja roknskapartíðarskeiðini, tá ið roknskapartølini eru send Gjaldstovuni at bóka í Búskaparskipan landsins.

*Ikki formligt loyvi til egna búskaparskipan.*

Rúsdrekkasølan hevur ikki formligt loyvi til egna fíggjarskipan. Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan eru tó kunnað. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur fyri árum síðani, vegna Rúsdrekkasøluna, biðið Fíggjarmálaráðið um formligt loyvi til skipanina, uttan at tað er komið. Landsgrannskoðanin mælti til, at fáa formligu viðurskiftini í rættlag.

### KT-viðurskifti

Rúsdrekkasølan er ikki partur av KT Landsins, men hevur hýsingaravtalu við P/f Nema. Øll ambætaraútgerðin stendur hjá P/f Elektron. Rúsdrekkasølan samstarvar við P/f Formula um hjálp og ráðgeving, m.a. viðvíkjandi fíggjarskipanini.

KT-grannskoðari hevur skoðað KT-viðurskiftini í 2020 og í 2021. Sambært skoðanarfrágreiðingini 2021 er endamálið at meta um, hvørt trygdarfyriskipanirnar á KT-økinum kunnu roknast at vera hóskandi fyri stovnsins fjølbroytta virksemi og samanborið við rundskrivið. Niðurstøðan er, at grannskoðarin heldur, at Rúsdrekkasølan fylgir krøvunum í trygdarrundskrivinum.

## 6.18 Umhvørvisstovan (LG 2021/206-374)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Umhvørvisstovuni. Játtanin er á høvuðskontu 6.37.4.02.

Umhvørvisstovan fyrisitur matrikul, tinglýsing, fólkayvirlit, landsadressuskrá og part av vápnalógini. Stovnurin fremur umhvørviseftirlit og umhvørvisvernd, umframt gransking á umhvørvisøkinum. Eisini umsitur stovnurin el-veitingarlógina, viðarlundir og onnur náttúruøki, og hevur síðani 2019 fyrisitið landkortmyndugleikan og síðani 2020 sjókort og sjóuppmáting.

Umframt vanliga virksemið hevur Umhvørvisstovan eisini inntøkufíggjað virksemi og stuðulsfíggjað virksemi.

## Rakstur

Roknskaparreglugerðin er góðkend, og er dagførd í 2022, eftir at bygnaðarbroytingar hava verið.

Roknskapar- og játtanartøl 2017 til 2021, vanligi raksturin:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir | 20.448 | 22.728 | 24.317 | 25.548 | 29.077 |
| Keyp av vørum og tænastum | 5.686 | 6.705 | 8.724 | 10.391 | 10.609 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 416 | 743 | 1.694 | 1.428 | 2.442 |
| Leiga, viðlíkahald, avskr. | 321 | 545 | 458 | 1635 | 747 |
| Søla av vørum og tænastum | -5.524 | -4.031 | -7.041 | -7.423 | -7.844 |
| Eftirlits- og umsjónaravgjøld | -80 | -65 | -79 | -170 | -97 |
| Kravd gjøld, bøtur o.a. | 0 | -420 | 0 | -144 | -123 |
| Flytingarinntøkur | -10 | 41 | 88 | -1023 | -228 |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti | 0 | 0 | 0 | 0 | -20 |
| Innah. flyt. ml. alm. stovn. (útr.) | 7 | 7 | 135 | 328 | 112 |
| Innah. flyt. ml. alm. stovn. (innt.) | -877 | -2.864 | -1.269 | -1.770 | -477 |
| Innanvirkis bókingar | 0 | 0 | 0 | 0 | -15 |
| **Tilsamans** | **20.387** | **23.388** | **27.027** | **28.792** | **34.184** |
| *Játtan, netto* | *21.285* | *24.722* | *27.016* | *30.898* | *33.872* |

### *Lønir*

Umhvørvisstovan umsitur lønirnar sambært almennu lønar- og setanarreglunum. Landsgrannskoðanin kannaði tvey starvsfólkamál. Einki var at finnast at.

Sambært innanhýsis reglum kunnu starvsfólk eiga upp til 50 tímar á, ella skylda í mesta lagi 20 tímar. Í oktober 2021 áttu nøkur starvsfólk meira enn hægst loyvda tímatalið, og fleiri skyldaðu meira enn 20 tímar. Sambært Umhvørvisstovuni hava tey tikið stig til at fáa viðurskiftini upp á pláss.

### *Keyp av vørum og tænastum*

Umhvørvisstovan bjóðar sambært leiðsluni størri keyp út á Keypsportalinum.

***Mælt til at halda reglur um úbjóðing.***

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um stovnurin hevði biðið um tilboð í sambandi við keyp yvir 50 t.kr. Í fleiri førum høvdu tey ikki biðið um tilboð, tó at keypini ikki vóru undantikin reglunum. Landsgrannskoðanin mælti til at halda almennu reglurnar um útbjóðing.

## Fíggjarstøða

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t. | 5.633 | 4.552 | 3.449 | 1.725 | 1.543 |
| Ferðaavrokning v.m. | 10 | 21 | 4 | 1 | 16 |
| Onnur áogn | 11 | 3 | 23 | 132 | 34 |
| Tíðaravmarking | 0 | 0 | 0 | 99 | 0 |
| Banka- og girokontur | 74 | 54 | 255 | 545 | 69 |
| Forskotskassar | 11 | 4 | 9 | 4 | 2 |
| Skuld, sum er greidd til útgjaldingar | -68 | 0 | 0 | -182 | 0 |
| MVG, netto | 0 | 0 | -8 | 76 | 0 |
| Tíðaravmarkan | 0 | -57 | 2 | -192 | -98 |
| Skuld, annað | -60 | -55 | -138 | -88 | 0 |

### *Tíðaravmarking av lønum*

***Ikki tíðaravmarkað lønir.***

Stovnurin hevur ikki tíðaravmarkað lønir við árslok 2020. Tíðaravmarkingin við árslok 2020 er uppgjørd til 142 t.kr.

*Ognaryvirlit*
Umhvørvisstovan skrásetir útbúnað við útveganarvirði yvir 75 t.kr. í Búskaparskipan landsins. Í innanhýsis yvirliti hevur stovnurin skrásett ognir við útveganarvirði millum 20 t.kr. og 75 t.kr. Sambært stjóranum eru allir bilarnir merktir við búmerkinum hjá Umhvørvisstovuni.

*Peningastovnskontur, gjaldkort og netbanki*
Umhvørvisstovan hevur 4 peningastovnskontur við netbankaatgongd, sum tey stemmað av regluliga. Landsgrannskoðanin hevur kannað, hvørji starvsfólk hava atgongd til netbankarnar, og hvørjar heimildir tey hava.

Landsgrannskoðanin var á ófráboðaðum kassaeftirliti á Umhvørvisstovuni í desember 2020, har kassin og konturnar viðvíkjandi tinglýsingini vórðu kannaðar. Vit staðfestu onkran mun, bæði í kassanum og á aðrari peningastovnskontuni.

Landsgrannskoðanin var á ófráboðaðum kassaeftirliti hjá Skógrøktini í 2021. Peningastovnskontan stemmaði, men ein munur var í kassanum.

Stovnurin hevur tvey gjaldkort. Gjaldstovan hevur givið loyvi til annað kortið, og stovnurin hevði sent Gjaldstovuni umsókn um loyvi til hitt. Landsgrannskoðanin mælti til at seta reglur í roknskaparreglugerðina um umsiting og nýtslu av gjaldkortum.

### KT-viðurskifti
Teldurnar hjá Umhvørvisstovuni eru knýttar í Landsnet. Stovnurin hevur dátur, sum hava týdning fyri stovnin sjálvan og fyri samfelagið sum heild.

KT-grannskoðari hevur skoðað skipanirnar hjá Umhvørvisstovuni í 2021. Hann vísti á fleiri veikleikar og gav tilmælir, harav nøkur við høgari raðfesting. Grannskoðarin heldur, at høgt raðfestu tilmælini eiga at verða bøtt, til tess at stovnurin kann sigast at liva upp til ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd. Sambært Umhvørvisstovuni hava tey avgreitt fimm av høgt raðfestu tilmælunum, og eru í holt við restina.

***KT-skoðanin vísti á veikleikar.***

### Inntøkufíggjað virksemi
Í inntøkufíggjaða virkseminum eru virksemið hjá Skógrøktini í Hoydølum, røkt av viðarlundum og útskiftingararbeiðið.

Roknskapartøl 2017 til 2021 fyri inntøkufíggjað virksemi:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.659 | 1.281 | 1.356 | 1.890 | 1.391 |
| Keyp av vørum og tænastum | 994 | 418 | 405 | 799 | 1.187 |
| Keyp av útbúnaði, netto | -4 | 0 | 0 | 25 | 0 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur o.a. | 316 | 263 | 216 | 111 | 178 |
| Søla av vørum og tænastum | -2.109 | -1.834 | -2.149 | -4.786 | -2.574 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -855 | -127 | -230 | 1.567 | -25 |
| Innanvirkis bókingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 15 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **-401** | **-393** | **173** |

Í 2021 er nettojáttanin 0 kr., t.e. 2,2 mió.kr. í inntøkum og 2,2 mió.kr. í útreiðslum.

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t. | 399 | 1.952 | 800 | 510 | 218 |
| Onnur áogn | 724 | 788 | 1.269 | 231 | 202 |
| Banka- og girokontur | 0 | 0 | 0 | 4 | 3 |
| Forskotskassar | 15 | 4 | 5 | 3 | 3 |
| MVG, netto | 0 | -136 | -177 | -124 | 20 |
| Tíðaravmarkan | -8 | 0 | -1.700 | -1.708 | -1.842 |
| Ikki innt.ført – granskingarstyrkir o.a. | -606 | -408 | -155 | -103 | 0 |

***Jarðareigarar eiga 1,8 mió.kr. á.***

Tær 1,8 mió.kr. á kontuni "Tíðaravmarkan" eru áognir hjá 32 jarðareigarum, sum Umhvørvisstovan ikki hevur fingið fatur á í sambandi við útskifting, tó at tey fleiri ferðir hava roynt.

Søla av vørum og tænastum, greinað á staðartættir:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ógreinað | 0 | 0 | 0 | -31 | 0 |
| Matrikul | 0 | 0 | -51 | -1.970 | 100 |
| Skógrøkt | -1.867 | -1.834 | -2.091 | -2.782 | -2.667 |
| Kort og skráir | -242 | 0 | -7 | -3 | -7 |
| **Tilsamans** | **-2.109** | **-1.834** | **-2.149** | **-4.786** | **-2.574** |

Skógrøktin hevur sjálvstøðugan kassa, sum skal gerast upp regluliga. Kommunur og handlar kunnu keypa upp á borg. Øll smásøla til privat er goldin kontant. Sølan er skrásett í Búskaparskipan landsins.

Røktarleiðararnir hava heimild at avtala prísir á vørum og tænastum innan ávísar karmar. Prísásetingin er lagað til marknaðarprísir, og Skógrøktin hevur dagførdar príslistar. Flestu planturnar eru eginframleiðsla, har útsøluprísurin svarar til kostnaðin at ala tær. Í øðrum førum samanber Skógrøktin við prísir hjá øðrum veitarum. Skógrøktin letur avsláttur til tey, ið keypa nógv.

Á inntøkufíggjaða virkseminum eru eisini inntøkur frá kommunum fyri røkt av skógarfriðaðum lendi. Prísirnir fyri røkt av skógarfriðaðum lendi eru sambært Umhvørvisstovuni eftir avtalu við Tórshavnar Kommunu. Spurd um avtaluna, svaraði stovnurin, at tey finna ikki avtaluna, men tey eru í holt við at gera eina nýggja avtalu.

Gjøldini fyri útskiftingar eru ásett í K. nr. 14/2009 "um gjøld eftir matrikullógini. Í 2020 vóru inntøkurnar slakar 2 mió.kr., og í 2021 vóru tær 63 t.kr.

Vøru- og tænastuskuldarar vóru 218 t.kr. við árslok 2021. Fallin skuld var 43 t.kr.

## Stuðulsfíggjað virksemi

Umhvørvisstovan luttekur í fleiri granskingarverkætlanum, sum heilt ella lutvíst eru fíggjaðar uttaníframá. Stovnurin samskipar arbeiðið í norðurlendska arbeiðsbólkinum fyri lívfrøðiligt margfeldni. Verkætlanin, nevnd NBM, verður fíggjað av Norðurlendska Ráðharraráðnum.

Roknskapartøl 2017 til 2021 fyri samlaða stuðulsfíggjaða virksemi:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 972 | 952 | 1.145 | 1.230 | 2.002 |
| Keyp av vørum og tænastum | 542 | 1.086 | 988 | 1.013 | 1.462 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 75 | 122 | 1 | 0 | 6 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 122 | 192 | 194 | 27 | 14 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | -13 | -1 | 0 | 0 |
| Tilskot til útlandið | 0 | 0 | 2.131 | 2.105 | 5.111 |
| Íløgustuðul | 0 | 0 | 56 | 0 | 0 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -133 | 506 | 1.096 | -499 | 343 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | -1.005 | -2.940 | -5.483 | -3.682 | -8.967 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovnar (útr.) | 0 | 334 | 56 | -190 | 0 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovnar (innt.) | -573 | -229 | -183 | -121 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **11** | **0** | **-117** | **-29** |

Í 2021 er nettojáttanin 0 kr., t.e. 1,8 mió.kr. í inntøkum og 1,8 mió.kr. í útreiðslum. Sambært roknskapinum vóru inntøkurnar og útreiðslurnar væl hægri.

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Onnur áogn | 0 | 0 | 565 | 236 | 1.726 |
| Skuld, sum er greidd til útgjaldingar | 24 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ikki innt.ført – granskingarstyrkir o.a. | -1.095 | -457 | -1.374 | -4.414 | -5.147 |
| Skuld, annað | -5 | 0 | -7 | -19 | 0 |

Í Búskaparskipan landsins eru 37 verkætlanir í 2021. Í fleiri verkætlanum vóru fáar ella ongar rørðslur í árinum.

*Emergreen (Emerging Technologies for Greener Communities)*

Emergreen er ein NPA[24] verkætlan, sum hevur til endamáls at menna nýskapandi modell, sum eru luttakandi, miðsavna seg um brúkarar, eru góðsku- og burðardygg, og sum miðja ímóti grønari samfeløgum í fjarøkjum.

Umhvørvisstovan luttekur fyri Føroyar, og fýra onnur lond eru við, t.e. Írland, Svøríki, Finnland og Stórabretland. Samlaða fíggjarætlanin er 1,6 mió.evrur, harav parturin hjá Føroyum er 246 t.evrur. Emergreen fíggjar 65%, ella 160 t.evrur. Verkætlanin byrjaði í oktober 2018, og skuldi enda í 2021, men orsakað av COVID-19 skuldi hon enda 31. mars 2022.

Parturin hjá Umhvørvisstovuni er at menna heimasíðuna, orka.fo, sum kunnar um hitapumpur og sólorku. Nakað er eftir at gera við heimasíðuna, men sambært Umhvørvisstovuni halda tíðar- og fíggjarætlanir.

Roknskapartøl 2019 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 335 | 241 |
| Keyp av vørum og tænastum | 37 | 94 | 146 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 0 | 0 | 6 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -37 | -320 | -394 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovnar | 0 | -108 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** |

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Onnur áogn | 0 | 315 | 711 |
| Ikki inntøkuført – granskingarstyrkir, gávur o.t. | 37 | 0 | 0 |

Nettoútreiðslurnar eru útlíknaðar við, at inntøkur eru bókaðar í rakstrinum sum vanligar flytingarinntøkur, og støðlaðar í fíggjarstøðuni.

Í 2020 hevur NPA goldið 311 t.kr. fyri tíðarskeiðið oktober 2018 til mars 2020. Í januar 2022 rindaði NPA 454 t.kr. fyri tíðarskeiðið apríl 2020 til 31. mars 2021.

Sambært Umhvørvisstovuni vóru onkrir feilir í byrjanini av verkætlanini, sum nú eru rættaðir, og tí hava tey gjørt rættingar av roknskapinum, bæði í rakstrinum og í fíggjarstøðuni.

Landsgrannskoðanin hevur hugt at uppgerðunum, sum Umhvørvisstovan hevur latið NPA. Tað er trupult at síggja samanhangin millum roknskapin í Búskaparskipan landsins og uppgerðirnar. Umhvørvisstovan hevur sundurgreinað roknskapartølini í Búskaparskipan landsins í rokniarki, sum ber til at halda saman við uppgerðirnar til NPA. Vit hava ikki aðrar viðmerkingar.

[24] Northern Periphery and Arctic Programme.

*NBM (Nordisk arbejdsgruppe for biologisk mangfoldighed)*
Umhvørvisstovan er sekretariat hjá NBM, ið er ein arbeiðsbólkur, sum er settur av Norðurlendska Ráðharraráðnum.

Hvørt ár letur NBM um 4 mió.kr. í stuðli til 5-8 verkætlanir innan ávís evni í Norðurlondum. Arbeiðsbólkurin ger fíggjarætlanir hvørt ár fyri verkætlanarvirksemið og sekretariatsútreiðslurnar.

Í 2020 játtaði NBM 4,3 mió.kr. í stuðli, harav fekk sekretariatið 750 t.kr. til rakstur.

Roknskapartøl fyri NBM sekretariat:

*t.kr.*

| Heiti | 2020 | 2021 |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | 621 | 671 |
| Keyp av vørum og tænastum | 128 | 133 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 105 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | -750 | -909 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** |

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2020 | 2021 |
|---|---|---|
| Onnur áogn | -159 | -105 |

Umhvørvisstovan hevur avtalað við Norðurlendska Ráðharraráðið, at umsitingargjaldið skal vera 120 t.kr. um árið, men í 2020 eru 109 t.kr. bókaðar sum umsitingargjald. Tær 11 t.kr., sum NBM hevur goldið afturat tí, er kostnaður, ið Umhvørvisstovan skuldi havt rindað.

Tær 159 t.kr., ið ikki vóru brúktar í 2020, vórðu støðlaðar. Í 2021 er upphæddin rakstrarførd á tveimum ymiskum verkætlanum, t.e. “Synergi mellem biodiversitet og klima - fase II” og “Nordisk prosjekt på kantsoner og grønne korridorer i jordbrukslandskap - fase II”.

Í 2021 játtaði NBM 4,25 mió.kr. í stuðli; harav fekk sekretariatið 909 t.kr. til rakstur.

*Formansskapsverkætlanir hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum*

***15 mió.kr. til orkuverkætlanir.***

Í 2020 hevði Danmark formansskapin í Norðurlendska Ráðharraráðnum. Í tí sambandi fekk Danmark játtaðar 45 mió.kr. til at stuðla verkætlanum í Danmark, Føroyum og Grønlandi; 15 mió.kr. til hvønn, býttar yvir 3 ár.

Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður, er norðurlendskur samstarvsráðharri fyri Føroyar; hann útveitti uppgávuna at finna, leiða og stuðla verkætlanir til Umhvørvisstovuna.

NORA umsitur fíggjarliga partin av verkætlanunum, og sekretariatið hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum í Keypmannahavn hevur ábyrgd av NORA.

Leikluturin hjá Umhvørvisstovuni er at leiða verkætlanir, og stovnurin fær samsýning fyri tað. Í 2020 var samsýningin 200 t.kr. Leiðarin á Orkudeildini er verkætlanarleiðari.

***Stuðla 2 verkætlanir.***

Umhvørvisstovan valdi tvær verkætlanir út, sum Norðurlendska Ráðharraráðið góðkendi. Onnur var at stuðla Bakkafrost at byggja ein 100% el-riknan alibát, og hin var at stuðla sjóhitaskipan í Leirvík.

Alibáturin kostar um 16 mió.kr., harav stuðulin frá Norðurlendska Ráðharraráðnum er um 5,1 mió.kr.

Upprunaliga var ætlanin at gera eina sjóhitaskipan í Leirvík at hita hús og aðrar bygningar. Eftir kommunuvalið í november 2020 broytti nýggja kommunustýrið verkætlanina. Verkætlanin er nú minni í vavi, og avgjørt er at brúka jarðhita í staðin fyri sjóhita. Skúlin og eitt ellisheim eru partar av verkætlanini. Upprunaliga skuldu tríggir aðrir bygningar knýtast í skipanina, og møguliga eisini ein stórur partur av bygdini. Ein heittvatnstangi verður nú bygdur, har vatnið verður hitað við jarðhita, sum skal hita bygningarnar.

Sambært Umhvørvisstovuni er broytingin av verkætlanini í Leirvík góðkend av Norðurlendska Ráðharraráðnum. Verkætlanin er seinkað umleið eitt hálvt ár, og verður ætlandi liðug á sumri 2022. Samlaða verkætlanin kostar um 9 mió.kr., harav stuðulin frá Norðurlendska Ráðharraráðnum er 4,1 mió.kr.

Tær sløku 6 mió.kr., sum ikki eru brúktar, verða sambært Umhvørvisstovuni nýttar til at netverka og kunna um úrslitini av verkætlanunum.

***6 mió.kr. til at kunna um verkætlanir.***

## 6.19 Heilsufrøðiliga starvsstovan (LG 2017/206-375)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Heilsufrøðiliga starvsstovan nevnir í roknskaparreglugerðini, hvørji inntøkusløg stovnurin hevur, men ikki nærri reglur um prísáseting v.m.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini, at tað var ikki samsvar ímillum ásetingina í rundskrivinum og uppskotið til roknskaparreglugerð. Ráðið skuldi saman við Heilsufrøðiligu starvsstovuni broyta ásetingina um inntøkur í samsvari við rundskrivið.

***Mælt til at seta reglur um prísáseting í roknskaparreglu-gerðina.***

Í 2020 kunnaði Umhvørvis- og vinnumálaráðið um, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tekur gjøld fyri ymiskar tænastur og veitingar. Prísir eru ásettir í kunngerð. Tó áttu prísir fyri tey ymisku inntøkusløgini at framgingið av roknskaparreglugerðini. Tað eigur at verða tikið við, tá ið roknskaparreglugerðin verður endurskoðað.

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið víst á, at ráðið, síðani koronufarsóttin fór at gera um seg, og har Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur havt týðandi leiklut í kanningararbeiðinum, ikki hevur raðfest at nýta orku til dagføring av roknskapar-reglugerðini. Vónandi verður orka til at taka hetta arbeiði upp seinni í ár ella komandi ár.

## 6.20 Arbeiðs- og brunaeftirlitið (LG 2021/206-391)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Játtanin er á høvuðskontu 6.39.1.07, undirkontu 20. Arbeiðseftirlitið og 21. Bruna-eftirlitið.

Høvuðsuppgávurnar hjá stovninum eru støðugt at betra arbeiðsumhvørvið á føroyskum arbeiðsplássum og at virka fyri brunatrygd.

## Rakstur

Játtanar- og roknskapartøl 2021:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| 20. Arbeiðseftirlitið | 4.500 | 5.298 |
| 21. Brunaeftirlitið | 2.689 | 1.825 |
| **Tilsamans** | **7.189** | **7.122** |

Roknskaparreglugerðin er góðkend av aðalráðnum í 2017.

Í januar 2022 flutti Arbeiðs- og brunaeftirlitið undir Bryggjubakka 27.

Stovnurin er skrivstova hjá Arbeiðsumhvørvisráðnum og Prótvøkunevndini fyri kavaravinnu, og rindar nevndarlimunum fundarpengar eftir reglunum hjá Fíggjarmálaráðnum.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar ferða- og umboðanarútreiðslur við stakroyndum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið tók undir við tilmælinum um at gera ferðauppgerðirnar greiðari og at skjalprógva umboðanarútreiðslurnar betur.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið gjørdi avtalu við Heilsumálaráðið um, at Farsóttartilbúgvingin skuldi halda ávísar útreiðslur hjá stovninum, ið stóðust av koronustøðuni, m.a. at standa fyri kanningardeplinum á flogvøllinum.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur fingið 1.685 t.kr. í endurgjaldi fyri koronuráðgevingina í 2021. Stovnurin hevur goldið Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu 68 t.kr. fyri starvsfólk í koronuráðgevingini.

Í mai 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið víst á, at koronutilbúgving er ikki eitt øki, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið umsitur. Heilsumálaráðið umsitur koronutilbúgvingina.

### *Lønir*

Í 2021 rindaði Arbeiðseftirlitið 5,5 mió.kr. í lønum. Landsgrannskoðanin hevur kannað nøkur lønarmál, og hevði onkra viðmerking.

***Ikki tíðaravmarkað lønir.***

Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur ikki tíðaravmarkað lønirnar, sum ásett er í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja reglunum í rundskrivinum.

### *Inntøkur*

Í 2021 hevði Arbeiðs- og brunaeftirlitið 1,5 mió.kr. í inntøkum av eftirlits- og umsjónaravgjøldum:

*t.kr.*

| Heiti | 2021 |
|---|---|
| Lyftur & elevatorar | -270 |
| Góðkent virki, góðkenning | -144 |
| Trýstíløt, eftirlit | -81 |
| Mát og vekt (Force) | -634 |
| Vinnubrøv, nýggj | -334 |
| Vinnubrøv, endurnýggja | -43 |
| **Tilsamans** | **-1.502** |

Við heimild í K. nr. 120/2018 “um gjøld fyri løggildingar, ávís eftirlit og loyvisbrøv frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum” eru 869 t.kr. kravdar inn.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um samsvar er ímillum upphæddirnar í kunngerðini og rokningarnar fyri veittu tænasturnar.

Einstøku upphæddirnar samsvara við kunngerðina, men Landsgrannskoðanin vísti á, at tað hevði bøtt um gjøgnumskygni, um vektklassi stóð á fakturunum, soleiðis at tað sæst hvørja tænastu kundin rindar fyri.

### *Mát og vekt*

Inntøkurnar fyri mát og vekt eru 634 t.kr. Arbeiðseftirlitið kannar og góðkennir vektir og nøgdarmátarar samsvarandi anordning nr. 720/1995 "om ikrafttræden på Færøerne af lov om Erhvervsfremme" við tilhoyrandi kunngerðum.

Spurt, hvar gjaldið fyri mát og vekt er ásett, svaraði Arbeiðs- og brunaeftirlitið við at vísa á bræv frá Vinnumálaráðnum 9. januar 2009, har ráðið góðkendi prísirnar. Vinnumálaráðið hevur góðkent, at tann til eina og hvørja tíð galdandi príslistin hjá FORCE technology í Danmark er galdandi í Føroyum, við ískoyti upp á 15%. Útgangstøðið var príslistin frá 2008.

***Upphæddir samsvara ikki við ásetingarnar frá ráðnum.***

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað fakturar, og staðfest, at upphæddirnar á fakturunum eru ikki í samsvari við ásetingarnar frá Vinnumálaráðnum.

Seinastu nógvu árini eru prísirnir javnaðir við 3% um árið, men sambært Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er tað ikki víst, at javningin er gjørd við 3% tey fyrstu árini. Stovnurin metti tá, at tann javningin fór at raka kostnaðarstøðið í Føroyum betur, enn loysnin við at leggja 15% afturat príslistanum.

Í anordning frá 1995 er ásett í § 13 at "erhvervsministeren fastsætter nærmere regler om gebyrer til dækning af udgifterne ved administrationen af loven".

Ll. nr. 68/2022 "um mát og vekt" er sett í gildi 6. mai 2022. Í § 6 í lógini er ásett, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um gjald, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið kann taka fyri útreiðslur, ið standast av eftirlitinum sambært § 5, stk. 2.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið vónar, at nýggju reglurnar fara at gera umsitingina greiðari og at prísmyndilin, sum er heimilaður landsstýrismanninum at áseta við kunngerð, verður greiðari.

### *Eftirlit við prísáseting*

***Veikt innaneftirlit.***

Tað kann vera óheppið, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið ikki hevur góðkenningarmannagongd, tá ið stovnurin broytir prísir. Skipanin er viðbrekin við ongum ella í besta føri veikum innaneftirliti, tá ið sama starvsfólk hevur ábyrgd av at rokna prísir út, gera eftirlit, og at gera fakturagrundarlagið. Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta mannagongdir í roknskaparreglugerðini.

## Fíggjarstøða

Úr fíggjarstøðuni við árslok 2021:

| | *t.kr.* |
|---|---|
| | **2021** |
| Flutningsútbúnaður | 1.244 |
| Innbúgv og annar útbúnaður | 36 |
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t., landskassadømi | 529 |
| Onnur áogn | 96 |
| Banka- og girokontur | 13 |

Á kontuni "Onnur áogn" eru tær 96 t.kr. væntað endurgjald frá Barsilsgrunninum í 2022.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið sendir ikki krøv undir 2.000 kr. til innheintingar. Stovnurin hevur ikki avskrivað krøv, og hevur heldur ikki sent krøv til innkrevjingar. Tey lata ikki prógv ella váttanir, fyrr enn goldið er fyri tænastuna.

Í mai 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at skuldin pr. 31. mars 2022 var 67 t.kr. Ráðið heldur samanumtikið, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur skipað fíggjarøkið hóskandi við atliti at avmarking av møguligum tapsváða.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið brúkar egna peningastovnskontu til inngjøld fyri trukk- og kranakoyrikort. Stovnurin hevur stemmað kontuna av.

## 6.21 Barsilsskipanin (LG 2020/206-394)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Barsilsskipanini. Í Ll. nr. 48/2001 “um barsilsskipan” (Barsilslógin) eru reglur um m.a. rætt til barsilsfarloyvi, útgjald av barsilspeningi og inngjald til skipanina. Fleiri kunngerðir eru gjørdar við heimild í Barsilslógini.

Løntakarar og arbeiðsgevarar hava skyldu at gjalda barsilsgjald, tá ið A-inntøka verður móttikin ella rindað. Í § 19, stk. 2, í barsilslógini er ásett, at barsilsgjaldið fellur til gjaldingar samstundis, sum teir gjaldsskyldugu rinda ella fáa A-inntøku. Áðrenn A-inntøkan verður útgoldin, skal inngjaldið avroknast.

Sambært K. nr. 123/2001 “um barsilsgjald” kunnu arbeiðsgevarar rinda við at geva TAKS fulltrú til at taka barsilsgjaldið av peningastovnskontu hjá viðkomandi, ella við at rinda barsilsgjaldið eftir rokning frá TAKS. Barsilsgjaldið skal rindast innan 20 dagar eftir, at TAKS hevur sent rokningina.

Í kunngerðini er ásett, at tá ið arbeiðsgevarar rinda A-inntøku, skulu teir avrokna sín part av barsilsgjaldinum til TAKS.

Áðrenn føroysku peningastovnarnir fluttu sítt KT-virksemi av landinum, bleiv gjaldið frá arbeiðsgevarum trekt sjálvvirkandi, tá ið lønir vórðu avgreiddar. TAKS hevði kannað, um tað aftur bar til at trekkja gjaldið sjálvvirkandi, men tað lat seg ikki gera.

***Barsilsgjald ikki avroknað sambært reglunum.***

Í kunngerðini um barsilsgjald er ásett, at bæði løntakarar og arbeiðsgevarar skulu avrokna barsilsgjaldið, samstundis sum lønin verður móttikin ella rindað. Við verandi innheintingarmannagongd verður gjaldið frá arbeiðsgevarum ikki rindað samstundis sum A-inntøka verður goldin.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum helt TAKS, at verandi mannagongd riggaði væl. Ráðið ásannaði, at tørvur var á at endurskoða lógina og tilhoyrandi kunngerð. Ætlanin var, at gjaldshátturin skuldi vera smidligur fyri arbeiðsgevarar, men samstundis tryggja inntøkurnar hjá Barsilsskipanini.

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at ráðið ætlar framvegis at broyta ásetingarnar um, hvussu gjaldingin hjá arbeiðsgevarum skal fara fram. Ætlanin er at hava eina smidliga gjaldsloysn, sum tryggjar inntøkurnar til Barsilsskipanina, og sum er smidlig fyri arbeiðsgevararnar.

***Veikt innaneftirlit.***

TAKS hevði skrivliga vegleiðing við mannagongdum fyri málsviðgerð og innaneftirliti. Innaneftirlitið var skipað m.a. við at avstemma og kanna listar, og eisini kannaðu málsviðgerararnir málini hjá hvørjum øðrum. Málsviðgerðin, innaneftirlitið og avstemmingar annars vóru fyri tað mesta handlig; tað helt Landsgrannskoðanin vera ein veikleiki, sum kundi virka til at feilir komu í.

***Talgildar umsóknir frá almennum arbeiðsgevarum.***

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið víst á, at Gjaldstovan, saman við TAKS og Elektron, hevur ment eina skipan fyri almennu arbeiðsgevararnar, har søkjast kann um barsilsgjald umvegis Búskaparskipan landsins. Umsókn verður sjálvvirkandi send

barsilsumsitingini. Nú er tað tí vorðið nógv lættari hjá almennum arbeiðsgevarum og alment settum starvsfólkum at avgreiða umsóknir um barsilsendurgjald.

## 6.22 Barsilsgrunnurin

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin Barsilsgrunnin.

Barsilsgrunnurin hevur til endamáls at fíggja og rinda út barsilspening. Sambært § 19a, stk. 2, 2. pkt. í Barsilslógini verða inntøkur grunsins játtaðar í fíggjarlógini og fluttar grunninum. Møguligt avlop verður spart saman í grunninum og kann nýtast til útgjøld, um skipanin hevur hall, ella avgerð verður tikin um at hækka útgjaldið.

Barsilsgrunnurin er internur grunnur, og er skipaður fyri at tryggja, at innkravd barsilsgjøld verða nýtt til endamálið. Grunnurin er at rokna sum ein marking ella eyðmerking av tí peningi, sum verður kravdur inn til at fíggja Barsilsskipanina.

Í landsroknskapinum 2020 var meirnýtslan "avgreidd" á tann hátt, at fyrst var eginognin hjá Barsilsgrunninum brúkt, og síðani var restin tikin við í landsroknskapin undir játtanini til barsilsskipan á høvuðskontu 6.39.4.01.

Landsgrannskoðanin vísti á, at § 19a í lógini um barsilsskipan ásetir, at "Barsilsgrunnurin endurrindar landskassanum útreiðslurnar". Játtanin á høvuðskontu 6.39.4.01 er bara til at avgreiða "Tilskot til einstaklingar", í hesum føri at rinda barsilspening til tey, sum hava rætt til útgjøld. Til at rinda útreiðslurnar, verða "innanhýsis flytingar" gjørdar frá Barsilsgrunninum til hesa játtanina.

Landsgrannskoðanin vísti á, at Barsilsgrunnurin átti at víst eina negativa eginogn upp á slakar 15 mió.kr. við ársenda 2020.

Landsgrannskoðanin ivaðist eisini í, um heimild var at "eftirgeva" grunninum tað, sum grunnurin sambært lógini átti at endurrindað Barsilsskipanini.

***Ivasamt um heimild var at "eftirgeva" Barsilsgrunninum.***

Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísti í september 2021 til viðmerkingarnar til broytingina í lógini um Barsilsgrunn, har tað verður sagt *"Er líkt til, at tiltakspeningurin verður burtur, má landsstýrismaðurin leggja uppskot fyri Løgtingið um annaðhvørt at hækka inngjaldið til Barsilsgrunnin ella at játta grunninum pening".* Út frá hesum ásetingunum var ikki heimild, ella hevði ikki verið ætlanin, at grunnurin skuldi vísa hall. Umframt tað helt Umhvørvis- og vinnumálaráðið, at landsroknskapurin hevði verið misvísandi, um veruligu útreiðslurnar ikki sóust í landsroknskapinum, men heldur blivu fluttar til ein internan grunn.

### Umsiting av Barsilsgrunninum

Barsilsgrunnurin endurrindar landskassanum útreiðslurnar av umsitingini av Barsilsskipanini, og landsstýrismaðurin hevur við heimild í § 19a, stk. 7, í Barsilslógini lagt umsitingina til TAKS.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum kann áseta nærri reglur um umsiting og virksemi grunsins í kunngerð. Landsstýrismaðurin hevði ikki gjørt slíka kunngerð. Umhvørvis- og vinnumálaráðið helt, at tørvur var ikki á reglugerð fyri umsitingina av Barsilsgrunninum, tí at sum so var eingin umsiting í grunninum. Talan var um eina kontu, har inn- og útgjaldingar eru bókaðar. Harafturat endurrindaði Barsilsgrunnurin TAKS kostnað fyri umsiting av Barsilsskipanini.

Sambært § 19a, stk. 8, í lógini ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur fyri íløgurøkt Barsilsgrunsins, soleiðis at hon er í samsvari við íløgupolitikk landsins.

Í juli 2022 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at ráðið kann enn eina ferð vísa á, at innistandandi í Barsilsgrunninum verður umsitið á sama hátt sum gjaldførið hjá landinum, og metir Umhvørvis- og vinnumálaráðið av hesi orsøk, at tað er óneyðugt at áseta reglur, tí heimildin hjá landsstýrismanninum gongur ikki víðari enn til at áseta reglur um, at íløgurøktin skal vera í samsvari við íløgupolitikk landsins.

# 7. Uttanríkis- og mentamál

## 7.1 Uttanríkis- og mentamálaráðið (LG 2021/207-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum við denti á lønarviðurskifti og fíggjarstøðupostar. Játtanin er á høvuðskontu 7.11.1.09.

### Rakstur

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 13.335 | 13.478 | 14.845 | 16.595 | 18.094 |
| Keyp av vørum og tænastum | 3.084 | 3.425 | 3.748 | 4.988 | 4.740 |
| Keyp av útbúnaði | 150 | 48 | 144 | 1.012 | 353 |
| Søla av vørum og tænastum v.m. | 0 | 0 | 0 | -11 | -2 |
| Stuðul til annað virksemi | 8 | 27 | 339 | 15 | 38 |
| Rentuútreiðslur | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | 0 | -14 | -271 | 0 | 0 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn (útr.) | 155 | 172 | 89 | 491 | 603 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn (innt.) | -6 | -227 | -338 | 0 | -573 |
| **Tilsamans** | **16.726** | **16.909** | **19.015** | **23.867** | **24.352** |

Roknskaparreglugerðin er frá 2016 fyri táverandi Mentamálaráð. Uttanríkis- og mentamálaráðið er í holt við at dagføra reglugerðina.

***Ráðið er í holt við at dagføra reglugerðina.***

Landsgrannskoðanin kannaði setanarmál; um lýsingar, umsóknir, prógv og setanarskriv vóru í málinum. Eisini kannaðu vit, um almenni setanarpolitikkurin er fylgdur. Einki var at finnast at.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur reglur um flekstíð hjá starvsfólkunum. Sambært ráðnum hendir tað seg, at tímasaldan er hægri ávís tíðarskeið, tá ið arbeiðstrýstið er størri enn vanligt. Deildarstjórar gera ætlan saman við starvsfólkunum um, hvussu saldan fæst niður aftur.

Tað kemur fyri, at starvsfólk eiga serstakar frívikur á. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði ikki gjørt avtalur um serstakar frívikur, men ætlar frameftir at fylgja vegleiðingini um serstøku frívikuna.

### Fíggjarstøða

Landsgrannskoðanin vísti á, at keyp oman fyri 50 t.kr. skulu skrásetast í støðisognini í Búskaparskipan landsins. Uttanríkis- og mentamálaráðið ætlaði at taka málið upp við Gjaldstovuna. Landsgrannskoðanin mælti til eisini at hava yvirlit yvir smærri ognir.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur kunnað um, at tveir skermar hjá stovninum nú eru skrásettir í støðisogn í Búskaparskipan landsins. Sambært ráðnum skrásetir Gjaldstovan ikki skrivstovuinnbúgv, hóast tað er keypt samlað og virði samlað er áleið ella oman fyri 50 t.kr.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur peningastovnskontu til Mastercard at lata sendifólkum og ráðgevum at brúka til umboðan. Landsgrannskoðanin mælti til, at rørslur á peningastovnskontuni verða bókaðar í roknskapinum, og at ráðið regluliga stemmar av við kontuavrit frá peningastovninum.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið kreditorarnar. Einki var at finnast at.

Í 2021 stóðu 254 t.kr. á kontuni "ikki inntøkuført – granskingarstyrkir, gávur o.t.". Landsgrannskoðanin mælti til, at ráðið kannar kontuna, og ger verkætlanirnar upp. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur kunnað um, at við árslok 2021 er stuðulin førdur aftur.

## 7.2 Umsiting av stuðli undir § 7 (LG 2021/207-000)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av stuðulsjáttanum undir § 7 í fíggjarlógini. Endamálið við grannskoðanini er at kanna, um heimild er at gjalda út, um roknskapar- og eftirlitsskipanir hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum eru tryggar, og um umsitingin heldur góðan fyrisitingarsið. Grannskoðanin tekur støðið í roknskapum og frágreiðingum frá stuðulsmóttakarum fyri fíggjarárið 2020.

Fyri at kunna rinda út stuðul er neyðugt at hava fíggjarliga og materiella heimild. Tá ið um stuðulsjáttanir ræður, finst materiella heimildin ofta í fíggjarlógini. Í játtanarlógini er ásett, at viðmerkingarnar til stuðulsjáttanir skulu lýsa neyvt endamál, móttakaraskara, útrokningarhátt, samantalda studningsupphædd og útgjaldstíðarskeið.

Í játtanarskipanini er heimilað landsstýrismanninum í fíggjarmálum at áseta nærri reglur um m.a. endamálið við stuðli, móttakaraskara, eftirlit, fíggjarætlan, roknskap og grannskoðan. Endamálið við reglunum er at tryggja skynsama stuðulsfyrisiting. Um serligar reglur ikki eru ásettar um stuðulin, galda reglurnar í K. nr. 125/2011 "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan".

*Roknskapartøl*

Í 2020 vóru útreiðslurnar til stuðulsjáttanir til "Útbúgving og gransking" og "Mentan" 125 mió.kr. Niðanfyri er talva við roknskapar- og játtanartølum fyri stuðulsjáttanirnar, sum Landsgrannskoðanin hevur valt til nærri grannskoðan.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Heiti | R2020 | J2020 |
|---|---|---|---|
| 7.23.2.10.01 | Eftirskúlin á Tvøroyri | 1.200 | 1.200 |
| 7.23.2.10.02 | Eftirskúlin í Skálavík | 1.684 | 1.900 |
| 7.23.5.01.20 | Føroya Fólkaháskúli | 3.786 | 3.792 |
| 7.23.5.01.21 | Ítróttaháskúlin í Suðuroy | 4.424 | 4.441 |
| 7.23.5.01.22 | Háskúlatilboð innan vistgrøði á Sandoynni | 2.200 | 2.200 |
| 7.24.1.13.01 | Útnorðursamstarv | 224 | 300 |
| 7.24.1.13.02 | Norrøna felagið | 150 | 150 |
| 7.24.1.13.03 | Ungmannafeløg | 350 | 350 |
| 7.24.1.13.04 | Stuðul til onnur endamál | 790 | 1.120 |
| 7.24.1.13.05 | Listafólkasamband Føroya (LISA) | 430 | 430 |
| 7.24.1.13.06 | Stuðul til listafólk | 95 | 150 |
| 7.24.1.13.07 | Skótarørsla | 1.250 | 1.250 |
| 7.24.1.13.08 | Farlit | 500 | 500 |
| 7.24.1.13.09 | Bátasavn í Svínoy | 200 | 0 |
| 7.24.2.01.01 | Tónleikur og sangur | 330 | 415 |
| 7.24.2.01.02 | Føroya Symfoniorkestur | 1.700 | 1.700 |
| 7.24.2.01.03 | Føroyskur dansur | 500 | 500 |
| 7.24.3.27.01 | Saltsilo, rakstrarstuðul | 2.500 | 2.500 |
| 7.24.6.18.01 | Stuðul til at smíða kappróðrarbátar | 100 | 100 |
| | **Tilsamans** | **22.413** | **22.998** |

## Grannskoðan

### *Eftirskúlar, fólkaskúlar og háskúlar*

Undirvísingarstýrið fyrisitur játtanirnar til eftirskúlar og háskúlar. Samanumtikið vísti grannskoðanin, at í onkrum førum hevði Undirvísingarstýrið ikki fingið grannskoðanarprotokollina, ella vóru næmingatølini ikki grannskoðað. Ein roknskapur var grannskoðaður av skrásettum grannskoðara, tó at tað sambært lógini um eftirskúlar skal vera løggildugur grannskoðari, og í einum skúla var aðalfundur hildin eftir tíðarfreistina fyri, nær stýrið skuldi hava roknskapin. Annars var einki at finnast at.

***Ikki grannskoðað sambært reglunum.***

### *Ymiskir studningar, tónleikur, sangur, Saltsilo og kappróðrarbátar*

Sambært K. nr. 90/2008 “um stuðul til mentan og list” skal stuðulsmóttakari lata inn roknskap, tá ið verkætlan er endað ella í seinasta lagi 1. mars árið eftir. Tað er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn um stuðul.

Samanumtikið er torført hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum at fáa roknskapir v.m. inn til tíðina.

Sambært ráðnum kemur tað meira enn so fyri, at roknskapir koma ov seint, tó at ráðið minnir á freistina. Tey hava strammað upp á økinum, soleiðis at tey rykkja fyrr eftir roknskapunum. Uttanríkis- og mentamálaráðið ásannar, at trupult er at fáa alt inn rættstundis, av tí at tað snýr seg um nógvar stuðulsmóttakarar, og arbeiðið er handligt. Ráðið er í samskifti við Fíggjarmálaráðið um at broyta K. nr. 90/2008 “um stuðul til mentan og list”, m.a. fyri at leingja freistina til 1. apríl, eins og ásett er í K. nr. 125/2011 “um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan”.

***Trupult at fáa roknskapir inn rættstundis.***

Fyri nakrar stuðulsjáttanir hevði Uttanríkis- og mentamálaráðið í 2022 enn ikki fingið roknskap v.m. fyri stuðul í 2020; fyri tað mesta vóru tað smærri stuðulsjáttanir og stuðul, sum var veittur eftir umsókn. Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki nøktandi, at eftirlitið við stuðlinum fyri 2020 ikki var avgreitt.

Eitt listafelag hevði ikki latið ráðnum roknskap v.m. fyri 2020. Stuðulsveitingin er ein afturvendandi upphædd, og Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði latið felagnum stuðul í 2021. Sambært ráðnum er talan um eitt mistak. Stuðulin fyri 2022 var ikki goldin, tí roknskapirnir fyri 2020 og 2021 vantaðu, tó at ráðið hevði rykt eftir teimum. Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki nøktandi, at stuðul verður goldin, hóast stuðulsmóttakari ikki hevur latið ráðnum roknskap fyri undanfarna ár.

***Stuðul goldin, uttan at ráðið hevur fingið roknskap.***

Nakrir stuðulsmóttakarar hava sambært roknskapunum yvirskot í rakstrinum, t.v.s. tey hava ikki brúkt allan stuðulin. Landsgrannskoðanin spurdi Uttanríkis- og mentamálaráðið, hvussu ráðið fyriheldur seg til, at feløg ikki brúka allan stuðulin, men lata yvirskotið falla til eginognina.

Uttanríkis- og mentamálaráðið kann krevja stuðul aftur, og sambært ráðnum er endamálið við stuðli ikki, at feløg skulu økja um eginognina, men at stuðulin verður brúktur í inniverandi ári. Tó kann tað vera skynsamt hjá einum felag at hava eina lítla eginogn, t.d. um felagið skal hava eitt størri tiltak okkurt árið, ella at felagið kemur út fyri onkrum óvæntaðum, sum krevur eyka fígging. Yvirskipað heldur Uttanríkis- og mentamálaráðið eyguni við eginognunum hjá teimum, sum fáa stuðul í fíggjarlógini. Vísir tað seg, at eitt felag fær meira í stuðli, enn tað hevur brúk fyri, kann talan blíva um at lækka stuðulin árið eftir.

## Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Landsstýrismaðurin tekur undir við, at nøkur viðurskifti í stuðulsumsitingini eiga at verða betrað. Uttanríkis- og mentamálaráðið fer tí at leggja seg eftir at styrkja um umsitingina, við at fáa greiðari og betri mannagongdir.

## 7.3 Undirvísingarstýrið (LG 2020/207-231)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Undirvísingarstýrinum. Undirvísingarstýrið, sum formliga var skipað á heysti 2018, var í holt við at gera egna roknskaparreglugerð. Stýrið hevði einki ognaryvirlit.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin hjá Undirvísingarstýrinum liggur til góðkenningar hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, og sambært Undirvísingarstýrinum er ognaryvirlitið gjørt.

Undirvísingarstýrið hevði gjørt váðameting og var skoðað av KT-grannskoðara. Grannskoðarin lat stýrinum frágreiðing, sum vísti, at tvey tilmæli høvdu høga raðfesting og áttu at verið viðgjørd beinanvegin. Annað tilmælið var avgreitt. Nøkur tilmæli vóru, sum høvdu miðal raðfesting og áttu at verið loyst innan 6 mánaðir.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært Undirvísingarstýrinum eru tilmælini nú eru komin í rættlag.

## 7.4 Nám (LG 2021/207-231)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Námi. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.1.18, undirkontu 24. Nám virkar eftir Ll. nr. 53/2014 “um at útvega undirvísingarmiðlar o.a.” Nám umsitur játtanina til Próvstovuna á undirkontu 25 “Próvtøkur”.

Útgávurnar hjá Námi eru grundaðar á fólkaskúlalógina og lógina um gymnasialar miðnámsútbúgvingar. Høvuðsvirkisøkini hava verið: føroyskt, heimstaðarlæra, náttúra og tøkni, alis- og evnafrøði, søga, landalæra, enskt, lívfrøði, kristni og rokning til fólkaskúlan.

Bókamiðsølan umsitur søluna fyri Nám, og hevur bókaútgávurnar á goymslu.

### Rakstur

Roknskaparreglugerðin, sum er góðkend av Mentamálaráðnum í 2016, er ikki dagførd, tó at bygnaðarbroytingar vóru gjørdar í 2017. Sambært Námi er reglugerðin ikki endurskoðað, tí bygnaðarbroytingarnar eru ikki lidnar.

Roknskapar- og játtanartøl 2018 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 12.627 | 14.209 | 14.206 | 15.642 |
| Keyp av vørum og tænastum | 13.665 | 9.364 | 11.129 | 10.383 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 308 | 269 | 153 | 218 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 302 | 273 | 347 | 413 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | -2.407 | 0 | 0 | 0 |
| Søla av vørum og tænastum | -7.402 | -7.038 | -7.752 | -8.397 |
| Tilskot til útlandið o.a. | 0 | 100 | 400 | 500 |
| Stuðul til annað virksemi | 200 | 200 | 210 | 200 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -3 | -241 | -300 | 0 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | -312 | -47 | -45 | 0 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 183 | 353 | 396 | 595 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -2.704 | -300 | -310 | -670 |
| **Tilsamans** | **14.456** | **17.143** | **18.433** | **18.884** |
| *Játtan, netto* | *14.493* | *17.173* | *18.453* | *19.096* |

#### *Lønir*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað lønarmál. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Einki var at finnast at.

Nám hevur reglur um arbeiðstíð og tíðarskráseting. Starvsfólkini skráseta, nær tey koma og fara, frítíð og annað. Sambært innanhýsis reglum kunnu starvsfólk eiga upp í 30 tímar á ella skylda í mesta lagi 30 tímar.

*Keyp av vørum og tænastum*

Nám bjóðar ikki uppgávur at skriva undirvísingartilfar út. Tá ið bøkur skulu skrivast, verður tað gjørt við, at onkur kemur við hugskoti um at skriva eina bók fyri Nám, ella at Nám biður ein við røttu førleikunum.

Nám brúkar ikki Keypsportalin, tí kostnaðurin fyri prent og uppseting koma sjáldan upp á 50 t.kr. Stovnurin biður um tilboð frá minst tveimum veitarum, tá ið tey skulu hava bøkur umbrotnar ella prentaðar. Tó velja tey í ávísum førum føroyskar veitarar framum.

Landsgrannskoðanin hevur vístá, at um vørur ella tænastur ikki ítøkiliga eru undantiknar sambært rundskrivinum "um keyp av vørum og tænastum", ber til at biðja um undantak frá regluni um útbjóðing.

*Inntøkur*

Inntøkurnar hjá Námi stava frá útgávu- og skeiðsvirksemi. Størsti parturin av útgávunum í dag eru talgildar bøkur, tí allar bøkur verða ikki prentaðar, men allar koma út talgildar. Fólkaskúlin fær altíð prentaðar bøkur, sum síðani verða talgildar og gjørdar til ljóðbøkur.

*Serligar avtalur*

Talvsambandið fær 1,3 mió.kr. játtaðar á høvuðskontu 7.24.6.08 "Hugasamband Føroya", har ein partur er ætlaður talvráðgevanum. Nám hevur avtalu við Talvsamband Føroya um, at talvráðgevin verður løntur av Námi, sum so fær lønina endurgoldna frá Talvsambandinum. Starvið er tíðaravmarkað, og skal endurnýggjast triðja hvørt ár.

*Aðrar útreiðslur*

Nám hevur gjørt avtalu við Copydan, um at Nám rindar 88 kr. fyri hvønn næming í fólkaskúlunum og miðnámsskúlunum, fyri at skúlar skulu kunna stroyma tilfar av netinum. Avtalan er galdandi frá januar 2021, til hon verður søgd upp við eitt ára fráboðan.

Nám hevur ásett vegleiðandi takstir fyri tænastur, sum stovnurin keypir frá feløgum og persónum til útgávuvirksemi. Í vegleiðing frá 2020 eru takstir fyri myndir, tekningar, tekstir, rættlestur og aðrar tænastur. Lønir til einstaklingar, sum ikki eru MVG-skrásettir, rindar Nám sum A-inntøku.

## Fíggjarstøða

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Goymslur | 2.584 | 222 | 43 | 43 | 43 |
| Tænastu-, vøruskuld. o.t., landsk.dømi | 5 | 20 | 501 | 27 | 557 |
| Tænastu- og vøruskuldarar o.t., | 440 | 255 | 389 | 457 | 32 |
| Banka- og girokontur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Skuld, annað | -270 | -341 | -268 | -211 | 0 |

Ongar broytingar eru í goymsluni síðani 2017. Nám hevur niðurskrivað goymsluna til 0, tí skipanin er løgd um, soleiðis at kommunurnar nú rinda 1.020 kr. um árið í føstum gjaldi fyri hvønn næming.

***Eingin goymsla longur, tí kommunurnar gjalda árligt gjald.***

Nám hevur yvirlit yvir seldar bøkur og bøkur á goymslu við støði í goymsluhagtølum, sum Bókamiðsølan førir. Sambært Námi hevur verið trupult at hava støðugt yvirlit yvir goymsluna, men við nýggjari tillaging av fíggjarskipanini hjá Bókamiðsøluni, ber nú til at síggja, hvat er á goymslu.

*Ognaryvirlit*
Nám hevur ongar ognir, sum skulu skrásetast í Búskaparskipan Landsins. Stovnurin eigur ein bil, og hevur ikki aðra kostnaðarmikla útgerð. Nám hevur yvirlit yvir teldur, telefonir og útgerð í rokniarki.

*Peningastovnskonta*
Nám hevur peningastovnskontu til m.a. inntøkur frá netsølu og royalties. Gjaldstovan tømir kontuna regluliga. Í 2021 hevur Nám gjørt kontuna upp fýra ferðir. Landsgrannskoðanin mælti til, at kontan verður gjørd upp hvønn mánað, og at bókingarskjøl verða løgd við uppgerðunum.

*Goymsla*
Leigan fyri goymslupláss frá Bókamiðsøluni verður ásett eftir, hvussu nógvir plattar við bókum eru á goymslu. Nám miðar eftir at minka um talið av bókum á goymslu.

Bókagoymslan er skrásett í búskaparskipanini hjá Bókamiðsøluni, og Nám stemmar hana av við Búskaparskipan landsins. Bókamiðsølan telur goymsluna upp árliga, og Nám tekur stakroyndir við ársenda.

Í 2007 fekk táverandi Føroya Skúlabókagrunnur loyvi frá aðalráðnum til at støðla kostnaðin av framleiðsluni til útgávur inn á goymslu. Nám hevur ikki støðlað til útgávur farnu trý árini. Sambært Námi er orsøkin til at eingin rørsla er frá 2018 til 2021, at farið er yvir til nýggjan søluleist, har kommunur gjalda árligt gjald fyri undirvísingartilfar.

### Kunningartøkni
KT-netið hjá Námi er knýtt í Landsnet. Seinasta KT-grannskoðanin var gjørd av einum grannskoðanarvirki í juni 2021. Grannskoðarin hevði trý tilmæli við høgari raðfesting, átta við miðal raðfesting og tvey við lágari raðfesting. Landsgrannskoðanin mælti til, at tilmælini verða bøtt skjótast gjørligt. Nám hevur víst á, at tað verður arbeitt við einari nýggjari skipan, og so skjótt hon er komin at virka um tvey til trý ár, verður gamla skipanin Kervi sløkt.

### Uppfylging frá seinastu frágreiðing
Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin eisini umrøtt grannskoðan av Námi. Ll. nr. 53/2014 “um at útvega undirvísingarmiðlar o.a.” var sett í gildi í mai 2014. Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið arbeiddi við at umskipa Nám við atliti at bygnaðarbroytingum í ráðnum, har Nám skuldi átaka sær øktar uppgávur sum fakligur og námsfrøðiligur menningardepil. Tí var kunngerðin um virksemi á Námi ikki gjørd enn.

Arbeiðið at skipa eftirútbúgvingina í síni heild, sum byrjaði í 2013, var ikki liðugt. Sambært landsstýrismanninum var tað arbeiðið eisini tongt at bygnaðarbroytingunum og broyttu uppgávunum hjá Námi.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at stovnurin var skipaður við einum toymisbygnaði, sum var í støðugari menning og mentur við atliti at nýggjum uppgávum, har Prógvstovan er partur av Námi. Harumframt var ein ráðgevingareind skipað, umframt øktu uppgávurnar innan KT-menning. Ráðgevingartoymið, sum eftir ætlan skuldi skipast sum ein námsfrøðiligur menningardepil, var komið væl áleiðis, og arbeiðið at gera reglur um virksemið var byrjað.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Nám nú hevur skipað ráðgevingina sum eina deild, og er sostatt farið frá toymisbygnaðinum til ein meira klassiskan bygnað. Tá nú bygnaðurin er komin upp á pláss, er farið undir arbeiðið at gera reglur um virksemið á stovninum, sambært § 3, stk. 2, í Ll. nr. 53/2014 “um at útvega undirvísingarmiðlar o.a”.

## 7.5 Fólkaskúlin (LG 2021/207-232)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað nakrar læraraløgnir í fólkaskúlanum. Játtanin til fólkaskúlan er á høvuðskontu 7.23.2.01 “Fólkaskúlin”, og í 2021 er hon 402 mió.kr., harav meginparturin er til lønir. Sambært fíggjarlógini eru 781 fulltíðarstørv í 2021.

Fólkaskúlin virkar eftir Ll. nr. 125/1997 “um fólkaskúlan”. Sambært § 32, stk. 2, skipar landsstýrismaðurin í mentamálum talið av lærarum á skúlunum. Skipanin er grundað á upplýsingar frá skúlunum um væntað tal av næmingum, flokkum o.ø.

Einstaki skúlin sendir Undirvísingarstýrinum tølini, og stýrið tillutar skúlunum tímar og umsitur forskipanina til lønarkoyringar. Gjaldstovan rindar lønirnar út.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 327.312 | 348.163 | 370.435 | 379.819 | 398.071 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.809 | 728 | 1.104 | 834 | 1.111 |
| Tilskot til einstaklingar | 9 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Stuðul til annað virksemi | 1.099 | 1.086 | 1.029 | 1.236 | 1.091 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 1.116 | 1.788 | 1.840 | 1.660 | 1.908 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -19.228 | -27.845 | -5 | 0 | 0 |
| Flyting frá kommununum til landið | 0 | 0 | 0 | -340 | -554 |
| **Tilsamans** | **312.116** | **323.919** | **374.402** | **383.208** | **401.626** |

### Sandoyar Meginskúli

Til at grannskoða læraraløgnir í fólkaskúlanum valdi Landsgrannskoðanin Meginskúlan á Sandi. Endamálið við grannskoðanini var at kanna, um útgoldnu lønirnar eru rættar, og um almenni setanarpolitikkurin verður hildin.

Roknskapartøl 2017 til 2021, Sandoyar Meginskúli:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 4.519 | 4.989 | 5.218 | 4.981 | 5.485 |
| Keyp av vørum og tænastum | 3 | 4 | 1 | 11 | 14 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -246 | -334 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **4.276** | **4.660** | **5.220** | **4.991** | **5.499** |

Sambært almenna setanarpolitikkinum eru starvssetanir fyrisitingarligar avgerðir og eru tí fevndar av ásetingunum í fyrisitingarlógini. Skúlin er setanarmyndugleiki, skúlastjórin lýsir størv leys, skipar setanartilgongdina og setir lærarar.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarmál, um lýsingar, umsóknir, læraraprógv, tilboð um setan, setanarbrøv og lønargjaldsumbønir vóru í málunum. Eisini kannaðu vit, um lønirnar eru rættar sambært sáttmála og lønartalvu, um virksemisætlanin er røtt, og um frítíð, sjúka ella avspáking verður skrásett. Eisini kannaðu vit, hvussu starvsfólkamál verða viðgjørd og skrásett.

Samanumtikið vístu stakroyndirnar, at lønirnar eru goldnar eftir røttum sáttmála og røttum lønarflokki. Læararnir hava virksemisætlan og frávera verður skrásett.

Sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Læararafelag skal settur lærari fáa setanarbræv í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina. Setanarpolitikkur landsins ásetir, at setanarbræv skal vera latið, áðrenn viðkomandi byrjar í starvinum. Spurd, um lærarar fáa setanarbræv sambært reglunum, svaraði leiðslan, at sum mannagongdirnar eru, við at setanarbrævið fyrst skal sendast til Gjaldstovuna at fylla út og síðani aftur til skúlan at undirskriva, er tað vanliga seinni enn 14 dagar. Annars var einki at finnast at.

## 7.6 Rásin (LG 2020/207-232)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Rásini. Rásin er stovnssett við Ll. nr. 67/2003. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.2.06 “Skúlatilboð til ung við breki”.

Fyri skúlagongdina rinda næmingarnir 3.500 kr. um mánaðin í 10 mánaðir um árið. Ein næmingur skyldaði 12 t.kr. fyri kostgjald frá 2019. Lítið sannlíkt var, at skuldin fór at verða goldin, og rættarliga var kravið ivasamt, tí næmingurin var undir 18 ár, og tók ikki sjálvur avgerð um skúlagongdina.

Tað hendir seg, at onnur enn næmingur ella avvarðandi taka avgerð um, at næmingur skal í skúla á Rásini. Flestu næmingar eru undir 18 ár, tí kann vera ivasamt um teir hefta fyri møguligari skuld. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa greiði á, hvønn kravið skuldi sendast til.

Undirvísingarstýrið vísti Rásini á, at um næmingur sjálvur ella avvarandi ikki hava tikið avgerð um, at næmingur skal í skúla á Rásini, átti tann stovnur ella skipan, sum avger tað, at vátta, at tey hefta fyri kostgjaldinum.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at enn er mannagongdin viðvíkjandi kostgjaldinum ikki broytt. Umrøtt verður, hvørjar broytingar kunnu gerast, soleiðis at tað verður lættari umsitingarliga fyri allar partar.

## 7.7 Glasir (LG 2020/207-233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Glasi. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.3.05 “Miðnámsútbúgvingar”, undirkontu 31.

### Depilsráð

Landsstýrismaðurin setir depilsráð, sum sambært Ll. nr. 79/2015 “um skúladepil í Marknagili” m.a. skal tryggja yrkisfakliga virksemið í Marknagilsdeplinum, og at skúlin í størst møguligan mun bjóðar út yrkisfakligar grund-, eftir- og víðariútbúgvingar, sum eru viðkomandi fyri tørvin hjá vinnuni. Sambært lógini verður depilsráðnum heimilað at ráða yvir inntøkufíggjaða virkseminum í Marknagilsdeplinum.

Depilsráðið skal gera starvsskipan fyri virksemi sítt, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna. Í desember 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at góðkenning av starvsskipanini hevur verið knýtt at málinum um báðar sjálvsognarstovnarnar, sum ikki er avgreitt.

Spurdur, hevur landsstýrismaðurin í august 2022 greitt frá, at væntandi verður komið á mál í heyst.

### Sjálvsognarstovnar

Tekniski skúlin í Tórshavn og Føroya Handilsskúli vóru framvegis sjálvsognarstovnar skipaðir sambært Ll. nr. 106/1998 “um yrkisskúlar”, og sum eftir ætlan skuldu taka seg av í 2020.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið helt tað ikki vera haldbart at bíða longur eftir heimildini at flyta avlop yvir um ár, og ætlaði ráðið tí at varðveita annan av sjálvsognarstovnunum, ið skuldi taka sær av inntøkufíggjaða virkseminum. Leisturin fyri umsitingina av inntøkufíggjaða virkseminum verður at líkna við eginraksturin, sum sjálvsognarstovnarnir høvdu, áðrenn Skúladepilin í Marknagili var settur á stovn.

Í desember 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður við ætlanini at leggja báðar sjálvsognarstovnarnar saman, men enn var ikki komið á mál. Stýrini fyri sjálvsognarstovnarnar høvdu samtykt at fara undir eina tilgongd at leggja stovnarnar saman, soleiðis at talan verður um ein sjálvsognarstovn.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin var send Mentamálaráðnum í mai 2017, men ráðið hevði ikki góðkent hana.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Glasir fekk ásetingar við í roknskaparreglugerðina, um hvussu skrásetingin av inntøkum er løgd til rættis, og hvussu prísásetingin av vørum og tænastum verður gjørd, so til ber at kanna, um samsvar er ímillum vørukeyp, vørunýtslu og sølu.

Í desember 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at roknskaparreglugerðin, sum Uttanríkis- og mentamálaráðið fekk í 2021, var løgd til síðis, og skúlin var biðin um eina dagførda reglugerð, tí skúlin er umskipaður og nógv broyttur síðani 2017, og tí at atlit skuldi takast at viðmerkingunum frá Landsgrannskoðanini.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur ikki móttikið nakra dagførda roknskaparreglugerð frá Glasi. Ráðið fer at spyrja eftir reglugerðini, og í sambandi við góðkenningina av henni at tryggja, at atlit verða tikin at viðmerkingunum frá Landsgrannskoðanini.

***Skúlin var biðin um dagførda reglugerð.***

*Inntøku- og stuðulsfíggjað virksemi*

Landsgrannskoðanin hevur áður vístá, at um stovnur hevur fingið loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at hava inntøku- og stuðulsfíggjað virksemi, skal virksemið vísast fyri seg í fíggjarlógini og í landsroknskapinum á serstøkum undirkontum.

Landsgrannskoðanin mælti enn eina ferð til, at inntøkufíggjað virksemi og/ella stuðulsfíggjað virksemi verður skrásett, sum ásett í játtanarreglunum.

Í desember 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at spurningurin viðvíkjandi inntøkufíggjaða virkseminum hjá Glasi, var partur av málinum um, at báðir sjálvsognarstovnarnir skuldu leggjast saman í ein, sum skuldi hava loyvi at hava eginrakstur, eins og sjálvsognarstovnarnir høvdu áður.

*Næmingagjøld*

Síðani 2017 hevði Glasir goldið Fjølriti 250 kr. fyri hvønn næming fyri upphavsrættindi. Næmingarnir rindaðu harumframt 200 kr. fyri avrit o.a., tilsamans skuldu teir rindað 450 kr. um árið.

Við skúlaársbyrjan boðaði Glasir næmingunum frá, at teir skuldu rinda næmingagjøld. Umsitingardeildin krossaði av á einum lista, hvør hevði goldið. Fíggjardeildin hevði ikki yvirlit yvir, hvussu stór skuldin var, ella hvørjir næmingar skyldaðu næmingagjøld.

Frá 2018 til 2020 vóru næmingagjøldini 1.770 t.kr., men næmingarnir høvdu einans goldið 552 t.kr. Áognin, sum var 1.218 t.kr., var ikki skrásett í roknskapinum.

***Áognin, sum var 1.218 t.kr., var ikki skrásett í roknskapinum.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað var ikki nøktandi at krevja gjøld frá næmingum, uttan at halda skil á roknskaparliga, um gjaldið var goldið, og hvussu nógv hvør næmingur skyldaði.

Orsøkin til, at Glasir ikki hevði gjørt meira fyri at fáa áognina goldna, var, at skúlin hevði samskift við Mentamálaráðið um heimildir, og hvussu gjaldið skuldi krevjast inn, men enn hevði Glasir ikki fingið nakra niðurstøðu.

Í 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at sambært lógini “um gymnasialar miðnáms-útbúgvingar”, kann landsstýrismaðurin heimila skúlunum at taka gjald, ið samsvarar við kostprís, fyri ljóstøk, útprenting o.a. tilfar, ið verður nýtt í undirvísingini.

Landsstýrismaðurin segði eisini, at miðnámsskúlarnir helst ongantíð høvdu fingið formligt loyvi at taka gjald frá næmingunum, men nakrir skúlar høvdu í áravís kravt næmingagjald. Uttanríkis- og mentamálaráðið ætlaði at umrøða, um tørvur var at fáa tað formliga upp á pláss.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur ikki umrøtt málið, so enn er einki hent í málinum.

*Eftirlitsslóð v.m.*

Landsgrannskoðanin vísti eins og áður á, at roknskapurin varð ikki rættur, tá ið Glasir bókaði keyp og sølu í fíggjarstøðuni í staðin fyri í rakstrinum, og tað var ikki í samsvari við roknskaparreglurnar. Tað bar ikki altíð til at fylgja eftirlitsslóðini, tí upphæddir vóru fluttar ímillum nógvar ymiskar kontur.

Glasir greiddi frá, at tað var í samsvari við “Depilslógina”, at skúlin bókaði inntøkur og útreiðslur í fíggjarstøðuni.

Landsgrannskoðanin mælti enn eina ferð til at fáa viðurskiftini viðvíkjandi rokn-skapinum í rættlag.

Í desember 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Uttanríkis- og mentamálaráðið tók tað í størsta álvara, at roknskapurin ikki var rættur. Ráðið helt ikki, at bókingarhátturin hjá Glasi var í samsvari við Depilslógina, og fór at taka málið upp við Glasir í sambandi við dagføring av roknskaparreglugerðini.

***Undirvísingarstýrið givið Glasi boð um, at rætta bókingarháttin.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Undirvísingarstýrið hevur víst Glasi á, at grundgevingin fyri at bóka inntøkur og útreiðslur í fíggjarstøðuni er skeiv. Undirvísingarstýrið hevur givið Glasi boð um at rætta bókingarháttin, og at geva Undirvísingarstýrinum boð, tá ið tað er gjørt. Sambært Undirvísingarstýrinum lovaði Glasir, at alt skuldi verða komið upp á pláss í mars 2022, men enn hevur Undirvísingar-stýrið einki hoyrt.

*Lønir*

Upphæddirnar í tímabankanum eru skrásettar sum “skyldugur kostnaður” og drignar frá í rakstrinum, uttan at vera goldnar út. Ultimo 2020 var skylduga tímatalið slakir 26.000 tímar.

Seinastu árini er skyldugi kostnaðurin til lønir støðugt øktur. Í 2017 var hann 6,2 mió.kr., og í 2020 var hann 12,2 mió.kr. 26 lærarar áttu 13.415 tímar á fyri tíðina fram til skúlaárið 2019/20. Teir áttu yvir 300 tímar hvør og upp í nærum 1.300 tímar.

Glasir hevði biðið deildarleiðarar og starvsfólk um at minka tímabankan, har tíma-bankin ikki tyktist fylgja endamálinum. Sambært Glasi var saldan hjá summum lærarum lækkað í 2020/21 í samsvari við áheitanina.

Onkrir lærarar við stórum tímabanka kundu ikki fáa tímarnar ella yvirtíð goldna, tí teir høvdu tímaniðurskurð sambært § 26 í sáttmálanum hjá YF. 120 lærarar kundu sambært YF-sáttmálanum eiga +/- 300 tímar. Teir flestu høvdu positiva tímasaldu.

Í desember 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at Glasir skal halda seg til ásetingina í § 26 í sáttmálanum og, alt tað ber til, ráðleggja árliga tímatalið til 1.750 +/-300 klokku-tímar. Uttanríkis- og mentamálaráðið ætlaði saman við Undirvísingarstýrinum at taka málið upp við Glasir fyri at finna út av, um nakað skal stillast við mátanum, sum Glasir brúkar tímabankan.

### Fíggjarstøða

Í 2018 vísti Landsgrannskoðanin á, at tað var átaluvert, at skúlin enn ikki hevði nakað yvirlit yvir ognirnar, tó at hann í 2010 upplýsti, at hann fór at gera ognaryvirlit. Glasir var samt við Landsgrannskoðanina, men vísti samstundis á, at tey høvdu ikki arbeiðsorku til at gera yvirlitið, tí síðani 2013 var øll orkan farin til umsitingina av nýggja lønarsáttmálanum. Glasir hevði gjørt avtalu við Gjaldstovuna og Mentamálaráðið um at gera yvirlit yvir innbúgv og maskinur við virði oman fyri 50 t.kr., ið fóru at verða keyptar til nýggja skúlabygningin, og at gamalt innbúgv og maskinur, ið tey tóku við sær, eisini skuldu skrásetast.

Glasir hevði ikki yvirlit yvir maskinur, innbúgv o.a. Leiðslan greiddi frá, at bygningurin var enn ikki yvirtikin frá Landsverki, og vísti á, at ein umbøn um eykajáttan var til viðgerar um at játta 6 mió.kr. til manglar í bygninginum, sum skuldu gerast, áðrenn hann kundi góðkennast og fáa nýtsluloyvi.

Í støðisognini hjá Glasi í Búskaparskipan landsins vóru fimm bygningar í Hoydølum, serligt innbúgv og tríggir bilar skrásettir. Leiðarin á KT-deildini hevði yvirlit yvir allar teldur hjá skúlanum.

Landsgrannskoðanin mælti enn eina ferð til, at Glasir útvegaði yvirlit yvir ognirnar hjá skúlanum, og at allar ognir, sum skuldu skrásetast í landsroknskapinum, vórðu skrásettar. Í desember 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini.

***Mælt var til at útvega yvirlit yvir ognirnar hjá skúlanum.***

#### *Peningastovnskontur og gjaldkort*

Á kontu í BankNordik, "Føroya Studentaskúli (inngjøld)" bókaði Glasir rørsluna eina ferð um mánaðin. Ultimo 2020 stóðu 153 t.kr. á kontuni. Skúlin hevði arvað kontuna í samanleggingartilgongdini. Kontan var stovnað í samráði við Mentamálaráðið til at rinda fyri stakgreinalestur hjá næmingum í øllum miðnámsskúlunum. Glasir hevði fleiri ferðir biðið Undirvísingarstýrið um at fáa ábyrgdina av kontuni staðsetta, uttan at tað var gjørt.

Í desember 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið og Undirvísingarstýrið fóru at umrøða, hvat skuldi gerast við kontuna, og um hvørt skipanin við depositum til innskriving er røtt.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur ikki umrøtt málið, so enn er einki hent í málinum.

#### *Stuttfreistað skuld*

Salda á St.Rk. 0881 "Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ikki inntøkuført - granskingarst., gávur o.t. | -319 | -621 | -1.276 | -1.376 | -1.567 |

Talan er í høvuðsheitum um inntøkur og útreiðslur, sum bert eru bókaðar í fíggjarstøðuni. Bókingarnar eru ikki í samsvari við reglurnar um, at inntøkur og útreiðslur skulu bókast í rakstrinum. Roknskapurin vísir ikki samlaða virksemið hjá skúlanum, og tað forðar fyri gjøgnumskygni.

Landsgrannskoðanin mælti staðiliga til, at allur raksturin var bókaður í rakstrarroknskapinum.

Uttanríkis- og mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at inntøkur og útreiðslur skulu bókast í rakstrinum og ikki í fíggjarstøðuni. Ráðið ætlaði at taka málið upp við Glasir.

***Inntøkur og útreiðslur skulu ikki bókast í fíggjarstøðuni.***

## 7.8 Lønir á serbreytunum (LG 2018/207-233)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av lønunum hjá lærarunum á serbreytunum á Miðnámi á Kambsdali, Tekniska skúla í Klaksvík og á Glasi í Tórshavn.

Landsgrannskoðanin kundi ikki við vissu siga, at lønirnar vóru rættar, við at samanbera tær. M.a. var ymiskt, hvussu ársverk, skrásetingar av arbeiðstíð, lønarsáttmálar, flokkingar, starvsaldur o.a. vóru umsitin. Hóast talan var um *eina* námsskipan, vóru tveir ymiskir lønarsáttmálar brúktir.

Uttanríkis- og mentamálaráðið greiddi frá, at í apríl 2019 var semja undirskrivað ímillum Føroya Tekniska Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið. Partarnir samdust um, at størvini á serbreytunum skuldu flokkast, og avtala skuldi gerast um arbeiðstíð.

Í samráðingunum við Yrkisfelagið Miðnám hevði Uttanríkis- og mentamálaráðið eisini kravt, at partarnir samdust um at endurskoða lønirnar á serbreytunum. Í sáttmálanum í mai 2019 er ásett, at størvini á serbreytini skulu flokkast, og avtala gerast um arbeiðstíð.

***Setanarviðurskiftini við í semjuni við Yrkisfelagið Miðnám.***

Í 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at semja var gjørd um nýggjan sáttmála við Yrkisfelagið Miðnám, har viðurskiftini hjá serbreytini vóru partur av semjuni.

Landsstýrismaðurin greiddi eisini frá, at "*Undirvísingarstýrið hevur kunnað Miðnám á Kambsdali og Miðnámsskúlan í Suðuroy um semjuna.*

*Fyri Miðnám á Kambsdali eru boðini, at tey beinanvegin skulu gjøgnumganga allar setanir og fáa setanarskriv o.l. avgreidd. Harumframt at tey 1. januar 2022 hava sett í verk hóskandi skráseting av arbeiðstíð. Undirvísingarstýrið hevur biðið um at fáa fyrilagt, hvussu skúlin ætlar at skráseta arbeiðstíð frameftir.*

*Fyri Miðnám í Suðuroy eru boðini, at tey skulu seta starvsfólk eftir semjuni og beinanvegin fara undir at fáa hóskandi skráseting av arbeiðstíð. Undirvísingarstýrið fylgir hesum upp, og fer at biðja um at fáa fyrilagt, hvussu skúlin skrásetir arbeiðstíðirnar.*

*Tað er enn ikki gjørd semja við Føroya Tekniska Lærarafelag, men samráðingarnar eru byrjaðar. Undirvísingarstýrið vónar, at semja blívur gjørd í 2021, soleiðis at Tekniski skúli í Klaksvík og Glasir kunnu fáa øll viðurskifti upp á pláss til skúlaárið 2022/23".*

***Setanarviðurskiftini hjá serbreytini við í semjuni við Føroya Tekniska Lærarafelag.***

***Skúlarnir skulu skipa hóskandi tíðarskráseting.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at semja er gjørd við Føroya Tekniska Lærarafelag um størvini á serbreytini. Skúlarnir hava tillagað nakrar setanir, og skulu annars fylgja ásetingunum í sáttmálanum í sambandi við setan. Ein avleiðing av semjuni er, at skúlarnir skulu skipa hóskandi tíðarskráseting. Tað er ikki sett í verk, og framvegis arbeiða starvsfólkini á serbreytini uttan at skjalfesta arbeiðstíð.

## 7.9 Tekniski skúli í Klaksvík, løgujáttan (LG 2018/207-233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av løgujáttanini til Tekniska skúla í Klaksvík. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.3.07.

Sambært landsroknskapinum kostaði skúlin 36,6 mió.kr. Tó hevði landið goldið 38,2 mió.kr. fyri byggingina. Munurin stóðst av, at Landsverk í 2016 hevði sent høvuðsráðgevanum ein faktura, 1,6 mió.kr., har Landsverk vísti til, at feilir hjá ráðgevanum høvdu gjørt, at aðrar arbeiðstøkur vóru vorðnar dýrari. Upphæddin var mótroknað í prosjekteringsútreiðslunum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað var lítið sannlíkt, at landið fór at fáa peningin frá høvuðsráðgevanum, og at roknskapurin fyri byggingina tí ikki var rættur.

Í 2018 hevði høvuðsráðgevin einki goldið. Mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at bókingarhátturin gjørdi, at roknskapurin var ikki rættur. Í 2019 segði landsstýrismaðurin, at Landsverk royndi at fáa semju við høvuðsráðgevan, tí at eitt sakarmál var kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Landsverk hevði latið gerðarrættinum málið.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at síðani 2020 var roynt at fáa semju millum partarnar, men tó uttan nakra niðurstøðu.

Seinastu tíðina hevði tað víst seg, at bygningurin lak sera illa. Nærri kanningar vístu, at bygningurin mátti umvælast. Landsverk hevði boðið umvælingina út og fingið tilboð á slakar 2 mió.kr. við MVG. Samlaða kravið í hesum máli var tískil hækkað til 3,4 mió.kr. við MVG. Tað var fráboðað gerðarrættinum 24. august 2021.

Partarnir samráddust tá um eitt sýn og meting á staðnum, fyri at fáa staðfest manglar, áðrenn teir vóru umvældir.

***Eingin semja funnin í gerðarrættarmálinum.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Landsverki, eru sýn og meting gjørd av takinum á Tekniska skúla í Klaksvík. Semja er tó ikki funnin millum partarnar, men málini eru enn áleikandi. Landsverk ger í løtuni eina nýggja roynd at fáa semju, men annars verður hildið fram við gerðarrættarmálinum. Málið um lekan er partur av málinum.

## 7.10 Miðnám í Vestmanna (LG 2021/207-233)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Miðnámi í Vestmanna. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.3.05 “Miðnámsútbúgvingar”, undirkontu 27.

Miðnám í Vestmanna er tilfeingisbreyt, skipað eftir Ll. nr. 62/2012 “um gymnasialar miðnámsútbúgvingar”. Útbúgvingin tekur 3 ár, og gevur næmingum fakligt grundarlag fyri hægri lestri og framhaldandi útbúgvingum.

Skúlin bjóðar út ferðaleiðaraskeið sambært Ll. nr. 22/2004 “um yrkisskeið”. Sambært fíggjarlógini var játtanin til ferðavinnuútbúgvingina í 2019 flutt til játtanina hjá Miðnámi í Vestmanna. Í 2020 var samlaða játtanin til skúlan 7,6 mió.kr.

### Rakstur

Roknskaparreglugerðin er frá 2015, og Undirvísingarstýrið hevur heitt á skúlan um at dagføra reglugerðina.

Roknskapartøl fyri Miðnám í Vestmanna og inntøkufíggjað virksemi:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 5.118 | 5.362 | 5.894 | 5.861 | 6.642 |
| Keyp av vørum og tænastum | 637 | 655 | 784 | 930 | 867 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 196 | 143 | 253 | 237 | 307 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 78 | 48 | 35 | 141 | 37 |
| Søla av vørum og tænastum | -12 | -15 | -65 | -122 | -88 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovnar (útr.) | 0 | 5 | 0 | 8 | 14 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovnar (innt.) | -91 | -61 | -71 | -42 | -449 |
| **Tilsamans** | **5.927** | **6.137** | **6.830** | **7.013** | **7.330** |

Roknskaparliga skilir skúlin ímillum Tilfeingisbreyt og Ferðavinnuútbúgving við at bóka á staðartættirnar 0000 “ógreinað”, 2000 “Tilfeingisbreyt” og 3000 “Ferðaleiðaraskeið”.

Roknskapartøl 2020 býtt á staðartættir:

*t.kr.*

| Heiti | 0000 | 2000 | 3000 |
|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 135 | 5.258 | 468 |
| Keyp av vørum og tænastum | 23 | 808 | 99 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 10 | 216 | 11 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 141 | 0 |
| Søla av vørum og tænastum | -122 | 0 | 0 |
| Innanh. flyt millum alm. stovnar (útr.) | 8 | 0 | 0 |
| Innanh. flyt millum alm. stovnar (innt.) | -42 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **12** | **6.423** | **578** |

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini er ætlanin at skipa ferðavinnuútbúgvingina sum styttri framhaldsútbúgving, heldur enn ferðaleiðaraskeið sum yrkisskeið við luttøkugjaldi.

***Eru givin at brúka kontu til Inntøku-fíggjað virksemi.***

Sambært skúlanum, hava tey tørv á at skilja ímillum ferðaleiðaraskeið og tilfeingis-breytina, og halda tey tí, at rættast er at bóka á staðartættir. Skúlin hevur havt ynski um at strika undirkontuna fyri inntøkufíggjað virksemi fyri at lætta um roknskaparliga.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at kontan til inntøkufíggjað virksemið hjá Miðnámi í Vestmanna er stongd.

Sambært Uttanríkis- og mentamálaráðnum eru inntøkurnar frá skeiðsvirkseminum rættiliga avmarkaðar, og skeiðini eru skipað sambært lóg um yrkisskeið, har reglur eru um, hvussu tey skulu skipast og fíggjast. Ráðið heldur tí, at skúlin hevur ikki tørv á serstakari játtan til inntøkufíggjað virksemi, men at inntøkurnar kunnu bókast á vanliga raksturin. Málið verður tikið upp við Fíggjarmálaráðið.

### *Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarútgjøld, um lønirnar vóru rættar, um skjalprógv vóru fyri útbúgvingum, starvsaldri o.ø. Eisini kannaðu vit, hvussu almenni setanarpolitikkurin er hildin, um størv eru lýst leys, um setanarbólkur viðger umsóknir, og um setanarbræv er latið starvsfólkunum. Einki var at finnast at.

### *Keyp av vørum og tænastum*

Skúlin biður um tilboð og roynir at vísa sparsemi og skynsemi, tá ið tey keypa vørur og tænastur. Rektarin góðkennir roknskapin mánaðarliga og kannar, um rokningar eru skrásettar og goldnar.

### *Ferðaútreiðslur*

Sambært avtalu frá 2018 “um tænastuferðir” kann arbeiðsgevari lata starvsfólkum endurgjald fyri útreiðslur á tænastuferð. Fyri tænastuferðir í Føroyum verða goldnir dag- og tímapengar, men tímapeningur verður ikki goldin, um tænastuferðin byrjar eftir kl. 7 og endar fyri kl. 19.

Miðnám í Vestmanna hevur goldið starvsfólkum tímapening, tó at tænastuferð byrjar eftir kl. 7 og endar fyri kl. 19. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja ásetingunum í avtaluni um tænastuferðir.

Almenna busssambandið passaði ikki til at næmingar úr Kollafirði og harumleiðir kundu ganga í Miðnámi í Vestmanna. Skúlin hevði tí skipað fyri, at næmingar vóru koyrdir við hýruvogni til Kollfjarðardal, haðani teir kundu taka bussin til Vestmanna. Í 2020 vóru útreiðslurnar til hýruvogn 51 t.kr. Við skúlaársbyrjan 2021 helt tann koyringin uppat.

Sambært landsstýrismanninum hevur Undirvísingarstýrið greitt frá, at tað var í samráð við stýrið, at næmingarnir vóru koyrdir við hýruvogni, sum skúlin rindaði fyri.

Sambært Undirvísingarstýrinum var tað ein neyðloysn, tí busssambandið var ikki nøktandi. Við skúlaársbyrjan 2021 er busssambandið umskipað, og riggar sum tað skal. Skuldi ein líknandi støða íkomið aftur, heldur landsstýrismaðurin, at tað er ikki uppgávan hjá skúlanum at gjalda fyri, at næmingar sleppa til og frá skúlanum.

## Fíggjarstøða

### *Inntøkur, debitorar og banki*

Inntøkurnar eru frá ferðaleiðaraskeiði og útleigan av hølum. Sølan fyri árið 2020 er bókað í januar 2021 eftir uppgerð av peningastovnskontu. Skúlin hevur eftirlit við, at rokningarnar vera goldnar.

Landsgrannskoðanin mælti skúlanum til at brúka debitorskipanina í Búskaparskipan landsins til at skráseta inntøkur, gera rokningar og fylgja við skuldarum, og at umhugsa at brúka peningastovnskonturnar hjá Gjaldstovuni, heldur enn at hava egna kontu.

Sambært landsstýrismanninum hevur Undirvísingarstýrið samskift við skúlan um viðurskiftini og um, hvussu fyriskipanirnar kunnu betrast.

### *Gjaldkort*

Rektarin hevur gjaldkort, sum er knýtt at vanligu peningastovnskontuni hjá skúlanum. Heimildarváttan er ikki fingin til vega.

Sambært rundskrivi um gjaldkort hjá tí almenna skal gjaldkort vera stovnað á serstaka kontu. Í roknskaparreglugerðini skal standa tann peningaupphædd, sum í mesta lagi kann vera á kontuni, og meginreglan er, at peningur eigur ikki at flytast á gjaldkort-kontuna, fyrr enn øll nýtsla av kortinum er avgreidd og bókað.

Sambært Uttanríkis- og mentamálaráðnum vil Gjaldstovan hava, at gjaldkortini skulu vera frá Eurocard. Gjaldstovan hevur avtalu við Eurocard, sum er ein vanligur kreditorur. Harvið er eingin peningastovnskonta knýtt at kortinum. Undirvísingarstýrið samskiftir við skúlan um at flyta til Eurocard og fáa gjørt heimildarváttan.

### *Støðisogn og ognaryvirlit*

Í Búskaparskipan landsins eru tríggjar ognir skrásettar sum støðisogn hjá Miðnámi í Vestmanna; t.e. bygningur, grundstykki og kopimaskina. Skúlin hevur annað ognar-yvirlit, sum er dagført í mai 2021. Serligur dentur er lagdur á at skráseta KT-útbúnaðin.

Keypsvirðið á fleiri ognum er yvir 50 t.kr., og eiga tær tí at verða skrásettar í Búskapar-skipan landsins. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja roknskaparkunngerðini og skráseta størri ognir í Búskaparskipanina.

Landsgrannskoðanin vísti eisini á, at tað er skynsamt eisini at føra yvirlit yvir smærri ognir, ikki minst KT-útbúnað, sum eisini hevur serstakar reglur um burturbeining.

Skúlin vísti á, at tað kann vera trupult at virðismeta telduútbúnað, tí virðið minkar skjótt og útbúnaðurin verður tíðum skiftur út. Telduútbúnaður er heldur ein rakstrarútreiðsla enn keyp av ogn.

## KT-skoðan

Eftir áheitan frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum hevur privat grannskoðanarvirki í 2020 gjørt KT-skoðan av Miðnámi í Vestmanna sambært rundskrivi frá Fíggjarmála-ráðnum um KT-trygd. Niðurstøðan av skoðanini er, at trygdarviðurskiftini ikki til fulnar eru í samsvari við krøvini í trygdarrundskrivinum, og grannskoðarin hevði tilmælir til staðfestu veikleikarnar.

## 7.11 Miðnám á Kambsdali (LG 2021/207-233)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapirnar hjá Miðnámi á Kambsdali og Klaksvíkar HF-skeiði. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.3.05, "Miðnámsútbúgvingar", undirkontu 32 "Miðnám á Kambsdali" og undirkontu 22 "Klaksvíkar HF-skeið".

Miðnám á Kambsdali er skipað við støði í Ll. nr. 62/2012 "um gymnasialar miðnáms-útbúgvingar". Skúlin veitir eisini undirvísing samsvarandi Ll. nr. 107/1998 "um støðis-útbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið" og Ll. nr. 49/2005 "um stuttar framhaldsútbúgvingar á yrkisskúlum og almennum útbúgvingarstovnum".

Klaksvíkar HF-skeið verður umsitið av Miðnámi á Kambsdali, men er staðsett á Tekniska skúla í Klaksvík.

Gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar eru skipaðar við útbúgvingarbreytum, ið taka 3 ár, og við fyrireikingarbreyt, ið tekur 2 ár. Tær geva næmingunum fakligt grundarlag undir hægri lestri og framhaldandi útbúgving.

Miðnám á Kambsdali bjóðar eisini serbreyt, sum í august 2020 víðkaði virksemið, til eisini at hava næmingar í bólki C, har normeringin er eitt starvsfólk fyri hvønn næming.

### Roknskapartøl

Roknskapartøl fyri Miðnám á Kambsdali 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 35.843 | 38.283 | 41.369 | 42.932 | 44.505 |
| Keyp av vørum og tænastum | 5.005 | 5.809 | 4.419 | 3.709 | 5.105 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 1.513 | 842 | 205 | 1.316 | 1.241 |
| Leiga, viðlíkah., skattur og avskrivingar | 785 | 764 | 408 | 663 | 582 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | -1 | -2 | -3 | -3 | -1 |
| Søla av vørum og tænastum | -1.275 | -1.410 | -1.668 | -1.405 | -1.542 |
| Vanligar flyt.innt. og flyt.innt. úr útl. | 0 | -667 | 42 | -185 | -82 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 0 | 0 | 0 | 0 | 17 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -382 | -247 | -757 | -2.599 | -2.835 |
| Flyting frá kommununum til landið | 0 | -65 | -65 | -65 | -65 |
| **Tilsamans** | **41.489** | **43.306** | **43.951** | **44.362** | **46.925** |

Miðnám á Kambsdali hevur innanvirkis roknskap, sum á staðartátti vísir fyrisiting, kantinu, bókasølu, undirvísingarvirksemi, serbreyt, NGK[25] v.m. Sambært skúlanum bóka tey Nordplussverkætlanir á staðartátt í fíggjarstøðuni.

Roknskapartøl fyri Klaksvíkar HF-skeið 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Rakstur | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.676 | 3.227 | 3.159 | 3.312 | 3.340 |
| Keyp av vørum og tænastum | 259 | 109 | 84 | 60 | 76 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 149 | 14 | 90 | 18 | 47 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 15 | 16 | 9 | 0 | 0 |
| Søla av vørum og tænastum | -1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | 0 | 0 | 0 | -28 | -33 |
| **Tilsamans** | **4.097** | **3.365** | **3.342** | **3.362** | **3.430** |

### Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin, sum er frá august 2020, er ikki góðkend. Undirvísingarstýrið hevur kunnað skúlan um, at stýrið arbeiðir við roknskaparreglugerðum fyri alt miðnámsøkið, tí ger Miðnám á Kambsdali ikki meira við málið.

[25] Nordatlantisk Gymnasieklasse.

Allar útgjaldingar skulu, sambært roknskaparkunngerðini, um Búskaparskipan landsins. Hevur ein stovnur fingið loyvi til at hava egna kontu og kassa, skulu tey bert brúkast til tað, sum Fíggjarmálaráðið hevur ásett.

*Lønir v.m.*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað lønarumsitingina, herundir um lýsingar, umsóknir, prógv, tilmælir um setan og setanarskriv eru í lønarmálunum. Einki var at finnast at lønarmálunum.

Sambært § 27 í sáttmálanum hjá Yrkisfelagnum Miðnám kann yvirtíð upp til 300 tímar pr. lærara setast í tímabanka. Fara tímarnir ikki í tímabankan, verða teir goldnir út so hvørt. Fara lærarar úr starvi, verða yvirtímar útgoldnir og undirtímar afturhildnir í lønini. Við árslok 2021 og í juni 2022 eiga fleiri lærarar meira enn 300 tímar hvør.

Tímatalvan hjá lærarunum er skrásett í skipan, sum er samantvinnað við tímum og undirvísing. Møtir lærari ikki, skal hann boða skrivstovuni frá, sum skrásetir alla fráveru.

Leiðslan skrásetir ikki arbeiðstíð, men onnur í umsitingini skráseta arbeiðstíð, sjúku, feriu v.m. í egið rokniark.

Feriuárið hjá lærarunum er lagt eftir undirvísingini. Leiðsla og umsiting arbeiða eina viku, eftir at næmingarnir eru farnir í summarferiu, og byrja aftur eina viku áðrenn skúla-árið byrjar.

*Ferðaútreiðslur*

Ferðaútreiðslur seinastu fimm árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ferðing og flutn., alm. sett - innanlands | 198 | 194 | 86 | 77 | 240 |
| Ferðing og flutn., alm. sett - uttanlands | 349 | 1.232 | 412 | -1 | 273 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 32 | 108 | 68 | 63 | 260 |
| **Tilsamans** | **579** | **1.535** | **566** | **139** | **773** |

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið ferðaútreiðslurnar í 2020 og 2021, serliga útreiðslurnar til ferðing uttanlands.

Í 2021 eru tvær rokningar við tilhoyrandi kreditnotum bókaðar, og í 2020 eru somu kreditnotur eisini bókaðar. Spurdur, um bókingarnar vóru rættar, svaraði skúlin, at bókingarnar eru gjørdar av Gjaldstovuni, og ganga tey tí útfrá, at tær eru rættar.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur tosað við Gjaldstovuna um bókingarnar, sum Landsgrannskoðanin biður um viðmerkingar til. Í mars 2021 hevur kreditorurin goldið Gjaldstovuni peningin aftur fyri kreditnoturnar, ið eru bókaðar í 2020. Kreditnoturnar eru tí afturførdar í 2021, tí roknskaparárið 2020 var stongt.

Í 2021 hevur skúlin á Kambsdali rindað fyri ferð í oktober 2019. Endurgjald, sum skúlin í 2020 hevur fingið frá Gribskov kommunu fyri ferðina, er eisini bókað í 2021. Lands-grannskoðanin heldur, at tíðaravmarkingarnar eru ikki rættar.

Landsgrannskoðanin samanbar nakrar ferðauppgerðir við ásetingarnar í rund-skrivinum um tænastuferðir uttanlands. Vit høvdu nakrar spurningar, sum skúlin hevur svarað. Landsgrannskoðanin mælti til, at ferðaloyvi verða givin, áðrenn ferðir verða lagdar til rættis, og at avroknað verður innan 3 vikur eftir heimkomu.

*Keyp av vørum og tænastum*

Miðnám á Kambsdali hevur ikki keypt stórvegis av útbúnaði, men nøkur keyp eru oman fyri 100 t.kr. Skúlin hevur biðið um tilboð í sambandi við øll keypini, og prísurin var eitt

av atlitunum. Tilboðsfyrispurningar og krøv vóru sett, áðrenn ársroknskaparlok, og vøran er latin áðrenn 15. februar árið eftir.

***Landsgrannskoðanin mælti til at brúka talgildar rokningar.***

Skúlin fær bæði talgildar og ikki-talgildar rokningar. Í Ll. nr. 56/2017 "um talgildar rokningar" er ásett, at almennir stovnar skulu hava rokningar talgilt frá veitarum. Landsgrannskoðanin mælti til, at skúlin frameftir fær talgildar rokningar. Skúlin heldur, at tað verður ringt at fáa smáu veitararnar at senda talgildar rokningar, men tey kunnu heita á veitararnar um at gera tað.

## Fíggjarstøða

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Bygningar, netto | 0 | 280 | 260 | 30.239 | 26.569 |
| Goymslur | 35 | 46 | 43 | 49 | 29 |
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t. | 162 | 62 | 61 | 44 | 6 |
| Onnur áogn | 87 | 114 | 82 | 0 | 105 |
| Banka- og girokontur | 418 | 202 | 280 | 183 | 90 |
| Forskotskassar | 18 | 16 | 34 | 10 | 22 |
| Avrokning MVG | -51 | -29 | -38 | -14 | -34 |
| Tíðaravmarkan | -38 | -25 | -25 | -9 | 0 |
| Ikki inntøkuført - gransk.st., gávur o.t. | -13 | -39 | -52 | -710 | -751 |
| Skuld, annað | -1.578 | -2.352 | -1.110 | -1.656 | -1.501 |

### *Støðisogn*

Miðnám á Kambsdali hevur skrásett Bygning á Dalsvegi 1, og "Orkudepilin á Kambsdali" í støðisognini. Í 2021 hevur skúlin keypt nýggjan bil, sum ikki er skrásettur í Búskaparskipan landsins.

Sambært roknskaparkunngerðini skal yvirlit gerast yvir ognir, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr.

***Yvirlit yvir støðisogn ikki fullfíggjað.***

Sambært Miðnámi á Kambsdali er støðisognin í Búskaparskipan landsins ikki full-fíggjað. Leiðslan var ikki kunnað um skipanina við ognaryvirliti. Tey fara at senda neyðugu skrásetingarskjølini til Gjaldstovuna.

Skúlin hevur egna skráseting av leysafæ, tó er tað ikki dagført.

### *Peningastovnskontur og forskotskassi*

Miðnám á Kambsdali hevur fýra peningastovnskontur til inntøkur. Tríggjar av kontunum hava gjaldkort hjá starvsfólkum atknýtt. Skúlin hevur rindað koyripengar og útlegg í sambandi við seturskúla og depositum fyri NGK-næmingar av kontunum. Til fjórðu peningastovnskontuna, ið Føroya Handilsskúli á Kambsdali hevði, áðrenn samanleggingina av skúlunum, er knýttur ein gjaldterminalur. Gjaldstovan tømir kontuna mánaðarliga.

Skúlin hevur loyvi til fýra gjaldkort, harav tvey kredittkort, ið ikki eru knýtt at kontu í peningastovni. Sostatt eru tvær peningastovnskontur uttan loyvi. Landsgrannskoðanin mælti til, at skúlin fær formligu viðurskiftini avgreidd.

Saldurnar í Búskaparskipan landsins samsvara við ársyvirlitið frá peningastovnum 31. desember 2021.

### *Goymsla*

Kantinan hevur vørugoymslu, eisini frystigoymslu. Starvsfólk telja goymsluna við árslok.

*Tænastu-, vøruskuldarar o.t., og onnur áogn*
Bókhaldarin fylgir við, at øll skuld verður goldin. Onnur áogn, 105 t.kr., er áogn hjá Barsilsskipanini, ið er goldin í januar 2022.

*Ikki-inntøkuførdur granskingarstyrkur*
Ikki-inntøkuførdur grannskingarstyrkur, greinaður á staðartættir:

*t.kr.*

| Heiti | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ógreinað | -26 | -18 | -26 | -26 | -632 | -608 |
| Nordpluss | -175 | 5 | -14 | -46 | -71 | -143 |
| NGK | 0 | 0 | 0 | 19 | -6 | 0 |
| **Tilsamans** | **-201** | **-13** | **-39** | **-52** | **-710** | **-751** |

Í 2020 var næmingaheimið selt, og skúlin fekk ágóðan, sum var 754 t.kr. Peningurin er oyramerktur til trý endamál, og er bókaður á "ógreinað" í fíggjarstøðuni. Bókhaldarin hevur uppgerð yvir nýtsluna av kontuni í rokniarki, har 419 t.kr. vóru eftir.

Tær 143 t.kr., sum standa á Nordpluss í 2021, eru sambært skúlanum 6 verkætlanir, sum ikki eru rakstrarførdar. Stígur kom í onkra av verkætlanunum, tí korona forðaði fyri ferðing millum lond. Verkætlanirnar eru farnar í gongd aftur, og eru væntandi gjøgnumførdar og endaðar í 2022 og 2023.

*Skuld annað*
Í 2021 er onnur skuld 1,5 mió.kr. Talan er um nakrar reguleringar, har avsett er fyri skylduga løn og saldu í tímabanka, men størsti parturin av salduni er frá 2016. Niðanfyri er saldan á "Skuld – løn o.t." aftur til 2016:

***Saldur í fíggjarstøðuni stava frá samanleggingini í 2016.***

*t.kr.*

| Heiti | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ógreinað | -843 | -151 | -894 | 365 | -654 | -499 |
| Undirvísingarvirksemi | -1.458 | -1.458 | -1.458 | -1.458 | -1.002 | -1.002 |
| **Tilsamans** | **-2.301** | **-1.609** | **-2.352** | **-1.093** | **-1.656** | **-1.501** |

Sambært Miðnámi á Kambsdali stava saldurnar frá samanleggingini av Handilsskúlanum og Studentaskúlanum í 2016. Talan er um goymslubroytingar í tímabankanum 2016 og 2017, og ein støðling í 2016, sum ikki er bókað útaftur. Skúlin fer at spyrja Gjaldstovuna, hvussu tey kunnu rætta saldurnar.

## 7.12 Skúladepil við Marknagil, løgujáttan (LG 2020/207-233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av løgujáttanini á høvuðskontu 7.23.3.09. Í 2019 vóru 23,9 mió.kr. játtaðar til liðugtgerð og ymiskar tillagingar av Glasi. Nýggj verklagslóg var gjørd, ið ásetir, at byggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 23,9 mió.kr.

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlóg fyri oktober 2020 segði Fíggjarmálaráðið m.a., at munandi manglar vóru í gjørda arbeiðinum, sum máttu bøtast, fyri at bygningurin kundi góðkennast. Bygningurin hevði ikki fingið endaligt nýtsluloyvi. Útfylt R&V-ætlan skuldi latast kommununi, sum kravdi, at ætlan skuldi fyriliggja fyri øll aktivu brunaanleggini. Ætlanin var gjørd, men Glasir skuldi fylla hana út.

Bygningurin var ikki endaliga góðkendur, og góðkenningin kom ikki, fyrr enn samanstoypingarnar vóru gjørdar. Landsverk hevði ikki sett arbeiðið við samanstoypingunum í verk, tí stovnurin hevði bíðað eftir endaligu játtanini.

***Bygningurin ikki endaliga góðkendur.***

Sambært Landsverki vóru nøkur arbeiðir á Glasi um at vera liðug, tó at arbeiðstakarin framvegis ikki hevði sent rokning. Einasta veruliga stóra arbeiði, sum var eftir, vóru

samanstoypingarnar. Arbeiðið var boðið út sum undirhondsútboð, har tríggir arbeiðstakarar vóru bidnir um at geva tilboð. Landsverk hevði gjørt sáttmála við múrarafyritøku fyri 5 mió.kr.

Í 2020 vóru játtaðar 12,2 mió.kr. við eykajáttanarlóg, og í 2021 vóru 1,2 mió.kr. játtaðar í fíggjarlógini. Landsverk hevði disponerað og/ella avsett 36 mió.kr. av teimum játtaðu 37,3 mió.kr.

Í mai 2021 var avsetingin vegna ógoldnar rokningar slakar 5,3 mió.kr. frá 7 ognarum. Elsta skuldin var frá 2017.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært Landsverki, eru enn nøkur mál um ósemjur eftir at loysa. Roynt verður at finna semjur, har tað ber til, annars verður talan um gerðarrættarmál.

## 7.13 Frítíðarundirvísing (LG 2019/207-235)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av játtanini til frítíðarundirvísing, sum er á høvuðskontu 7.23.5.07.

Undirvísingarstýrið vísti í 2019 Mentamálaráðnum á, at neyðugt var dagføra lógarverkið. Stýrið hevði spurt um tulkingar av lógini og av fyrisitingarligu mannagongdunum, sum høvdu verið siðvenjur, áðrenn Undirvísingarstýrið fekk ábyrgdina av at fyrisita lógina.

Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at hann ætlaði at dagføra lógina um frítíðarundirvísing v.m., og hevði sett hana á løglistan.

Landsgrannskoðanin vísti á ymisk viðurskifti í rundskrivinum um læraraløgnir frá 5. juli 2001. Talan var um ásetingar í sambandi við løgnir til almenna frítíðarundirvísing, serstaka frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt var framvegis við lógarbroytingunum, serliga at gera ítøkiligari ásetingar fyri føroyskt sum annaðmál, ið verður skipað sum serstøk frítíðarundirvísing. Rundskrivið um læraraløgnir var partur av hesum arbeiði, og fór at verða endurskoðað samstundis.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið við lógarbroytingunum er framvegis í gongd, men enn ber ikki til at siga, nær arbeiðið verður liðugt.

## 7.14 Undirvísing í føroyskum fyri fremmandmælt (LG 2021/207-235)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til undirvísing í føroyskum fyri fremmandmælt. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.5.07 “Frítíðarundirvísing”, undirkontu 21. Játtanin í 2021 er 1,9 mió.kr., og nýttar eru 1,4 mió.kr.

Undirvísing fyri fremmandmælt er skipað eftir Ll. nr. 70/1983 “um frítíðarundirvísing”. Kommunurnar rinda lønirnar hjá lærarum og leiðarum og góðkenna skeiðini. Endurgjaldið til kommunurnar er 50% fyri almenna frítíðarundirvísing og 100% fyri serstaka frítíðarundirvísing. Hvørt hálvár lata kommunurnar Uttanríkis- og mentamálaráðnum uppgerð, sum stuðulin verður goldin eftir.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini stendur, at undirvísingin í føroyskum sum annaðmál verður skipað sambært § 15, stk. 2, sum landsumfatandi frítíðarundirvísing v.m., og

løgd til rættis sambært CEFR-skipanini[26], ið fatar um tríggjar útbúgvingar, Føroyskt sum annaðmál 1, 2 og 3, sum aftur eru býtt í fleiri stig. Undirvísingin verður samskipað landafrøðiliga.

Tímar verða játtaðir einum øki í mun til, hvussu nógv stig undirvíst verður á hvørt skúlaár. Eisini er tímatalið tongt at framstigunum, ið næmingarnir gera; hvørt stig fatar um 300 tímar og endar við roynd, sum næmingarnir skulu lúka fyri at koma á næsta stig.

Saman við Prógvstovuni ger Uttanríkis- og mentamálaráðið tilfar til visitatión, og útvegar stig- og støðuroyndir, sum næmingar fara upp til, tá ið lærarin metir, at tey megna tað.

***Diplomútbúgving útsett vegna koronu.***

Sambært Uttanríkis- og mentamálaráðnum var ætlanin at byrja diplomútbúgving á Fróðskaparsetrinum í 2020, men tann ætlanin bleiv fyribils útsett til 2021 vegna COVID-19. Í 2021 var ætlanin aftur útsett av somu orsøk.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur greitt frá, at tey miða eftir, at drúgvu skeiðini í føroyskum sum annaðmál, verða skipað sambært nýggju námsætlanini, og býtt út á 4 høvuðsøkir í Føroyum. Harumframt skulu kvøldskúlarnir kring landið skipa fyri styttri skeiðum í føroyskum fyri tilflytarar, sum ikki eru til reiðar at melda seg til drúgvu skeiðini í føroyskum sum annaðmál.

Í løtuni er undirvísing skipað í Havn, Fuglafirði, Klaksvík, Gøtu, Runavík, Vágum, á Strondum, Eiði, Tvøroyri og á Sandi.

Havnin hevur samskipað undirvísingina saman við Vágunum. Í Suðuroynni samstarva allar kommunurnar, og í Norðoyggjum verður arbeitt við at leggja undirvísingina í eitt størri øki.

Kommunurnar gjalda lønirnar til undirvísararnar, og hvørt hálva ár senda tær Undirvísingarstýrinum krøv. Eru krøvini í samsvari við játtanarskrivini, avgreiðir stýrið tey.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um krøvini fyri skúlaárið 2021/2022 eru í samsvari við játtaða tímatalið og stuðulin, og um umbønin er send rættstundis.

Í skrivinum frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum stendur, at treytir fyri at fáa stuðul, eru m.a. at yvirlit verður fört yvir uppmøting, og allir næmingar, sum verða skrivaðir inn á FSA-útbúgving[27] sambært námsætlanini, ella fylgja styttri skeiði í FSA, verða visiteraðir. Kvøldskúlaskipanin kann søkja um hálvan tíma pr. næming, sum verður visiteraður.

Kvøldskúlarnir boða Uttanríkis- og mentamálaráðnum frá innskrivingunum og tali av næmingum, og senda ráðnum yvirlit yvir úrslit av visitatiónini í seinasta lagi 15. oktober.

## 7.15 Musikkskúlar (LG 2021/207-235)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Musikkskúlaskipanina. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.5.10. Í 2021 eru játtaðar 16,4 mió.kr. Musikkskúlaskipanin er stovnur undir Undirvísingarstýrinum. Stjórin hevur námsfrøðiligu ábyrgdina og samskipar undirvísingina.

[26] Common European Framework of Reference for Languages.
[27] Føroyskt sum annaðmál.

Musikkskúlarnir virka eftir Ll. nr. 83/2017 “um musikkskúlaskipan”. Lógin kom ístaðin fyri Ll. nr. 69/1984 “um stuðul til musikkskúlar”. Skipanin hevur til endamáls at skipa musikkskúlaundirvísingina í Føroyum, menna musikalsku gávur næminganna v.m.

Við lógini frá 2017 er samsvar millum lóg og tað, sum í roynd og veru var gjørt, tí ásett er, at landið rindar bæði stuðul til musikkskúlar og lærarum løn.

Landið og kommunurnar samstarva um at bjóða út musikkundirvísing. Í Føroyum eru 14 kommunalir musikkskúlar. Fyri at koma undir skipanina skal musikkskúli vera knýttur at einari kommunu ella einum kommunalum samstarvi.

Kommunurnar seta musikkskúlaleiðarar og rinda teimum løn. Musikkskúlastjórin setir lærarar í starv, í samráði við avvarðandi kommunalu musikkskúlaleiðararnar, og rindar lønir og ferðaútreiðslur hjá lærarunum. Kommunurnar endurrinda landinum 50% av lønarútreiðslunum og útvega hóskandi hølir, undirvísingartilfar, amboð og ljóðføri til musikkskúlarnar.

## Rakstur

Roknskaparreglugerðin hjá Undirvísingarstýrinum fevnir eisini um Musikkskúla-skipanina. Reglugerðin er send til góðkenningar hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

Roknskapar- og játtanartøl 2018 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 24.623 | 24.791 | 27.100 | 28.796 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.084 | 1.310 | 901 | 1.145 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 0 | 148 | 8 | 5 |
| Tilskot til einstaklingar o.a. | 3 | 6 | 0 | 2 |
| Flyting frá kommununum til landið | -11.670 | -12.342 | -13.151 | -13.995 |
| **Tilsamans** | **14.040** | **13.913** | **14.859** | **15.952** |
| *Játtan* | *14.070* | *14.702* | *14.939* | *16.438* |

***Játtanin hækkað til at stytta bíðilistar.***

Í 2021 hækkaði játtanin við 1,2 mió.kr. til at styrkja skipanina og stytta bíðilistarnar.

Musikkskúlastjórin vísti á, at allir musikkskúlarnir hava ikki bíðilistar. Tað er trupult at seta beinleiðis samband millum tímatal og næmingatal, tá ið undirvísingin ikki burturav er einstaklingaundirvísing, men er eisini samanspæl og felagsundirvísing. Bíðilistar eru til einstøk ljóðføri, og tímatalið til musikkskúlamiðnám var hægri, enn ætlað.

Fyri at sanna um samband er ímillum hækkaðu játtanina og styttar bíðilistar, bað Landsgrannskoðanin um at síggja bíðilistarnar til Tórshavnar musikkskúla frá 2020 til 2022. Vit fingu ikki umbidna tilfarið, men musikkskúlastjórin hevur kunnað um, at sambært Tórshavnar Musikkskúla eru umleið 114 fleiri næmingar tiknir inn.

### *Lønir*

Í 2021 vóru 60 ársverk í Musikkskúlaskipanini. Við útgangsstøði í tali av børnum og ungum millum 0 og 18 ár í kommununum ger musikkskúlastjórin, við ársbyrjan, yvirlit yvir býtið av tímum til musikkskúlarnar.

Tá ið lærarar arbeiða meira enn 20 undirvísingartímar um vikuna, rindar Musikkskúla-skipanin úrtíðarløn sambært lønartalvuni (1/1040). Orsøkin er, at undirvísingartímarnir kunnu vera spjaddir á ymisk undirvísingarstøð, og at meginparturin av tímunum verða undirvístir av lærarum, sum ferðast.

Í sáttmálanum millum Musikklærarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið, fylgiskjal 2, er seravtala um lærarar, sum undirvísa á fleiri musikkskúlum, og har fjarstøðan er stór. Sambært avtaluni fáa teir læararnir niðurskurð í tímatalinum, sum verður roknaður í lutfalli til setanarbrotið, og tímarnir verða eisini brúktir til avspáking í juni mánað.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarmál. Vit kannaðu, um lýsingar, umsóknir, prógv, setanarskriv o.a. vóru í málunum, og samanhildu lønirnar við undirvísingartímarnar og við sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Musikklærara-felag Føroya.

Landsgrannskoðanin hevur ikki aðrar viðmerkingar til stakroyndirnar enn, at eitt setanarskriv var ikki undirskrivað, og mælti til at tað var gjørt.

*Mánaðarlig uppgerð av lønum*

Hvønn mánað ger musikkskúlastjórin tímauppgerð, sum er greinað á skúlar og lærarar. Gjaldstovan brúkar uppgerðina sum bókingarskjal, tá ið hon endurrindar landinum lønarútreiðslurnar.

Útreiðslurnar hjá kommununum verða roknaðar í lutfalli millum lønir og tímar. Musikk-skúlastjórin góðkennir uppgerðirnar, áðrenn bókhaldið sendir tær til Gjaldstovuna at bóka. Landsgrannskoðanin stemmaði lønirnar av við rokniarkið fyri februar. Lands-grannskoðanin mælti til at seta mannagongdirnar í roknskaparreglugerðina.

*Ferðaendurgjøld*

Í § 4 í musikkskúlalógini er m.a. ásett, at landið rindar ferðing hjá musikkskúlalærarum. Í viðmerkingunum til lógina stendur, at musikkskúlalærarar framhaldandi hava eina samskipaða setan, og at setanin fevnir alla Musikkskúlaskipanina.

Í § 4, stk. 5, í sáttmálanum ímillum Musikklærarafelagið og Fíggjarmálaráðið er ásett, at *"lærarar, sum í starvi sínum ferðast ímillum arbeiðsøki, fáa ferðakostnaðin endur-goldnan. Lærarar eiga í mesta mun at nýta almenna ferðasambandið. Um nýtsla av egnum bili metist neyðug, verður km-gjald latið sambært galdandi reglum og harafturat møguligt ferðagjald fyri bil, har ferðing sjóvegis er neyðug."*

Í roknskaparreglugerðini hjá Musikkskúlaskipanini er ásett um ferðing innanlands, at uppgerðir verða gjørdar á ferðauppgerðarskjal, og víst verður til avtaluna millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið um dagpening.

Ferðaútreiðslur innanlands 2018 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Ferðaseðlar við skipi – o.a. innanlands | 97 | 75 | 71 | 235 |
| Kilometurendurgjald[28] | 0 | 0 | 274 | 552 |
| Gisting og uppihald | 61 | 86 | 62 | 82 |
| Dagpengar og náttarviðbót | 699 | 819 | 357 | 87 |
| Leiga av bili | 13 | 7 | 6 | 27 |
| Ymsar útreiðslur í sambandi við ferðing | 0 | 0 | 2 | 1 |
| **Tilsamans** | **870** | **987** | **772** | **984** |

Læararnir senda ferðauppgerðir inn mánaðarliga.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um ferðaendurgjøldini eru í samsvari við reglurnar frá Fíggjarmálaráðnum "um endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum". Samanumtikið brúka fáir lærarar almenna ferðasambandið. Í fleiri førum sær út sum, at Musikkskúlaskipanin rindar endurgjøld fyri koyring frá bústaði til undirvísingarstað og aftur, tá ið lærarar ferðast heimaníframá til skúla í aðrari bygd ella býi.

Treytin, fyri at fáa endurgjald eftir reglunum hjá Fíggjarmálaráðnum, er, at starvsfólk javnan eru í tænastuørindum, og tá kunnu tey fáa skrivliga heimild frá stovninum at nýta egnan bil í tænastuørindum.

[28] Í 2018 og 2019 er kilometurendurgjald bókað á dagpengar og náttarviðbót.

*Rinda endurgjald fyri koyring frá bústaði til arbeiðsstað.*

Landsgrannskoðanin vísti á, at vanliga hava tænastuørindi ikki verið roknað sum tað, at starvsfólk koyra heimanífrá til arbeiðsstað, men heldur at starvsfólk, sum eru møtt á arbeiðsstaðnum, og síðani verða send arbeiðsørindi, fáa endurgjald fyri koyring í egnum bili. Koyring frá egnum bústaði til arbeiðsstað er vanliga at rokna sum ein privat útreiðsla, sum løntakarar hava rætt til at søkja um ferðastuðul fyri.

Sambært stjóranum leggur Musikkskúlaskipanin seg eftir at umsita ferðaendurrindanina soleiðis, at lærari bert fær endurgjald fyri ferðing millum undirvísingarstøðini. Hann vísir á, at endurrindað verður ikki millum heim og arbeiðspláss. Tó fær lærari, sum ferðast til Suðuroyar í undirvísingarørindum, og bert hevur undirvísingarstað í Suðuroy, ferðina endurrindaða. Lærarin kann í sínari sentralu setan verða fluttur millum ymisku musikkskúlarnar.

*Tørvur á at greina hvat setan í allari skipanini merkir.*

Landsgrannskoðanin heldur, at tørvur er á, at Musikkskúlaskipanin fær greinað nærri, hvat setan í allari Musikkskúlaskipanini merkir í mun til endurgjøld fyri ferðaútreiðslur vísandi til lógina, roknskaparreglugerðina, rundskrivið o.a. Eisini verður mælt til at seta mannagongdirnar í roknskaparreglugerðina.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin fyri Musikkskúlan verður partur av roknskaparreglugerðini hjá Undirvísingarstýrinum. Mannagongdir, sum Landsgrannskoðanin viðmerkir, verða í tí sambandi umrøddar og tiknar við í reglugerðina í tann mun, tørvur er á tí.

## 7.16 Vinnuháskúlin (LG 2018/207-236)

Í undanfarnu frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Vinnuháskúlanum.

Vinnuháskúlin hevði goldið samsýning fyri verkætlanarleiðslu. Sambært Vinnuháskúlanum var avtalan um samsýningina gjørd, áðrenn Maskinmeistaraskúlin var lagdur saman við Føroya Sjómansskúla, men avtalan var ikki at finna.

*Eingin skrivlig avtala um samsýning fyri verkætlanarleiðslu.*

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at sambært Vinnuháskúlanum var eingin skrivlig avtala gjørd um samsýningina, sum lærarar fingu fyri verkætlanarleiðslu hjá skipsføraralesandi. Føroya Sjómansskúli hevði ásett samsýningina í 2001, ella har á leið. Sambært skúlanum var samsýningin ongantíð prísjavnað ella broytt.

Landsstýrismaðurin legði afturat, at í sambandi við sáttmálasamráðingarnar var arbeitt við ársverki fyri maritimu skúlarnar, sum ætlandi skuldi verða sett í verk í 2022. Í tí sambandi fór Fíggjarmálaráðið at endurskoða og góðkenna allar samsýningar.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað er Undirvísingarstýrið, sum luttekur í sáttmálasamráðingunum saman við Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, og sambært Undirvísingarstýrinum var fyrsti samráðingarfundur við lærarafeløgini á maritimu skúlunum í juni. Avtalað er at halda fram í september. Komið er tí ikki á mál við ætlanini at endurskoða og góðkenna samsýningar hjá Vinnuháskúlanum.

## 7.17 Sjónám (LG 2020/207-236)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Sjónámi og Trygdarmiðstøðini. Sjómansskúlin er skipaður sambært Ll. nr. 55/2001. Trygdarmiðstøðin veitir sjófólki og næmingum skeið og undirvísing í trygd á sjónum sambært Ll. nr. 63/1998 “um manning av skipum”.

*Roknskaparreglugerð*
Roknskaparreglugerðin hjá Sjónámi var frá 2018, og var send Mentamálaráðnum til góðkenningar.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Sjónám er biðið um at dagføra roknskaparreglugerðina, sum skúlin áður hevur sent Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

*Heimildir til skeiðsgjøld*
Sambært K. nr. 100/2012 "um gjald fyri skeið innan trygd á sjónum" kunnu gjøldini fyri lógarkravd trygdarskeið í mesta lagi vera 2.500 kr. fyri næmingar í fólkaskúla og sjóvinnubreyt og 4.000 kr. fyri sjófólk.

Sambært § 11 í K. nr. 73/2016 "um trygdarskeið fyri manning á fiskiskipum" kann skúlin krevja gjald frá hvørjum einstøkum luttakara fyri útreiðslur í sambandi við trygdarskeiðið, undir hesum luttøkugjald og gjald fyri prógv.

Í 2020 var kostnaðurin fyri trygdarskeið á Sjónámi 3.250 kr. fyri næmingar í fólkaskúla og 6.500 kr. fyri sjófólk. Sami takstur hevði verið galdandi í nøkur ár.

Spurt, hvar heimildin er at áseta onnur gjøld fyri trygdarskeið enn tey, sum eru ásett í K. nr. 100/2012, svaraði Sjónám, at skúlin í 2015 munnliga gjørdi Vinnuháskúlan og Mentamálaráðið varug við, at K. nr. 100/2012 ikki longur var rímilig fyri stovnin, tí tað var ómøguligt at bjóða eitt slíkt skeið út í samsvari við kunngerðina. Í samráði við Vinnuháskúlan helt Sjónám, at 6.500 kr. fyri eitt 5 daga trygdarskeið, var rímiligur prísur fyri bæði skeiðsveitara og skeiðstakara. Stovnarnir ynsktu ikki at koma í ta støðu at bjóða skeið út við undirskoti.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at skúlarnir fóru at fáa boð um at tillaga gjøldini soleiðis, at tey svaraðu til ásetingina í K. nr. 100/2012, og at ráðið eisini skuldi umrøða spurningin um at endurskoða kunngerðina.

Í august 2022, hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at síðani svarið til Landsgrannskoðanina í 2021 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið tikið málið um skeiðsgjøldini upp til nýggja viðgerð. Enn er ikki nøkur niðurstøða gjørd, og komið er tí ikki víðari í málinum.

***Enn eingin niðurstøða um skeiðsgjøld.***

*Skeiðsgjøld*
Sambært Sjónámi hevði skúlin ásett kostnaðir fyri skeið í mun til útreiðslurnar hjá skúlanum. Sjónám lat ikki luttakarunum prógv, fyrr enn goldið var fyri skeiðið.

Í 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at maritimu skúlarnir vóru ikki inntøkufíggjaðir, men fingu játtan í fíggjarlógini hvørt ár. Skúlarnir høvdu tó í ávísan mun ásett skeiðsgjøldini eftir útreiðslunum, skúlarnir høvdu av skeiðunum.

Sambært landsstýrismanninum var kunngerðin um skeið innan trygd á sjónum ein politisk avgerð, fyri ikki at gera tað ov kostnaðarmikið hjá næmingum í fólkaskúlanum og hjá øðrum ungum, sum høvdu hug at royna sjógvin.

Sjónám bjóðaði eisini út onnur skeið, enn vanligu trygdarskeiðini, og Landsgrannskoðanin mælti til at greina prísásetingina av skeiðum v.m. í roknskaparreglugerðini.

Uttanríkis- og mentamálaráðið helt, at ráðið skuldi ikki góðkenna einstøku skeiðsgjøldini, og ásetingar vóru ikki fyri onnur skeið, enn vanliga trygdarskeiðið. Í roknskaparreglugerðini skuldi tó verið greitt frá um heimildir, prísásetingar, avsláttir og kredittir, og tí fór ráðið at taka tann spurningin upp í sambandi við góðkenning av reglugerðini.

*KT-trygd*
Í desember 2020 hevur grannskoðanarvirki skoðað Sjónám sambært rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um KT-trygd. Í niðurstøðuni segði grannskoðarin, at trygdarviðurskiftini hjá Sjónámi ikki til fulnar samsvaraðu við krøvini í trygdarrundskrivinum, og vísti á staðfestar veikleikar.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin víst á, at KT-skoðan verður framd hvørt ár, og Sjónám ger tær tillagingar, sum verða tilmældar.

## 7.18 Føroya Brandskúli og inntøkufíggjað virksemi hjá Vinnuháskúlanum (LG 2021/207-236)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapirnar hjá Føroya Brandskúla og inntøkufíggjaða virksemið hjá Vinnuháskúlanum. Játtanirnar eru á høvuðskontu 7.23.6.05, undirkontur 30 og 40.

### Rakstur
Vinnuháskúlin hevur í 2022 sent roknskaparreglugerðina til Uttanríkis- og mentamálaráðið at góðkenna.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið er saman við Undirvísingarstýrinum í holt við at gjøgnumganga roknskaparreglugerðina. Reglugerðin er send aftur til Vinnuháskúlan við nøkrum viðmerkingum, og er reglugerðin tí ikki góðkend, men arbeitt verður fram ímóti hesum.

Føroya Brandsskúli, roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.506 | 3.713 | 3.508 | 3.546 | 3.721 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.023 | 1.032 | 864 | 807 | 1.074 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 400 | 492 | 423 | 248 | 535 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 160 | 638 | 636 | 569 | 664 |
| Søla av vørum og tænastum | -3.389 | -3.509 | -4.597 | -3.807 | -5.488 |
| **Tilsamans** | **1.700** | **2.366** | **834** | **1.363** | **505** |

Føroya Brandskúli skipar fyri skeiðum í trygd á sjónum, sløkkiliðsútbúgvingum og skeiðum innan eldsløkking og roykkaving. Flestu skeiðini eru kravd av IMO.

Inntøkurnar eru lægri í 2020, av tí at nógv færri skeiðsluttakarar vóru orsakað av koronufarsóttini.

Vinnuháskúlin, inntøkufíggjað virksemi, roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 2.100 | 1.249 | 1.019 | 737 | 1.234 |
| Keyp av vørum og tænastum | 726 | 476 | 510 | 396 | 543 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 428 | 285 | 221 | 210 | 140 |
| Leiga, viðlíkah.og skattur, avskriv. o.a. | 0 | 9 | 0 | 0 | 2 |
| Søla av vørum og tænastum | -3.750 | -2.641 | -2.171 | -1.714 | -2.246 |
| **Tilsamans** | **-497** | **-622** | **-420** | **-372** | **-328** |

Vinnuháskúlin skipar fyri skeiðsvirksemi í sjóvinnu, eftirútbúgvingarskeiðum fyri maskinistar og maskinmeistarar, og dugnaskaparskeiðum í sigling og motor. Skúlin hevur yvirskot av inntøkufíggjaða virkseminum, árini 2017 til 2021.

Í K. nr. 100/2012 eru ásett gjøld fyri lógarásett skeið innan trygd á sjónum. Sambært leiðsluni, er prísurin fyri onnur skeið ásettur til áleið tað, sum aðrir útbjóðarar av líknandi skeiðum taka.

***Prísurin fyri skeið áleið tann sami sum hjá øðrum.***

*Lønir*

Í 2021 eru lønarútreiðslurnar hjá Føroya Brandskúla 3,7 mió.kr., og hjá inntøkufíggjaða virkseminum eru tær 1,2 mió.kr.

Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá lærarum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Landsgrannskoðanin hevur ikki aðrar viðmerkingar enn tað, ið er nevnt niðanfyri.

Sambært Vinnuháskúlanum fáa undirvísingarleiðarnir á Vinnuháskúlanum ikki eftirløn av leiðaraviðbótini. Deildarleiðarin á Føroya Brandskúla hevur øll árini fingið eftirløn av deildarleiðaraviðbótini, tí hevur Vinnuháskúlin hildið fram við sama leisti. Skúlin hevur samskift við Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum um málið. Í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Maskinmeistaralærarar og Fakfelag Sjómansskúlalærara er eingin áseting um, at eftirløn verður roknað av deildarleiðaraviðbótini.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur biðið Undirvísingarstýrið tikið málið upp við Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum.

*Inntøkur*

Skeið skulu vera goldin, áðrenn prógv verða handað luttakarum. Eingin eftirstøða er vegna ógoldin skeið.

Landsgrannskoðanin hevur samanhildið nakrar prísir hjá Vinnuháskúlanum við prísir hjá privatum veitarum. Í teimum førunum eru prísirnir hjá Vinnuháskúlanum á sama stigi ella eitt vet hægri.

Sambært roknskaparrundskrivinum skal stovnur, sum hevur inntøkur av at selja vørur og tænastur, greiða frá í roknskaparreglugerðini um heimildir, prísáseting, avsláttir og kredittir. Landsgrannskoðanin mælti skúlanum til at halda reglurnar í rundskrivinum.

Sambært Vinnuháskúlanum heldur skúlin ikki skeið, um tey geva hall. Har bert Vinnuháskúlin bjóðar skeið út, skal avlopið vera 35% av skeiðsupphæddini. Prísurin á hvørjum einstøkum skeiðið er eisini ásettur eftir, hvat minsta tal av luttakarum skal vera.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at roknskaparreglugerðin fyri Vinnuháskúlan og Brandskúlan verður dagførd, og málið um at fáa ásetingar um heimildir, prísáseting, avsláttur og kredittir verður í tí sambandi tikið upp. Somuleiðis hvussu skrásetingin og prísásetingin verður gjørd.

Undirvísingarstýrið ivast í, um tað er rætt av Brandskúlanum og Vinnuháskúlanum ikki at halda skeið, um undirtøkan er so lítil, at skeiðini geva hall. Talan er um lógarkravd skeið, og kann tað tá verða óheppið fyri persónar, sum skulu hava skeið fyri at mynstra v.m., um hesi eru avlýst.

Prísurin fyri skeið í eldsløkking verður hækkaður 3% um árið, m.a. orsakað av øktum kostnaði av jet-fuelolju.

## Fíggjarstøða

Skúlin hevur einki ognaryvirlit. Landsgrannskoðanin mælti til at gera eitt yvirlit yvir, hvørjar ognir skúlin eigur, so sum ásett er í roknskaparkunngerðini § 20.

***Skúlin hevur einki ognaryvirlit.***

Í fíggjarstøðuni 2021 hjá Føroya Brandskúla eru 355,5 t.kr. settar av sum stuttfreistað skuld.

Í sambandi við grannskoðan av Sjónámi hevur Landsgrannskoðanin spurt um heimildina at áseta hægri skeiðskostnað fyri skeið innan trygd á sjónum.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Sjónám og Vinnuháskúlin hava ikki hildið seg til skeiðsgjaldið, sum er ásett í K. nr. 100/2012 "um gjald fyri skeið innan trygd á sjónum". Sambært kunngerðini skal gjaldið vera í mesta lagi 2.500 kr. fyri skúlanæmingar og í mesta lagi 4.000 kr. fyri sjófólk. Vinnuháskúlin hevur tikið ávikavist 3.250 kr. og 6.500 kr. fyri skeiðini.

***Vinnuháskúlin skal gjalda skeiðsgjøld aftur.***

Vinnuháskúlin skal tí gjalda skeiðsluttakarunum ov nógv kravda skeiðspeningin aftur, men sambært skúlanum, hava tey havt trupult við at finna fram til, hvørjir skeiðsluttakararnir eru, tí er peningur settur av til tað. Skúlin arbeiðir framvegis við at loysa málið, og samskiftir við Uttanríkis- og mentamálaráðið um tað.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur tikið málið um skeiðsgjøldini upp til nýggja viðgerð. Enn ber ikki til at siga, nær komið verður víðari í málinum.

## 7.19 Fróðskaparsetur Føroya (LG 2021/207-236)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Fróðskaparsetri Føroya. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.6.16. Endamál, virksemi og uppgávur hjá Fróðskaparsetrinum eru lýst í Ll. nr. 58/2008 "um Fróðskaparsetur Føroya", í kunngerðum og í fíggjarlógini.

### Rakstur

Fróðskaparsetrið hevur dagført roknskaparreglugerðina í mars 2022 og sent hana til góðkenningar hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Í juli 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at reglugerðin er enn ikki góðkend.

Roknskapar- og játtanartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Undirkontur | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fróðskaparsetur Føroya | 85.923 | 97.281 | 105.002 | 114.024 | 121.905 |
| Eftirútbúgving | 2.185 | 2.480 | - | - | - |
| Óvanligt | - | - | 1.326 | 1.155 | 0 |
| Stuðulsfíggjað virksemi | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 |
| Inntøkufíggjað virksemi | 0 | 0 | 0 | 0 | 30 |
| **Tilsamans** | **88.108** | **99.761** | **106.328** | **115.180** | **121.935** |
| *Játtan* | *88.086* | *100.001* | *106.331* | *115.341* | *121.935* |

Fróðskaparsetrið hevði havt samstarv við eina KT-fyritøku um at menna kekklistar í sambandi við roknskapargóðkenningar. Samstarvið riggaði ikki, og helt uppat, uttan at Setrið fekk umbidnu tænasturnar.

### *Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur lønarmál, um starvslýsingar, prógv o.a. eru í málunum, um útgjaldingin samsvarar við hóskandi tíðarskráseting, um tíðarskrásetingar eru váttaðar av persónum við heimildum, um talið av tímum er rætt, um rættir lønarsatsir eru nýttir, og um pensjónsinngjaldingarnar eru rættar.

### *Tíðarskrásetingar og avsetingar í roknskapinum*

Í ársfrágreiðingini 2018 vísti Landsgrannskoðanin m.a. á, at vit kundu ikki sanna, at tímarnir, ið Setrið rindaði fyri, vóru rættir, tá ið stovnurin onga tíðarskráseting hevði fyri starvsfólk í fyrisitingini.

Fróðskaparsetrið hevur eftirsíðan útvegað sær tíðarskrásetingarskipan, nevnd Setursnet. Skipanin hevur ikki riggað eftir ætlan, og tí hevur Fróðskaparsetrið útvegað sær TotalView, har starvsfólkini í fyrisitingini skulu skráseta arbeiðstíð, feriur v.m. Vísindastarvsfólkini skráseta arbeiðstíðina eftir avtalu við næstu leiðslu.

Sum meginregla skal yvirtíð avspákast, men í serligum føri kann avtala gerast um at gjalda fyri yvirtíð. Enn skráseta ikki øll í fyrisitingini arbeiðstíð, men øll skráseta feriur. Starvsfólk kunnu hava +/- 20 tímar í flekssaldu. Í mai 2022 skyldaðu nøkur starvsfólk nógv fleiri tímar, og fleiri onnur áttu millum 54 og 231 tímar á.

***Ikki avsett til skyldugar lønir.***

Fróðskaparsetrið hevur ikki gjørt avsetingar í roknskapinum vegna tíðaravmarking av lønum v.m. Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar um at tíðaravmarka lønir v.m.

Av samlaðu útreiðslunum í 2021, á 122 mió.kr., eru lønir slakar 98 mió.kr. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at tað er týdningarmikið, at leiðslan tryggjar sær, at teir tímar, sum stovnurin rindar lønir fyri, veruliga eru arbeiddir. Sambært roknskaparkunngerðini kann tað m.a. gerast við at hava eina nøktandi tíðarskráseting.

***Tíðarskráseting ikki nøktandi.***

Til ber ikki at staðfesta, at lønarútreiðslurnar eru rættar, um skrásetingar av m.a. arbeiðstíð og ferium ikki eru eftirfarandi.

Í juli 2022 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið kunnað um, at ráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at tað er týdningarmikið, at leiðslan á Fróðskaparsetrinum tryggjar sær, at lønarútgjaldingarnar eru rættar. Ráðið vísir á, at sambært Fróðskaparsetrinum hevur skiftið til TotalView gjørt, at stovnurin nú hevur nøktandi yvirlit yvir arbeiðstíðir og feriur, og kann siga við vissu, at lønarútgjaldingarnar eru rættar.

### *Lønir goldnar sum keyp av tænastum*

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin spurningin, um at samsýningar fyri undirvísing og nevndarsamsýningar til fólk, ið ikki búgva í Føroyum, eru at roknað sum A-inntøka, um arbeiðið er útint í Føroyum, og tí áttu at verið goldnar sum løn heldur enn “keyp av tænastum”.

Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at TAKS metti samsýningarnar til útlendskar undirvísarar sum A-inntøku, tá ið arbeiðið er útint í Føroyum. Um arbeiðið verður útint í útlandinum, er talan ikki um A-inntøku, og teir persónarnir verða tí heldur ikki skattskyldugir í Føroyum. Nevndarsamsýningar eru A-inntøka sambært skattalógini § 60, stk. 1, nr. 7.

Sambært Fróðskaparsetrinum hevur tað volt teimum nógv eykaarbeiði at skulu rinda lønir til útlendskar undirvísarar v.m. um lønarskipanina, herundir at útvega p-tøl. Fróðskaparsetrið er tí nústaðni farið undir at rinda samsýningarnar um lønarskipanina.

### *Keyp av vørum og tænastum*

Í 2021 hevur Setrið rindað slakar 400 t.kr. til Fjølrit fyri rættindi. Setrið tekur ikki gjald frá teimum lesandi.

Fróðskaparsetrið hevur boðið reingerðingina út á Keypsportalinum. Stovnurin biður um prísir frá minst tveimum veitarum, um keyp eru størri enn 50 t.kr. Seinast Fróðskaparsetrið keypti teldur, bóðu tey um tilboð frá fleiri, og sambært Fróðskaparsetrinum fingu tey lægri eindarprís, enn vinnandi latari lat telduútgerð fyri sambært upplýsingum á Keypsportalinum.

Fróðskaparsetrið bað um tilboð frá trimum veitarum, tá ið tey skuldu keypa skipan til hybridundirvísing fyri 700 t.kr. og laservørpu fyri slakar 400 t.kr.

***Mælt til at bjóða størri keyp út ímillum fleiri.***

Landsgrannskoðanin mælti til at halda almennu reglurnar um at bjóða alt keyp, størri enn ávísar upphæddir, út ímillum fleiri.

*Ferðing uttanlands*

Stovnurin brúkar ferðaavrokningarskipanina hjá Gjaldstovuni. Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin ferðauppgerðir. Einki var at finnast at, men vit mæltu til at leggja innbjóðing, skrá e.l. við ferðauppgerðum.

*Umboðan o.t.*

Í 2021 hevur Fróðskaparsetrið brúkt 1 mió.kr. til umboðan o.t. Í 2020 og 2019 vóru útreiðslurnar ávikavist 755 t.kr. og 942 t.kr.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar rokningar við stakroyndum, og mælti til at viðmerkja, hvør hevur luttikið, og í hvørjum sambandi Setrið rindar fyri matstovurokningar.

*Keyp av telefonum*

Starvsfólkini brúka fartelefonir til arbeiðsbrúk. Fróðskaparsetrið rindar í mesta lagi 1.500 kr. fyri hvørja fartelefon. Kosta telefonirnar meira, rinda starvsfólkini munin. Landsgrannskoðanin mælti til, at Fróðskaparsetrið hevur yvirlit yvir, hvørjar telefonir Setrið rindar fyri, fyri at tryggja, at reglurnar um burturbeining eru fylgdar.

*Leiga*

Leigusáttmálin viðvíkjandi hølunum í Jónas Broncks gøtu var galdandi frá 1. juli 2017 til 30. juni 2022, og kann sigast upp av leigara og eigara við 12 mánaða varningi. Húsaleigan er góðar 1,9 mió.kr. um árið.

Leigumálið fyri Sjóvinnuhúsið er galdandi frá 2017 til 2027, og kann sigast upp av báðum pørtum við 12 mánaða varningi. Um eigarin sigur leigumálið upp, innan 10 ár eru umliðin, síðan gildiskomuna av sáttmálanum, má hann endurrinda leigaranum íløguna, leigarin hevur gjørt í leigumálið við leigumálsbyrjan, frádrigið tað áramálið, sum er farið av leigumálinum deilt við 10.

***Setrið væntar ikki at fáa longt sáttmálan við Tórshavnar havn.***

Landið hevur goldið 10,6 mió.kr. at innrætta leigaðu hølini í Sjóvinnuhúsinum. Setrið væntar ikki at fáa longt sáttmálan við Tórshavnar havn.

*Inntøkur*

Í 2021 vóru inntøkurnar hjá Fróðskaparsetrinum 3,6 mió.kr. Inntøkurnar eru m.a. vegna masterútbúgving í leiðslu, sum eru 30 t.kr. fyri hvønn luttakara. Kostnaðurin fyri útbúgvingar við ECTS-stigum er 2.000 kr. pr. ECTS-stig. Eisini fær Setrið umsitingargjøld fyri verkætlanir.

## Fíggjarstøða

Í yvirlitinum yvir ognir í Búskaparskipan landsins hevur Fróðskaparsetrið skrásett Lindbergs hús í J. C. Svabosgøtu 7. Húsið er skipað sum sjálvsognarstovnur. Í yvirlitinum eru eisini tveir bilar.

Fróðskaparsetrið húsast í fleiri bygningum, sum landið eigur. Stovnurin fer at kanna, um bygningarnir eru skrásettir sum ogn hjá landinum, og um ikki, ætlar Fróðskaparsetrið at skráseta teir.

*Yvirlit yvir innbúgv o.a.*

Í ársfrágreiðingini 2019 umrøddi Landsgrannskoðanin m.a., at Fróðskaparsetrið hevði ikki skrásett innbúgvið í Sjóvinnuhúsinum.

Fróðskaparsetrið er samt við Landsgrannskoðanina, at tað er ikki nøktandi, at innbúgvið v.m. ikki er skrásett, og sambært Setrinum hava tey nú skrásett lutir, ið hava virði oman fyri 50 t.kr. í Búskaparskipan landsins.

Í sambandi við skrásetingina, hevur Fróðskaparsetrið fylgt leiðreglunum hjá Gjaldstovuni, har talan er um sjálvstøðugar ognarlutir, sum hava eitt virði oman fyri 50 t.kr. Fróðskaparsetrið hevur fingið lista frá Landsverki yvir innbúgvið, sum er keypt til Sjóvinnuhúsið, og sum Landsverk hevur umsitið. Har er bert ein lutur, sum kostar oman fyri 50 t.kr.

***Innbúgv fyri 2 mió.kr. ikki skrásett.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at í løgujáttan til Fróðskaparsetur Føroya hevur landið goldið góðar 2 mió.kr. fyri innbúgv til Sjóvinnuhúsið. Landsgrannskoðanin mælir til, at Fróðskaparsetrið hevur yvirlit yvir ognir sínar, eisini um tær hvør sær kosta minni enn 50 t.kr.

Í innanhýsis skipan hevur Fróðskaparsetrið yvirlit yvir teldurnar, og tey hava skrásett málningar.

### *Peningastovnskontur og gjaldkort*

Fróðskaparsetrið hevur stemmað saldurnar í Búskaparskipan landsins av við kontuavrit frá peningastovnum.

### *Onnur áogn og stuttfreistað skuld*

Tá ið stuðul verður goldin afturút, verður brúkta upphæddin bókað í fíggjarstøðuni sum “Onnur áogn”. Stuðul, sum er goldin frammanundan, verður skrásettur sum “Ikki inntøkuført”. Upphæddirnar eru bókaðar á undirkontu 40. “Stuðulsfíggjað virksemi”.

Seinastu 5 árini hava áognin og stuttfreistaða skuldin verið:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Onnur áogn | 5.670 | 6.895 | 6.889 | 7.820 | 10.526 |
| Ikki inntøkuf. - gransk.styrk. og gávur | -11.782 | -11.305 | -17.529 | 24.237 | -31.476 |

Talvan vísir, at í 2021 eru brúktar 10,5 mió.kr., sum verkætlanir eiga á hjá stuðulslatarum, og Fróðskaparsetrið hevur fingið 31,5 mió.kr., sum ikki eru brúktar. Tað ber tó ikki til at siga, at nettoupphæddin er “ikki inntøkuført”, tí t.d. í roknskapinum hjá onkrari verkætlan, vit kannaðu, er salda á báðum kontunum.

## Kunningartøkni v.m.

Góðkendur KT-grannskoðari hevur skoðað stovnin. Fróðskaparsetrið hevur fingið privata fyritøku at røkja uppgávuna sum DPO[29]. Saman við viðkomandi persóni eru tey í holt við at orða KT-trygdarpolitikk. Váðametingin er frá 2019, og sambært Fróðskaparsetrinum eru tey í holt við at endurskoða hana.

### *Prógvbókin*

***Einsamallur mennari til Prógvbókina.***

Prógvbókin er ein skipan frá 1987, sum upprunaliga var útvegað til at útskrivað prógv. Skipanin er dagførd við tíðini og útbygd eftir tørvinum hjá Fróðskaparsetrinum. Persónurin, ið lat Fróðskaparsetrinum skipanina, hevur einsamallur ment og umsitið hana øll árini, og bara hann kennir skipanina til fulnar.

Leiðarin og tvey starvsfólk á Prógvstovuni hava ábyrgd av Prógvbókini. Lesandi hava atgongd til egnar upplýsingar, og kunnu broyta navn, adressu, teldupost o.a. Fróðskaparsetrið verður partur av KT-skipanini, sum Undirvísingarstýrið er í holt við at menna, og tey vóna, at prógvbókaparturin verður liðugt mentur innan eini tvey ár.

[29] Data Protection Officer.

Prívbókablað er skjalprógv fyri, at alt, sum er tøppað inn, er rætt. Lærarar og prívdómarar skrivað undir prívtøkurnar. Skrivstovan tøppar dáturnar inn handligt, og sendur listan til Lestrarskrivstovuna, sum eftirkannar og læsir.

Á útbúgvingum við møtiskyldu førir undirvísarin protokoll, sum verður hildin upp ímóti prívbókablaðnum, fyri at vita, hvør sleppur til prívtøku, ella hvør hevur staðið. Til prívtøkur, ið krevja innlatingar, sleppur lesandi ikki upp, um viðkomandi ikki hevur lokið treytirnar, men verður skrásettur sum ikki møttur.

### Stuðulsfíggjað virksemi

Á undirkontu 40 er játtan til stuðulsfíggjað virksemi. Granskingarverkætlanir eru heilt ella lutvíst fíggjaðar uttanífrá. Fróðskaparsetrið umsitur verkætlanirnar eftir innanhýsis leisti. Verkætlanarleiðarar (t.d. PhD-lesandi) hava ábyrgd av, at játtanir til stuðulsfíggjað virksemi halda. Dekanur og stjórin góðkenna verkætlanir.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar verkætlanir.

Roknskapartøl fyri stuðulsfíggjaða virksemi 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 4.064 | 4.664 | 5.756 | 5.699 | 5.286 |
| Keyp av vørum og tæn., útb. og leiga | 2.096 | 2.099 | 1.898 | 1.419 | 2.709 |
| Søla av vørum og tænastum | -24 | -147 | -223 | -419 | -129 |
| Tilskot til útlandið og einstaklingar | 398 | 371 | 281 | 125 | 385 |
| Vanligar flytingarinnt. og stuðul | -6.538 | -6816 | -4.563 | -5.684 | -6.172 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | -1.551 | -1.199 | -1.670 | -472 | -1.130 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 1.690 | 1.500 | 2 | 24 | 11 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -135 | -463 | -1.481 | -691 | -960 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **1** | **0** |

### *Cancer Epidemiology in the Faroe Islands*

Verkætlanin, sum er PhD-verkætlan, byrjaði í 2019, og skuldi varða til februar 2022. Játtaðar vóru 2.166 t.kr. í stuðli. Niðanfyri er yvirlit yvir stuðulsupphæddir frá 2019 til 2021:

*t.kr.*

| Ár | Stuðulslatari | |
|---|---|---|
| 2019 | Dansk Kræftforening | 247 |
| 2019 | Brødrene Hartmanns Fond | 300 |
| 2019 | Granskingarráðið | 300 |
| 2020 | Kræftens Bekæmpelse | 13 |
| 2020 | Granskingarráðið | 350 |
| 2021 | Granskingarráðið | 300 |
| 2021 | Føroya Felag móti krabbameini | 300 |
| 2021 | Krabbameinsfelagið | 20 |
| | **Tilsamans** | **1.830** |

Fróðskaparsetrið roknar við at fáa 241,5 t.kr. frá Landssjúkrahúsinum, og at Fróðskaparsetrið skal lata 360 t.kr. til verkætlanina. Við væntaða stuðlinum eru tilsamans 2.768 t.kr. játtaðar. Til mars 2022 eru slakar 1.470 t.kr. brúktar.

Í fíggjarætlanini fyri verkætlanina er eisini roknað við 325 t.kr. til útgávu, teldu, innskriving og umsitingargjald. Hesar útreiðslurnar eru ikki bókaðar í Búskaparskipan landsins. Sambært Fróðskaparsetrinum bóka tey tær, tá ið verkætlan er liðug, og tey vita, at nóg mikið av peningi er á verkætlanini. Um hall er, verður tað fíggjað av oman fyri nevndu inntøkum.

Tá ið verkætlanin er liðug, og allir kostnaðir eru skrásettir, ger Fróðskaparsetrið endaligan roknskap. Møguligt yvirskot verður goldið aftur til stuðulsveitararnar.

*Health and Environment Monitoring of Ships and Propellers (HARMONAISE) GCFI*
Granskingarráðið hevur játtað 1 mió.kr. at rinda í 2021 og 2022. Granskingarráðið heldur 50 t.kr. aftur, til endalig frágreiðing er góðkend. Verkætlanin er staðsett á Umhvørvisstovuni. Í 2020 hava Umhvørvisstovan, Landsverk og Fróðskaparsetrið undirskrivað Memorandum of Understanding, um at rinda 200 t.kr. í part til verkætlanina.

Verkætlanin hevur fingið 200 t.kr. frá aðrari verkætlan, nevnd "PhD-verkætlan í orkuverkfrøði". Sambært Setrinum var peningurin tøkur frá eldri verkætlanum, við privatari fígging, sum vóru lidnar. Endamálið við hesum stuðlinum var at fyrireika eitt "Geospatial center" á Setrinum.

Fróðskaparsetrið hevur goldið góðar 200 t.kr. fyri útbúnað, sum sambært Setrinum stendur á Umhvørvisstovuni, men er skrásettur í ognaryvirliti hjá Fróðskaparsetrinum.

*The Hydrogen & Green Energy, HUGE*
Verkætlanin er byrjað í 2019. Fróðskaparsetrið er ein av átta samstarvspørtum, og Northern Periphery and Artic Programme (NPA) hevur stuðlað. Parturin hjá Setrinum skuldi vera 1.061 t.kr.[30], harav NPA skal lata 690 t.kr. og Setrið sjálvt 370 t.kr.

Í 2019 játtaði Fróðskaparsetrið Náttúruvísindadeildini 248 t.kr. í stuðli í trý ár. Afturat tí hevur Fróðskaparsetrið roknað við 124 t.kr. til umsitingargjald.

Frá 2019 til 2021 eru 441 t.kr. goldnar í lønum og 55 t.kr. fyri rakstrarkostnað. Í 2020 og 2021 hevur North Highland College goldið Setrinum tilsamans 241 t.kr.

Fróðskaparsetrið hevur greitt frá, at verkætlanin endar í summar. Útreiðslur, sum koma afturat, eru í høvuðsheitum knýttar at seinasta verkætlanarfundinum, sum var hildin í Skotlandi frá 25. til 28. apríl. Eisini eru útreiðslur til film, sum greiðir frá, á hvønn hátt Vetni kann fáa ein leiklut í umlegging hjá skipum og bátum frá olju til varandi orku.

Sambært Fróðskaparsetrinum rindar NPA 65% av útreiðslunum frá desember 2021 til juni 2022. Uppgerðir eru latnar inn hvørt hálvár, og eru góðkendar av First Level Controller. Endaliga uppgerðin verður tøk í summar.

*Burðardygg aling á sjónum*
Í 2019 skrivaðu Fróðskaparsetrið og P/f Bakkafrost undir upprit (memorandum of understanding) um strategiskt samarbeiði um gransking og menning. Bakkafrost letur 700 t.kr. um árið til verkætlanina, sum varir í trý ár. Allur stuðulin er goldin Fróðskaparsetrinum.

***Bakkafrost letur 700 t.kr. árliga í trý ár.***

Í 2019 eru ongar inntøkur bókaðar, og útreiðslurnar, 289 t.kr., eru støðlaðar. Í 2020 vóru inntøkurnar 1,4 mió.kr. og útreiðslurnar 697 t.kr. Við ársenda eru 709 t.kr. støðlaðar sum stuttfreistað skuld. Útreiðslurnar 2019 til 2021 hava verið 1.040 t.kr.

Í 2021 eru lønir til granskaran 589 t.kr., av teimum eru 530 t.kr. fluttar til rakstrarjáttanina hjá Fróðskaparsetrinum, og sambært Fróðskaparsetrinum er orsøkin, at stovnurin stuðlar verkætlanini. 700 t.kr. eru inntøkuførdar í 2021, og 31. desember 2021 eru 1.061 t.kr. støðlaðar í fíggjarstøðuni.

***1,1 mió.kr. eru støðlaðar.***

Vanliga fær Fróðskaparsetrið umsitingargjald fyri at hýsa verkætlanum. Sambært stovninum eru eingi umsitingargjøld í fíggingini frá Bakkafrost. Fróðskaparsetrið hevur latið arbeiðsorku til fíggjarligu umsitingina til tess at stuðla undir samstarvið.

[30] Stuðulin er latin í EUR. Upphæddirnar í DKK eru roknaðar við kursi 7,44.

Verkætlanin er ikki liðug, og endalig frágreiðing er ikki gjørd. Sambært Fróðskaparsetrinum eru ávegis frágreiðingar gjørdar á statusfundum millum Fróðskaparsetrið og Bakkafrost.

## 7.20 Granskingarráðið (LG 2020/207-236)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Granskingarráðnum. Granskingarráðið og -grunnurin hava hvør sín roknskap, og roknskapurin hjá Granskingargrunninum verður grannskoðaður av privatum grannskoðara.

Granskingarráðið hevði eina fyribilsroknskaparreglugerð frá 2016, sum var fyri Granskingarráðið og grunnin. Reglugerðin var send Mentamálaráðnum, men var ikki góðkend, tí ógreiða var um, um avlop av óbrúktari játtan hjá grunninum skuldi falla aftur til landskassan.

Nýggja lógin, sum kom í gildi 1. januar 2021, greiddi spurningin um óbrúktar játtanir. Granskingarráðið var farið í holt við at gera nýggja roknskaparreglugerð.

***Einki hent við roknskaparreglugerðini.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið við at dagføra roknskaparreglugerðina er ikki í gongd.

## 7.21 Studni (LG 2020/207-237)

Játtanin til lestrarstuðul er á høvuðskontu 7.23.7.04, undirkontu 01 “Lestrarstuðul”, og játtanin til lestrarlán er á høvuðskontu 7.23.7.05 “Lestrarlán”. Studni umsitur játtanirnar. Studni er partur av Undirvísingarstýrinum.

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapirnar við tí endamáli at kanna, um umsiting og eftirlit hjá Studna tryggja, at stovnurin umsitur lestrarstuðul og lestrarlán sambært galdandi reglum, og at lesandi lúka treytirnar fyri at fáa lestrarstuðul og -lán v.m.

### Reglur

Heimild at rinda stuðul v.m. er í Ll. nr. 36/2007 “um lestrarstuðul”. Nærri ásetingar eru í K. nr. 107/2011 “um lestrarstuðul”.

Stuðul til lestur í Føroyum verður veittur teimum, ið eru lestrarvirkin og annars lúka treytirnar í lógini. Roknað sum lestrarvirkin eru lesandi, sum ikki er meira enn eitt ár afturúr í lesnaðinum í mun til ásettu lestrartíðina. Harafturat skulu lesandi møta til frálæruna, lata inn kravdar uppgávur og fara til próvtøkurnar eftir reglunum á útbúgvingarstovninum.

Stuðul kann latast til útbúgvingar, ið eru skipaðar sum heiltíðarlestur, eru minst 3 fylgjandi mánaðir til longdar, eru ólønt og enda við próvtøku. Næmingar á serliga skipaðum miðnámi eru undantiknir ásetingini um próvtøku.

Lesandi á miðnámi kunnu fáa hægra studningin sambært K. nr. 107/2011, tá ið tey kunnu skjalprógva, at tey hava leiguútreiðslur, sum tey rinda.

***Studni kann krevja stuðul aftur.***

Studni kann krevja stuðul aftur, um lesandi hevur givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar, hevur tagt burtur týðandi upplýsingar ella ikki lýkur treytirnar fyri stuðli annars.

Frá 1. august 2021 skal útbúgvingarstovnurin hava eftirlit við, um tann lesandi er lestrarvirkin og boða Studna frá hvørt hálvár.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskaparreglugerðin fyri Undirvísingarstýrið er frá juli 2021. Í august 2022 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið kunnað um, at reglugerðin er ikki góðkend, men at ráðið fer at avgreiða hana skjótast gjørligt.

Mannagongdirnar hjá Studna um innanhýsis eftirlit og arbeiðsgongdir eru ikki dagførdar. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra mannagongdirnar, og umhugsa hvørt tær tryggja, at umsitingin er trygg, og at útgjøld av studningi og lánum eru røtt.

***Mannagongdir ikki dagførdar.***

*Útgjaldsskipanin*

Til at skráseta og gjalda út studning og lán brúkar Studni ÚS-skipanina, sum er frá 2002. Elektron umsitur skipanina.

### Lestrarstuðul

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Útbúgvingarstudningur | 97.657 | 95.561 | 94.969 | 94.341 | 100.179 |
| ÚSUN | 9.375 | 8.942 | 8.956 | 8.810 | 9.254 |
| Ferðastudn. uttanlands | 4.233 | 2.182 | 2.024 | 1.832 | 1.423 |
| Verkætlanarstudningur | 530 | 327 | 162 | 67 | 73 |
| **Tilsamans** | **111.796** | **107.011** | **106.110** | **105.049** | **110.929** |

Lesandi uttan fyri Norðurlond kunnu fáa stuðul til at rinda skúlagjøld. Árligi stuðulin er í mesta lagi 100 t.kr.

Av teimum 111 mió.kr. í stuðli í 2021 eru 100 mió.kr. til útbúgvingarstudning. Í talvuni niðanfyri er útbúgvingarstudningurin útgreinaður:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Studningar til hægri útbúgvingar | 53.377 | 54.523 | 54.224 | 56.174 | 60.606 |
| Studn. til miðnámsútb., heimabúgvandi | 19.416 | 18.989 | 20.648 | 20.489 | 21.257 |
| Studn. til miðnámsútb., útibúgvandi | 16.933 | 14.339 | 13.368 | 11.533 | 11.299 |
| Bókastudningur | 2.830 | 2.901 | 2.861 | 3.052 | 3.130 |
| Vistarhaldsstudningur | 962 | 824 | 695 | 609 | 724 |
| Ferðastudningur innanoyggja | 4.140 | 3.984 | 3.173 | 2.483 | 3.094 |
| **Tilsamans** | **97.657** | **95.561** | **94.969** | **94.341** | **100.109** |

*Treytir fyri hægri stuðli til miðnámslestur*

Miðnámslesandi kunnu fáa hægri studning, um tey ikki búgva heima hjá foreldrum, men t.d. leiga.

Studni hevði avbjóðingar við, hvussu reglurnar um flyting av bústaði skuldu tulkast og spurdi tí Landsfólkayvirlitið. Landsfólkayvirlitið vísti m.a. á, at skrásetti bústaðurin í Landsfólkayvirlitinum er at rokna sum bústaður hjá persóni, og at TAKS, Almannaverkið, Landssjúkrahúsið og Heilsutrygd nýta upplýsingarnar hjá Landsfólkayvirlitinum sum grundupplýsingar í sínum skráum og málsviðgerð.

Uttanríkis- og mentamálaráðið helt eisini í fyrstu atløgu, at í hesum sambandi er lógin um fólkayvirlit yvirskipað, og neyðugt var ikki við serstøkum ásetingum í kunngerð um lestrarstuðul. Eftirsíðan hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið boðað Studna frá, at ráðið hevði viðgjørt spurningin av nýggjum, og metti, at heimild er ikki í lógini um lestrarstuðul at seta sum treyt, at umsøkjari boðar frá flyting hjá fólkayvirlitinum fyri at fáa hægra stuðulin.

***Studni fær ikki brúkt Landsfólkayvirlitið at staðfesta hvar fólk búgva.***

Undirvísingarstýrið hevur víst á, at stýrið ynskir at fáa lógina broytta, soleiðis at skrásetti bústaðurin í Landsfólkayvirlitinum er at rokna sum bústaður hjá persóni, ið fær lestrarstuðul, eins og tað er hjá øðrum almennum stovnum.

Í august 2022 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið kunnað um, at ráðið umrøður spurningin, hvørt lógar- ella kunngerðarbroyting er neyðug, til tess at styrkja eftirlitsarbeiðið hjá Studna.

*Stakroyndir av útgoldnum studningum*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um útgoldin studningur er rættur, t.e., um umsókn er komin, um umsøkjari lýkur treytirnar um tilknýti til Føroyar, um viðkomandi er fyltur 18 ár, um útbúgvingin er stuðulsheimilað og um skúlin hevur váttað, at umsøkjarin gongur har.

Í einum føri fekk lesandi í Svøríki ÚSUN-stuðul, tó at útbúgvingin ikki er góðkend av SU. Studni hevur kannað, um útbúgvingin er góðkend í Svøríki og Noregi, og hevur fingið váttan um, at hon er góðkend. Landsgrannskoðanin hevði annars einki at finnast at.

## Lestrarlán

Lestrarlán kunnu latast lesandi, 18 ár og eldri. Lánini verða rentað við 2% p.a. í útbúgvingartíðini og við 3% p.a. yvir diskontuni eftir lokna útbúgving.

Yvirlit yvir lán, afturrindan av lánum og játtan:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Keyp av vørum og tæn. o.a. | 42 | 39 | 147 | 33 | 51 |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti | -2.132 | -1.770 | -1.937 | -1.749 | -1.546 |
| Útlán v.m. | 9.558 | 7.386 | 8.466 | 6.483 | 6.238 |
| Afturgjaldan av útlánum v.m. | -11.181 | -10.854 | -11.867 | -12.381 | -12.394 |
| **Tilsamans** | **-3.713** | **-5.199** | **-5.191** | **-7.614** | **-7.649** |
| *Játtan* | *-3.000* | *-3.900* | *-4.500* | *-4.500* | *-6.500* |

Lesandi byrja vanliga at gjalda aftur eitt ár eftir, at útbúgvingin er lokin ella steðgað, og lánini skulu rindast aftur við í minsta lagi 300 kr. um mánaðin og í mesta lagi 15 ár.

Hevur skuldari ikki goldið, tá ið Studni hevur sent tríggjar rykkjarar, boðar Studni viðkomandi skrivliga frá, at skuldin er søgd upp til skaðaleysa afturrindan.

***TAKS heintar eftirstøður av lánum inn.***

TAKS heintar eftirstøður inn, um skuldari býr í Føroyum. TAKS boðar javnan Studna frá, um skuldari flytur av landinum, og tá kallar Studni kravið aftur.

Studni sendir krøv viðvíkjandi skuldarum, ið búgva uttanlands til advokat. Advokaturin ger avtalur við skuldarar, ella sendir hann krøvini t.d. til útlendskan advokat.

*Eftirstøður*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kanna áognir av lánum. Skuldin er bókað á høvuðskontu 7.23.7.05 “Lestrarlán”. Í november 2021 vóru 342 lán í eftirstøðu.

Ímillum eftirstøðurnar av lestrarlánum vóru eisini eftirstøður viðvíkjandi ov nógv útgoldnum stuðli bókaðar, tó at stuðul ikki er játtaður á somu høvuðskontu sum lestrarlán.

Nógvar umsóknir um lestrarlán, herundir fleiri gamlar, vóru skrásettar at vera í bíðistøðu, tí umsøkjarar høvdu ikki sent Studna allar upplýsingar. Landsgrannskoðanin mælti til at strika umsóknir og upplýsingar, sum ikki eru viðkomandi longur.

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur mál um lán, sum eru endað í 2020 og 2021. Einki var at finnast at.

*Eftirstøður, sendar til advokat*

Studni kallar ikki mál aftur, ið eru send til advokat, tó at upplýsingar, ið stovnurin hevur atgongd til, vísa, at persónur er fluttur aftur til Føroyar.

Eitt krav upp á 104 t.kr. var enn hjá advokati, tó at skuldarin er fluttur aftur til Føroyar í 2020; einki er goldið til Studna.

Studni hevur einki frætt frá advokati um krav upp á 113 t.kr., ið stovnurin sendi advokatinum í 2018. Í juni 2022 hevur Undirvísingarstýrið upplýst, at Studni nú munnliga hevur fingið at vita frá advokatinum, at persónurin er ikki at finna.

Undirvísingarstýrið hevur víst á, at støðan tann dagin, skuld er søgd upp til skaðaleysa afturrindan, er avgerandi fyri, um eitt mál verður sent til TAKS ella til advokat. Flytur skuldari uttanlands, boðar TAKS Studna frá; tá kallar Studni kravið aftur, og sendir tað til advokatin. Er krav sent til advokat at heinta inn, verður tað verandi til skuldin er goldin, ella staðfest er, at skuldarin ikki kann gjalda. Undirvísingarstýrið leggur afturat, at krøvini kunnu sambært lógini innheintast og pantast av TAKS, men at tað merkir ikki, at Studni skal kanna, um skuldari flytur ímillum lond.

### *Reglurnar um í mesta lagi 15 ára afturgjaldstíð*

Reglurnar, um at rinda lán aftur yvir í mesta lagi 15 ár, eru ikki altíð fylgdar.

***Reglurnar um afturgjaldstíð ikki hildnar.***

Ein skuldari, ið skyldar 211 t.kr., og skuldi byrja afturgjald í 2014, hevur higartil goldið 37 t.kr. Sambært Studna hava tey verið í sambandi við skuldaran, fyri at fáa hann at rinda hægri gjald, men tað hevði ikki borið til. Studni sendi málið til advokat í mars 2021.

Studni sendi eitt krav til innheintingarfyritøku í 2015, har skuldarin skuldi byrja at gjalda aftur í 2013. Eftirstøðan er nú 265 t.kr. Sambært Undirvísingarstýrinum sendi innheintingarfyritøkan málið til sín advokat í 2018. Studni hevur sent kravið til advokat í 2022.

Skuldari, sum skuldi byrja afturgjald í 2011, skyldar 102 t.kr., og hevði goldið 19 t.kr. Kravið er sent til advokat í 2018, og sambært Studna er einki inngjald komið enn.

Í einum føri, har skuldari hevði gamla lániskuld, hevði Studni í 2010 sett mánaðargjaldið til 400 kr. Í 2020 sendi Studni kravið til TAKS at heinta inn, tá var skuldin 250 t.kr. Eftirstøðan er 192 t.kr. í 2021.

Ein persónur, sum skuldi byrja afturgjald í 2015, skyldar 135 t.kr. Studni hevur sent kravið til TAKS í 2018. Viðkomandi hevði higartil goldið 1.007 kr. Í juni 2022 hevur Undirvísingarstýrið kunnað um, at Studni er biðið um at kanna hjá TAKS, hvat er hent í málinum.

### *Áogn av ÚSUN-lánum*

Áognin vegna ÚSUN-lán v.m. er sambært Studna slakar 11 mió.kr. Harav eru lán, ið eru løgd um frá studningi, góðar 8,7 mió.kr.

Í juni 2022 hevur Undirvísingarstýrið greitt frá, at tær 8,7 mió.kr. eru ikki umlagdur studningur, men lán. Studni hevur rindað alla rokningina frá útbúgvingastaðnum sum studning, og síðani umlagt tað, sum er oman fyri 100 t.kr., til lán.

Í einum málið, sum Landsgrannskoðanin kannaði, var skuldin 400 t.kr., og afturgjald var byrjað í 2019 við 1.943 kr. um mánaðin, sum ger, at tað tekur meira enn 15 ár at rinda aftur.

Ein annar skuldari, sum skyldar 125 t.kr., er settur at gjalda 500 kr. um mánaðin til ár 2054. Studni hevur havt nógv samskifti við hann, tí hann helt ikki fyrstu avtaluna um at rinda 1.500 kr. um mánaðin. Studni hevur nú boðað honum frá, at lánið verður uppsagt, og kravið sent til advokat til innheintingar.

Í juni 2022 hevur Undirvísingarstýrið kunnað um, at tá ið Studni lækkar avdrátt, gera tey avtalu við skuldara um tað í eitt styttri tíðarskeið, og boða samstundis frá, at gjaldið skal hækkast aftur, soleiðis at øll skuldin er goldin eftir 15 árum. Sambært stýrinum skulu hesar fráboðanir frameftir vera skrivligar.

*Avskriving av skuld*

Um lántakari doyr, áðrenn lán er afturgoldið, kann Studni sambært § 20, stk. 4, í lógini strika restskuldina. Studni hevur ongantíð sent krøv í deyðsbúgv. Stovnurin avskrivar altíð lán, tá ið skuldari doyr. Sambært Studna hava tey avskrivað ávikavist 132 t.kr. í 2019, 18 t.kr. í 2020 og 35 t.kr. í 2021.

Í juni 2022 hevur Undirvísingarstýrið kunnað um, at hereftir verða krøv send í deyðsbúgv. Stýrið vísir á, at í § 20, stk. 4, í lógini er ásett, at Studni kann strika restskuld. Um einki er at luta úr deyðsbúnum, kann Studni strika skuldina, men ikki áðrenn búgvið er gjørt upp, og roynd er gjørd at fáa kravið innfríað.

### Ov nógv útgoldin stuðul

Sambært Studna krevur stovnurin ov nógv útgoldnan stuðul aftur frá teimum, ið hava fingið stuðul av órøttum, t.d. tá ið tey ikki hava verið lestrarvirkin, og ikki hava boðað Studna frá.

Í 2021, 2020 og 2019 vóru ávikavist 515 t.kr., 802 t.kr. og 842 t.kr. goldnar ov nógv í studningi. Somu ár er áognin ávikavist 336 t.kr., 904 t.kr. og 405 t.kr.

***Stuðul í fleiri ár uttan at lúka treytirnar.***

Ein skuldari hevur fingið studning í 3 ár, uttan at hava lokið treytirnar. Í 2020 gjørdi hann sjálvbodna sátt við Studna um ov nógv útgoldnan stuðul, tilsamans 158 t.kr. Seinni í 2020 sendi Studni málið til TAKS at heinta inn.

Landsgrannskoðanin ivast í, um reglurnar at senda falna skuld til innheintingar hjá TAKS fata um “ov nógv goldnan stuðul”.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin svarað, at § 21, stk. 1-4, í lógini “um lestrarstuðul” einans fevnir um afturgjald av láni og um falnar rentur og avdráttir sambært § 21, stk. 1.

***Studni krevur ikki altíð ov nógv goldnan studning aftur.***

Grannskoðanin vísti eisini, at Studni hevur ikki altíð kravt ov nógv goldnan studning aftur, tó at móttakari ikki hevur lokið treytirnar fyri lestrarvirkni.

Í einum málið var eftirstøðan 53 t.kr. Málið er sent til TAKS í 2020, og sambært Studna eru slakar 18 t.kr. goldnar higartil. Persónurin hevði lisið í 3 ár, og staðið ECTS-stig, ið svara til minni enn eitt árs lestur. Spurt, hví tey ikki hava kravt ov nógv goldnan studning aftur, svaraði Studni, at viðkomandi hevði lisið í trý ár, fingið 34 útgjøld, og at upplýsingar úr Prófvbókini vóru ikki tøkar hjá Studna tá.

Sambært lógini hevur lesandi ikki rætt til studning, m.a. um viðkomandi er meira enn eitt ár afturút við lestrinum.

Í juni 2022 hevur Undirvísingarstýrið kunnað um, at Studni hevði ikki fingið boð um, at tann lesandi ikki hevði staðið nóg nógv ECTS-stig, og at tað er ábyrgdin hjá útbúgvingarstovninum at vátta lestrarvirkni sambært § 9 í K.nr. 107/2011. Undirvísingarstýrið vísir á, at eftir at Studni partvís hevur fingið talgilda atgongd til Prófvbókina hjá Fróðskaparsetrinum, eru møguligar ábendingar um, at einstøk lesandi ikki hava lokið treytirnar um lestrarvirkni, og sostatt er neyðugt at hyggja at tí aftur í tíð.

***Prófvbókin ikki altíð dagført.***

Studni kann tó ikki altíð ganga út frá, at Prófvbókin er dagført, og harafturat er eisini neyðugt at menna skipanina hjá Studna, soleiðis at mánaðarlig útgjøld verða samanhildin við staðin ECTS-stig. Neyðugt er tí at ganga ígjøgnum hvørt einstakt mál saman við Fróðskaparsetrinum, áðrenn krav um ov nógv útgoldnan stuðul verður sent. Hetta

arbeiðið krevur tíð og er ikki gjørt enn. Sambært Undirvísingarstýrinum er tí eisini altavgerandi, at Fróðskaparsetrið frameftir raðfestir at dagføra Prógvbókina á ein tílíkan hátt, at hon kann nýtast sum prógv fyri lestrarvirkni.

Í einum øðrum máli var skuldin 207 t.kr. Sambært Studna hevur viðkomandi staðið minni enn ein triðing av ECTS-stigunum í 3 ára lestri, og eigur helst at verða kravdur eftir útgoldnum studningi fyri 3 – 4 mánaðir. Studni fer at rudda upp í næstum, og um tað vísir seg, at tann lesandi hevur fingið útgoldið ov nógvan studning, verður upphæddin kravd aftur.

Ein persónur skyldaði upprunaliga 381 t.kr., og eftirstøðan er 90 t.kr. Sambært Studna stavar skuldin frá gjaldsskúlaláni, sum er uppskrivað og lagt um frá stuðli, umframt rentur. Skuldin hevur verið til innheinting hjá advokati, sum hevur havt tað hjá advokati í útlandinum, har skuldarin býr. Málið hevur verið í fútarættinum, sum í skrivi hevur sett 10 ára fyrningarfreist at vera í 2031.

Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at uppruddingararbeiði er byrjað viðvíkjandi krøvum um afturgjald av ov nógv goldnum studningi, sum er fingin orsakað av, at móttakari ikki hevur lokið treytirnar fyri lestrarvirkni.

***Uppruddingararbeiði viðvíkjandi krøvum um afturgjald av ov nógv goldnum studningi er byrjað.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Studni er farið undir skipaða gjøgnumgongd av stuðulsútgjøldum síðstu 5 árini, fyri at finna út av, um tað eru persónar, ið hava fingið stuðul av órøttum. Síðani fer Studni at krevja ov nógv útgoldnan stuðul aftur. Samstarvað verður við Fróðskaparsetrið.

Landsstýrismaðurin vísir á, at Prógvbókin hjá Fróðskaparsetrinum er eitt amboð, sum Studni á virknan hátt brúkar, fyri at finna út av, um lesandi eru lestrarvirkin og hava rætt til lestrarstuðul. Tað er ein trupulleiki, at Prógvbókin er ikki ment beinleiðis til tørvin hjá Studna, og síðsti parturin av menningararbeiðinum hjá Studna, sum skal samkoyra upplýsingarnar frá Prógvbókini, er ikki liðugur; tí kann arbeiðið við Prógvbókini vera umsitingarliga tungt.

Sambært Studna virkar Prógvbókin yvirskipað soleiðis, at lesandi, sum ikki eru lestrarvirkin sambært lógini um lestrarstuðul, sláa út í útgjaldingarskipanini hjá Studna. Studni ger síðani ein næmingalista yvir hesar persónar, og sendur hann til Fróðskaparsetrið at eftirkanna. Tá ið Studni hevur fingið váttan frá Fróðskaparsetrinum, verður lestrarstuðulin steðgaður, og ov nógv útgoldin stuðul kravdur aftur.

### Lógarbroyting viðvíkjandi innkrevjing av ov nógv goldnum studningi

Frá 1. august 2021 kann Studni sambært § 3, stk. 4, í lógini krevja stuðul rindaðan aftur, um tann lesandi hevur givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella hevur tagt burtur týðandi upplýsingar ella ikki lýkur treytirnar fyri stuðli annars.

Í viðmerkingunum til § 3, stk. 4, stendur, at *"Ásetingin er nýggj. Eftir áheitan frá Studna hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið gjørt eina áseting um afturgjalding av stuðli, um treytirnar fyri at fáa stuðul ikki eru loknar. Mett verður, at tørvur er á hesi áseting í sjálvari lógini, soleiðis at ivamál ikki taka seg upp í sambandi við møguliga afturrindan av stuðli."*

Sambært álitinum í Lm. nr. 116/2020 er *"endamálið við uppskotinum at áseta greiðari reglur fyri eftirlit við lestrarvirkni og heimild til Studna at krevja studning afturgoldnan í ávísum førum."*

### Heimild at heinta inn sambært lógini um lestrarstuðul

Í § 20 í lógini er m.a. ásett, hvussu skuld kann heintast inn. Um lántakari ikki lýkur lánitreytirnar ella letur vera við at gjalda falnar rentur og avdráttir, kann skuldin sigast upp til skaðaleysa afturrindan sambært § 21, stk. 1. Sambært § 21, stk. 2 og 3, kann Studni biðja TAKS heinta inn skuld við at halda aftur í A-inntøkum og panta.

Í 2003 gjørdi Studni avtalu við TAKS um innheinting av eftirstøðu. Sambært reglugerð hjá Fíggjarmálaráðnum frá 2. apríl 2003 heintar TAKS inn eftirstøður, sum viðkomandi stovnur (áognari) sambært viðkomandi lóggávu kann senda til innheintingar.

Spurt, hvar heimild er ásett at senda krøv um ov nógv útgoldnan studning til TAKS at heinta inn, svaraði Studni, at stovnurin heldur, at alt, sum lesandi skylda, er skuld.

***Ov nógv goldin studningur er simpult krav.***

Í juni 2022 hevur Undirvísingarstýrið greitt frá, at ov nógv útgoldin studningur er eitt simpult krav, og fellur sostatt til gjaldingar beinanvegin. Undirvísingarstýrið fer at biðja Uttanríkis- og mentamálaráðið broyta lógina, soleiðis at heimild er at gera sjálvbodna semju við móttakara av ov nógv útgoldnum studningi, og at Studni sambært § 3, stk. 4, eisini fær heimild at renta og innkrevja krøvini hjá TAKS, bæði tey simplu krøvini og um undirskrivað verður sjálvboðin sátt sambært § 21, stk. 2.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Studni kann krevja ov nógv goldnan stuðul afturgoldnan, sambært § 3, stk. 4, í lógini, um lestrarstuðul er útgoldin grundað á skeivar ella villleiðandi upplýsingar, sum tann lesandi hevur givið Studna, ella um tann lesandi hevur tagt burtur týðandi upplýsingar ella ikki lýkur treytirnar fyri stuðli annars.

Landsstýrismaðurin vísir á, at orðaljóðið í § 21, stk. 1-4, fevnir einans um lán, og tískil ikki um lestrarstuðul. Ráðið heldur tí, at Studni kann krevja skuld sambært § 3, stk. 4, afturgoldna á privatrættarligum grundarlagi, tað er sum við øllum øðrum vanligum peningakrøvum, við at Studni heitir á skuldaran um at afturrinda skuldina innan rímiliga tíð, og um tað ikki ber á mál, við at beina málið til advokat til innkrevjingar. Í síðsta enda má málið tá avgerast við rættarúrskurði.

Uttanríkis- og mentamálaráðið er sinnað at kanna, um leisturin í § 21 um afturrindan av láni eisini er ein skynsamari leistur í mun til lestrarstuðul, ið próvfast er útgoldin á skeivum grundarlagi, ella sum móttakarin annars ikki hevur havt rætt til sambært § 3, stk. 4.

***Umrøða neyðuga lógarheimild.***

Landsstýrismaðurin vísir á, at Uttanríkis- og mentamálaráðið í løtuni umrøður við Studna, hvørt tað er neyðugt við lógar- ella kunngerðarheimild, fyri at tryggja, at Studni kann gera sjálvbodna sátt við skuldara, ella hinvegin, um heimild longu er fyri tí á privatrættarligum grundarlagi. Hann leggur afturat, at sjálvboðin sátt ikki neyturviliga merkir, at partur av skuldini verður eftirgivin.

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur, at eftirgeving av skuld til tað almenna, til minni enn áljóðandi virði, krevur lógarheimild, t.d. eins og TAKS sambært § 1, stk. 4, í Ll. nr. 93/1993 “um gjøld o.t. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan”.

### Eftirlit við lestrarvirkni

Vinnuháskúlan hevur vátta lestrarvirkni fyri 2020/2021. Skúlin sendi Studna undirskrivaðan lista og viðmerkti, at sjey lesandi vóru givin. Studni fer at krevja lestrarstuðul aftur frá tveimum, og tvey eru avgreidd.

Studni hevur viðgjørt ivamál um lestrarvirkni við Lestrarskrivstovuna á Fróðskaparsetrinum umvegis telefon. Studni gav fimm lesandi boð um, at tey vóru meira enn 60 ECTS-stig afturút. Eftir at Prógvbókin er dagførd, vísti tað seg, at fýra av teimum fimm høvdu kravdu ECTS-stigini. Studni steðgaði útgjaldinum til tann fimta, og fer ikki at krevja goldnan studning aftur. Sjey lesandi á Fróðskaparsetrinum eru givin fyrr í lestrarárinum, har fer Studni at kanna um tey skulu rinda studning aftur.

#### *Prógv fyri lestrarvirkni*

Studni plagdi at senda listar til lestrarstovnarnar at vátta, at studningsmóttakararnir vóru lestrarvirknir.

Tá sendi Fróðskaparsetrið sínum deildum váttanarskjøl tvær ferðir um árið at gjøgnumganga og vátta. Uppgávan var krevjandi, m.a. tí at Prófvbókin var ikki nóg væl dagførd, og upplýsingar um staðin ECTS-stig máttu fáast frá undirvísarunum o.ø. Fróðskaparsetrið og Studni vildu frá hesari skipan, m.a. tí ivasamt var, um Setrið og Studni høvdu felags fatan av lestrarvirkni.

***Ivasamt, um Setrið og Studni høvdu felags fatan av lestrarvirkni.***

Fyri tveimum árum síðani fóru Studni og Setrið undir at menna skipanirnar fyri at fáa upplýsingar úr Prófvbókini talgilt. Í dag fær Studni upplýsingar úr Prófvbókini inn í ÚS-skipanina, sum vísa ymiskar støður hjá lesandi. Upplýsingarnar eru tó ikki nóg eftirfarandi, men kunnu geva ábending um lestrarvirkni. Studni fær ikki brúkt skipanina til at steðga útgjaldi til lesandi, sum eru meira enn 60 ECTS-stig afturút.

Sambært Fróðskaparsetrinum er Prófvbókin ein gomul skipan frá 1987, sum upprunaliga var ætlað til at útskriva prógv. Prófvbókin er ment so við og við, men í løtuni verður minst møguligt gjørt við at menna skipanina, tí tey bíða eftir nýggja skúlanetinum. Um Studni er komið eftir, at onkur ikki hevur lokið treytirnar at vera lestrarvirkin sambært Prófvbókini, mugu tey spyrja Setrið, tí Prófvbókin er ikki altíð dagførd.

Fyri at fáa endaliga staðfest rættleikan fer Studni undir eitt eftirlitsarbeiði, har hugt verður eftir Prófvbókini fimm ár aftur.

***Eftirlit 5 ár aftur í tíð.***

Í apríl 2022 hevur Studni kunnað um, at Undirvísingarstýrið er farið undir at menna eina lestrarfyrisitingarskipan (LFS-skipanin), ið skal hjálpa skúlum og stovnum at stýra virksemi og tilfeingi. Fróðskaparsetrið verður partur av LFS-skipanini, sum kemur í staðin fyri Prófvbókina. Studni fer at fáa atgongd til neyðugu upplýsingarnar umvegis LFS, og miðað verður eftir, at LFS-skipanin kann takast í brúk um 2 ár.

Í juni 2022 hevur Undirvísingarstýrið greitt frá, at stýrið hevur tikið niðurstøðuna hjá Landsgrannskoðanini til eftirtektar. Undirvísingarstýrið hevur givið KT-eindini boð um, at Prófvbókin á Fróðskaparsetrinum, herundir fráboðanarskipanin til Studna um lestrarvirkni, skal fáa eina forrættarstøðu í menningini av nýggju KT-skipanini.

***Skunda undir menning av Prófvbókini.***

Í august 2022 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið kunnað um, at Studni heldur, at eftirlitið við lestrarvirkni frameftir er nøktandi, við at Studni samskiftir við Fróðskaparsetrið umvegis næmingalistar yvir persónar, ið sláa út í útgjaldingarskipanini. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur heitt á Studna um at hava neyvt eftirlit við lestrarvirkni hjá teimum lesandi, soleiðis at stovnurin minkar um vandan fyri at rinda út stuðul til lesandi, ið ikki hava rætt til stuðul.

***Hava heitt á Studna um at hava neyvt eftirlit við lestrarvirkni.***

## Fíggjarstøða

### *Fíggjarligur útbúnaður*

Lestrarlánini og áognin av ov nógv útgoldnum stuðli eru skrásett sum fíggjarligur útbúnaður. Fíggjarligur útbúnaður 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Útlán (primo) | 77.261 | 75.637 | 72.169 | 68.768 | 62.870 |
| Útlán (tilgongd) | 9.558 | 7.386 | 8.466 | 6.483 | 6.238 |
| Útlán (frágongd) | -11.181 | -10.854 | -11.867 | -12.381 | -12.393 |
| **Tilsamans** | **75.637** | **72.169** | **68.768** | **62.870** | **56.715** |

Í tilgongdini av lánum í 2021 eru 4 mió.kr. vanlig lán til lesandi, 1,5 mió.kr. rentur og 700 t.kr. eru ÚSUN gjaldskúlalán.

Í teimum 56,7 mió.kr. í 2021 eru lán, eftirstøður av lánum, ov nógv útgoldin stuðul og upphæddir, sum advokatur hevur heintað inn úrslitaleyst.

Í november 2021 vóru slakar 2,7 mió.kr. til innheintingar hjá TAKS, og sambært uppgerð frá advokatinum vóru slakar 1,3 mió.kr. úrslitaleyst innheintaðar, og Studni hevur markað krøvini sum óvirkin.

***Áognin í fíggjarstøðuni ikki sundurgreinað.***

Studni hevur ikki sundurgreinað áognina í fíggjarstøðuni. Sambært Studna er eftirstøðan av lánum og ov nógv útgoldnum studningi 9,2 mió.kr. tilsamans. Tað sæst heldur ikki, hvussu gomul skuldin er, hvussu stór virðisleysu krøvini eru, ella hvussu nógv er avskrivað. Studni renturoknar lán, men ikki studning, sum lesandi eru kravd at rinda aftur.

***Ongantíð sett av móti tapi.***

Studni hevur víst á, at tað hevur ongantíð verið nakað ynski um at útgreina fíggjarstøðuna. Studni hevur heldur ongantíð sett av ímóti tapi av skuldarum. Studni heldur, at tað ber ikki til, uttan at tey hava eina mannagongd um, at t.d. eftirstøða, eldri enn eitt ávíst, kann avsetast.

Undirvísingarstýrið fer saman við Studna at kanna, hvussu fíggjarstøðan tøkniliga kann greinast, soleiðis at gjøgnumskygni verður betri. Eisini fara tey at kanna møguleikan at seta av ímóti tapi og gera mannagongdir fyri tað.

***Neyðugt við betri gjøgnumskygni.***

Í august 2022 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið kunnað um, at enn er ikki funnin nøkur loysn á, hvussu fíggjarstøðan betur kann útgreinast. Studni er farið undir at kanna, hvussu tað kann gerast, men ivast í hvørjar dagføringar og broytingar mugu gerast í verandi útgjaldsskipan. Neyðugt verður at tosa við veitaran av skipanini um málið.

*Peningastovnskontur*

Studni hevur 5 peningastovnskontur í føroyskum peningastovnum. Studni hevur stemmað peningastovnskonturnar av við uttanhýsis skjøl 31. desember 2021.

### Umsiting av játtanum á høvuðskontum

Ov nógv útgoldin lestrarstuðul er ikki bókaður á høvuðskontu 7.23.7.04 “Lestrarstuðul”, har játtanin til stuðul er.

Undirvísingarstýrið tekur undir við, at áognin av ov nógv útgoldnum stuðli eigur at verða bókað í fíggjarstøðuni á høvuðskontu 7.23.7.04. Sambært Studna er tað trupult, men stovnurin fer at kanna, hvussu tað kann loysast, soleiðis at áognin verður skrásett á rætta høvuðskontu.

***Bókingarhátturin ger at hvørgin roknskapur er rættur.***

Tá ið Studni krevur ov nógvan stuðul goldnan aftur, minka tey útgoldna stuðulin á høvuðskontu 7.23.7.04 “Lestrarstuðul”, undirkontu 01, og bókað upphæddina sum veitt lán á høvuðskontu 7.23.7.05 “Lestrarlán”. Tað ger, at feilir eru í báðum roknskapunum. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at tað er ikki í samsvari við játtanarreglurnar. Afturgjalding av ov nógv útgoldnum stuðli eigur at inntøkuførast á somu kontu.

***Ov nógv útgoldin stuðul bókaður sum lán.***

Studni broytir “ov nógv útgoldnan stuðul” til lán, tá ið lesandi ikki megna at gjalda upphæddina aftur beinanvegin. Onkuntíð ger Studni avtalur við lesandi um at mótrokna ov nógv útgoldnan stuðul frameftir, um tað ber til.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað, at ov nógv útgoldin stuðul verður umlagdur til lán, merkir ikki, at Studni kann flyta upphæddina frá einari høvuðskontu til aðra.

Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at sambært Studna ber ikki til tøkniliga at umsita ov nógv útgoldnan stuðul á høvuðskontu 7.23.7.04 “Lestrarstuðul”. Stýrið sær væl trupulleikan, sum Landsgrannskoðanin vísir á, og fer tí, saman við Studna, at royna at finna eina loysn, soleiðis at bókað verður á rætta høvuðskontu.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið tekur undir við Landsgrannskoðanini, at tað er ein trupulleiki í bókingarháttinum, tá ið ov nógv útgoldin stuðul verður bókaður inn á kontuna fyri lánini.

### Samanumtikið um grannskoðanina

Grannskoðanin av umsitingini av lestrarstuðli og -lánum vísir, at umsøkjarar lúka treytirnar fyri at fáa studning/lán, t.e. tilknýti til Føroyar, bústað í landinum, aldur v.m. Studni hevur eftirlit við, at útbúgvingarnar eru góðkendar, at stuðulstíðarskeiðið er rætt við atliti at normeraðari tíð + 1 ár.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at roknskapirnir eru rættir, m.a. tí at okkara stakroyndir vísa,

***Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at roknskapirnir eru rættir.***

- at Studni hevur ikki nóg væl skipað eftirlit við, um studningsmóttakarar eru lestrarvirknir,
- at Studni hevur ikki fingið neyðug skjalprógv frá hægru lærustovnunum um, at lesandi eru lestrarvirkin,
- tó at stovnurin hevur havt beinleiðis samband við Prófvbókina hjá Fróðskaparsetrinum í rúma tíð, eru upplýsingarnar ikki brúktar til at hava eftirlit við lestrarvirkni hjá teimum lesandi, og
- dømi eru um, at Studni hevur ikki kravt staðfestan “ov nógv útgoldnan stuðul” aftur frá móttakarum.

Aðrar orsøkir, sum eisini gera, at roknskapurin er misvísandi, eru, at Studni hevur skrásett áognir av ov nógv útgoldnum studningi á skeiva høvuðskontu. Reglurnar um í mesta lagi 15 ára afturgjaldstíð av lánum eru ikki altíð fylgdar.

Studni vísir á, at stovnurin hevur gott eftirlit við lestrarvirkni. Studni sendir árliga næmingalistar út til allar skúlar, og lestrarvirkni er grundað á upplýsingar frá útbúgvingarstovnunum. Studni heldur, at skúlarnir halda sína fráboðanarskyldu.

Nú Studni hevur fingið innlit í Prófvbókina, sæst, at tað møguliga eru lesandi, sum kunnu hava fingið ov nógv útgoldið í mun til staðin ECTS, orsakað av, at fráboðanir frá Fróðskaparsetrinum ikki eru komnar, tá ið Studni brúkti váttanarskjøl.

Fyri at fáa endaliga staðfest rættleikan, fer Studni undir eitt eftirlitsarbeiði, har hugt verður at Prófvbókini fimm ár aftur. Studni vísir eisini á lestrafyrisitingarskipanina, sum Undirvísingarstýrið er í holt við at menna, og sum miðað verður eftir at taka í nýtslu um 2 ár.

Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at stýrið saman við Studna fer at royna at broyta mannagongdir og finna loysnir á teimum viðurskiftum, sum gera, at Landsgrannskoðanin ikki kann sanna, at roknskapirnir eru rættir.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Studni hevur greitt Uttanríkis- og mentamálaráðnum frá, at stovnurin er í holt við at leggja eina ætlan fyri, hvussu tey kunnu betra um tey viðurskifti, sum sambært frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini eiga at verða betur handfarin, soleiðis at eftirlitið verður styrkt. Ætlanin inniber m.a., at Studni gjøgnumgongur lestrarstuðulin, sum er útgoldin 5 ár aftur, og krevur stuðul aftur, um hann er útgoldin av órøttum. Studni skal tryggja, at ongar afturgjaldsavtalur eru longri enn 15 ár, og leggja dent á at tryggja, at lesandi, sum fáa lestrarstuðul, eru lestrarvirkin. Studni kunnar Uttanríkis- og mentamálaráðið um gongdina í málinum, soleiðis at ráðið fær tryggjað sær, at eftirlitið verður styrkt.

## 7.22 Yrkisdepilin (LG 2021/207-237)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av lønar- og ferðaendurgjøldum til læruplass og gjøld fyri lærusáttmálar. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.7.04 "Lestrarstuðul (lógarbundin játtan)", á undirkontunum 03 "Studningur til læruplass", 04 "Gjald fyri lærusáttmálar" og 05 "Ferðaendurgjald til læruplass".

Heimildin at skipa fyri yrkisútbúgvingum er í Ll. nr. 94/1998 "um yrkisútbúgvingar".

Lærusáttmálar fáa gildi frá tí degi, Yrkisdepilin hevur góðtikið teir. Læruplass gjalda landskassanum 3.000 kr. fyri hvønn góðkendan lærusáttmála.

Landskassin endurrindar læruplássum fyri løn, sum læruplássini rinda lærlingum í skúlatíðini. Endurgjaldið er 75% av ásettu minstuløninni hjá avvarðandi yrkisfeløgum íroknað frítíðarløn. Er eingin sáttmáli galdandi, ásetir Yrkisútbúgvingarráðið minstuløninа.

Landskassin veitir læruplássum 2.600 kr. fyri hvørt skúlaskeið til ferðaútreiðslur, sum standast av, at lærlingur ikki fær kravda skúlaundirvísing í Føroyum.

### KT-skipan

Til at avgreiða útgjøldini brúkar Yrkisdepilin KT-skipanina, nevnd ÚS-skipanin. Studni útvegaði í sínari tíð skipanina til at umsita lestrarstuðul og -lán. Parturin, sum Yrkisdepilin brúkar, er lítið mentur, síðani skipanin var tikin í nýtslu í 2005.

Yrkisdepilin hevur raðfest at menna verandi skipan, soleiðis at umsitingin av ferða- og lønarendurgjøldum er góðskutryggjað, inntil nýggja Skúlanetið, ið Uttanríkis- og mentamálaráðið er í holt við at menna, er tøkt.

Yrkisdepilin og Studni hava nýliga undirskrivað avtalu um býtið av skipanini.

Elektron hevur í desember 2020 framt KT-skoðan av Yrkisdeplinum sambært rundskrivinum um KT-trygd. 11 tilmælir vóru, harav 6 vóru høgt raðfest, 2 miðal og 3 lágt raðfest. Av teimum 6 høgt raðfestu eru 2 avgreidd. Nýggj skoðan skuldi væntandi gerast í fyrru hálvu av 2022.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskaparreglugerðin er góðkend í februar 2022. Yrkisdepilin hevur fleiri ferðir spurt Fíggjarmálaráðið, um nýtslan av egnari fíggjarskipan er fata av loyvinum hjá Studna, uttan at hava fingið svar.

***Bókingarskjøl skulu liggja við í BSL.***

Sambært roknskaparkunngerðini skal hvør einstøk roknskaparlig skráseting verða prógvað við einum skjali. Landsgrannskoðanin mælti til at leggja bókingarskjøl við í Búskaparskipan landsins.

Roknskapar- og játtanartøl seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lestrarstuðul, Studningur til læruplass | 12.180 | 14.544 | 12.796 | 18.201 | 26.019 |
| Lestrarstuðul, Gjald fyri lærusáttmálar | -1.098 | -1.131 | -1.125 | -942 | -1.119 |
| Lestrarstuðul, Ferð.end.gj. til læruplass | 1.300 | 800 | 861 | 676 | 1.017 |
| **Tilsamans** | **12.382** | **14.213** | **12.532** | **17.935** | **25.917** |
| *Játtan* | *13.730* | *12.735* | *15.035* | *15.535* | *17.035* |

### *Feilir í útgjøldum*

Yrkisdepilin hevði goldið 640 t.kr. ov nógv út av órøttum frá 2016 til 2021, og hevði sent rokningar til læruplássini fyri tað. Afturat tí hava nøkur læruplass rindað skeiv útgjøld aftur til stovnin.

Yrkisdepilin hevði staðfest, at frá 2005 til 2021 vóru møguligar feilútgjaldingar fyri slakar 3 mió.kr., harav góðar 1,5 mió.kr. vóru innan fyri 5 ára fyrningarfreistina. Yrkisdepilin gjøgnumgekk síðani øll útgjøld fimm ár aftur í tíð, og sendi rokningar til 21 fyritøkur fyri ov nógv útgoldin endurgjøld, roknað aftur til 2017.

***Feilútgjaldingar fyri milliónir.***

### Innaneftirlit

Landsgrannskoðanin vísti á, at innaneftirlitið í besta føri hevur verið veikt, og alt handliga arbeiðið í sambandi við útgjøld vísir, at einføld eftirlit, sum kundu havt byrgt fyri feilum, hava ikki verið í KT-skipanini.

ÚS-skipanin hevði ikki innbygd eftirlit at byrgja fyri vanligum feilum, so sum at sama upphædd kann vera goldin út fleiri ferðir, ella at læruplass fær endurgjald fyri sama lærling sama skúlaskeið meira enn eina ferð.

***Ikki innbygd eftirlit at byrgja fyri vanligum feilum.***

Sambært Yrkisdeplinum bar ikki til at fáa neyðug yvirlit úr ÚS-skipanini, áðrenn hon var ment í 2020/21, og skipanin hevði ikki nøktandi innbygd eftirlit. Eisini hevði stovnurin avmarkaða játtan til KT-menning, og tí er skipanin ment so við og við. ÚS-skipanin er nú nógv ment við innbygdum kontrollum, innanhýsis eftirlitið er hert, og allar mannagongdir eru niðurskrivaðar, við neyvt lýstum leiklutum.

### Kanning av útgjøldum

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lønar- og ferðaendurgjøldini eru sambært galdandi reglum, og um upphæddirnar eru rættar.

#### *8 vikurs freistin*

Yrkisdepilin hevði ikki fylgt regluni í § 4 í K. nr. 63/2003, um at umsóknir um lønar- og ferðaendurgjøld skuldu sendast stovninum seinast 8 vikur eftir, at lærlingurin er komin aftur av hvørjum einstøkum skúlaskeiði. Stovnurin hevur tí rindað læruplássum endurgjøld langt aftur í tíð; og tað kann eisini hava havt við sær, at feilir eru í útgjøldum.

Frá 1. desember 2021 hevur Yrkisdepilin broytt siðvenju, soleiðis at umsóknir, sum ikki koma inn rættstundis, vera ikki viðgjørdar.

Í mars 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at eftir at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði gjørt vart við, at Yrkisdepilin ikki fylgdi reglunum í kunngerðini um 8 vikurs freist at søkja um ferðaendurgjald, boðaði ráðið stovninum frá, at freistin á 8 vikur er bindandi, og at Yrkisdepilin hevur ikki heimild at rinda endurgjald, tá ið umsókn er komin ov seint.

#### *Lønarendurgjald*

Fyri at fáa lønarendurgjald vátta læruplass fyri Yrkisdeplinum, at tey hava goldið lærlingunum í minsta lagi minstulønina sambært galdandi lønarsáttmála, og at skúladagar og læruár samsvara.

Landsgrannskoðanin spurdi, um Yrkisdepilin hevur umhugsað at fáa læruplássini at upplýsa, hvussu nógv tey hava goldið lærlinginum í løn og frítíðarløn fyri skúlaskeiðið, ið læruplássið søkir um endurgjald fyri.

Yrkisdepilin hevur eftirsíðan broytt oyðubløðini. Nú skal læruplass upplýsa, hvørjum arbeiðsmarknaðarsáttmála lærlingur er løntur eftir, og um lærlingur er fastløntur ella tímaløntur.

***Læruplass skulu upplýsa, hvørjum arbeiðsmarknaðarsáttmála lærlingar eru løntir eftir.***

Í 2021 var Yrkisdepilin í sambandi við Føroya Arbeiðsgevarafelag og Fíggjarmálaráðið um at fáa neyvt ásett, hvønn sáttmála ymisku útbúgvingarnar hoyra til, fyri at Yrkisdepilin skal kunna liva upp til ásetingarnar í lógarverkinum um at hava eftirlit við, at rætti sáttmáli er ásettur, fyri at lønarendurgjøldini til arbeiðsgevarar eru røtt.

Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin nakrar lærusáttmálar. Vit kannaðu, um læruplass eru góðkend, um lærusáttmáli er undirskrivaður, áðrenn lærutíðin byrjaði, um avvarðandi fakfelag og løn standa greitt í sáttmálanum, og um øll neyðug skjøl eru við. Einki var at finnast at í sambandi við góðkenningina av læruplássunum og lærusáttmálunum.

Yrkisdepilin hevur roknað ein takst fyri hvønn dag, næmingur er í skúla. Í ÚS-skipanini hevur stovnurin brúkt útroknaða dagstakstin at rinda lønarendurgjøld eftir.

***Feilir vóru í øllum stakroyndum.***

Í málunum, ið Landsgrannskoðanin kannaði, vóru feilir í øllum, og øll læruplássini høvdu fingið ov lítið endurgjald.

Yrkisdepilin hevði brúkt skeivar lønartalvur, hevði goldið frítíðarløn eftir ymiskum satsum, og eisini var feilur í rokniarkinum, sum gjørdi allar upphæddirnar skeivar. Øll høvdu harvið fingið ov lágan dagstakst.

Afturat hesum feilunum, hevur Yrkisdepilin mest sannlíkt goldið skeivar upphæddir til tey, ið hava søkt um lønarendurgjøld aftur í tíð og fyri fleiri skúlaskeið í senn.

Í februar 2022 hevur Yrkisdepilin kunnað um, at feilirnir í rokniarkinum, sum tey rokna dagstakstirnar eftir, nú eru rættaðir. Stovnurin vísir eisini á, at ÚS-skipanin megnar ikki at brúka fleiri takstir samstundis, t.v.s. at um lønin hjá lærlingi broytist, ímeðan viðkomandi er í skúla, megnar skipanin bert at brúka ein takst fyri alt tíðarskeiðið. Yrkisdepilin hevur tikið stig til at menna skipanina, soleiðis at tað verður broytt, og leggur stovnurin afturat, at einki verður goldið út, fyrr enn tað er rættað.

Sambært Yrkisdeplinum hevur stovnurin hert innanhýsis eftirlitið við áseting av lønartakstum, og biðið arbeiðsgevarar boða stovninum frá, tá ið nýggjar avtalur eru undirskrivaðar á arbeiðsmarknaðinum, og nýggir takstir tí skulu skrásetast í ÚS-skipanini.

### *Ferðaendurgjald*

Yrkisdepilin hevur rindað læruplássum endurgjald fyri ferðir hjá lærlingum, uttan at kanna, um læruplássini hava goldið fyri ferðaseðlar.

***Ferðaendurgjald er goldið, uttan at lærlingur hevur verið uttanlands.***

Yrkisdepilin bað Uttanríkis- og mentamálaráðið um ráð, tí stovnurin ætlaði at broyta oyðublaðið viðvíkjandi ferðaendurgjaldi, tí lærlingar, í tíðini við koronufarsóttini, tóku skúlaskeið við danskar skúlar á netinum, og læruplass høvdu tí ikki útreiðslur av at rinda ferðaseðlar.

Uttanríkis- og mentamálaráðið vísti á, at tað er ikki samsvar ímillum ásetingarnar í lógini og kunngerðini. Sambært lógini skal læruplass hava havt útreiðslur av at rinda fyri ferðir hjá lærlingunum, meðan tað í kunngerðini er einasta treyt, at skúlagongdin ikki kann takast í Føroyum. Ráðið mælti tí stovninum frá at broyta oyðublaðið, uttan at kunngerðin fyrst verður broytt.

Í mars 2022 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið kunnað um, at ráðið arbeiðir við at lýsa málið um ferðaendurgjald. Ráðið miðar ímóti at fáa eina áseting um, at ferðaendurgjald einans verður goldið, tá ið lærlingur er noyddur at fara uttanlands fyri at fáa ta til læruna hoyrandi skúlagongd, og at lærlingurin hevur verið uttanlands á skúlaskeiði.

### Samanumtikið um grannskoðanina

*Skipanin hevur ikki roknað endurgjøld rætt.*

Samanumtikið er niðurstøðan hjá Landsgrannskoðanini, at roknskapurin fyri lønar- og ferðaendugjøld er ikki rættur, tí:

- Yrkisdepilin hevur øll árini brúkt eina skipan, sum ikki roknar rætt lønar-endurgjald.
- Stovnurin hevur ikki syrgt fyri, at lønarendurgjaldið er sambært sáttmálum og lønartalvum, ið eru galdandi á arbeiðsmarknaðinum, tó at tað er greitt ásett í lógini, at endurgjaldið skal vera 75% av sáttmálalønini tað tíðarskeiðið, lærlingurin hevur verið í skúla.

Landsgrannskoðanin dugir heldur ikki at síggja, at heimild er at endurrinda læru-plássum fyri ferðaútreiðslur, tey ikki hava havt.

*Viðmerkingar frá landsstýrismanninum*

Í mars 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur viðgjørt frágreiðingina frá Landsgrannskoðanini saman við Yrkisdeplinum, og kann samanumtikið siga, at:

- ÚS-skipanin, sum Yrkisdepilin hevur brúkt síðani 2005 til at rinda út lønar- og ferðaendurgjøld, er nógv ment seinastu tvey árini, og eftir bestu sannføring er skipanin nú før fyri at rinda út røtt endurgjøld í samsvari við lógarverkið.
- Teir feilir, sum Landsgrannskoðanin vísti á, eru nú rættaðir, eins og arbeiðs-gongdir í Yrkisdeplinum í sambandi við viðgerð og útgjald av lønar- og ferða-endurgjøldum nú eru greitt lýstar. Samstundis er innanhýsis eftirlitið í Yrkisdeplinum nógv hert.
- Arbeitt verður, saman við Yrkisdeplinum, við at lýsa málið um ferðaendur-gjaldið. Miðað verður ímóti at fáa lógarverkið broytt, so ferðaendurgjald einans verður goldið, tá ið lærlingur hevur verið uttanlands á skúlaskeiði.

### Hendingar eftir grannskoðanarlok

*Avsetingar til lønarendurgjøld aftur í tíð*

*Roknskapurin munandi broyttur, eftir at grannskoðanin er gjørd.*

Stovnurin hevur broytt roknskapin munandi, eftir at grannskoðanin er gjørd. Sambært Búskaparskipan landsins hevur Yrkisdepilin í mars 2022 biðið Gjaldstovuna bókað 300 t.kr. í útreiðslum til lønarendurgjøld. Yrkisdepilin vísir til, at gjøldini eru skrásett til útgjaldingar í skipanini í 2018 og 2019, men av onkrari orsøk eru tey ikki goldin út.

7. apríl 2022 hevur Yrkisdepilin biðið Gjaldstovuna bókað útreiðslur fyri 6,5 mió.kr. í 2021 vegna skyldug lønarendurgjøld.[31] Upphæddin er støðlað í fíggjarstøðuni.

Sambært Yrkisdeplinum er orsøkin, til at tey avseta so stóra upphædd, at stovnurin hevur ikki handhevja regluna um 8 vikurs freist at søkja um endurgjald, sum ásett í K. nr. 63/2003.

*Lógarfest krav um tíðarfreistir er ikki hildið.*

Tá ið Yrkisdepilin ikki hevur hildið reglurnar um tíðarfreistirnar, læruplass hava at søkja um lønar- og ferðaendurgjøld, eru roknskapirnir fyri undanfarin ár ikki rættir.

Játtanin til lønar- og ferðaendurgjøld er lógarbundin játtan. Sambært § 13, stk. 3, í roknskaparkunngerðini skulu útreiðslur, ið ikki stava frá vørum og tænastuveitingum, skrásetast, so skjótt, upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá ið goldið verður.

Játtanin til studning til læruplass er hækkað 3,5 mió.kr. við eykajáttanarlóg fyri oktober 2021, sum er samtykt 25. november 2021. Í álitinum frá fíggjarnevndini stendur m.a., at *"óvissa er um upphæddina fyri lønarendurgjald til læruplass, tí hendan er grundað á, at Yrkisdepilin er í holt við at broyta mannagongdina viðvíkjandi tíðarfreistini fyri, nær eitt læruplass kann fáa endurgoldið útreiðslur í sambandi við skúlauppihald hjá lærlingum. Yrkisdepilin fer í framtíðini at stramma upp uppá tíðarfreistirnar."*

[31] Sí frágreiðing um Frávik millum játtan og nýtslu 2021.

## 7.23 Tjóðpallur Føroya (LG 2020/207-242)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Tjóðpalli Føroya.

Roknskaparreglugerðin var dagførd í 2018, men Mentamálaráðið hevði ikki góðkent hana. Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum fleiri ferðir víst á, at Tjóðpallurin hevði ikki góðkenda roknskaparreglugerð.

***Roknskaparreglu-gerðin er nú góðkend.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið hevur góðkent roknskaparreglugerðina hjá Tjóðpallinum.

*Fíggjarstøða*
Í fíggjarstøðuni stóðu 250 t.kr. sum ogn hjá Tjóðpallinum. Upphæddin hevði staðið síðani 2016. Sambært Tjóðpallinum stavaði áognin frá einum felags projekti millum fleiri partar. Ógreitt var, um upphæddin var røtt. Landsgrannskoðanin mælti til fáa greiði á upphæddini, og krevja tað inn, sum skuldi.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Tjóðpallurin er í gongd við at fáa greiði á upphæddini í fíggjarstøðuni.

*KT-viðurskifti*
Teldurnar hjá Tjóðpallinum vóru knýttar í Landsnet. Á heimasíðuni var ein skipan til at selja talgild atgongumerkir til sjónleikir. Atgongumerkjaskipanin fór umvegis atgongumerki.fo., sum var tekniskur veitari.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Tjóðpallurin flokkaði dáturnar, sum stovnurin varðaði av og gjørdi eina váðameting av tí, sum hótti tær dáturnar.

Í mars 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði gjørt avtalu við veitara, ið skuldi hjálpa ráðnum og stovnum undir ráðnum at lúka krøvini í dátuverndarlógini. Arbeiðið fataði m.a. um váðameting, dátuflokking, viðgerðaryvirlit o.s.fr. Landsstýrismaðurin vísti á, at arbeiðið eisini ávirkaði KT-trygdina sum heild, tí at tað var ógjørligt at hava nøktandi dátuvernd, uttan at KT-trygdin eisini var í lagi.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur tikið í brúk skipanina Wired Relation, ið stovnarnir undir ráðnum skulu brúka til eitt nú at gera váðametingar, dátuflokkingar og viðgerðaryvirlit. Eitt starvsfólk í ráðnum er sett sum DPO fólk fyri stovnarnar, ið vísa til Uttanríkis- og mentamálaráðið. Arbeiðið við at fáa stovnarnar at brúka skipanina er í gongd.

## 7.24 Tjóðsavnið (LG 2019/207-243)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Tjóðsavninum og umsiting stovnsins av stuðulsjáttanum.

Roknskaparreglugerðin var dagførd í 2019, men Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði ikki góðkent hana.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at roknskaparreglugerðin hjá Tjóðsavninum er ikki góðkend enn. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur fingið eina dagførda roknskaparreglugerð frá Tjóðsavninum, sum ráðið er í gongd við at gjøgnumganga.

*Umsiting av stuðulsjáttanum*
Landsgrannskoðanin grannskoðaði útgjøldini av stuðli, sum Tjóðsavnið lat bygdasøvnum, mentanarsøguligum skipum, Sjósavninum og listasøvnum.

Tá ið reglur um eftirlit, roknskap, grannskoðan v.m. ikki eru í serligu heimildarlógunum, eru reglurnar í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan galdandi.

Stuðul til bygdasøvn og mentanarsøgulig skip hevur heimild í serligari lóg, men tað hevur stuðulin til Sjósavnið og stuðulin til listasøvn ikki.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at málið um umsitingina av stuðulsjáttanum hjá Tjóðsavninum er umrøtt við Tjóðsavnið. Uttanríkis- og mentamálaráðið samskiftir nú við Fíggjarmálaráðið um møguligar tillagingar av reglunum, ið stuðulin verður umsitin eftir, men arbeiðið er ikki liðugt.

## 7.25 Tjóðskjalasavnið (LG 2021/207-243)

Játtanin til Tjóðskjalasavnið er á høvuðskontu 7.24.3.03, undirkontu 23. Landsgrannskoðanin hevur verið á Tjóðskjalasavninum fyri at kanna, um stovnurin hevur bøtt um innaneftirlitið síðani grannskoðanina í 2021.

*Roknskaparreglugerð*
Tjóðskjalasavnið hevði gjørt roknskaparreglugerð, og sent hana til Uttanríkis- og mentamálaráðið at góðkenna í februar 2021. Stovnurin hevur enn ikki fingið svar, um reglugerðin er góðkend.

*Tíðarskráseting*
Starvsfólk kunnu eiga ella skylda 2/3 av sínari vikuligu arbeiðstíð. Skrivarin sendir starvsfólkunum útskrift av skrásettu arbeiðstíðini hvønn mánað, soleiðis at tey kunnu kanna, um skrásetingin er røtt. Landsgrannskoðanin mælti enn eina ferð til, at stjórin góðkennir mánaðarligu skrásetingarnar.

***Fylgja ikki reglunum um tíðaravmarking av lønum.***

Sambært yvirliti yvir tíðarskrásetingar kemur tað fyri, at starvsfólk eiga ella skylda fleiri tímar, enn reglurnar loyva. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin fylgir rundskrivinum frá 18. desember 2017 um tíðaravmarking av lønum.

*Ferðauppgerðir*
Í 2021 gjøgnumgekk Landsgrannskoðanin allar ferðauppgerðirnar frá 2018, 2019 og 2020. Í fleiri førum vantaðu nøktandi skjalprógv. Landsgrannskoðanin vísti á, at sum skjalprógv fyri útreiðslur eiga kvittanir týðiliga at vísa upphæddir, dagfestingar, hvør eigur útreiðsluna, hvønn hon er fyri o.a.

Tjóðskjalasavnið hevur síðani hert eftirlitið við ferðauppgerðum. Stjórin og skrivarin góðkenna tær, og eingin kann góðkenna egnar uppgerðir.

Landsgrannskoðanin hevur kannað ferðauppgerðirnar í 2021. Einki var at finnast at.

*Inntøkur, kassi og banki*
Tjóðskjalasavnið hevur kassa í lesistovuni, har fólk rinda fyri at taka avrit, skanna skjøl v.m. Inntøkurnar eru sambært Tjóðskjalasavninum smáar og minkandi, tí fólk taka heldur myndir av skjølum við fartelefonini.

Avgreiðslukostnaðurin er 40 kr., og 3 til 4 kr. fyri avritini. Inntøkur fyri kanningararbeiði, avgreiðir stovnurin um Búskaparskipan landsins. Stovnurin sendir kundanum teldupost við upphædd, kontunummari og kontustreingi til flyting, og Gjaldstovan umsitur innkrevjingina.

Tjóðskjalasavnið hevði egna peningastovnskontu til inngjøld, sum í 2021 er gjørd upp.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Tjóðskjalasavnið fær greiði á, um møguleiki skal vera at fáa avrit av skjølum á lesistovuni, og at stovnurin finnur ein hóskandi leist fyri kontantgjøldum. Vit mælti eisini til, at dagføra punkt 4 “umsiting av inntøkum” og punkt 5 “umsiting av gjaldingum” í roknskaparreglugerðini.

*Ognir*

***Mælt til at skráseta størri ognir í BSL.***

Tjóðskjalasavnið hevur ognaryvirlit, sum seinast var dagført í november 2021. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin skrásetur útbúnað, har keypsprísurin er oman fyri 50 t.kr. í støðisognina í Búskaparskipan landsins.

Eisini mælti Landsgrannskoðanin til, at stovnurin dagførir yvirlit yvir smærri ognir, serliga við atliti at virðismiklum útbúnaði, tó at keypsprísurin er undir 50 t.kr.

## 7.26 Landsbókasavnið (LG 2020/207-243)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Landsbóka-savninum.

Roknskaparreglugerðin var seinast dagførd í 2019.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsbókasavnið hevur sent Uttanríkis- og mentamálaráðnum eina dagførda roknskaparreglugerð, ið Landsbóka-savnið nú er í gongd við at gjøgnumganga av nýggjum. Tá ið tað er gjørt, verður hon send av nýggjum til góðkenningar hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

Í støðisognini í Búskaparskipan landsins vóru tríggjar ognir skrásettar; t.e. ein skriv-stovubygningur, ein bilur og ein móttøkuskiva. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra støðisognina, og at stovnurin annars hevði yvirlit yvir ognir og virðismiklan útbúnað.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsbókasavnið hevur skrásett ognir í Búskaparskipanini, sum hava eitt keypsvirði omanfyri 50 t.kr. Gjald-stovan skrásetir ikki ognir, sum kosta minni enn 50 t.kr. Landsbókasavnið hevur hartil eitt innanhýsis ognaryvirlit yvir allar ognir hjá Landsbókasavninum.

Í fíggjarstøðuni vóru 18 t.kr. settar av ímóti tapi av skuldarum, sum var áogn frá 2008 til 2011. Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at peningurin, er førdur aftur og bókaður yvir raksturin í 2022.

## 7.27 Miðlastuðul (LG 2021/207-244)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingini av Miðlastuðlinum, sum var latin í 2019, har Landsgrannskoðanin m.a. hevði kannað, um stuðulin var latin sambært ásetingunum í lógini um miðlastuðul, Ll. nr. 35/2017.

Samanumtikið var miðlastuðul í 2019 játtaður grundað á lønarútreiðslur og útreiðslur til freelance. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um heimild var at lata stuðul út frá øðrum fortreytum enn lønarútreiðslum, og mælti til, at Uttanríkis- og mentamálaráðið skipaði soleiðis fyri, at miðlastuðulin bleiv latin sambært lógini, og at umsøkjararnir blivu kunnaðir neyvt um stuðulsgrundarlag, krøv til grannskoðan o.a.

Uttanríkis- og mentamálaráðið tók undir við tilmælinum og helt, at tørvur var á at eftirmeta umsóknarskjalið og møguliga at orða eina vegleiðing, soleiðis at tað var greiðari fyri øllum, hvat var stuðulsheimilað.

*Miðlastuðul 2021*
Landsgrannskoðanin hevur fylgt grannskoðanini upp og kannað, hvussu miðlastuðul er latin í 2021.

***Miðlastuðulsnevndin hevur breiða tulking av hugtakinum lønarútreiðslur.***

Í 2021 hevur Miðlastuðulsnevndin greitt Uttanríkis- og mentamálaráðnum frá, at nevndin frá fyrsta degi hevði havt eina breiða tulking av hugtakinum lønarútreiðslur í sambandi við Miðlastuðul. Tað merkir, at bæði løn hjá fólki í starvi og samsýning av arbeiði hjá atknýttum arbeiðstakarum hevur verið roknað við í útrokningargrundarlagið fyri miðlastuðlinum.

Í viðgerðini av at avmarka stuðulsgrundarlagið til bert at fevna um A-inntøkur, kom Miðlastuðulsnevndin til tað úrslit, at miðlarnir ikki høvdu møguleika at laga seg eftir broytingini, tí stuðulsárið var longu byrjað. Í 2021 hevur nevndin tí kunnað umsøkjararnar um, at frá 2023, tá ið stuðul verður rindaður fyri fíggjarárið 2022, verður lønarútreiðslustuðulin latin, grundað á ta løn, ið er rindað sum A-inntøka.

Miðlastuðulsnevndin hevur eisini kunnað umsøkjararnar um, at nágreiningar verða gjørdar í einari komandi vegleiðing. Miðilin skal upplýsa um øll viðurskifti av týdningi fyri metingina av stuðulsgrundarlagnum. Roknskapur skal vera lagdur við sum skjalprógv, og vera grannskoðaður av løggildum grannskoðara. Oyðublaðið skal vera útfylt, herundir eisini "stuðulsgrundarlag" við krónutali, og skjal skal vera hjálagt við lønarútreiðslum (starvsfólkakostnaður og fríyrkisfólk), sum er góðkent av løggildum grannskoðara.

*Viðmerkingar frá landsstýrismanninum*
Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Miðlastuðulsnevndin í skrivi til ráðið í februar 2022, hevur kunnað um, at nevndin hevur fylgt leistinum frá seinastu fýra árunum við einari lutfalsliga breiðari tulking í mun til treytirnar, ið lógin og viðmerkingarnar til lógina seta til innihaldið.

***Landsstýrismaðurin sigur seg ikki hava ávirkan á venjuna hjá nevndini.***

Landsstýrismaðurin kann bert taka tað til eftirtektar. Sambært málsøkjabýti løgmans hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið onga heimild at geva nevndini tænastuboð. Nevndin er løgskipað sum sjálvstøðugur myndugleiki uttan fyri fyrisitingarliga stigveldið, og tekur endaligar avgerðir innan fyrisitingina. Uttanríkis- og mentamálaráðið kann heldur ikki stýra venjuni hjá nevndini sum kærumyndugleiki.

Viðmerkjast kann, at tá ið lógin var løgd fyri Løgtingið, stóð stuðul til rakstrarútreiðslur nevndur. Mentanarnevndin broytti hugtakið til lønarútreiðslur uttan at greiða frá, hvat liggur í hugtakinum, sambært álitinum í løgtingsmáli nr. 48/2016.

## 7.28 Kirkjugrunnurin og Tiltaksgrunnurin (LG 2018/207-245)

Í undanfarnu frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Kirkjugrunninum. Í fleiri ár hevur Landsgrannskoðanin víst á, at sambært Ll. nr. 60/2007 "um fólkakirkjuna í Føroyum" ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini, og sambært Ll. nr. 61/2007 "um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar" ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir.

Í 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at gera kunngerðirnar í 2015, og í 2017 upplýsti landsstýrismaðurin, at enn var arbeitt við kunngerðunum.

***Enn ongar kunngerðir.***

Í uppskoti til samtyktar at góðkenna landsroknskapin 2016 vóru løgtingsgrannskoðararnir ónøgdir við, at kunngerðirnar enn ikki vóru gjørdar, hóast meira enn 10 ár vóru liðin, síðani lógirnar komu í gildi.

Í 2018 ásannaði Mentamálaráðið, at gott hevði verið, um kunngerðir vórðu gjørdar; men av tí at virksemið var í hampiliga tryggari legu, hevði Mentamálaráðið fyri ein part valt at raðfesta annað virksemi, og lutvíst høvdu viðurskifti, ið ráðið ikki var harri yvir, kravt stóran part av teirri avmarkaðu orku, ið var til meira yvirskipaða málsviðgerð viðvíkjandi kirkjuøkinum. Tí var arbeiðið ikki gjørt enn.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at: *"Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur greiða fatan av, at virksemið hjá Stiftsstjórnini yvirhøvur er í tryggari legu, um enn einki er at taka seg aftur í, at ein hóskandi kunngerð hevði verið ein lætti fyri arbeiðið hjá Stiftsstjórnini. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur tí ikki raðfest uppgávuna so høgt, men væntar - við fyrivarni fyri, hvørjar meira áleikandi uppgávur fara at koma nú í heyst og vetur - at kunngerð kann verða lýst komandi vár. Komið er ikki á mál við reglunum fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir. Uttanríkis- og mentamálaráðið kann tó upplýsa, at Stiftsstjórnin arbeiðir við einum kunngerðaruppskoti, sum er um ein part av hesum. Miðað verður eftir, at kunngerð kann verða lýst komandi vár. Tá arbeiðið er liðugt, fer Uttanríkis- og mentamálaráðið at gera eina aðra kunngerð um teir partarnar av reglunum fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir, sum hendan kunngerðin ikki fer at fevna um".*

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at einki nýtt var hent í málinum. Málsøkini, fólkakirkjan, onnur trúarsamfeløg og attongd øki, vóru bert mannað við einum ársverki tilsamans, og tá drúgt forfall hevði verið, hevði tíverri ikki borið til at fremja annað enn tær mest neyðugu málsviðgerðirnar hetta seinasta árið, meðan alt menningararbeiðið hevði ligið stilt.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðsorkan á málsøkinum fólkakirkjan, onnur trúarsamfeløg og attongd øki eru nú mannað uppaftur, og tí er gongd sett á aftur arbeiðið við at menna reglurnar á økinum. Tað, sum fyrst liggur fyri, er at laga til uppskot til kunngerð um samsýningar til kirkjutænarar og hjálparfólk, ið Stiftsstjórnin hevur gjørt uppkast til, so tað kann verða sett í gildi. Kunngerðin um samsýningar til kirkjutænarar og hjálparfólk kemur at regluseta ein týðandi part av arbeiðinum hjá kirkjukassunum við at gera fíggjarætlanir.

## 7.29 Ítróttahøll í Sandoynni (LG 2018/207-246)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av játtanini til ítróttahøll í Sandoynni.

Í 2017 vóru 485 t.kr. játtaðar til endaliga avhendan av ítróttahøllini, harav 289 t.kr. vóru til at rinda kostnaðin at tinglýsa eitt veðskuldarbrævi, sum 1. veðrætt í ognini. Veðskuldarbrævið var ikki lýst í 2017, og Mentamálaráðið bað um at fáa upphæddina støðlaða, tí tinglýsingin fór at verða avgreidd eftir ársskiftið.

Í 2018 vóru tær 289 t.kr. inntøkuførdar í roknskapinum, uttan at nøkur útreiðsla var til tinglýsing.

Í 2019 kunnaði Uttanríkis- og mentamálaráðið um, at veðbrævið, sum gav ráðnum veð í matr. nr. 292b, Sandur, við ástandandi ítróttahøll, var ikki tinglýst. Ítróttahøllin var heldur ikki avhendað kommununum í Sandoynni. Høllin var ikki góðkend av Sands kommunu, tí ymiskir manglar vóru. Fundur hevði verið við bygginevndina um, hvørji krøv bygginevndin setti til bygningin, og ein kostnaðarmeting var gjørd. Uttanríkis- og mentamálaráðið skuldi, gjøgnum samskifti við kommunurnar í oynni, tryggja sær, at tær yvirtóku høllina, tá ið staðfest krøv og ynskir vóru gjørd. Eftir tað skuldi høllin avhendast kommununum í Sandoynni, og veðbrævið tinglýsast.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði fingið eykajáttan til at gera ítróttahøllina í Sandoynni lidna. Tá ið seinastu arbeiðini vóru gjørd, skuldi skúlasambandið í Sandoynni yvirtaka høllina móti veð fyri láninum, sum landskassin hevði útvegað.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at áðrenn arbeiðið fór í gongd, var avtalað millum Uttanríkis- og mentamálaráðið, Landsverk og kommunurnar í Sandoynni, hvat skuldi gerast, og ein mangullisti var í tí sambandi gjørdur. Mangullistin var sendur kommununum í Sandoyar skúlasambandi, sum hvør í sínum lagi váttaðu í ætlanarskrivi arbeiðini á mangullistanum, og at kommunan vildi skriva undir veðbrævið, sum gav Uttanríkis- og mentamálaráðnum veð í ítróttahøllini, matr. 292b, Sandur, tá ið arbeiðini vóru nøktandi útint, og nýtsluloyvi fyrilá til bygningin.

Sambært Landsverki vóru arbeiðini á mangullistanum gjørd, og Uttanríkis- og mentamálaráðið var tí av teirri fatan, at arbeiðini, sum gjørd vóru sambært mangullistanum, vóru í samsvari við treytirnar fyri at fáa nýtsluloyvi til bygningin; men eftir at arbeiðini vóru gjørd, var komið fram, at veggurin á eystursíðuni skuldi gerast av nýggjum, fyri at høllin kundi verða brunagóðkend. Hesar upplýsingar vóru nýggjar fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið, og var tað heldur ikki partur av m.a. mangullistanum og eykajáttanini til liðugtgerð av høllini.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði fingið at vita, at kommunurnar ikki vildu átaka sær uppgávuna at gera veggin av nýggjum, men at landið skuldi fíggja tað arbeiðið. Kommunurnar vildu tí heldur ikki skriva undir veðbrævið.

Uttanríkis- og mentamálaráðið helt ikki, at ráðið hevði skyldu at gera meira við høllina, umframt at ráðið heldur ikki hevði tøka játtan til at gera meira. Ráðið hevði boðað kommununum í oynni frá tí, og samstundis heitt á kommunurnar um at avgreiða málið um veðsetingina.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið upp á ítróttahøllina í Sandoynni er liðugt, og kommunurnar í Sandoynni hava undirskrivað veðbræv, sum gevur Føroya Landsstýrið 30 mió.kr. í veð í ítróttahøllini. Veðbrævið er sent til tinglýsing hjá Tinglýsingini.

# 8. Heilsumál

## 8.1 Heilsumálaráðið (LG 2021/211-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Heilsumálaráðnum, á høvuðskontu 11.11.1.24, við serligum denti á lønarviðurskifti og fíggjarstøðupostar.

### Rakstur

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 11.144 | 11.835 | 10.651 | 8.989 | 8.463 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2.473 | 2.520 | 2.370 | 1.648 | 928 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 292 | 74 | 156 | 312 | 114 |
| Leiga viðlíkahald og skattur | 131 | 72 | 126 | 211 | 6 |
| Søla av vørum og tænastum | -88 | -96 | -96 | -96 | 0 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn (útr.) | 44 | 17 | 57 | 74 | 1.388 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn (innt.) | -646 | -680 | -773 | -799 | -404 |
| **Tilsamans** | **13.352** | **13.742** | **12.491** | **10.339** | **10.496** |

Roknskaparreglugerðin hjá Heilsumálaráðnum er dagførd í januar 2020.

Landsgrannskoðanin kannaði seinasta setanarmál, frá lýsing eftir starvsfólki til umsøkjarar høvdu fingið svar sambært almenna setanarpolitikkinum. Eisini hevur Landsgrannskoðanin hildið skráseting av tímum hjá starvsfólkum upp ímóti áseting av tímaskráseting sambært roknskaparreglugerðini, og kannað, um ráðið hevur tíðaravmarkað lønir 31. desember 2021. Einki var at finnast at.

### Fíggjarstøða

Sambært roknskaparreglugerðini skal til- og frágongd av innbúgvi, KT-útbúnaði o.l. skrásetast í ognaryvirlit, tó ikki um nývirðið er minni enn 4.000 kr. Heilsumálaráðið hevur kunnað um, at ognaryvirlitið er ikki dagført, tí tað hava verið tøkniligar avbjóðingar, sum nú eru loystar.

Heilsumálaráðið vísti á, at KT-fyrisitingin hjá Gjaldstovuni skrásetir teldur og burturbeinir tær.

Sambært roknskaparreglugerðini er hámarksupphæddin á gjaldkortkontuni 50 t.kr. Eftir rundskrivinum um gjaldkort eigur peningaupphæddin leiðbeinandi ikki at fara upp um 10 t.kr. Heilsumálaráðið vísti á, at vanliga er tað *ein* stovnur, sum brúkar bankakontu til sítt gjaldkort. Heilsumálaráðið er saman við Almannamálaráðnum um bankakontuna, tí heldur ráðið, at 10 t.kr. er alt ov lítið.

## 8.2 Etiska ráðið (LG 2021/211-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Etiska ráðnum. Játtanin er á høvuðskontu 11.11.1.33 “Siðseminevndir”, undirkontu 21.

Etiska ráðið virkar eftir Ll. nr. 70/2017 “um Etiskt ráð”. Ráðið hevur til endamáls at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg at heilsufakligum virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum.

Eisini skal ráðið sambært lógini gera almennar myndugleikar og borgarar betur førar fyri at taka støðu í etiskum spurningum. Ráðið er við til at byggja upp almenna vitan og førleikar um etiskar spurningar í Føroyum. Etiska ráðið eigur í sínum virki at leggja dent á virðing fyri tign og friðhalgi menniskjans, virðing fyri komandi ættarliðum, umframt virðing fyri náttúru og umhvørvi.

Í Etiska ráðnum eru 9 limir, ið landsstýrismaðurin í heilsumálum setur fyri 4 ár í senn.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Heilsumálaráðið tekur sær av bókhaldinum hjá Etiska ráðnum, og roknskapar-reglugerðin hjá Heilsumálaráðnum fatar eisini um Etiska ráðið.

Roknskapar- og játtanartøl 2018 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 313 | 443 | 489 | 469 |
| Keyp av vørum og tænastum | 146 | 76 | 101 | 63 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 45 | 0 | 8 | -7 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 33 | 42 | 34 | 38 |
| **Tilsamans** | **538** | **561** | **632** | **562** |
| *Játtan* | *560* | *560* | *660* | *672* |

Etiska ráðið flutti í november 2021 úr hølum hjá Landssjúkrahúsinum til Smæruna í J. H. Schrøtersgøtu. Heilsumálaráðið hevur gjørt avtaluna um húsaleigu.

Etiska ráðið hevur dagført ognaryvirlit.

*Løn, samsýning og fundarpeningur*

Landsgrannskoðanin kannaði lønir, samsýningar og fundarpening, sum eru goldin í 2021.

Skrivarin er løntur fyri hálva tíð, og hann skrásetur arbeiðstímarnar og loyvda fráveru.

Formaðurin fær fasta mánaðarliga samsýning, og hinir nevndarlimirnir fáa fundar- og ferðapening eftir almennu reglunum.

Sambært § 7, stk. 2, í lógini kann serlig avtala gerast um samsýning til formannin í Etiska ráðnum. Fíggjarmálaráðið hevur í 2018 góðkent samsýningina.

Fyri at sanna, at samsvar er ímillum samsýningar og fundir, samanhelt Landsgrann-skoðanin nevndar- og ferðasamsýningar við gerðabókina.

Í trimum førum eru munir ímillum tal av útgjøldum og tal av fundum. Sambært skrivaranum kann orsøkin vera, at fundarpengar verða ikki rindaðir, fyrr enn umbønin um fundarpengar er undirskrivað av tí, sum skal hava fundarpengarnar. Landsgrann-skoðanin hevur ikki aðrar viðmerkingar.

## 8.3 Fólkaheilsuráðið (LG 2020/211-201)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin Fólkaheilsuráðið. Játtanin er á høvuðskontu 11.20.1.04 “Upplýsing og ráðgeving”.

Fólkaheilsuráðið fær stórar nøgdir av dátum, tá ið kanningar verða gjørdar, men sambært formanninum eru dáturnar gjørdar navnleysar. Í 2020 framdi eitt grannskoðanarvirki KT-skoðan av ráðnum. Grannskoðarin hevði 15 tilmæli, harav 1 høgt, 9 miðal og 5 lágt raðfest.

Fólkaheilsuráðið miðaði eftir at avgreiða høg tilmæli sum skjótast, miðal tilmæli áðrenn hálvt ár var farið, meðan eingin ítøkilig freist var fyri lágu tilmælini.

***Arbeiðið at avgreiða øll tilmælini hjá KT-grannskoðara eru seinkað.***

Í juli 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at trý tilmæli eru avgreidd. Arbeiðið, at avgreiða øll tilmælini, er seinkað, av tí at ætlanin er at leggja Fólkaheilsuráðið, Ílegusavnið og Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu saman í nýggja Fólkaheilsustýrið. Upprunaliga var ætlanin at stovnseta Fólkaheilsustýrið 1. januar 2022, men tað verður 1. januar 2023.

Stórur partur av arbeiðinum at avgreiða tilmælini frá KT-skoðanini skal gerast fyri nýggja stovnin, og sambært landsstýrismanninum fer Fólkaheilsuráðið undir arbeiðið at avgreiða tilmælini í heyst.

## 8.4 Heilsutrygdarveitingar (LG 2020/211-202)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Heilsutrygdarveitingum. Játtanin er á høvuðskontu 11.20.2.03.

*Hjálparráð*

Sambært § 10, stk. 4, 5 og 6, í heilsutrygdarlógini[32] veitir Heilsutrygd ískoyti til hjálparráð, sum eru tilskotsheimilað í kunngerð, sum eru liður í einari viðgerð, ella til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði, og hjálparráð í sambandi við heilivág.

Sambært § 10, stk. 1, skal landsstýrismaðurin seta eina hjálparráðsnevnd. Hjálparráðsnevndin tekur avgerðir sambært reglunum í stk. 4 og 5, og er mannað við trimum føstum limum, umframt einum ella fleiri serkønum limum við læknafakligari útbúgving. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um virksemi nevndarinnar, tá ið hon skal viðgera umsóknir um tilskot til hjálparráð.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Heilsumálaráðið arbeiddi við tveimum kunngerðum, einari um ískoyti til gjald fyri ávís hjálparráð og einari um hjálparráðsnevnd. Ætlanin var at seta hjálparráðsnevndina, tá ið kunngerðin var lýst.

Sambært lógini ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um hjálparráð, m.a. møguligt egingjald ella depositum fyri hjálparráð, hvussu stórt tilskot verður veitt til einstaka hjálparráðið, og hvørji hjálparráð tilskot verður veitt til.

Í juli 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tvær kunngerðir, sum umrøða fyrisitingina av hjálparráðum, eru lýstar 3. februar 2022, t.e. K. nr. 12/2022 og K. nr. 13/2022. Limirnir í Hjálparráðsnevndini eru valdir, og nevndin hevði sín fyrsta fund í apríl 2022.

[32] Ll. nr. 178/2009 “um almenna heilsutrygd”.

*Heilivágur*
Í 2020 var tilskotið til keyp av heilivági, fyriskipaðum á forskrift, 81,7 mió.kr. Í 2016 vóru 66,4 mió.kr. latnar í tilskoti. Landsstýrismaðurin hevur ásett reglur um áseting av søluprísi í K. nr. 113/1992 "um áseting av søluprísi á heilivági".

***Einki eftirlit við stuðli til heilivág nýliga.***

Spurt, um Heilsutrygd hevði eftirlit við, at upphæddirnar, sum stovnurin rindaði apotekunum fyri heilivág, vóru rættar, svaraði Heilsutrygd, at møguligt eftirlit mátti gerast úti á apotekunum, og at tað var ikki gjørt nýliga.

*Mannagongdir og eftirlit*
Heilsutrygd kannaði, um rokningar frá ergo- og fysioterapeutum, tannlæknum, fótarøktarum, umsóknir um jarðarferðarhjálp o.t. vóru rættar.

Heilsutrygd kannaði í ávísan mun útgjøldini til kommunulæknar, men hevði ikki gjørt eftirlit á staðnum í longri tíð. Heilsutrygd hevði heldur ikki gjørt kanningar á apotekunum nýliga. Stovnurin kunnaði um, at ætlanin var at gera eftirlit í næstum og útbyggja KT-skipanina til tað.

Landsgrannskoðanin mælti Heilsutrygd til at útvega skrivligar mannagongdir til umsiting og útgjald av veitingunum, og vísti á, at roknskaparreglugerðin var ikki dagførd síðani 2010.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Heilsumálaráðið hevði fingið uppskot til roknskaparreglugerð frá Heilsutrygd, sum ráðið fór at viðgera í næstum.

Í juli 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at roknskaparreglugerðin enn er til viðgerðar í Heilsumálaráðnum.

*Dygdarskipan*
Í 2019 rindaði Heilsutrygd 3,90 kr. til BE-skipanina og 1,84 kr. til Dygdargrunnin fyri hvønn borgara yvir 18 ár. Sambært Heilsutrygd áttu kommunulæknarnir grunnin, og stjórin á Heilsutrygd gjørdi roknskapin og hevði umsitingina.

31. desember 2019 vóru 298 t.kr. á peningastovnskontu hjá Dygdargrunninum og 399 t.kr. hjá BE-skipanini. Allar inntøkurnar vóru frá Heilsutrygdarveitingum.

Sambært Heilsutrygd hevði nevndin givið stjóranum á Heilsutrygd og einum fulltrúa heimild at flyta pening av kontu hjá BE-skipanini. Eftir áheitan frá nevndini bókaði stjórin og bað um flytingar, og fulltrúin góðkendi. Roknskapirnir hava ikki verið grannskoðaðir.

Í 2020 kunnaði Heilsutrygd um, at einki stóð í reglugerðini fyri Dygdarskipanina um, at roknskapurin skuldi grannskoðast, og at Heilsutrygd fór at leggja uppskot fyri nevndina, um at roknskapirnir hereftir vórðu grannskoðaðir.

Heilsutrygd hevði ikki tikið støðu til, um grunnurin kom undir landsins almenna roknskaparhald, og visti heldur ikki, um leiðslan í Dygdarskipanini hevði tikið støðu til tann spurningin. Heilsutrygd legði afturat, at talan var ikki um pening, sum beinleiðis var játtaður í fíggjarlóg, men um gjald, sum var ásett í sáttmála ímillum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelag Føroya, og at talan tí var um vunnin rættindi hjá kommunulæknum í einari sáttmálasamráðing.

Dygdarskipanin var sambært reglugerðini umsitin av nevnd, sett saman av tveimum umboðum fyri Heilsutrygd og tveimum umboðum fyri Kommunulæknafelagið. Sambært Heilsutrygd var seinasta samskiftið í nevndini á vári 2020. Heilsutrygd kunnaði um, at sambært nevndini í Dygdargrunninum høvdu tveir fundir verið seinastu fimm árini.

Sambært reglugerðini verður óbrúktur peningur fluttur til eftirfylgjandi ár, og um peningur hópar seg upp, verður málið lagt fyri Samstarvsnevndina.

Spurd, um Samstarvsnevndin hevði viðgjørt málið, nú 700 t.kr. vóru í Dygdarskipanini, svaraði Heilsutrygd, at málið ikki var lagt fyri Samstarvsnevndina enn, men at tað væntandi fór at verða gjørt í næstum.

Í 2021 kunnaði Heilsumálaráðið um, at Samstarvsnevndin hevði umrøtt ymiskt at brúka peningin í Dygdarskipanini til. Enn var eingin avgerð tó tikin. Heilsumálaráðið vísti á, at Heilsutrygd hevði ikki ræðið á grunninum, men nevndin í grunninum, sum er mannað við kommunulæknum og umboðum fyri Heilsutrygd.

Í juli 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at einki virksemi hevur verið í Dygdarskipanini seinasta hálvtannað árið. Ein fundur var á skrá tíðliga í 2021, men var avlýstur. Nevndin hevur tí ikki umrøtt, hvussu peningurin í Dygdarskipanini skal brúkast.

***Einki virksemi hevur verið í Dygdarskipanini seinasta hálvtannað árið.***

# 9. Almannamál

## 9.1 Almannamálaráðið (LG 2021/212-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Almannamálaráðnum við serligum denti á lønarviðurskifti og fíggjarstøðupostar. Játtanin er á høvuðskontu 12.11.1.26.

### Rakstur

Roknskaparreglugerðin hjá Almannamálaráðnum er dagført í januar 2020.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 7.630 | 7.442 | 8.614 | 8.890 | 8.782 |
| Keyp av vørum, tænastum | 1.771 | 1.609 | 1.935 | 1.592 | 1.113 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 356 | 182 | 268 | 268 | 269 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 69 | 81 | 116 | 165 | 96 |
| Søla av vørum og tænastum | -88 | -96 | -96 | -96 | 0 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 665 | 656 | 675 | 822 | 1.581 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | 0 | -13 | -50 | -50 | -59 |
| **Tilsamans** | **10.402** | **9.861** | **11.463** | **11.591** | **11.782** |

*Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði setanarmál; um lýsingar, umsóknir, prógv og setanarskriv vóru í málunum. Eisini kannaðu vit, um almenni setanarpolitikkurin er fylgdur, og hildu skráseting av tímum hjá starvsfólkum upp ímóti áseting av tímaskráseting sambært roknskaparreglugerðini. Einki var at finnast at.

### Fíggjarstøða

*Ognaryvirlit*

Landsgrannskoðanin mælti til at skráseta ognir í Búskaparskipan landsins, hvørs keypsvirði er 50 t.kr. ella hægri. Sambært Almannamálaráðnum er ognaryvirlitið ikki dagført, tí tað hava verið tøkniligar avbjóðingar, sum nú eru loystar.

*Gjaldkort*

Í rundskrivi um nýtslu av gjaldkorti og kredittkorti fyri landsstovnar er ásett, at leiðbeinandi eigur upphæddin ikki at fara upp um 10 t.kr. Sambært roknskaparreglugerðini hjá Almannamálaráðnum er hámarksupphæddin á kortkontuni 50 t.kr. Almannamálaráðið heldur, at 10 t.kr. er alt ov lítið gjaldføri á felags gjaldkortkontu fyri tvey aðalráð.

## 9.2 Familjufyrisitingin (LG 2019/212-141)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Familjufyrisitingini. Í 2021 hevði Almannamálaráðið móttikið roknskaparreglugerð frá Familjufyrisitingini til góðkenningar.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin í almannamálum kunnað um, at Almannamálaráðið hevur móttikið dagført uppskot til roknskaparreglugerð, sum verður viðgjørd í næstum.

## 9.3 Almannaverkið (LG 2021/212-211)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Almannaverkinum á høvuðskontu 12.21.1.02, undirkontu 20 “vanligt virksemi”.

Almannaverkið umsitur eina røð av sosialum lógum, umframt ávísar ásetingar í lóg um barnavernd, millumlandasáttmálan við Norðurlond o.a. Almannaverkið veitir sosiala ráðgeving og leiðbeining til einstaklingar. Harumframt veitir stovnurin tænastur til fólk við serligum tørvi, sum búgva heima ella á stovni.

### Rakstur

Útreiðslurnar til vanliga virksemið eru til rakstur av fyrisitingini, t.e. stjórnarskrivstovu, KT-deild, fíggjardeild, fakdeild og HR-deild. Aðrar tænastur liggja í Viðskiftadeplinum, Trivnaðardeplinum o.ø. Ialt eru 103[33] fulltíðarstørv í Almannaverkinum, vanligum virksemi.

***Gomul roknskaparreglugerð ikki dagførd enn.***

Roknskaparreglugerðin hjá Almannaverkinum er frá 2004, og er ikki dagførd síðani. Almannaverkið arbeiðir við nýggjum leisti til roknskaparreglugerð.

Roknskapar- og játtanartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 43.054 | 44.659 | 46.293 | 47.156 | 54.011 |
| Keyp av vørum og tænastum | 7.747 | 8.489 | 7.710 | 7.770 | 9.606 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 2.659 | 2.759 | 3.233 | 5.473 | 7.198 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 3.828 | 3.270 | 3.496 | 3.378 | 3.980 |
| Søla av vørum og tænastum | -193 | -361 | -426 | -274 | -317 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 215 | 97 | 284 | 993 | 1.103 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -11.324 | -11.962 | -12.472 | -14.505 | -18.464 |
| **Tilsamans** | **45.986** | **46.951** | **48.118** | **49.991** | **57.117** |
| *Játtan* | *45.444* | *46.320* | *47.582* | *49.631* | *55.471* |

Sum talvan vísir, eru allar útreiðslurnar øktar í 2021, samanborið við undanfarin ár. Lønirnar eru størsti parturin av útreiðslunum, góðar 54 mió.kr. Almannaverkið endurrindar sær útreiðslur, sum stovnurin hevur goldið fyri aðrar tænastur. Endurgjaldið er bókað undir innanhýsis flytingar (innt.), og í 2021 er tað 18,5 mió.kr. Til at rokna endurgjaldið brúkar Almannaverkið ávísan býtislykil.

### *Lønir*

Í 2021 eru lønarútreiðslurnar 54 mió.kr. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur lønarmál, um lýsingar, umsóknir, prógv, setanarbrøv o.a. eru í lønarmálunum. Vit høvdu onkra einstaka viðmerking.

[33] Sambært fíggjarlógini 2021.

Í februar 2021 hevur Almannaverkið gjørt fráfaringaravtalu við eitt starvsfólk. Sambært avtaluni fekk starvsfólkið løn í 9 mánaðir og var fríttstillað. Almannaverkið brúkti advokatvirki til at gera løgfrøðiligar kanningar í sambandi við avtaluna.

Landsgrannskoðanin hevur í "Frágreiðing um fráfaringaravtalur hjá landinum[34]" mælt til, at stovnsleiðslur fylgja ásetingunum hjá Fíggjarmálaráðnum.

Spurt, svarar Almannaverkið, at tey meta, at fráfaringaravtalan livir upp til ásetingarnar, sum landið hevur í sambandi við fráfaringaravtalur. Tó hevur Almannaverkið ikki havt Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum við í viðgerðini, sum Almannaverkið átti at havt.

***Reglur um flekstíð ikki hildnar.***

Almannaverkið hevur reglur um flekstíð. Í mars 2022 høvdu fleiri starvsfólk saldur, sum ikki eru í samsvari við reglurnar. Saldurnar vóru frá +252 tímar til -1.391 tímar. Landsgrannskoðanin hevur í august 2022 biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

Spurt, hvørji ítøkilig tiltøk stovnurin hevur gjørt fyri at halda reglurnar, svaraði Almannaverkið, at tey fara at geva øllum leiðarum, sum hava ábyrgd av, at reglurnar verða hildnar, áminning hesum viðvíkjandi.

### *Keyp*

Landsgrannskoðanin hevði nøkur tilmæli viðvíkjandi skráseting av keypum. M.a. mæltu vit til, at keyp, sum er goldið, men ikki latið, verður skrásett við árslok í fíggjarstøðuna sum áogn.

Eisini mælti Landsgrannskoðanin til at bóka neyvari og at skjalfesta betur, m.a. tá ið talan er um útreiðslur til annað enn til "framleiðslu stovnsins", so sum starvsfólkaútreiðslur, gávur, starvsfólkadagar, klæðir til starvsfólkatiltøk o.l. Slíkar útreiðslur eiga at verða bókaðar á St.Rk. 1420 "Umboðan o. til."

***Skeivar konteringar og spjaðing á fleiri kontur forða fyri gjøgnumskygni.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at skeivar konteringar, og tað, at útreiðslur eru spjaddar á fleiri kontur, ger, at gjøgnumskygni í roknskapinum hvørvur, og at yvirlit ikki er yvir, hvat veruliga er brúkt.

Almannaverkið keypir javnan vørur úr Danmark. T.d. hevur stovnurin keypt lampur, teldulutir, fartelefonir og prentlutir frá donskum veitarum. Samlaði kostnaðurin fyri vørurnar sæst ikki, tá ið flutningskostnaður, tollur, v.m., eru bókað aðrastaðni, sum t.d. á kontuna hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Spurt, um hesi keyp eru boðin út í Føroyum, svaraði Almannaverkið, at stovnurin hevur góðar umstøður at keypa vørur úr Danmark. Almannaverkið hevur avtalu við flutningsfyritøku um at flyta hjálpartól o.a. til Føroyar. Um vøra kostar yvir 50 t.kr., verður hon sum meginregla keypt frá føroyskum veitarum. Almannaverkið hevur onkuntíð keypt fyri meira enn 50 t.kr. úr Danmark, men tá er talan um so mikið breitt vøruúrvæl, at tað sambært Almannaverkinum ikki kann metast sum *eitt* keyp.

### *Keyp til røkt av bygningum*

Almannaverkið hevur rindað 111 t.kr. fyri røkt av bygningi, m.a. 63 t.kr. fyri lásaskipan, harav 45 t.kr. eru bókaðar á Almannaverkið, vanligt virksemi. Eisini eru fleiri rokningar frá sama veitara fyri ymisk el-arbeiði.

Almannaverkið hevur rindað veitara 95 t.kr., harav 32 t.kr. eru bókaðar á "Húsaleigu", uttan at biðja um prísir frá fleiri. Sambært Almannaverkinum mettu tey tað vera bíligari at brúka sama handverkara, sum eigarin av bygninginum hevði brúkt á staðnum, og at rinda honum tímaløn.

[34] Frágreiðingin er at finna á www.lg.fo

Samanumtikið heldur Almannaverkið tað vera eina treyt fyri at bjóða handverkara-arbeiði út, at tilfar má gerast, fyri at handverkarar skulu hava somu fyritreytir at geva tilboð. Almannaverkið leggur afturat, at tað kostar pengar at gera eitt slíkt arbeiði, tí fyrisitingin hjá stovninum hevur ikki hesar førleikar í løtuni. Almannaverkið velur tí sjáldan at biðja um fleiri tilboð til smærri uppgávur. Eisini er tað sera trupult at fáa handverkarar, og enn verri at fáa teir at geva tilboð upp á smærri arbeiði.

*Postgjøld*

Í 2021 hevur Almannaverkið rindað 479 t.kr. til Posta, sum eru bókaðar sum postgjøld, umframt at postgjøld eisini eru bókað sum keyp av sakkønari hjálp.

Spurt, hvussu Almannaverkið samskiftir við viðskiftafólkini, eftir at stovnurin hevur verið við til at menna skipanir, so sum Vangan, svaraði stovnurin, at tey vóru við frá byrjan at sjóseta Vangan hjá Talgildu Føroyum. Almannaverkið hevur eini 20 ymisk virkisøkir, sum skulu leggjast út á Vangan, og er komið væl áleiðis við tí arbeiðinum.

***Frameftir verður alt samskifti um Vangan.***

Sambært Almannaverkinum samskiftir stovnurin við borgarar á Vanganum umvegis MínBoks. Av tekniskum orsøkum kundi Almannaverkið ikki knýta í MínBoks beinan-vegin, men í juni 2022 er tað gjørt. Almannaverkið væntar, at 70-80% av samskiftinum frameftir eru um MínBoks og ikki gjøgnum Posta.

*Grannskoðara-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur*

Í desember 2021 hevur Almannaverkið rindað advokati 175 t.kr. í ómaksløn fyri málsviðgerð. Sambært Búskaparskipan landsins er upphæddin goldin fyri mál, sum er til viðgerðar viðvíkjandi ætlan at byggja vardar bústaðir í einum almennum/privatum samstarvi.

Landsgrannskoðanin spurdi Almannaverkið, um uppgávan er boðin út, og um hon er partur av “framleiðslu stovnsins”.

Almannaverkið hevur greitt frá, at arbeiðið er gjørt eftir áheitan frá politiska myndugleikanum, og vísir til høvuðskontu 12.21.6.22 “Keyp og avhendan av lendi til leigubústaðir, løgujáttan” í fíggjarlógini 2022, og at Almannaverkið hevur arbeitt við alternativum hátti at byggja vardar bústaðir til fólk við serligum tørvi. Almannaverkið vísir á, at eftir nýggja leistinum skal Almannaverkið fáa privatar útleigarar at byggja búfelagsskapir, sum privatir útleigarar standa fyri og leiga beinleiðis til borgarar, sum Almannaverkið ávísir. Hetta verður kallað APS – Alment-Privat-Samstarv og líkist samstarvinum, Almannaverkið hevur við Bústaðir.

***Keyp av tænastu ikki boðið út.***

Sambært Almannaverkinum hevði stovnurin havt bjóðað uppgávuna út, høvdu tey verið varug við hendan kostnaðin. Almannaverkið vísir á, at stovnurin leitaði sær løgfrøðiliga hjálp frá advokati, sum hevur royndir á økinum, av tí at tílíkt samstarv við privatan veitara krevur væl skrivaðan sáttmála, har hædd er tikin fyri øllum.

Almannaverkið heldur, at tílík arbeiðir eru partur av framleiðslu stovnsins, tí stovnurin hevur einar 150 borgarar á bíðilista til vardar bústaðir. Nógvir av hesum borgarum eru í svárari neyð, og verða mettir at lúka treytirnar fyri at fáa vardan bústað.

Sambært viðmerkingum í fíggjarlógini 2022 til høvuðskontu 12.21.6.22 “Keyp og avhendan av lendi til leigubústaðir, løgujáttan”, hevur Almannaverkið heimild til at keypa grundstykki, við tí endamáli at selja sama grundstykki aftur til privatan veitara, sum vinnur útboð frá Almannaverkinum.

Vísandi til at Landsverk síðani 2009 hevur havt heimild til at standa fyri allari bygging av bygningum hjá landinum, t.v.s. at bygningsumsitingin liggur hjá Landsverki, hevur Landsgrannskoðanin í august 2022 spurt landsstýrismannin um, hvønn leiklut Lands-verk hevur í sambandi við hesa ætlaðu byggingina.

### *Keyp av tænastum í sambandi við KT*

Keyp av KT-tænastum 2019 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald, rakstur o.tíl. | 520 | 333 | 1.062 |
| Support, brúkarahjálp o.tíl. | 0 | 43 | 3 |
| Árlig gjøld fyri rættindi (licensir) o.tíl. | 436 | 530 | 645 |
| Hýsing av útgerð og KT-skipanum o.tíl. | 66 | 112 | 120 |
| Transmission og Internet o.a. | 97 | 118 | 172 |
| Samstarvssáttmálar við KT-fyritøkur | 701 | 691 | 658 |
| **Tilsamans** | **1.822** | **1.828** | **2.661** |

Útreiðslurnar í 2021 eru øktar við 800 t.kr. samanborið við 2020. Serliga eru tað útreiðslur til viðlíkahald og rakstur, sum eru hækkaðar.

"Samstarvssáttmálar við KT-fyritøkur" eru útreiðslur vegna tænastusáttmálar um m.a. miðlaráðgeving og dátuverndartrygd. Í oktober 2021 gjørdi Almannaverkið avtalu við starvsfólk um at keypa tænastuna, dátuverndarfólk, frá viðkomandi.

***Uppgávur ikki bodnar út.***

Almannaverkið bjóðaði ikki uppgávuna út ímillum fleiri, tí stovnurin metti tað sum neyðuga fortreyt fyri at byggja økið upp, at viðkomandi hevði neyðugu førleikarnar sum dátuverndarfólk og kendi til virkisøkið hjá Almannaverkinum.

Almannaverkið legði afturat, at ásannandi, at uppgávan sum dátuverndarfólk er meiri kend fyri Almannaverkið nú, og at fleiri veitarar kunnu veita tænastuna, fer Almannaverkið at bjóða arbeiðið út.

### *Keyp av tænastuveitingum annars*

Í 2021 rindaði Almannaverkið 199 t.kr. fyri sakkøna hjálp.

Í 2014 gjørdi stovnurin sáttmála við smápartafelag um at rinda 10.000 kr. um mánaðin fyri fjølmiðlaráðgeving. Í sáttmálanum er eisini ásett, hvørja tímaløn Almannaverkið skal rinda fyri meirarbeiði. Av mánaðarligu upphæddini eru 7.500 kr. bókaðar á Trivnaðartænastur. Tænastan er ikki boðin út.

### *Keyp av útbúnaði*

Samlað keyp av útbúnaði 2018 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Flutningsútbúnaður | 439 | 158 | 409 | 0 |
| Telduútbúnaður og KT-menning | 1.443 | 2.532 | 4.453 | 5.976 |
| Skrivstovuútbúnaður | 306 | 147 | 135 | 261 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 574 | 396 | 476 | 987 |
| Søla av brúktum flutningsútbúnaði | -3 | 0 | 0 | -26 |
| **Tilsamans** | **2.759** | **3.233** | **5.473** | **7.198** |

Størsti vøksturin stavar frá "forriting – menning", harav ein partur er fyri tænastur, sum eru mentar á Vanganum, Tænastuportal, Heildarroknarin o.a.

***Keyp av innbúgvi ikki boðið út.***

Frá apríl til november 2021 hevur Almannaverkið keypt innbúgv frá sama veitara 21 ferðir fyri tilsamans 475 t.kr., uttan at keypið er boðið út ímillum fleiri veitarar. Av samlaðu rokningunum eru sjey frá 27. og 28. september 2021, tilsamans 220 t.kr.

### *Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (innt.)*

Roknskapartøl:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Inn. flyt. millum alm. stovn (innt.) | -11.962 | -12.472 | -14.505 | -18.464 |

Almannaverkið, vanligt virksemi, rindar útreiðslur, sum hoyra til annað virksemi hjá stovninum, t.d. Endurmenning, KT-útreiðslur, Hjálpartól, Heimaráðgeving, Trivnaðartænastur og húsaleigu. Deildirnar endurrinda útreiðslur mánaðarliga eftir ávísum leisti. Størstu endurgjøldini rindar Trivnaðardepilin.

Endurgjaldið frá Trivnaðardeplinum í 2020 var 13,1 mió.kr., og í 2021 var tað 17 mió.kr. Niðanfyri er sundurgreining av endurgjøldunum frá Trivnaðardeplinum:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisiting á Almannaverkinum lønir | 5.692 | 6.243 | 7.898 | 8.325 |
| Fyrisiting á Viðskiftadeplinum lønir | 3.077 | 3.282 | 3.038 | 4.583 |
| Rakstrarkostnaður | 1.888 | 1.958 | 2.190 | 2.208 |
| Hjálpitól | 0 | 492 | 0 | 0 |
| 5% av virksemi játtað í 2021 | 0 | 0 | 0 | 1.496 |
| 5% av eykajáttan fyri mars 2021 | 0 | 0 | 0 | 350 |
| **Tilsamans** | **10.657** | **11.975** | **13.126** | **16.962** |

Størsti vøksturin er 1,9 mió.kr. fyri lønarútreiðslur hjá heimaráðgevingini. Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu komið var fram til tær 1,9 mió.kr., og hvør orsøkin er til, at 5% av játtanini eru endurgoldnar vanliga virkseminum.

Almannaverkið svaraði, at upprunaliga var heimaráðgevingin løgd í Trivnaðardepilin. Tá ið heimaráðgeving var stovnað sambært almannalógini, valdi Almannaverkið at leggja alla heimaráðgeving saman í eina deild í Viðskiftadeplinum.

Í og við at virksemið er vaksið alsamt, hevur eisini verið neyðugt at styrkja umsitingina í Almannaverkinum. Tí var ein upphædd, svarandi til 5%, flutt frá Trivnaðardeplinum, umvegis býtislykilin, til felagsumsitingina í Almannaverkinum. Tað vísti seg tó, at øll upphæddin bleiv ikki nýtt í 2021, tí ætlaði størv antin ikki blivu sett, ella høvdu longri setanartilgongd vegna ónøktandi umsóknir. Tá avtornaði, vórðu 1 mió.kr. fluttar aftur til Trivnaðardepilin.

### Fíggjarstøða

*Ognaryvirlit*

Almannaverkið hevur innanhýsis ognaryvirlit, sum árliga verður dagført. Landsgrannskoðanin mælti til, at list o.l. virðismiklir lutir eisini verða skrásettir í ognaryvirlit. Almannaverkið fer at kanna, um tað eru virðislutir, ið eiga at verða skrásettir.

*Peningastovnskontur*

Í fíggjarstøðuni 31. desember 2021 eru tvær peningastovnskontur. Í 2021 stemmaði Almannaverkið konturnar av hvønn mánað. Vit samanhildu innanhýsis bókingar við kontuavrit. Einki var at finnast at, annað enn at tað er trupult at finna viðkomandi skjøl, tí tað kunnu vera upp í 100 síður av skjølum viðheft í einari fílu, har meginparturin er óviðkomandi fyri bókingarnar av rørslu á kontunum.

Almannaverkið kennir trupulleikan, og hevur greitt frá, at í 2022 verða bókingarnar á peningatovnskontunum bókaðar sjálvvirkandi í Búskaparskipan landsins. Tað hevur við sær, at peningastovnssaldan altíð samsvarar við Búskaparskipan landsins.

## 9.4 Barnapeningur veittur í forskoti (LG 2015/212-213)

Í fleiri undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av barnapeningi, m.a. innheinting av barnagjøldum, móttikin av órøttum. Í august 2016 var eftirstøðan 445 t.kr. Almannaverkið krevur eftirstøðuna inn, men roknaði við, at meginparturin fór ikki at verða goldin.

Í 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at hóast tað var óvist, hvussu nógv veruliga kundi krevjast inn, helt Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verða veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið ikki bar til at fáa gjaldsavtalu við gjaldskyldug. Fyrireikingar til møguligar lógarbroytingar vóru byrjaðar í samráði við TAKS og Almannaverkið.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið hevði vent sær til TAKS fyri at fáa heimild til vega at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað var eftir at áseta reglur um tað, næstu ferð broytingar skuldu verða gjørdar í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl."

Í august 2022 er einki nýtt hent í málinum sambært landsstýrismanninum.

## 9.5 Innheinting av skyldugum barnapeningi (LG 2021/212-213)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað innheintingina hjá TAKS av forskots-rindaðum barnapeningi. Endamálið við grannskoðanini var at kanna, um áognin hjá landinum er røtt, um hon verður goldin, og um TAKS heldur lív í rættarkrøvunum.

Í landsroknskapinum sæst áognin sum nota 4 "TAKS, innkrevjing". Inngjøld av skyldugum barnapeningi eru á høvuðskontu 12.21.3.04, undirkontu 02.

### Roknskapartøl v.m.

Í januar 2022 var áognin fyri forskotsrindaðan barnapening 37.689 t.kr., sum er útgreinað soleiðis: "Barnapeningur" 35.766 t.kr., "Eykagjald forskotsrindan" 39 t.kr. og "Ígongurættur" 1.884 t.kr.

Í talvuni niðanfyri er "Barnapeningur" býttur í 4 bólkar.

| Land | Tal av skuldarum | Áogn í t.kr. |
|---|---|---|
| Føroyar | 377 | 13.617 |
| Danmark | 229 | 16.334 |
| Norðurlond | 42 | 2.241 |
| Onnur lond og ókendir bústaðir | 36 | 3.574 |
| **Tilsamans** | **684** | **35.766** |

### Innheinting

TAKS heintar inn skuld hjá teimum, sum búgva í Føroyum, og hevur avtalur við myndugleikar í Norðurlondunum um innheinting. TAKS roknar ikki rentu av skyldugum barnapeningi, men tað gera myndugleikar í øðrum londum. Peningur, sum fæst inn har, fer fyrst til ómaksgjøld og rentur.

Almannaverkið stovnar málini, forskotsrindar og sendir krøvini talgilt til TAKS. TAKS boðar skuldarunum frá, hvat tey skylda, og at tey kunnu rinda á kontu hjá TAKS. Um skuldarar ikki svara innan ein mánað, fer kravið til Innheintingardeildina.

Deildin hjá TAKS í Saltangará umsitur innheinting av barnapeningi. Ger skuldari avtalu við deildina um at rinda fasta upphædd, verður málið verandi har. Annars fer skuldin til innheintingar hjá pantifútunum. TAKS hevur avtalur við yvir 100 skuldarar.

*Innheinting hjá pantifútum*

1. januar 2022 vóru 15,4 mió.kr. av skyldugum barnapeningi til innheintingar hjá TAKS. Tá ið mál koma til Innheintingardeildina, fara tey beinleiðis til málsviðgera ella panti-fúta, sum í fyrstu atløgu senda áminningarskriv út. Um skuldari ikki rindar innan rímiliga tíð, sendir Innheintingin fráboðanarskriv ella samskiftir um telefon. Panting er seinasta amboðið.

***15,4 mió.kr. til innheintingar hjá TAKS.***

Skuldarar hava skyldu at møta hjá TAKS, um teir fáa komuboð frá pantifúta. Skyldar ein persónur týðandi upphædd, senda pantifútarnir komuboð beinanvegin, har teir tilskilað, hvussu stór skuldin er, og hvat næsta stigið er, um skuldari ikki møtir. Møtir skuldari og rindar skuldina, verður ikki gjørt meira við málið.

Kann skuldari ikki rinda beinanvegin, ger TAKS avtalu við hann, um at rinda ávísa upphædd av útgoldnari løn; annars eftirheldur TAKS í A-inntøkuni, vanliga 15% afturat A-skattinum.

Um persónur, sum skyldar barnapening, fer uttanlands, t.d. at lesa, tekur TAKS støðu til, um avtala skal gerast við skuldaran, ella kravið skal sendast til innheintingar í útlandinum. TAKS kann steðga innheinting hjá lesandi. Tó mótroknar TAKS altíð í avlopsskatti e.ø. útgjøldum.

Sambært TAKS steðgar eykatrekk í A-inntøku ikki fyrningarfreist. Skuldari má aktivt taka við skuldini, ella má TAKS panta, so skuldin ikki fyrnar.

TAKS kann ikki eykatrekkja í DIS-inntøkum. Tey hava heitt á donsku myndugleikarnar um hjálp, men teir afturhalda ikki fyri skuld í tílíkum inntøkum. Innheintingin hevur tí heitt á umboð síni fyri útlond, ið luttaka á norðurlendskum fundum, um at útvega møguleika at afturhalda í DIS-inntøkum. Til samanberingar kann nevnast, at TAKS afturheldur í FAS-inntøkum.

Um skuldari ikki kann rinda alla skuldina, pantar TAKS í ognum, so sum tøkum peningi, fastogn, akfari og innbúgvi. Eigur skuldari ongar ella bert smáar ognir, kann talan gerast um úrslitaleysa útpanting.

Um skuldari eisini skyldar annað til tað almenna t.d. skatt ella MVG, fer innheintað upphædd fyrst til ta skuldina. Skuld, sum verður rentað, og hevur 5 ára fyrningarfreist, verður altíð goldin fyrst, harnæst rentur, og síðani kemur forútgoldin barnapeningur. Skyldugur barnapeningur verður ikki renturoknaður, og hevur 20 ára fyrningarfreist.

TAKS innheintar eisini krøv, sum ikki eru skuld til landskassan, t.d. konupengar og eykabarnapengar. Tann peningurin fer beinleiðis til gjaldsmóttakaran sambært gjalds-avgerðini, og verður tí ikki brúktur til aðra skuld.

## Grannskoðan

Landsgrannskoðanin kannaði 43 skuldarar; 20, sum búgva í Føroyum, 12 í Danmark, 6 í øðrum Norðurlondum og 5 uttan fyri Norðurlond. Vit kannaðu um skuldari hevur avtalu um afturrindan, ella skuldin verður innheintað. Vit kannaðu, um TAKS hevur sent kontuavrit ella áminning seinasta árið ella seinastu 5 árini, nær tey seinast hava roynt at fáa skuldina inn, nær skuldarin seinast hevur rindað, og um TAKS hevur samskifti við skuldara.

### *Føroyar*

Av teimum 20 vóru 19 mál send til Innheintingina. 12 høvdu einki goldið í 2021, og 3 høvdu ongantíð goldið nakað. Ein hevði fasta gjaldsavtalu við TAKS, og var liðugur at rinda í 2021.

***Stórur partur av skuldini verður helst ikki goldin.***

Samanumtikið vísti grannskoðanin, at TAKS hevur samskifti við skuldararnar, sum búgva í Føroyum, og tryggjar, at skuldin ikki fyrnar. Í helvtini av málunum er lítið sannlíkt, at øll skuldin verður goldin. Tað vísir seg, at tey, sum skylda stórar upphæddir, skylda ofta eisini MVG, skatt, rentur e.a., sum verður goldið fyrst. TAKS sleppur tó ikki krøvunum, og tó at tað tekur langa tíð, væntar TAKS, at onkur av skuldarunum verður skuldarfríur.

*Danmark*
TAKS sendir krøvini til Udbetaling Danmark, og sambært TAKS hevur Udbetaling Danmark havt stórar trupulleikar við innheinting í fleiri ár. Nú er tó komið gongd á, og TAKS hevur fingið nakað av peningi haðani. Fyri at fylgja við málunum, sendir TAKS fyrispurningar til Udbetaling Danmark. Í málunum, sum Landsgrannskoðanin kannaði, vóru nøkur svar frá donsku myndugleikunum, harav fleiri vóru komin hálvt ella heilt ár eftir, at TAKS hevði spurt.

Fyrningarfreistin er styttri í Danmark enn í Føroyum. Í einum máli hevði Danmark noktað at heinta skuld inn, sum var eldri enn 10 ár. Sambært TAKS er ásett í avtalu millum londini, at fyrning er eftir reglunum í landinum, sum setur fram áheitan um innheinting. Tá ið eitt land sendir krøv um innheinting til annað land, hevur útlendski myndugleikin skyldu at halda lív í krøvunum.

Sær TAKS, at ein skuldari t.d. eigur fasta ogn í Føroyum ella arvar, verður útpanting gjørd.

*Onnur Norðurlond*
Barnagjaldið í Noregi er hægri enn í Føroyum, og norsku myndugleikarnir innheinta mánaðarligar upphæddir, sum svara til norska gjaldið. Tað ger, at skuldarar rinda meira enn vanliga barnagjaldið í Føroyum. Innkomni peningurin fer fyrst til skuld til landið, og síðani rindar TAKS meirgjaldið til børnini.

Sambært TAKS rigga innheintingarnar væl í Íslandi og Noregi, men ikki í Grønlandi.

*Onnur útlond*
TAKS heintar ikki skuld inn uttan fyri Norðurlond. TAKS heldur, at kostnaðurin stendur ikki mát við tað, ið møguliga fæst inn. Um tað skal lata seg gera, skulu tey hava ein ambassadør í landinum, sum fær sakførara at fremja innheintingina. Ofta er bústaðurin ókendur, og tí er torført at finna skuldaran. Sambært TAKS skylda tveir persónar ávikavist 300 t.kr. og 500 t.kr. Hinir skylda undir 200 t.kr. hvør.

***Heinta ikki inn uttan fyri Norðurlond.***

TAKS gjøgnumgongur øll málini hvørt ár, og brúkar CPR-nummur fyri at kanna, um skuldararnir eru fluttir aftur til Danmarkar.

*Niðurskrivingar*
TAKS hevur lista yvir skuld, sum er niðurskrivað. Krøv um barnapengar, eykagjald, eykagjald forskotsrindað, ígongurætt og konupengar eru niðurskrivað fyri 20 mió.kr., harav eru 16,5 mió.kr. barnapengar. Orsøkirnar eru, at skuldari er deyður, krav er fyrnað, ella persónur hevur sitið inni, og tí fingið skuld eftirgivna.

TAKS hevur ikki heimild at eftirgeva skuld vegna barnapening, sum er veittur í forskoti. Tað kann bert gerast eftir boðum frá Almannaverkinum.

**Samanumtikið**
Samanumtikið riggar innheintingin av skuld frá teimum, ið búgva í Føroyum, tí TAKS heldur lív í rættarkrøvunum. Ivasamt er tó, um øll skuldin verður goldin, serliga hjá teimum, ið eisini hava aðra skuld til tað almenna, ella har lítið gjaldføri er.

Um innheinting uttan fyri Føroyar virkar ella ikki, veldst um, hvat land skuldari er fluttur til. TAKS hevur avtalur við Danmark og onnur Norðurlond, men skipanirnar kunnu virka ymiskt. TAKS heintar ikki inn uttan fyri Norðurlond, tí stovnurin heldur, at útreiðslurnar standa ikki mát við, hvat fæst inn.

## 9.6 Eftirgeving av forskotsrindaðum barnapeningi (LG 2021/212-213)

Landsgrannskoðanin hevur samskift við Almannaverkið um eftirgeving av skyldugum barnapeningi. Almannaverkið hevur, sambært lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar, heimild at eftirgeva skuld.

Fyri at fáa skuld eftirgivna er grundleggjandi treyt, at skuldari ikki er førur fyri at rinda, uttan at mangla tað, sum má metast at vera neyðugt til hansara egna og familjunnar uppihald. Skuld kann eftirgevast eitt ár eftir, at forskotsrindanin er endað, t.v.s. barnið er 19 ár, ella fyri tíðarskeið, har skuldarin hevur sitið inni.

Landsgrannskoðanin vísti á, at einki oyðublað er til umsóknir um eftirgeving. Á heimasíðuni hjá Almannaverkinum eru heldur ongar upplýsingar um møguleikan at søkja. Almannaverkið ræður fólki til at senda stovninum teldupost, um tey ætla at søkja um eftirgeving.

***Einki yvirlit yvir umsóknir um eftirgeving v.m.***

Almannaverkið hevur ikki yvirlit yvir, hvussu nógvar umsóknir tey hava fingið um eftirgeving, ella hvussu nógvar eru sýttar ella játtaðar. Stovnurin hevði eitt yvirlit frá 2010 til 2015, sum vísti, at tey høvdu fingið 19 umsóknir. Við núverandi skrásetingum ber ikki til at fáa yvirlit yvir tíðarskeiðið 2016 til 2021. Talan er tó um heilt fá mál.

Sambært Almannaverkinum fer frameftir at vera møguligt at fáa yvirlit yvir umsóknir v.m., og at søkja um eftirgeving á umsóknarblaði, ið kemur á heimasíðuna saman við kunning um viðurskiftini.

## 9.7 Stuðul til uppihaldspening (LG 2021/212-213)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað lógarbundnu játtanina “stuðul til uppihaldspening” á høvuðskontu 12.21.3.05.

Stuðulin er heimilaður í Ll. nr. 90/1997 “um stuðul til uppihaldspening”. Neyvari reglur um fyrisitingina av lógini eru ásettar í K. nr. 143/1997 “um stuðul til uppihaldspening” og í leiðbeining nr. 8001/2000 “um viðgerð av umsóknum um stuðul sambært lóg um stuðul til uppihaldspening”.

Árliga stuðulsupphæddin er 40% av upphæddini, sum gjaldsskyldugur er álagdur at rinda, og hevur goldið til hjúnafelaga, skildan ella sundurlisnan. Stuðul fyri uppihaldspening til børn, verður bert latin fyri upphædd, sum er oman fyri eitt vanligt barnagjald. Í 2020 var barnagjaldið 12.996 kr. um árið.

Søkir umsøkjari um stuðul fyri fleiri ár, verður stuðulsgrundarlagið lækkað samsvarandi fyri hvørt árið.

Umsókn skal vera latin Almannaverkinum innan 1. juli fyri uppihaldspening, sum er goldin undanfarna álmanakkaár. Eftir 1. juli er ikki heimild at rinda stuðul fyri uppihaldspening, sum er goldin í eldri árum.

Umsøkjarar skulu brúka serskilt umsóknarblað, sum fylgir krøvunum í K. nr. 143/1997. Umsøkjari skal leggja við avrit av gjaldsavgerðini og gjaldsváttanir fyri tíðarskeiðið, ið søkt verður um.

Stuðul kann ikki latast persónum, sum fáa ella hava fingið endurgjald á annan hátt fyri útreiðslur til uppihaldsveiting, t.d. veiting sum forsyrgjari sambært forsorgarlóg ella lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Tann, ið fær stuðul, skal vátta at hann er undir fullari skattskyldu í Føroyum, og ikki hevur fingið annað endurgjald.

### Roknskapartøl

Roknskapar- og játtanartøl 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Stuðul til uppihaldspening | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | 2.389 | 2.757 | 2.343 | 2.435 | 2.439 |
| Játtan | 2.423 | 2.423 | 2.423 | 2.723 | 2.723 |
| **Meir-/minninýtsla** | **-34** | **334** | **-80** | **-288** | **-284** |

Seinastu fimm árini hava útreiðslurnar til stuðul til uppihaldspening ligið um 2,5 mió.kr. um árið. Áðrenn lógarbroytingar í 2009 og 2010 lógu árligu útreiðslurnar millum 7 og 8 mió.kr. Frá 1. juli 2009 lækkaði stuðulsveitingin frá 50% til 40%, og síðani 1. januar 2011 hevur stuðul bara verið latin fyri upphædd, ið er hægri enn eitt vanligt barnagjald.

### Grannskoðan

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur mál, viðvíkjandi persónum sum í 2020 hava fingið stuðul til uppihaldsveiting.

Vit kannaðu, um umsóknarblaðið er brúkt, at tað er hóskandi fylt út, so tað sæst, hvør móttakarin av uppihaldspeninginum er, og at upphæddin er í samsvari við gjaldsavgerðina. Eisini kannaðu vit, hvørji skjalprógv liggja í málunum, um móttakararnir lúka treytirnar í lógini, og um upphæddirnar eru rættar. Í flestu málunum var einki at finnast at. Onkrir spurningar vóru, sum Almannaverkið hevur svarað.

Tá ið stuðulsmóttakari fær forsorgarhjálp e.a. sum forsyrgjari, hevur Almannaverkið drigið hækkaðu veitingina frá í stuðulsgrundarlagnum, áðrenn tey rindaðu stuðul.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu Almannaverkið kannar, at umsøkjarar ikki áður hava fingið endurgjald fyri útreiðslur til uppihaldspening.

Sambært Almannaverkinum hava tey atgongd til allar upplýsingar í Heildarskipanini, og tey kanna, um umsøkjari fær aðrar veitingar, sum kunnu hava ávirkan á stuðulin. Almannaverkið kann ikki kanna, um umsøkjari hevur fingið veiting aðrastaðni frá, uttan so at stovnurin verður kunnaður um tað t.d. av TAKS.

Ein umsøkjari søkti um stuðul til uppihaldspening, sum var goldin í 2019 og fyrra hálvár 2020. Almannaverkið viðgjørdi umsóknina fyri 2019 og ikki tað, sum var goldið í 2020. Almannaverkið kunnaði um, at orsøkin var, at umsóknarblaðið fyri 2020 var skeivt fylt út. Góður fyrisitingarligur siður hevði helst verið at kunnað umsøkjaran.

Ein annar umsøkjari søkti eisini um stuðul fyri barnapening goldnan í 2019 og 2020. Í Heildarskipanini er upplýsing frá TAKS um, at viðkomandi hevur goldið áløgdu upphæddirnar fyri 2019 og 2020. Fyri 2017 og 2018 hevði hann einki goldið, og skyldaði tí barnapening til landið.

Almannaverkið játtaði umsóknina. Tó rindaði Almannaverkið ikki alla upphæddina, sum umsøkjarin bað um, men dró upphædd frá, svarandi til gjald fyri eitt barn fyri árini 2017 til 2020, soleiðis sum ásett er í reglunum.

Í umsóknarblaðnum skal umsøkjarin upplýsa, nær peningurin er goldin, fyri at tryggja, at freistin, fyri at søkja um stuðul, er hildin. Sambært Almannaverkinum merkir tað ikki, at inngjald móttikið í 2019 bert fevnir um skuld fyri 2019.

Í hesum málinum er talan um inngjald í 2019, ið ikki neyðturviliga einans fevnir um gjaldsskyldu fyri 2019. Nevndi umsøkjari hevði einki goldið fyri 2017 og 2018, tó at Almannaverkið hevur rindað barnapening í forskoti hansara vegna.

Áðrenn Almannaverkið rindar stuðul, skal stovnurin lækka upphæddina við upphædd, svarandi til eitt barnagjald fyri hvørt ár, ið umsøkjarin skyldar barnapening, um so er,

at umsøkjarin skyldar fyri fleiri ár. Hendan áseting er, sambært viðmerkingunum til lógaruppskoti, gjørd, at forða fyri, at nakar skal kunna hava fyrimun av ikki at rinda barnagjald til ásetta tíð, fyri síðani at fáa hægri stuðul við at rinda fyri fleiri ár í senn.

## 9.8 Einkjubarnastyrkur (LG 2014/212-213)

Í undanfarnu frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av umsitingini av játtanini til einkjubarnastyrk.

Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl." skal barnagjald, sum umsøkjari hevur móttikið av órøttum, gjaldast aftur. Lógin segði einki um, hvørji amboð Almannaverkið kundi ella skuldi brúka at krevja gjaldið aftur. Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skuldi forða fyri feilum.

Almannamálaráðið helt tað vera neyðugt at umrøða reglur um innkrevjing av útgjøldum nærri saman við TAKS og Almannaverkinum.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið hevði vent sær til TAKS fyri at fáa til vega heimild at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað var eftir at áseta reglur um tað, næstu ferð broytingar skuldu verða gjørdar lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.

Landsstýrismaðurin hevur í august 2022 kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum.

## 9.9 Barnaískoyti (LG 2015/212-213)

Í undanfarnu frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin víst á, at ivi var um innheintingarheimildirnar hjá Almannaverkinum. Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl." skal tann, sum hevur móttikið barnaískoyti móti betri vitan, gjalda upphæddina aftur.

Í lógini framgongur ikki, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja peningin aftur. Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skuldi forða fyri feilum.

Í 2017 helt Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verið veitt TAKS at heinta inn, um ikki bar til at fáa í lag gjaldsavtalu.

Í 2018 greiddi Almannamálaráðið frá, at fundur hevði verið um málið ímillum TAKS, Almannaverkið og Almannamálaráðið. Eingin niðurstøða var gjørd, tí støða skuldi takast til m.a. fíggjarlig, teknisk og løgfrøðilig atlit.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið hevði vent sær til TAKS fyri at fáa heimild til vega at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað var eftir at áseta reglur um tað, næstu ferð broytingar skuldu gerast í lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.

Landsstýrismaðurin hevur í august 2022 kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum.

## 9.10 Bústovnar o.a., løgujáttan (LG 2019/212-216)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av roknskapinum fyri Bústovnar o.a. Játtanin er á høvuðskontu 12.21.6.02 "Bústovnar o.a., løgujáttan".

Vit umrøddu verkætlanir, ið eru nevndar í viðmerkingum í fíggjarlógunum 2017, 2018 og 2019.

Almannamálaráðið hevði um 70 bygningar tilsamans. Stovnarnir høvdu onga játtan til viðlíkahald í sínum rakstri.

Landsgrannskoðanin spurdi Almannamálaráðið, hvørjar raðfestingar vóru gjørdar 2017 til 2022, og hvussu býtið var ímillum viðlíkahald og umbyggingar í 2019.

Í 2020 vísti Almannamálaráðið á, at játtanin á hesari kontuni var til nýbyggingar, umvælingar og dagføringar av bygningum hjá ráðnum og stovnum undir ráðnum. Landsverk hevði ræðisrættin á játtanini og ráðið raðfesti játtanina í samstarvi við Landsverk og stovnarnar undir ráðnum. Tað var týdningarmikið, at neyvt samstarv var um nýtslu av játtanunum, soleiðis at sleppast kundi undan dupultarbeiði, og at játtanirnar blivu nýttar so skilagott sum møguligt.

Almannamálaráðið og Almannaverkið vóru umboðað í bygginevndum, har verkætlanir vóru settar í verk við verklagslóg. Regluligir mánaðarfundir millum landsstýrismannin og Landsverk vóru tiknir uppaftur í apríl 2021, har Landsverk kunnaði um støðuna á verkætlanunum.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskapartøl 2015 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 648 | 0 | 13 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Keyp av vørum og tænast. | 775 | 5 | 5 | 13 | 0 | 1 | 0 |
| Avskrivingar o.a. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 124 | 0 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | -1.423 | -1.482 | -1.920 | -2.010 | -2.038 | -1.437 | -1.404 |
| Bygging og løguframleiðsla | 21.871 | 20.368 | 6.106 | 10.165 | 14.722 | 9.741 | 26.488 |
| Útvegan av løgu o.ø. | 0 | -192 | 0 | 2.527 | 0 | 671 | 1.198 |
| Aðrar flytingarinntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | -124 |
| Inn. flyt. ml. alm. stovn. (útr.) | 0 | 1.477 | 1.902 | 1.997 | 2.038 | 1.312 | 1.404 |
| **Tilsamans** | **21.871** | **20.176** | **6.106** | **12.692** | **14.722** | **10.412** | **27.563** |

#### *Eirargarður og Sambýli í Reynstúni*

Í staðin fyri at umbyggja Eirargarð gjørdi Almannamálaráðið av at byggja í Reynstúni á Argjum.

Ll. nr. 79/2017 “um at dagføra ognina Eirargarður 14/16” fyri í mesta lagi 30 mió.kr. kom í gildi 30. mai 2017, og fór úr gildi 31. desember 2019.

Roknskapartøl fyri umvælingar av Eirargarði 14-16 og bygging av Sambýli í Reynstúni:

*t.kr.*

| Heiti | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eirargarður 14 og 16 | 2.141 | 1.732 | 688 | 0 | 0 | 0 |
| Samb.í Reynstúni/Høvuðsumv. Eirargarði 14-16 | 0 | 517 | 385 | 943 | 229 | 2.092 |
| Umvæling av Eirargarði 14-16 | 0 | 0 | 0 | 2.264 | 2.283 | 0 |
| **Tilsamans** | **2.141** | **2.249** | **1.073** | **3.207** | **2.512** | **2.092** |

Frá 2016 til 2021 eru tilsamans 13,3 mió.kr. brúktar til umvælingar av Eirargarði og til bygging í Reynstúni. Í oktober 2018 hevði landsstýrismaðurin sambært Landsverki slept ætlanini at heildarumbyggja Eirargarð 14-16. Ístaðin gjørdi Landsverk ábøtur fyri at bøta um inniumhvørvið.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at í 2019 og 2020 vóru 4,6 mió.kr. brúktar til umvæling av Eirargarði 14 og 16, til nýggj loft, lyftiútgerð o.a.

Í 2021 skuldi Eirargarður 16-1 og 16-2 eftir ætlan umvælast og dagførast. Til umvælingar, innbúgv og lyftiútgerð skuldu 1,5 mió.kr. brúkast. Í 2023 var ætlanin at totaltrenovera Eirargarð 14-1, og 3,1 mió.kr. vóru settar av til at betra inniluftina, nýtt loft, lyftiútgerð o.a.

***Arbeiðið at umvæla Eirargarð 16-1 er byrjað.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeiðið á Eirargarði 16-1 byrjaði í mars 2022, og búfólkini kunnu eftir ætlan flyta inn aftur síðst í august 2022.

Sambært landsstýrismanninum verður byrjað upp á Eirargarð 16-2 í september, og væntandi fer hetta arbeiðið at ganga skjótari, við tað at felagsarbeiðið er gjørt. Upprunaliga var ætlanin bert at umvæla/dagføra vátrúm í Eirargarði 16 1 & 2, men tað er broytt seinni, tí at tørvur er á fleiri dagføringum. Í tí sambandi var gjørt av at umraðfesta og strika aðrar ætlanir, soleiðis at játtanin til dagføringina av Eirargarði kundi hækka samsvarandi.

Sambært Almannamálaráðnum roknar Landsverk við at brúka 700 t.kr. afturat, fyri at røkka nýggja málinum, t.e. at høvuðsumvæla 2 hæddir fyri umleið 5,4 mió.kr., og arbeiðir Landsverk við at finna fíggingina innan fyri verandi játtanarkarm.

Sambært Almannamálaráðnum hevur verið avbjóðandi at halda kostnaðar-metingarnar, av tí at príshækkingar á m.a. tilfari hava verið óvanliga stórar.

### *Sambýlið í Reynstúni á Argjum*

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2019 vóru fyrireikingarnar byrjaðar at byggja nýggjan vardan bústað til húsfólkini á Eirargarði. Prosjekteringin steðgaði á í februar 2019, tá ið uppskot til verklagslóg var lagt fyri Løgtingið. Uppskotið fall burtur, tá ið Løgtingið fór í summarfrí.

Í desember 2019 boðaði landsstýrismaðurin í almannamálum Fíggjarnevndini frá, at skipanaruppskotið viðvíkjandi heiminum í Reynstúni var liðugt, og at bygningurin møguliga fór at verða dýrari enn mett. Grundstykkið fór møguliga at kosta 750 t.kr. Jørðarbeiðið kundi byrja í juni 2020 og byggingin í mars 2021. Heimið kundi verða liðugt í oktober 2022.

Í januar 2020 fekk Landsverk boð frá Almannamálaráðnum um at prosjektera Sambýlið í Reynstúni liðugt. Landsverk bað ráðgevan eftirkanna kostnaðarmetingina fyri at tryggja betri grundarlag fyri víðari arbeiði. Ráðgevin metti, at av tí at kostnaðarmetingin var eitt ára gomul, var neyðugt at hækka hana við 10%. Ætlanin var at fara í holt við víðari prosjektering, tá ið málið um grundøkið var avgreitt frá Tórshavnar kommunu. Býráðið samtykti 25. juni 2020 at selja Almannamálaráðnum økið í Reynstúni til sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Í 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tá ið Tórshavnar býráð samtykti at selja grundøkið til Almannamálaráðið, var tað treytað av, at innkoyringin, sum upprunaliga var frá Reynstúni, skuldi verða frá Glyvursvegi. Drúgva avgreiðslutíðin í býráðnum og broyttu treytirnar høvdu seinkað prosjekteringina við umleið 1½ ári og dýrkað verk-ætlanina um 25%.

Landsstýrismaðurin vísti eisini á, at áðrenn farast kundi víðari við prosjekteringini, var neyðugt at meta um kostnaðin av broyttu fortreytunum við nýggju innkoyringini. Ráðgevin fór undir prosjektuppskot í november 2020, sum var handað í apríl 2021. Nakrir spurningar skuldu avgreiðast, m.a. viðvíkjandi innkoyringini. Teir spurningarnir vóru avgreiddir í august 2021.

Sambært tíðarætlanini skuldi arbeiðið bjóðast út í 2022. Landsstýrismaðurin ætlaði í Løgtingið við verklagslógini, tá ið arbeiðið var boðið út, og tilboðini vóru komin inn, til tess at tryggja, at byggiverkætlanin var so væl fyrireikað og upplýst, sum gjørligt, tá ið Løgtingið skuldi taka støðu til málið.

***Byggja sambýli í Reynstúni.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið var boðið út í januar 2022, og lisitatiónin var 18. februar 2022. Verklagslógin var samtykt síðst í apríl at heimila landsstýrismanninum at byggja fyri í mesta lagi 54 mió.kr. Arbeiðstakara-sáttmálarnir vórðu undirskrivaðir í mai, og spakin var settur í 28. juni 2022. Eftir ætlan verður sambýlið liðugt síðst í 2023.

*Barnaheim í Tórshavn*

Sambært fíggjarlógini 2019 var ætlanin at byggja nýtt barnaheim í Tórshavn. Í 2019 vóru um 3,4 mió.kr. brúktar. Sambært Almannamálaráðnum var nýggjasta kostnaðar-ætlanin sambært skipanaruppskoti 135 mió.kr. Eingin játtan var í fíggjarlógini 2020 til bygging av barnaheimi.

***Barnaheim verður ikki bygt.***

Landsstýrismaðurin hevur í august 2022 kunnað um, at arbeitt verður ikki við at byggja nýtt barnaheim.

*Bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu*

Sambært Ll. nr. 60/2018 “um at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu” kundu í mesta lagi 29 mió.kr. brúkast til at byggja bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu. Lógin er galdandi til 31. desember 2024. Heimið skal byggjast í Kvíggjartúni á Argjum.

Árini 2015 til 2019 vóru 3,1 mió.kr. brúktar til verkætlanina.

Í skrivi til Fíggjarnevndina í desember 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at bygningurin verður 1.192 fermetrar til støddar, at høvuðsprosjekt fyrilá, og at metti kostnaðurin møguliga var hægri, enn heimildin í lógini. Arbeiðið var boðið út, og tilboðini skuldu koma inn í februar 2020. Sambært landsstýrismanninum fór broytingar-uppskot, um neyðugt, at verða lagt fyri Løgtingið í mars 2020, við umbøn um hægri játtan. Byggingin kundi eftir ætlan verða liðug í mars 2022.

Í 2020 kunnaði Almannamálaráðið um, at lisitatión var í februar 2020, men av tí at innkomnu tilboðini vóru munandi hægri enn kostnaðarmetingin, gjørdi landsstýris-maðurin av at ógilda lisitatiónina. Arbeitt var við at gjøgnumganga prosjektið við tí fyri eyga at gera uppskot til sparingar, og eftir ætlan bjóða prosjektið út av nýggjum.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at verkætlanin var umprosjekterað, og sparingar gjørdar, uttan at tað gekk út yvir funktiónirnar. Talan er um sama verklag, sum tá ið løgtingslógin var samtykt í 2018, (t.e. 6 búpláss, 6 umlættingarpláss og virkniseind til áleið 15 børn og ung). Kostnaðurin var 39 mió.kr. (íroknað grundstykki, innbúgv v.m.), og uppskot var lagt fyri Løgtingið um at hækka fíggjarligu heimildina frá 29 mió.kr. til 39 mió.kr. Farið var undir at byggja í mai 2021, og sambært ætlanini verður klárt at flyta inn um ársskiftið 2022/23.

***Heimið í Kvíggjartúni er seinkað og helst eisini dýrkað.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannamálaráðið er kunnað um, at verkætlanin er seinkað, og væntandi eisini dýrkað. Ráðið bíðar eftir dagførdari tíðarætlan og kostnaðarmeting.

*Vardir bústaðir í Tórshavn (Á Mýrini í Hoyvík)*

Sambært Ll. nr. 59/2018 “um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn”[35], kundu tveir bústaðir byggjast fyri í mesta lagi 58 mió.kr. Lógin fer úr gildi 31. desember 2024.

Tvær byggiskráir vóru gjørdar í 2018 til sambýli til fólk við menningartarni. Annað skuldi eftir ætlan staðsetast á Mýrini og hitt í Klingruni í Hoyvík.

Í desember 2019 kunnaði landsstýrismaðurin í almannamálum Fíggjarnevndina um, at byggikostnaðurin møguliga fór at verða hægri, enn upprunaliga mett. Fyrri bygningurin,

[35] Broytt við Ll. nr. 11/2021 “um at byggja ein vardan bústað í Tórshavn”.

sum verður 1.222 fermetrar, kundi verða liðugur á sumri 2022. Fyrireikingin til seinna bústaðin var ikki byrjað.

Almannamálaráðið vendi sær til Fíggjarmálaráðið við fyrispurningi, um prosjekteringin kundi halda áfram, hóast kostnaðurin møguliga fór at verða hægri, enn upprunaliga mett.

Í 2020 greiddi Almannamálaráðið frá, at sambært byggiskránni skuldu nýggju sambýlini ikki avloysa gomlu sambýlini, men staðsetingin av øðrum skuldi verða, har tvey minni sambýli vóru.

Sambært Almannamálaráðnum helt Fíggjarmálaráðið, at heimild var at arbeiða víðari við at fyrireika verkætlanina, til eitt prosjektuppskot var gjørt. Samstundis mælti Fíggjarmálaráðið til, at uppskot um at broyta verklagslógina skuldi leggjast fyri Løgtingið, soleiðis at lógin bert skuldi fevna um prosjekteraða bústaðin og ikki um tveir bústaðir. Almannamálaráðið boðaði í januar 2020 Landsverki frá, at Landsverk kundi undirskriva sáttmálan við ráðgevan um at prosjektera Sambýlið á Mýrini sambært leistinum frá Fíggjarmálaráðnum.

Í 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at ásannandi støðuna, sum hevur verið í sambandi við almennu byggiverkætlanirnar seinnu árini og viðmerkingarnar frá Fíggjarnevndini um, at tað er umráðandi, at verkætlanirnar eru so væl fyrireikaðar sum gjørligt, áðrenn tær verða lagdar fyri Løgtingið, var verklagslógin broytt, frá at byggja tveir vardar bústaðir fyri í mesta lagi 58 mió.kr., til at byggja *ein* vardan bústað fyri í mesta lagi 48 mió.kr.

Fíggjarmálaráðið og Landsverk mæltu tá til, at verklagslógir skuldu leggjast fyri Løgtingið, tá ið verkætlanaruppskotið var klárt. Sambært verkætlanaruppskotinum var kostnaðarmetingin 41,2 mió.kr. Fíggjarmálaráðið mælti til at leggja 15% oman á metingina til møguligar óvissur (tí at kostnaðarmetingin í verkætlanaruppskotinum er 85% neyv). Einmælt Løgting samtykti broytingaruppskotið í januar 2021. Farið var undir jørðarbeiðið í mars. Tilboðini at byggja nýggja sambýlið vórðu latin upp í juli 2021, og vóru innan fyri kostnaðarmetingina. Samlaði kostnaðurin verður 41,7 mió.kr. Byggiarbeiðið skuldi byrja í næstum, og bygningurin skuldi standa liðugur á heysti 2022.

***Sambýli á Mýrini væntandi liðugt í 2023.***

Landsstýrismaðurin hevur í august 2022 greitt frá, at farið er undir byggingina, og arbeiðið gongur væl. Sambært seinastu tíðarætlanini verður bygningurin liðugur 27. februar 2023.

### *Ætlanir um bústaðarbyggingar*

Í apríl 2018 spurdi Fíggjarnevndin, hvørjar ætlanirnar vóru við samlaða kostnaðinum av Barnaheiminum, vardum bústøðum og bú- og umlættingarheimi. Landsstýrismaðurin svaraði við at vísa til yvirlit yvir íløgur 2017 til 2022, har játtanin var 200 mió.kr., og at 14 mió.kr. vóru fluttar frá 2016, tilsamans var upphæddin 214 mió.kr.

Sambært yvirlitinum frá landsstýrismanninum skuldu játtanirnar brúkast til:

| | t.kr. |
|---|---|
| Eirargarður 14/16 (bráðfeingis viðlíkahald) | 4.000 |
| Eirargarður 14/16 (dagføring) | 30.000 |
| 2 sambýli til fólk við menningartarni í Tórshavn | 58.000 |
| Nýtt barnaheim í Tórshavn | 60.000 |
| Bústovnar í Tórshavn til børn og ung við autismu | 29.000 |
| Sambýli í Torfinsgøtu 41, Tórshavn | 7.500 |
| Vardur bústaður til fólk við sálarsjúku | 9.500 |
| Sambýlið Eystan Heyg | 3.000 |
| Sambýlið í Garðsgøtu | 3.000 |
| Ábøtur v.m. | 6.000 |
| Dugniskúlin | 4.000 |
| **Tilsamans** | **214.000** |

### *Játtanir og nýtsla*

Játtað og brúkt frá 2017 til 2021:

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Flutt frá síðsta ári | 13.869 | 19.763 | 36.071 | 21.349 | 30.937 |
| Játtan | 12.000 | 29.000 | 0 | 20.000 | 30.000 |
| Játtað í árinum tilsamans | 25.869 | 48.763 | 36.071 | 41.349 | 60.937 |
| Nýtsla | 6.106 | 12.692 | 14.722 | 10.412 | 27.563 |
| At flyta til næsta ár | 19.763 | 36.071[36] | 21.349[37] | 30.937[38] | 27.074[39] |

***Árini 2017-2022 var ætlanin at byggja fyri 200 mió.kr.***
***Góðar 71 mió.kr. eru brúktar.***

Almannamálaráðið hevur í sambandi við fíggjarlógarviðgerðir seinastu árini fleiri ferðir víst á ætlanina at byggja bústaðir fyri 200 mió.kr. frá 2017 til 2022. Árini 2017 til 2020 eru 43,9 mió.kr. brúktar, og í 2021 eru 27,6 mió.kr. brúktar.

Játtanirnar til Bústovnar o.a. hava givið lítla ábending um, hvør aktiviteturin fór at verða í fíggjarárinum.

Politiska stýringin av búskapinum liggur m.a. í íløgukarminum, har møguleiki er hjá politiska myndugleikanum at seta út í kortið, hvørjar íløgur skulu gerast og samstundis ávirka virksemið í landinum. Tá ið játtaðar upphæddir verða fluttar til seinni ár, er ikki samsvar ímillum ætlaða og veruliga virksemið.

Upphæddir, ið eru fluttar til seinni ár, verða støðlaðar í landsroknskapinum, og eru tí við í grundarlagnum undir fíggjarlógarviðgerðini. Men tá ið endaligi landsroknskapurin verður kunngjørdur árið eftir, ber illa til hjá Løgtinginum at fylgja við í virkseminum. Løgtingið sær ikki veruliga byggivirksemið, fyrr enn roknskapurin er gjørdur.

Sambært Almannamálaráðnum vóru 9,2 mió.kr. av játtanini 2017 á 12 mió.kr. settar av til at byggja eina búeind afturat Eystan Heyg. Málið var fyrireikað í 2017, og játtanin støðlað til 2018. Neyðuga lendið fekst ikki, tí var ætlanin slept og játtanin tí ikki brúkt.

Í 2018 vóru 29 mió.kr. játtaðar afturat, harav skuldu umleið 8 mió.kr. brúkast til at dagføra Eirargarð, sambært verklagslóg frá 2017. Ætlanin var slept, og ístaðin var farið undir fyrireikingar at byggja ein nýggjan vardan bústað. Umleið 6 mió.kr. skuldu brúkast til nýtt barnaheim, vísandi til uppskot um løgtingslóg, sum var lagt fyri Løgtingið í desember 2017. Tað málið datt burtur.

[36] Upphæddirnar "at flyta til næsta ár" standa aftarlaga í prentaða landsroknskapinum. Í 2018 eru tølini at finna á síðu 206.
[37] Síða 200 í landsroknskapinum 2019.
[38] Síða 214 í landsroknskapinum 2020.
[39] Síða 222 í landsroknskapinum 2021.

Til bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu skuldu sambært Almannamálaráðnum brúkast 5 mió.kr., og 5 mió.kr. skuldu brúkast til bygging av vardum bústaði. Tað tekur drúgva tíð at fyrireika eina byggiverkætlan og seinkingar hava verið.

Almannamálaráðið helt, at avsett var í fíggjarlógini í mun til tær verkætlanir, sum skuldu fremjast. Broytt støðutakan og seinkingar hava verið við til, at játtanirnar ikki hava verið brúktar sum ætlað.

Sambært almennu viðmerkingunum til Lm. nr. 94/2016 "Uppskot til løgtingslóg um at dagføra ognina Eirargarður 14/16" frá februar 2017, hevði Almannaverkið saman við Landsverki í mars 2015 útvegað eina frágreiðing um støðuna á 71 bygningum, har Almannaverkið hevur virksemi kring landið. 24 av bygningunum vóru bólkaðir í ringasta bólk, harav 22 í Suðurstreymoy.

Havandi í huga serliga vánaligu støðuna á bústøðunum, helt Landsgrannskoðanin tað vera undranarvert, at játtanirnar at byggja fyri ikki vóru brúktar.

Í 2020 greiddi Almannamálaráðið frá, at seinkingar, broytt støðutakan o.a. hava verið orsøkin til, at játtanirnar hava ikki verið brúktar til nýbygging.

Í fíggjarlógini 2020 vóru 20 mió.kr. játtaðar til nakrar smærri verkætlanir, sum vóru í gongd, og arbeitt var við teimum størru verkætlanunum sambært verklagslógunum Ll. nr. 59/2018 og Ll. nr. 60/2018.

Í skrivi til Fíggjarnevndina í desember 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannamálaráðið, í sambandi við byggingina av heiminum í Reynstúni, kannaði um tað var mest skynsamt, at verklagslógir ikki verða lagdar fyri Løgtingið, fyrr enn verkætlan er liðugt prosjekterað, boðin út og tilboð komin inn.

Í 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at sambært avtalu við Fíggjarmálaráðið, skuldi verklagslóg um verkætlanina í Reynstúni verða løgd fyri Løgtingið, tá ið verkætlanin var liðugt prosjekterað, arbeiðið boðið út og lisitiatiónin verið, til tess at tryggja, at byggiverkætlanin var so væl fyrireikað og upplýst sum gjørligt, tá Løgtingið skuldi taka støðu til málið.

Sum nevnt í brotinum um Sambýlið í Reynstúni, hevur landsstýrismaðurin í august 2022 kunnað um, at arbeiðið var boðið út í januar 2022, og lisitatiónin var 18. februar 2022. Verklagslógin var samtykt síðst í apríl at heimila landsstýrismanninum at byggja fyri í mesta lagi 54 mió.kr. Arbeiðstakarasáttmálarnir vórðu undirskrivaðir í mai, og spakin var settur í 28. juni 2022. Eftir ætlan verður sambýlið liðugt síðst í 2023.

## 9.11 Almannaverkið, Trivnaðartænastur (LG 2018/212-216)

### 9.11.1 Felagsrakstur í Trivnaðardeplinum

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin frá um grannskoðan av felagsrakstrinum í Trivnaðardeplinum, herundir eisini merking av akførunum hjá Almannaverkinum.

Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum er ásett, at øll akfør hjá landinum skulu vera týðiliga merkt við navninum á tí stovni, sum akfarið hoyrir undir ella við búmerki stovnsins. Akstovan hevur eftirlit við, at bilarnir verða merktir, og kann í heilt serligum førum loyva undantøkum.

Ikki allir bilarnir hjá Almannaverkinum vóru merktir, og tey høvdu søkt um nøkur undantaksloyvi. Við árslok 2018 hevði Almannaverkið 97 akfør. Akstovan hevði givið undantaksloyvi at sleppa undan at merkja eitt akfar, og hevði fýra umsóknir liggjandi

at taka støðu til. Akstovan hevði skotið upp, at Fíggjarmálaráðið útgreinar krøvini til undantaksloyvi, tí var avgerð ikki tikin.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannaverkið hevur ikki hoyrt aftur frá Akstovuni um hesi málini. Í 2021 hevur Almannaverkið søkt Akstovuna um undantak fyri merking av tveimum bilum, sum verða brúktir til borgarar á stovnum hjá Almannaverkinum, og hevur fingið undantak.

### 9.11.2 Eind 1 og Eind 6

*Skipan av arbeiðstíð - at leggja vaktætlanir*

Í eindunum hjá Almannaverkinum løgdu eindarleiðarar vaktætlanir fyri sína eind. Í summum førum var torført at taka atlit at hvílutíðum, tí starvsfólk kundu arbeiða í fleiri eindum. Sambært Almannaverkinum átti stovnurin at halda hvílutíðarreglurnar, men verandi skipan til vaktir megnaði ikki at handfara setanir, sum vóru í fleiri støðum. Almannaverkið arbeiddi við einari loysn.

Landsgrannskoðanin kannaði, um lønirnar í mai 2020 fyri Eind 6 vóru rættar í mun til sáttmála og vaktætlan. Einki var at finnast at nýggjaru setanunum.

Í 2021 spurdi Landsgrannskoðanin, um avgerð var tikin um meirtíð og yvirtíð hjá fulltíðarsettum starvsfólkum. Landsstýrismaðurin svaraði, at endalig avgerð var enn ikki tikin. Málið var enn til viðgerðar í Gerðarrættinum.

Eitt fakfelag hevði stevnt eftir yvirtíðargjaldi, og sambært landsstýrismanninum var málið lagt fyri Gerðarrættin, men tað fyrilá ikki nøkur avgerð í málinum.

***Gerðarrætturin gjørt úrskurð í málinum um yvirtíðargjald.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at málið, sum var lagt fyri Gerðarrættin, snúði seg um tríggjar tænastumannasettar námsfrøðingar, og úrskurður er sagdur í tænastumannagerðarrættinum. Tænastumannagerðarrætturin kom til ta niðurstøðu, at Almannaverkið skuldi gjalda teimum trimum tænastumonnunum munin millum vanliga tímaløn og yvirtíðarløn, í tann mun hesir hava fingið útgoldið vanliga tímaløn, tá teir hava arbeitt meira enn 40 tímar í miðal um vikuna í tíðarskeiðnum, sum teirra arbeiðsætlan fevnir um, fyri tíðarskeiðið frá 18. september 2018 til januar 2020.

Sambært Almannamálaráðnum hevur Almannaverkið goldið munin til hesar tríggjar tænastumannasettu námsfrøðingarnar.

### 9.11.3 Eind 11 í Trivnaðartænastum

Í seinastu frágreiðingini umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Eind 11, sum nærum øll eru staðsett í Vági.

*Verkstaðið á Bakka*

Í sambandi við grannskoðanina á summrið í 2020 vístu starvsfólkini á Verkstaðnum á Bakka á, at gjóstur var í parti av bygninginum.

***Arbeiði at dagføra verkstaðið er ikki byrjað enn.***

Í august 2022 hevur Almannamálaráðið kunnað um, at sambært leiðaranum á verkstaðnum á Bakka hevur Landsverk fyri stuttum hugt at bygninginum, men síðani er einki hent í málinum.

*Eiðisgarður*

Felagshølini hjá Eiðisgarði eru í sama bygningi sum røktarheimið Hamragarður. Bygningurin er rímiliga nýggjur, men ávísir manglar hava verið, sum enn ikki vóru bøttir. Búfólkini høvdu egna íbúð við køki/alrúmi, kamari, gongd og baðirúmi. Í einari íbúð manglaði ein rútur. Sambært starvsfólkunum var rúturin tikin úr, fyri at kanna vindeygakarmin. Í felagshølunum vóru flestu manglarnir, at vindeygu og terrassuhurðar ikki virka.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í sambandi við eftirlitsvitjan hjá Løgtingsins umboðsmanni á sambýlinum Eiðisgarði í Vági hevur Almannaverkið kunnað Umboðsmannin um, at ósemja er millum Landsverk og arbeiðstakaran, ið bygdi bygningin, og tískil eru feilir og manglar ikki umvældir enn.

***Alneyðugar ábøtur ikki gjørdar vegna ósemjur.***

Umboðsmaðurin hevur í fyribilsfrágreiðing frá eftirlitsvitjanini upplýst, at tað er óheppið, at búfólkini á Eiðisgarði í so langa tíð noyðast at finna seg í teimum viðurskiftum, ið sýnsfrágreiðingin greiðir frá. Umboðsmaðurin biður Almannaverkið kanna, um møguleiki er at gera ábøtur hóast ósemjuna millum Landsverk og arbeiðstakaran. Hugsað verður serliga um brotnu rútarnar, sum í vanligum føri hevði verið nakað, ið ein, sum býr í egnum heimi, hevði tikið stig til at bøta um.

Í juli 2022 hevur Almannaverkið spurt Landsverk, um møguleiki er at gera onkrar ábøtur, sum t.d. brotnu rútarnar, hóast ósemjan millum Landsverk og arbeiðstakaran ikki er avgreidd enn. Landsverk svaraði, at stovnurin fer at taka málið upp millum partarnar. Á fundi í juli 2022 millum Almannamálaráðið og Landsverk var m.a. hetta málið umrøtt. Niðurstøðan var, at Landsverk kannar nærri, hvussu málið um bráðfeingis ábøtur kann loysast.

*Frítíðartilboð*

Frítíðartilboðið í Vági var í einum sethúsum hjá Vágs kommunu. Tveir borgarar brúktu tilboðið eftir skúlatíð. Sethúsini vóru gomul, og trongdu til dagføringar, men sýntust at nøkta tørvin, tá ið tað ikki var brúk fyri atgongd við koyristóli.

Landsstýrismaðurin hevur í 2022 greitt frá, at einki er hent í málinum, og mett verður, at húsið nøktar tørvin í løtuni.

## 9.12 Felagskassar (LG 2020/212-216)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av roknskapunum fyri felagskassarnar hjá sambýlunum undir Almannaverkinum fyri 2020. Búfólkini á einstøku sambýlunum eiga felagskassarnar.

Roknskapirnir í 2020 góvu samanumtikið eina rættvísandi mynd av virkseminum í árinum. Samanborið við 2019 vóru stórir batar viðvíkjandi rættleikanum av fíggjarstøðuni. Tó vóru nøkur ivamál og feilir; harímillum at vøru- og tænastuskuld ikki sóust í einstaka felagskassanum, og at nakrar peningastovnskontur ikki vóru í samsvari við kontuavrit frá bankunum pr. 31. desember 2020.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært Almannaverkinum eru allar peningastovnskontur strikaðar í 2022 uttan tvær hjá sambýlinum á Rúnarvegi 3 og 6. Hesar báðar konturnar hava ikki verið bókaðar í fleiri ár, tí kvittanir mangla. Strikaðu konturnar eru uppgjørdar bæði í peningastovnunum og í roknskapinum.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at sum Almannaverkið áður hevur upplýst fyri Landsgrannskoðanini, so er Búskaparskipan Landsins ikki sett upp soleiðis, at vøru- og tænastuskuld pr. 31. desember 2020 kann vísast í fíggjarstøðuni. Tó kann tað gerast umvegis kreditormodulið, har ein velur “bókað í 2020” og “goldið í 2021”. Tað vil vísa skuld hjá einstaka felagskassanum, ið er bókað í 2020, men goldin í 2021.

## 9.13 Ískoyti til hoyritól sambært § 18b (LG 2020/212-217)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av ískoyti til hoyritól á høvuðskontu 12.21.7.01 “Vanlig forsorg, lógarbundin játtan” undirkontu 09 “Hoyritól”.

Í 2019 vóru 4,8 mió.kr. goldnar og í 2020 vóru 4,2 mió.kr. goldnar. Hoyriklinikkin og bókhaldið á Landssjúkrahúsinum umsita játtanina.

Endamálið við grannskoðanini var at kanna, um roknskapartølini eru røtt, t.v.s. at útreiðslur og inntøkur hava heimild í lóg og kunngerð, um roknskaparliga skjalfestingin er nøktandi, og at kunna okkum nærri um umsitingina av ískoytinum, sum verður latið, tá ið persónur keypir hoyritól frá privatum veitara.

### *Privatur veitari*

Persónar, ið keypa hoyritól frá privatum veitara, fáa ískoyti frá Hoyriklinikkini. Ískoytið er í mesta lagi 4.000 kr. fyri hvørt hoyritól, men kann ikki vera hægri enn veruligi kostnaðurin av hoyritólunum íroknað kanning, viðlíkahald og umvælingar. Ískoyti verður ikki veitt til keyp av battaríum ella filtrum.

***Í mesta lagi 4.000 kr. fyri hvørt hoyritól.***

Ein privat fyritøka selur hoyritól í Føroyum. Fyritøkan hevur egnan serlækna, sum kannar og váttar, at persónur hevur somikið niðursetta hoyrn, at viðkomandi hevur brúk fyri hoyritóli.

Hoyriklinikkin fekk faktura frá fyritøkuni upp á hvørt einstakt ískoyti. Á fakturunum var ikki upplýst, hvussu nógv keypari hevði rindað, ella hvat hann hevði rindað fyri. Fyri at tryggja, at upphæddirnar, sum landskassin rindar, vóru rættar, mælti Landsgrann-skoðanin Hoyriklinikkini til at útvega avrit av samlaðu rokningini. Hoyriklinikkin var í samskifti við privata veitaran um tey viðurskiftini.

***Skjølini vísa ikki samlaða kostnaðin fyri hvørt hoyritól.***

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landssjúkrahúsið fleiri ferðir hevur heitt á veitaran um at senda avrit av samlaðu rokningini, tá fakturi verður sendur. Higartil hevur veitarin ikki tikið tað til eftirtektar, men Landssjúkrahúsið er í tøttum samskifti við hann, og vónandi verða hesi viðurskifti skjótt fingin í rættlag.

Landssjúkrahúsið hevur somuleiðis upplýst, at tey hava samskift við grannskoðaran hjá privata veitaranum, sum upplýsir, at hann í sambandi við grannskoðanina m.a. kannar, at § 4, stk. 2, í K. nr. 96/2008 “um stuðul til hoyritól” verður hildin. Tað er, at stuðulin ikki er hægri enn útreiðslurnar til veitan av hoyritóli. Um hendan áseting ikki hevði verið hildin, so hevði grannskoðarin viðmerkt tað í átekning ella protokoll til roknskapin, og har er eingin slík viðmerking. Landssjúkrahúsið hevur tí onga orsøk til at halda, at stuðulin, sum veitarin fær, er hægri enn útreiðslan til einstaka hoyritólið.

### *Goymslustýring*

Hoyriklinikkin hevði ikki skipaða goymslustýring, men starvsfólkini kendu arbeiðið somikið væl, at tey vistu, hvat stovnurin átti inni.

Landsgrannskoðanin kundi ikki sanna, um virðini vóru til staðar, tá ið stovnurin ikki hevði skipaða goymslustýring. Vit kundu ikki kannað eftir, um útreiðslur vóru játtaðar sambært galdandi reglum, tá ið einstaka útreiðslan ikki kundi eyðmerkjast til eina játtan ella finnast á goymslu. Sambært Landssjúkrahúsinum fóru tey í 2021 í tættari samstarv við innkeypsfelagið Amgros, og tað fevndi m.a. um meira skipaða goymslustýring.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landssjúkrahúsið hevur upplýst, at Hoyriklinikkin er farin at keypa hoyritól frá Amgros í stórum, ofta umleið 100 í senn. Landssjúkrahúsið hevur onga skipaða goymslustýring, men øll hoyritól verða skrásett í journalskipanini Cosmic og í NOAH, sum er ein heimsumfatandi telduskipan fyri hoyritól og onnur tól, sum eru knýtt at hoyritólum. Hoyriklinikkin hevur gott yvirlit yvir, hvussu nógv tól eru á goymslu, og nær bíleggjast skal av nýggjum. Minst eina ferð um árið verður goymslan tald upp og skrásett.

## 9.14 Almannatrygd (LG 2021/212-217)

Í 2021 var samlaða játtanin til almannatrygd 113,9 mió.kr. Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað skipanirnar "Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku" og "Endurgjald fyri meirútreiðslur", sum eru játtaðar á høvuðskontu 12.21.7.01, undirkontu 11 og undirkontu 12.

Endamálið við grannskoðanini var at kunna okkum nærri um skipanirnar, kanna um skjalfestingin av málsviðgerðini var nøktandi, og um roknskapartølini vóru røtt, t.v.s. at útreiðslurnar hava heimild í lóg og kunngerð.

Heimild at veita stuðul er í §§ 24 og 25 í Ll. nr. 72/2020 "um almannatrygd og tænastur". Lógin hevur til endamáls at stuðla persónum, sum eru um persónar við varandi breki ella varandi sjúku.

Persónar, sum heilt ella partvíst eru í fyriskipan hjá tí almenna eftir §§ 45 og 46 í lógini "um almannatrygd og tænastur" ella eftir aðrari lóggávu, kunnu fáa stuðul eftir § 11, stk. 2, samanber § 12, stk. 2, í lógini.

Løgtingið samtykti við Ll. nr. 71/2022, at hægsta møguliga upphædd, sum verður veitt sum endurgjald sambært K. nr. 219/2020, verður javnað sambært lóg um javningarprosent til almannaveitingar. Broytingin fekk virknað frá 1. januar 2022.

### Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku

Endurgjaldið er fyri mista inntøku vegna varandi sjúku ella brek hjá barni, tá ið neyðugt er at vera um barnið heima, ella í ávísa tíð at vera hjá barni í sambandi við viðgerð.

Til ber eisini at fáa endurgjald, um talan er um persón, sum er undir fólkapensjónsaldur, og sum ynskir at doyggja heima, og verður ansaður av persóni, sum viðkomandi hevur tætt tilknýti til. Endurgjald kann veitast í upp til ein mánað eftir, at tann ansaði doyr.

Endurgjald verður veitt sambært K. nr. 219/2020 "um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku" og verður ikki veitt fyri tann partin av inntøkuni, sum er oman fyri 25 t.kr. um mánaðin umframt frítíðarløn og bundna eftirløn. Upphæddin verður javnað sambært lógini "um áseting og javning av almannaveitingum".

### Endurgjald fyri meirútreiðslur

Endurgjaldið er ætlað persónum, sum eru um barn við likamligum breki ella varandi sjúku. Rætturin til endurgjald fatar bæði um uppihaldsútreiðslur av brekinum ella sjúkuni, og útreiðslur til viðgerðir, sum eru góðkendar av Heilsutrygd.

Treytin fyri at fáa endurgjald fyri meirútreiðslur er, at viðgerðin er neyðug, og at hon er eftir tilmæli frá lækna. Fíggjarligur stuðul verður játtaður fyri í mesta lagi eitt ár í senn, men kann, um tørvurin er varandi og støðugur, veitast í longri tíðarskeið.

Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um treytir fyri útreiðslum og endurgjaldi fyri minstu og mestu upphædd, ið verður endurgoldin.

Almannamálaráðið hevur víst á, at til ber eisini at fáa endurgjald fyri mista inntøku, tá ið persónur undir fólkapensjónsaldur við seinheilaskaða, sum vegna vantandi pláss á bústaði sambært §§ 45 ella 46, verður ansaður í heiminum av persóni, sum hann hevur serligt og tætt tilknýti til sambært § 25 stk. 1, nr. 3.

***Nýggj kunngerð um endurgjald.***

Løgtingið samtykti við Ll. nr. 71/2022, at hægsta møguliga upphæddin, sum verður veitt sum endurgjald sambært K. nr. 219/2020, verður javnað sambært løgtingslóg "um javningarprosent til almannaveitingar". Broytingin fekk virknað frá 1. januar 2022.

### Roknskapartøl v.m.

Játtanin til Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku og Endurgjald fyri meirútreiðslur eru á høvuðskontu 12.21.7.01, undirkontu 11 og 12. Lógin var samtykt í 2020, og hevur sett aðrar skipanir úr gildi.

Játtanar- og roknskapartøl fyri 2021:

*t.kr.*

| Undirkonta | J 2021 | R 2021 |
|---|---|---|
| 11. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku | 12.192 | 12.286 |
| 12. Endurgjald fyri meirútreiðslur | 5.600 | 4.392 |

### Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku

Tá ið fólk søkja um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, byrjar Almannaverkið málsviðgerðina við einum fundi við umsøkjaran fyri at greina málið. Læknaváttan skal vera tøk, so trygd er fyri, at útgjaldið er heimilað. Tá ið málið er greinað og endurgjaldið staðfest, ásetir Almannaverkið ein endadag.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um:

- heimild er fyri endurgjaldi,
- treytirnar í Ll. nr. 72/2020 “um almannatrygd og tænastur” eru fylgdar,
- spardar útreiðslur ella onnur inntøka, sambært K. nr. 219/2020, er mótroknað (barnaansing, útgoldin frítíðarløn v.m.),
- eftirlit er við, at endurgjaldið fellur burtur, tá ansing steðgar,
- skjalfestingin er tøk, og
- hvussu stovnurin tryggjar, at umsøkjararnir eru veruligir persónar.

***Ikki mótroknað endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku.***

Í einum føri var kommunalt frítíðarpláss ikki mótroknað í endurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku. Spurt, hví ikki var mótroknað, svaraði Almannaverkið, at tey áttu at havt kannað, um ansingarplássið var mótroknað endurgjaldinum.

### Endurgjald fyri meirútreiðslur

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur mál, har Almannaverkið hevur endurgoldið fyri meirútreiðslur. Vit kannaðu um:

- heimild er fyri útgjaldinum,
- tilmæli er frá lækna, og
- eftirlit er við meirútreiðslunum.

Í øllum málunum, vit kannaðu, var heimild at gjalda. Tilmæli vóru frá viðgera, lækna e.l., og øll skjøl vóru tøk í øllum málunum.

Í einum føri var útgoldið alt ov nógv í koyripeningi. Eftir at Almannaverkið varð varugt við, at útgoldið var ov nógv, er skipanin broytt, so tað ikki hendir aftur. Avtalað er við móttakaran um afturgjalding av ov nógv útgoldnu upphæddini.

### Samanumtikið

Stakroyndirnar vísa, at málini eru væl lýst, og at øll viðkomandi skjøl eru tøk. Grannskoðanin vísti tó, at veikleikar eru við innaneftirlitinum hjá Almannaverkinum, tá ið veitingar ikki eru mótroknaðar, og alt ov stór útgjøld eru farin út sum koyripeningur.

***Innaneftirlitið veikt.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at veikleikar kunnu vera í handligum mannagongdum, og tí er neyðugt við tryggum eftirliti. Landsgrannskoðanin mælti til, at Almannaverkið styrkir eftirlitið við útgjøldunum.

## 9.15 Arbeiðsfremjandi tiltøk (LG 2021/212-217)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað skipanirnar “Arbeiðsbúgving”, “Tillagað starv” og “Vart starv”, sum eru á undirkontum til høvuðskontu 12.21.7.02 “Arbeiðsfremjandi tiltøk”. Í 2021 var samlaða játtanin til Arbeiðsfremjandi tiltøk 118 mió.kr.

Endamálið við grannskoðanini var at kunna okkum nærri um skipanirnar, kanna um skjalfestingin av málsviðgerðini er nøktandi, og um roknskapartølini eru røtt, t.v.s. at útreiðslurnar hava heimild í lóg og kunngerð.

Heimild at veita stuðul er í Ll. nr. 63/2012 “um arbeiðsfremjandi tiltøk”. Lógin hevur til endamáls at stuðla undir eitt virkið arbeiðslív hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar við at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

Roknskapartøl frá 2017 til 2021:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiðsbúgving | 34.454 | 32.741 | 32.297 | 30.404 | 33.770 |
| Tillagað starv | 21.755 | 34.026 | 49.958 | 62.685 | 74.061 |
| Vart starv | 12.677 | 12.045 | 9.318 | 7.634 | 9.897 |
| **Tilsamans** | **68.886** | **78.812** | **91.573** | **100.723** | **117.728** |

### Arbeiðsbúgving

Heimild at veita stuðulin er í Ll. nr. 63/2012 “um arbeiðsfremjandi tiltøk”. Játtanin er ætlað at veita stuðul til fólk, sum vegna serligar umstøður eru í vanda fyri at missa sambandið við arbeiðsmarknaðin. Játtanin er ætlað til útbúgvingar, arbeiðsvenjing og skeið. Fyriskipanin við arbeiðsvenjing kann vanliga vara upp til eitt ár.

Treytin fyri stuðli er sambært § 11 í lógini, at ein fyriskipanarætlan við tíðarætlan er gjørd. Er talan um serlig sjúkuviðurskifti ella aðrar grundaðar orsøkir, kann víkjast frá tíðarætlanini. Landsstýrismaðurin hevur ásett nærri reglur í K. nr. 114/2012 “um virknisvenjing, arbeiðsbúgving, tillagað starv, leiðbeinaraskipan o.a.”

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur mál, har endurgoldið er fyri arbeiðsbúgving. Vit kannaðu um:

- heimild er fyri útgjaldingini sambært, § 8,
- skjalfesting er tøk fyri val av fyriskipan, § 9-10,
- fyriskipanarætlan fyriliggur við tíðarætlan og uppfylging, § 11,
- skjalfesting finst fyri ásetingini av stuðulsveitingini, § 12, og um
- eftirlitið er skipað sambært § 31.

Fleiri mál snúgva seg um endurgjald í sambandi við skúlagongd. Almannaverkið hevði einki yvirlit yvir tað, sum stovnurin hevur rindað fyri tíðarskeið, lærlingar hava verið í skúla.

Yrkisdepilin endurrindar 75% av lærlingalønini, men arbeiðsgevari skal søkja um endurgjald. Almannaverkið er í holt við at gera mannagongdir fyri at tryggja, at umsitingin er í føstum rammum. Størsta avbjóðingin hjá Almannaverkinum er, at tað hevur verið trupult at fáa at vita frá lærumeistarum, nær lærlingar skulu í skúla.

Nøkur fólk hava verið í skipanini í langa tíð. Almannaverkið sigur, at persónar, sum eru sera illa fyri, hava av og á tørv á, at tíðarskeiðið, har avklárað verður, hvør skerjingin er, og hvussu ein framtíðar fyriskipan skal síggja út, er longri enn 12 mánaðir. Tað hevur við sær, at í ávísum førum er neyðugt at leingja eina arbeiðsroynd út yvir tað eina árið, sum er ásett í lógini.

Spurt, svarar Almannaverkið, at avklárandi skipan verður sett í verk í eitt ár, og eftir tað verður mett, um fyriskipanin hevur bøtt um arbeiðsførið. Almannaverkið heldur, at

tað er í samsvari við viðmerkingarnar til § 9, stk. 4, *"Um so er, at avklárandi fyriskipan miseydnast, t.e. at tað eftir lokna fyriskipan ikki er greitt, hvussu arbeiðsbúgving kann leggjast til rættis, so kann ein nýggj ella endurskoðað avklárandi fyriskipan setast í verk, um mett verður, at útlit eru til at fáa gongd á eina fyriskipan."*

Umsitingin av málum um arbeiðsbúgving er samanumtikið skipað eftir føstum mannagongdum. Málsviðgerðin er skjalfest og útreiðslurnar hava heimild í Ll. nr. 63/2012. Landsgrannskoðanin hevur ikki aðra viðmerking til málsgrannskoðanina.

### Tillagað starv

Lønarískoyti kann veitast persóni í tillagaðum starvi á arbeiðsmarknaðinum, um arbeiðsførleikin er minkaður við í minsta lagi 1/3, og viðkomandi tí ikki kann fáa ella varðveita arbeiði undir vanligum treytum.

Í 2020 var ískoytið í mesta lagi 22.000 kr. um mánaðin umframt frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld v.m. Frá 1. januar 2021 er upphæddin lækkað til í mesta lagið 18.552 kr. Lønarískoytið er skattskyldugt, og bundna eftirlønargjaldið skal leggjast afturat, eins og frítíðarløn ella frítíðarískoyti.

Arbeiðsgevarar skulu rinda løn sambært viðkomandi sáttmálum og fyri arbeiðstíð, sum arbeiðið hjá starvsfólkunum verður mett at samsvara við. Minstaupphæddin er 2.000 kr. um mánaðin. Samanlagt mugu løn og lønarískoyti ikki vera hægri enn lønin, sum starvsfólk hava fingið frammanundan. Hjá fyritíðarpenjónistum, sum fara í tillagað starv, kann upphæddin tó verða hægri.

Almannaverkið skal gera avtalu við arbeiðsgevara um løn, lønarískoyti, arbeiðstíð, arbeiðsuppgávur og møgulig serlig atlit, har tilskilast skal, hvørjar uppgávur persónurin skal loysa, um orsøkin til tillagað starv er, at viðkomandi bert í avmarkaðan mun kann loysa uppgávur á arbeiðsplássinum.

Sambært Almannaverkinum vóru 374 fólk í skipanini í 2020. Landsgrannskoðanin kannaði nøkur útgjøld av lønarískoyti í oktober 2020. Vit kannaðu um skjalfestingin var nøktandi, um avtalur vóru gjørdar við arbeiðsgevarar, og um útgjøldini vóru røtt.

***Mælt til at seta í avtaluna hvørjum sáttmála lønin er eftir.***

Í onkrari avtalu var ikki heilt greitt, hvørjum sáttmála stuðulsmóttakari skuldi lønast eftir, og í øðrum føri var ivamál, um stuðulsmóttakari fekk rætta løn og rætt ískoyti, eftir at sáttmálalønirnar vóru broyttar. Landsgrannskoðanin mælti til at áseta greitt í avtalurnar, hvørjum sáttmála fólk skulu lønast eftir, og at partarnir skriva undir avtalurnar. Almannaverkið tók tilmælið til eftirtektar.

Fastlønt fáa feriu við løn og 1,5% í frítíðarískoyti, og eiga tí ikki rætt til frítíðarløn eins og tímalønt, sum halda feriu uttan løn. Fleiri stuðulsmóttakarar høvdu fingið frítíðarløn, tó at tað sýntist sum, at tey vóru fastlønt, tí tey fingu júst somu løn og ískoyti hvønn mánað. Spurningurin var tí, um tey heldur skuldu havt fingið frítíðarískoyti. Ein persónur fekk frítíðarískoyti frá arbeiðsgevara og frítíðarløn frá Almannaverkinum. Sambært Almannaverkinum vóru tey í holt við at gera mannagongdir, sum tryggja, at fólk í tillagaðum starvi fáa rætta frítíðarløn og frítíðarískoyti.

Hjá fleiri var lønarískoytið ikki javnað, eftir at lønirnar á arbeiðsmarknaðinum vóru hækkaðar. Sambært Almannaverkinum hava tey ikki havt skipaða javning av lønarískoytinum, men frá 2021 verður nýggj mannagongd, sum skal tryggja, at javningin er røtt frameftir.

Ein stuðulsmóttakari hevði skiftandi inntøkur sum tímaløntur, og tí steðgaði útgjald av lønarískoyti, um lønin ein mánað var lægri ella hægri, enn væntaða inntøkan. Sambært Almannaverkinum eru mannagongdirnar broyttar, og frá 2021 áseta tey lønarískoyti til tímalønt fyri eitt ár í senn. Almannaverkið kannar síðani orsøkina til óstøðugu lønina, og ger møguligar tillagingar.

## Vart starv

Síðani 1. januar 2013 hevur heimild ikki verið at seta á stovn vard størv. Persónar, ið vóru í vardum starvi, ella sum høvdu játtan um vart starv eftir gomlu treytunum, vóru verandi í størvunum sambært skiftisreglunum í lógini.

Í oktober 2020 vóru 55 fólk í vardum starvi. Landsgrannskoðanin kannaði nøkur mál, um útgjøldini vóru heimilað og røtt.

Arbeiðsgevarar, sum søkja um endurgjald, skulu brúka oyðubløð hjá Almannaverkinum. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra oyðubløðini, t.d. tíðarskeið og lønargjøld. Sambært Almannaverkinum er eingin tíðarfreist hjá arbeiðsgevarum at søkja um endurgjald. Ein arbeiðsgevari hevði í september 2020 søkt og fingið lønarendurgjald fyri 2019.

Almannaverkið kannar ikki umsóknirnar gjølla, tá tey móttaka tær. Málsviðgeri kannar, um alt sær rætt og rímiligt út, og at tað er í samsvari við játtanina. Eru ivamál, sendir málsviðgeri umsóknina til deildina Menning, har ráðgevi kannar umsóknina neyvari.

Almannaverkið endurrindaði einum arbeiðsgevara 4,31% fyri arbeiðsmarknaðargjøld. Í sama máli fekk persónurin 10% í eftirløn frá arbeiðsgevaranum, tó at sáttmálin ásetir, at hjálparfólk frá januar 2018 fáa 12% í eftirløn. Sambært Almannaverkinum eru arbeiðsmarknaðargjøldini sannlíkt skeiv, og áttu at verið 5,06%. Almannaverkið rindar eftirlønargjaldið, sum er sett í umsóknina, men ger vanliga vart við skeivleikar, um søkt verður um meira, enn játtað er. Annars er tað ábyrgd arbeiðsgevarans at rinda arbeiðstakaranum rætta eftirløn.

### *Samanumtikið*

Landsgrannskoðanin vísti á, at tá ið útrokningargrundarlagið ikki er rætt, eru útgjøldini heldur ikki røtt. Stakroyndirnar vístu á fleiri ivamál. Landsgrannskoðanin mælti til, at Almannaverkið styrkir eftirlitið við, at upphæddirnar á oyðubløðum og lønarseðlum samsvara við tølini frá TAKS.

Um umsøkjarar skulu fylla út oyðubløð, fyri at kunnu søkja um endurgjald, mælti Landsgrannskoðanin til, at Almannaverkið dagførir oyðubløðini. Almannaverkið vísir á, trupulleikar standast av, at arbeiðsgevarar nýta gomul oyðubløð. Tí ætlar Almannaverkið at senda út nýggj oyðubløð til arbeiðsgevarar, sum hava fólk í vardum starvi.

## Avtalað løn

Landsgrannskoðanin umrøddi í seinastu frágreiðing grannskoðan av høvuðskontu 12.21.7.02 “Arbeiðsfremjandi tiltøk”, herundir avtalaða løn sambært § 24 í Ll. nr. 63/2012.

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur mál viðvíkjandi løn, sum arbeiðstakarar kunnu avtala við fyritíðarpensjónistar, og sum er lægri enn sáttmálalønin. Nøkur mál snúðu seg um persónar í starvi í royndartíð uttan løn. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um heimild var fyri royndartíð uttan løn í fyriskipanini.

Tá ið ásett er í lógini, at avtala skal gerast í samráði við viðkomandi fakfelag, helt Landsgrannskoðanin tað vera umráðandi, at fakfeløg verða kunnað í hvørjum einstøkum føri.

Í 2018 var landsstýrismaðurin samdur við Landsgrannskoðanina, at tað hevði týdning, at fakfeløg vórðu kunnað í hvørjum einstøkum føri, men lógin fyrihelt seg ikki til, hvør hevur ábyrgd av at kunna fakfelagið í sambandi við eina avtalu. Landsstýrismaðurin ætlaði at taka málið upp við Almannaverkið, soleiðis at fakfeløgini fóru at verða kunnað um einstøku avtalurnar á ein smidligan hátt.

Í august 2022 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at einki síðani er hent í málinum.

# 10. Fíggjarstøða

## 10.1 Fíggjarstøða (LG 2021/300-000)

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðunum hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og skuldini. Partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

Landsgrannskoðanin hevur í stóran mun bygt grannskoðanina av postum í fíggjarstøðuni 2021 á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Fíggjarstøðan við árslok 2017 til 2021.

*mió.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| **OGN** | | | | | |
| Kapitalinnskot | 487 | 390 | 399 | 402 | 0 |
| Keypsskála skrásett virðisbrøv | 0 | 0 | 0 | 0 | 470 |
| Virðisbrøv | 1.556 | 1.591 | 1.626 | 1.791 | 1.841 |
| Útlán | 121 | 109 | 101 | 91 | 81 |
| Áogn o.a. | 601 | 665 | 657 | 718 | 759 |
| Tøkur peningur | 3.479 | 3.666 | 3.478 | 4.729 | 3.849 |
| **Ogn tilsamans** | **6.244** | **6.421** | **6.261** | **7.731** | **7.000** |
| **SKULD** | | | | | |
| Langfreistað skuld | 5.133 | 4.608 | 2.472 | 4.069 | 2.739 |
| Stuttfreistað skuld | 1.021 | 1.060 | 2.445 | 2.438 | 2.579 |
| Útjavningarkonta | 90 | 753 | 1.344 | 1.224 | 1.682 |
| **Skuld tilsamans** | **6.244** | **6.421** | **6.261** | **7.731** | **7.000** |

### 10.1.1 Kapitalinnskot (LG 2021/300-102)

Kapitalinnskotið í landsroknskapinum hevur fevnt um Fíggingargrunnin frá 1992. Í desember 2020 fór Fíggingargrunnurin í sjálvbodna likvidatión, og 19. august 2021 er grunnurin strikaður úr partafelagsskránni.

***Fíggingargrunnurin frá 1992 strikaður úr partafelagsskránni.***

*t.kr.*

| Kapitalogn í landsfyritøkum | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Kapitalogn við ársbyrjan | 389.911 | 399.130 | 402.137 |
| Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum | 9.219 | 3.007 | 0 |
| Frágongd | 0 | 0 | -402.137 |
| **Kapitalogn við ársenda** | **399.130** | **402.137** | **0** |

Kapitalognin í 2020 svaraði til eginpeningin í Fíggingargrunninum við árslok 2019. Meginparturin av ognunum hjá grunninum vóru partabrøv í BankNordik. Grunnurin átti 3.342.280 partabrøv í BankNordik svarandi til 34,8% av samlaðu partabrøvunum.

Tá ið Fíggingargrunnurin var tikin av, blivu partabrøvini í BankNordik flutt til landskassan í postin "Keypsskála skrásett virðisbrøv" í fíggjarstøðuni. Restin av ognunum hjá grunninum er inntøkuført í rakstrinum.[40]

Í nógv ár hevur Løgtingið mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum, t.d. sum "Kapitalogn í landsfyritøkum".

Í 2013 kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at hesir grunnar verða ikki tiknir við í landsroknskapin, men verða partur av samlaða almenna roknskapinum.

Í 2014, 2015 og aftur í 2016 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt var framvegis við spurninginum, hvussu samlaði almenni roknskapurin skuldi gerast upp. Ætlanin var, at Frítíðargrunnurin, eins og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin skuldi bóka beinleiðis í Búskaparskipan landsins.

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum "Eksternir grunnar". Ætlanin var, at eginpeningurin í Húsalánsgrunninum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframagrunninum í framtíðini skuldi takast við í landsroknskapin undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Eftir var at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kunnu takast við í landsroknskapin.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt var við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini skuldi takast til tilknýti til landsroknskapin.

Í 2018 og aftur í 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tað framhaldandi var arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fór fram í stigum. Í 2018 var miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Sambært landsstýrismanninum var tað ikki gjørt kortini.

Arbeitt var framvegis við nýggjum lógaruppskoti um Realin. Landsstýrismaðurin kunnaði um, at lógaruppskotið fór at vera sent til hoyringar í apríl 2019. Í uppskotinum var ásett, at Realurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men verður ikki tikin við í fíggjarlógini. Tað eydnaðist ikki at fáa uppskotið fyri Løgtingið, áðrenn Tingið fór heim í mai 2019.

Í september 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at *"uppskot um broyting í løgtingslóg fyri Realin var í apríl 2019 til almenna hoyring. Politiskar raðfestingar gjørdu, at uppskotið ikki varð latið Løgtinginum. Sitandi samgonga og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava sett sær fyri at fáa ein meira fullfíggjaðan almennan roknskap. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur í sambandi við løgmansrøðuna á ólavsøku 2021 boðað frá, at ætlanin er at leggja uppskot fram um dagførda lóg fyri Realin í hesari tingsetuni. Eftir ætlan verður uppskotið klárt til politiska støðutakan tíðliga í 2022."*

### 10.1.2 Keypsskála skrásett virðisbrøv

*t.kr.*

| | **2021** |
|---|---|
| BankNordik | 469.590 |

Í 2021 vóru 3.342.280 partabrøv í BankNordik flutt frá Fíggingargrunninum frá 1992 til landskassan. Partabrøvini eru skrásett í keypsskála. Við árslok 2021 var kursurin 140,50.

[40] Sí notu 1 á síðu 310 í landsroknskapinum fyri fíggjarárið 2021.

### 10.1.3 Virðisbrøv

*t.kr.*

| Skrásett í landsroknskapinum | 2019 | 2020 | 2021 | Til skjals |
|---|---|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 160.300 | 160.300 | Ja |
| P/f Norðoyatunnilin | 235.000 | 235.000 | 235.000 | Ja |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 77.948 | 77.948 | Ja |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 43.000 | 43.000 | Ja |
| P/f Fiskaaling | 17.376 | 17.376 | 17.376 | Ja |
| P/f Føroya Lívstrygging | 11.667 | 11.667 | 11.667 | Ja |
| P/f Vága Floghavn | 807.818 | 822.818 | 822.818 | Ja |
| P/f Atlantic Airways | 86.912 | 186.912 | 186.912 | Ja *) |
| P/f Elektron | 2.347 | 2.347 | 2.347 | Ja |
| P/f Føroya Dátusavn | 0 | 0 | 0 | Ja |
| Sp/f Ítróttavedding | 20 | 20 | 20 | Nei |
| P/f Smyril Line | 32.760 | 32.760 | 32.760 | Ja |
| P/f Tjaldur | 140 | 140 | 140 | Nei |
| P/f BankNordik | 1 | 1 | 1 | Ja *) |
| P/f Visit Faroe Islands | 500 | 500 | 500 | Nei **) |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 150.000 | 200.000 | 250.000 | Nei **) |
| **Partabrøv tilsamans** | **1.625.788** | **1.790.788** | **1.840.788** | |

*) Partabrøvini eru skrásett elektroniskt og tí pappírsleys.
**) Partabrøv verða ikki útskrivað longur.

***Partabrøv í BankNordik flutt til landskassan.***

Sum áður nevnt eru partabrøvini sum Fíggingargrunnurin frá 1992 átti í BankNordik, flutt til landskassan í 2021. Við árslok 2021 var kursvirðið á teimum partabrøvunum 469.590 t.kr. Harafturat átti landskassin 170 partabrøv frammanundan, sum eru bókað til virði 1 t.kr. í landsroknskapinum. Partapeningurin í P/f Eystur- og Sandoyartunlar er hækkaður við 50 mió.kr. í 2021, sum er í samsvari við Ll. nr. 30/2014.

Í 9 feløgum eigur landið allan partapeningin:

*t.kr.*

| Roknskapartøl 2021 | Brutto-vinningur | Ársúrslit | Samlað ogn | Egin-peningur |
|---|---|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 6.731 | 1.806 | 201.984 | 192.995 |
| P/f Norðoyatunnilin | 11.619 | 4.832 | 277.765 | 271.040 |
| P/f Føroya Tele (samtak) | 216.464 | 40.534 | 794.362 | 538.398 |
| P/f Postverk Føroya (samtak) | 73.010 | 2.801 | 121.561 | 37.532 |
| P/f Fiskaaling | 17.733 | 131 | 14.298 | -2.462 |
| P/f Vága Floghavn (samtak) | 45.660 | -2.490 | 895.100 | 825.394 |
| P/f Atlantic Airways | 162.263 | -9.617 | 742.520 | 254.877 |
| P/f Visit Faroe Islands | 6.111 | 3 | 7.934 | 547 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 155.954 | 78.555 | 3.066.758 | 309.815 |
| **Tilsamans** | **695.545** | **116.555** | **6.122.282** | **2.428.136** |

Samlaða úrslitið hjá feløgunum var 116,6 mió.kr. í vinningi eftir skatt, og samlaði egin-peningurin 2,4 mia.kr. Í 2020 var samlaða úrslitið hjá feløgunum, har landið eigur allan partapeningin 94,7 mió.kr. í halli og eginpeningurin 2,3 mia.kr.

Í 2021 áttu minnilutapartaeigararnir 6 mió.kr. í dótturfelagi hjá P/f Vága Floghavn.

### Samlað roknskapartøl hjá feløgunum

Roknskapartølini 2011 til 2021 fyri feløg, sum landið eigur allan partapeningin í:

*t.kr.*

| Ár | Brutto-vinningur | Ársúrslit | Samlað ogn | Egin-peningur |
|---|---|---|---|---|
| 2011 | 732.782 | -268.123 | 7.241.118 | 2.201.249 |
| 2012 | 608.022 | -513.502 | 3.730.656 | 1.631.006 |
| 2013 | 620.290 | 91.263 | 3.898.691 | 1.710.169 |
| 2014 | 660.020 | 67.148 | 4.201.625 | 1.819.871 |
| 2015 | 866.069 | 48.714 | 4.856.817 | 2.038.028 |
| 2016 | 607.125 | 71.277 | 5.835.015 | 1.990.572 |
| 2017 | 618.316 | 86.093 | 5.885.239 | 2.088.516 |
| 2018 | 580.528 | 86.576 | 6.097.371 | 2.196.207 |
| 2019 | 585.746 | 59.057 | 5.947.786 | 2.255.562 |
| 2020 | 389.466 | -94.728 | 5.977.783 | 2.277.936 |
| 2021 | 695.545 | 116.555 | 6.122.282 | 2.428.136 |

*Virðismeting*

Gjaldstovan hevur ásett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey verða keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Somu reglur eru galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

***Skrásetti parta-peningurin gevur ikki ábending um virðið á felagnum.***

Í landsroknskapinum 2021 er partapeningurin hjá øllum feløgunum, uttan BankNordik, skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, yvirkurs og útgávu-kurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um ítøkiliga virðið á feløgunum.

Innara virðið á 14 feløgum, samanborið við keypsvirðið sambært landsroknskapinum fyri 2021:

*t.kr.*

| | Keypsvirðið sambært landsroknskapinum | Innara virðið |
|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 192.995 |
| P/f Norðoyatunnilin | 235.000 | 271.040 |
| P/f Vága Floghavn *) | 822.818 | 825.394 |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 538.398 |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 37.532 |
| P/f Fiskaaling | 17.376 | -2.462 |
| P/f Føroya Lívstrygging | 11.667 | 26.350 |
| P/f Atlantic Airways | 186.912 | 254.877 |
| P/f Elektron | 2.347 | 9.776 |
| P/f Smyril Line | 32.760 | 60.214 |
| P/f Tjaldur **) | 140 | 12.225 |
| Sp/f Ítróttavedding | 20 | 35 |
| P/f Visit Faroe Islands | 500 | 547 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 250.000 | 309.815 |
| **Partabrøv tilsamans** | **1.840.788** | **2.536.736** |

*) Parturin hjá minnilutapartaeigarum (Atlantic Airways) var 6 mió.kr.
**) Innara virðið við árslok 2020. Ársfrásøgnin fyri 2021 var ikki tøk.

Sum sæst í yvirlitinum, er keypsvirðið í nøkrum førum munandi lægri enn innara virðið.

Vinningsbýti frá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| P/f Føroya Tele | 35.000 | 34.000 | 32.000 |

Í 2021 fekk landskassin harafturat 156.678 t.kr. í vinningsbýti frá BankNordik og 1.435 t.kr. frá P/f Tjaldur, harav 1.044 t.kr. eru vinningsbýti fyri 2016 og 2017.

## 10.1.4 Útlán

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Útlán ársbyrjan | 291.384 | 286.010 | 143.244 |
| Tilgongd í árinum | 10.641 | 8.584 | 6.240 |
| Frágongd í árinum | -16.015 | -151.350 | -17.851 |
| **Útlán ársenda brutto** | **286.010** | **143.244** | **131.633** |
| Sett av ímóti tapi | -185.068 | -52.078 | -50.499 |
| **Sambært roknskapinum** | **100.942** | **91.166** | **81.134** |

Heitið útlán fevnir um veðhaldsútlegg, lestrarlán, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Tilgongdin stavar í høvuðsheitum frá, at nýggj lestrarlán eru veitt, og frágongdin stavar í høvuðsheitum frá, at lán eru avskrivað, og at lestrarlán eru goldin aftur. Samanlagt eru útlánini lækkað 10 mió.kr. netto frá 2020 til 2021.

Sett er av ímóti tapi. Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum eru sett til 0 kr. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

***Virðini á veghaldsútleggum, serlánum og stuðulslánum eru sett til 0.***

### Rentu- og avdráttarfrí útlán

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Rentu- og avdráttarfrí lán ársbyrjan | 271.872 | 271.872 | 209.594 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 | -62.278 | 0 |
| **Rentu- og avdráttarfrí lán ársenda** | **271.872** | **209.594** | **209.594** |
| Sett av móti tapi | -271.872 | -209.594 | -209.594 |
| **Sambært roknskapinum** | **0** | **0** | **0** |

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, sjálvsognarstovnar, studningslán, eldrasambýli og Postverk Føroya.[41]

Sambært landsroknskapinum eru rentu- og avdráttarfrí lán tikin við í roknskapin við virðinum 0 kr., av tí at talan er um treytað lán, sum bert skulu rindast aftur, um bygningar o.t., sum lán eru veitt til, verða brúkt til annað enn upprunaliga endamálið.

***Rentu- og avdráttarfrí lán eru sett til 0, tí talan er um treytað lán.***

## 10.1.5 Áogn o.a.

### Skatta-, toll- o.t. skuldarar

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Áogn landskassans brutto | 452.093 | 440.402 | 487.163 |
| Sett av ímóti tapi | -114.203 | -112.828 | -128.025 |
| **Sambært roknskapinum** | **337.890** | **327.574** | **359.138** |

Frá 2020 til 2021 er áognin hækkað 31,6 mió.kr. netto. Sambært landsroknskapinum eru størstu broytingarnar:

*t.kr.*

| **Broytingar 2020 til 2021** | |
|---|---|
| Tøkugjald á alivinnu | 39.381 |
| Tollavgjøld | 14.016 |
| Felagsskattur | 7.751 |
| Gjald til Barsilsskipan | 2.726 |
| Framleiðslugjald | -2.240 |
| Vanligur landsskattur | -4.884 |
| Kapitalvinningsskattur | -13.565 |
| Meirvirðisgjald | -13.570 |

[41] Sí notu nr. 3 í landsroknskapinum.

### Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Apoteksverkinum, Landsverki, Kringvarpinum, Rúsdrekkasølu landsins og øðrum stovnum. Aðrir skuldarar eru m.a. inntøkur og endurgjøld, sum vanliga eru tíðaravmarkað. Eisini eru tað millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá TAKS, kommunur o.a.

Niðanfyri eru upphæddirnar útgreinaðar:

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Tíðaravmarkingar | 82.337 | 80.574 | 89.582 |
| Avgjald á fiskatilfeingi | 41.482 | 81.991 | 88.602 |
| Apoteksverkið | 16.996 | 44.735 | 35.020 |
| Tøkugjald á alivinnu | 7.180 | 324 | 25.387 |
| Landsverk, inntøkufíggjað virksemi | 25.073 | 16.877 | 15.294 |
| Fróðskaparsetur Føroya, stuðulsf. virksemi | 7.079 | 8.105 | 10.764 |
| Landssjúkrahúsið | 6.041 | 9.394 | 9.058 |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan | 5.067 | 6.988 | 8.209 |
| Gjald til Heilsutrygd | 6.224 | 6.541 | 8.114 |
| Kringvarp Føroya | 5.890 | 4.616 | 4.465 |
| Tryggingareftirlitið | 4.088 | 3.752 | 4.117 |
| Strandfaraskip landsins | 3.543 | 3.182 | 3.670 |
| Fjarskiftiseftirlitið | 3.425 | 3.164 | 3.172 |
| Ymiskir skuldarar | 48.696 | 66.492 | 28.554 |
| **Tilsamans sambært roknskapinum** | **263.121** | **336.735** | **334.007** |

Fleiri hækkingar og lækkingar eru, sum netto geva eina lækking á 2,7 mió.kr. frá 2020 til 2021. Størstu broytingarnar eru “Tøkugjald á alivinnu”, “Tíðaravmarkingar” og “Avgjald á fiskatilfeingi”.

### Goymslur

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 56.376 | 53.535 | 66.400 |

Í tølunum eru vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum landsins, Námi (útgávuvirksemi), Glasi, Miðnámi á Kambsdali, Landsverki, KT Landsins og Tekniska skúla í Klaksvík.

***Goymsluvirðið hækkað 12,9 mió.kr. netto.***

Frá 2020 til 2021 er virðið á goymslunum hækkað 12,9 mió.kr. netto. Goymslurnar hjá Apoteksverkinum og Landsverki eru hækkaðar ávikavist 6,8 og 6,9 mió.kr. Hinar goymslurnar eru broyttar smávegis.

### Ognir og útbúnaður (LG 2021/300-101)

Í 2017 var roknskaparkunngerðin broytt við K. nr. 110/2017. Sambært § 20 í kunngerðini skulu stovnar gera yvirlit yvir ognir, so sum verkløg, bygningar, maskinur, før, innbúgv og annan virðismiklan útbúnað. Yvirlitini skulu fevna um ognir og útbúnað, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr. Ognirnar og útbúnaðurin skulu skrásetast í Búskaparskipan landsins, um ikki stovnurin hevur fingið loyvi til at nýta egna búskaparskipan.

***Reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað eru ikki hildnar.***

Landsgrannskoðanin kann enn eina ferð staðfesta, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað eru ikki hildnar.

Í 2017 vísti landsstýrismaðurin í fíggjarmálum á, at ásetingin í roknskaparkunngerðini um ognaryvirlit var broytt, men tað vantaði tøknilig menning av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins, til tess at fáa ognir við virði yvir 50 t.kr. skrásettar.

Í 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at ognarmodulið í Búskaparskipan landsins var broytt, soleiðis at størri stovnar, við fakligum førleika, fingu atgongd til at skráseta til-

og frágongd av ognum. Smærri stovnar skuldu framvegis venda sær til Gjaldstovuna fyri at fáa ognirnar skrásettar.

Í 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið við játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum verður uppraðfest, við m.a. at fáa aðalráð og stovnar at dagføra ognaryvirlitini.

Í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum er postur, nevndur "Immateriellur og materiellur útbúnaður, grundøki, bygningar, løgur o.t.", men eingin upphædd er ásett. Sjálvt um upprunavirði á ognum og avskrivingar eru skrásett í Búskaparskipan landsins, ber ikki til at nýta tey til fíggjarstøðuna, av tí at nógvar ognir eru ikki skrásettar, og virðið á skrásettu ognunum sjáldan er dagført.

### 10.1.6 Tøkur peningur

Tøkur peningur fatar um gjaldføri landsins. Sambært § 10, stk. 1, í Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" umsitur Landsbankin gjaldføri landsins eftir ásetingum frá landsbankanevndini. Sambært stk. 2, er endamálið við umsitingini:

- at landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at taað kann halda sínar skyldur,
- at landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og
- at landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Sambært § 10, stk. 3 og 4, fevnir gjaldføri landsins um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum o.ø. Gjaldførið verður roknað sum landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

Í fíggjarstøðuni er tøki peningurin býttur í tveir bólkar: virðisbrøv o.t. og bankakontur, girokontur og kassapeningur.

#### Virðisbrøv o.t.

Landsbanki Føroya hevur sett part av tøka peninginum í stuttfreistað virðisbrøv, sum eru tikin við til marknaðarvirðið. Posturin nevnist "Virðisbrøv o.t."

*mió.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 3.052 | 4.191 | 3.449 |

Landsbankin hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum. Plaseringin byggir á íløguinstruks frá landsbankanevndini, har ásetingar eru um m.a., hvussu nógv kann plaserast í ávís sløg av virðisbrøvum.

#### Bankakontur og kassapeningur

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 425.187 | 538.040 | 400.188 |

*Banka- og girokontur*

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv landskassin tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsroknskap hava nógvan pening standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Í 2021 kann upphæddin greinast sundur í tær kontur, sum Landsbankin og Gjaldstovan umsita, og tær, sum aðrir stovnar í landsroknskapinum umsita.

Landsbankin hevur gjørt innanhýsis reglugerð um, hvussu nógvur tøkur peningur kann standa í føroyskum peningastovnum, í hvørjum peningastovni sær og samanlagt.

Sambært § 11 í Ll. nr. 116/2016 skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyriskipa, at landsins gjaldføri, sambært § 10, stk. 3 og 4, í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári. Landsbankanevndin skal í august mánað áseta minstagjaldførið. Landsbankin hevur greitt frá, at av tí at bruttotjóðarúrtøkan fyri undanfarna ár ikki altíð er gjørd upp, tá ið landsbankanevndin skal áseta minstagjaldførið, brúkar bankin seinasta uppgjørda talið, eisini um talan er um fyribilstal.

Gongdin í tøka peninginum 2019 til 2021:

*mió.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Gjaldføri sambært roknskapinum | 3.478 | 4.729 | 3.849 |
| Harav minstagjaldføri | 2.830 | 2.890 | 3.290 |
| **Munur millum gjaldføri og minstagjaldføri** | **648** | **1.839** | **559** |

Lógin ásetir, at gjaldføri fevnir um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum v.m., og sum er trygt og lætt tøkt. Gjaldførið fevnir eisini um óveðsett virðisbrøv. Sambært Landsbankanum kemur allur tøki peningurin í fíggjarstøðuni undir hesar treytir, og verður tí roknaður sum gjaldføri hjá landskassanum.

***Landskassans tøki peningur er lækkaður.***

Tøki peningurin hjá landskassanum er lækkaður 880 mió.kr. frá 2020 til 2021, meðan kravið til minstagjaldførið er hækkað 400 mió.kr., t.v.s. at munurin millum tøka peningin (gjaldførið) og minstagjaldførið er minkaður við 1.280 mió.kr. frá 2020 til 2021.

*Kassapeningur*

Landsgrannskoðanin hevur framt nøkur kassaeftirlit í 2021, har vit hava stemmað kassapening av við kassauppgerðir, Búskaparskipan landsins v.m. Hava stovnar peningastovnskontur, eru tær stemmaðar av við kontuavrit frá peningastovnum og Búskaparskipan landsins. Eisini hava vit kannað konturnar fyri óvanligar bókingar ávís tíðarskeið. Kassaeftirlitini eru umrødd undir hvørjum stovni sær.

### 10.1.7 Skuld

**Innanlandsskuld, langfreistað**

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 3.816.981 | 5.419.335 | 4.039.035 |

Við árslok 2021 var talan um 4 lánsbrævarøðir:

- FO-LB 220602, áljóðandi 1.300 mió.kr., sum fall til gjaldingar 2. juni 2022.
- FO-LB 230627, áljóðandi 550 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 27. juni 2023.
- FO-LB 250602, áljóðandi 1.645 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 2. juni 2025.
- FO-LB 320503, áljóðandi NOK 550 mió.kr. (svarandi til 410,3 mió.kr. við árslok 2021), sum fellur til gjaldingar 3. mai 2032.

Við árslok 2021 var samlaða *áljóðandi* skuldin 3.905,3 mió.kr.

Í 2021 eru 1.350 mió.kr. rindaðar aftur til fallið lán.

Frá fíggjarárinum 2016 eru lánini gjørd upp eftir marknaðarvirði.

Landsbankin selur meginpartin av brævalánunum uttanlands. Heitið á roknskaparpostinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

*Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári*

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 1.345.000 | 1.350.000 | 1.300.000 |

Veruligu afturgjøldini vóru sambært Landsbankanum:

- Í juni 2020 fullu eftir skránni 1.345 mió.kr. av FO-LB 200611 til gjaldingar.
- Í juni 2021 fullu eftir skránni 1.350 mió.kr. av FO-LB 210622 til gjaldingar.
- Í juni 2022 fullu eftir skránni 1.300 mió.kr. av FO-LB 220602 til gjaldingar.

### Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 1.099.875 | 1.087.928 | 1.278.690 |

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðar-avmarkingar og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

## 10.1.8 Umsiting av kreditorum og Kreditorskipanini (LG 2021/300-201)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av kreditorum, og nøkur viður-skifti viðvíkjandi kreditorskipanini (FSL-Kred). Endamálið við grannskoðanini er m.a. at kanna, um nøktandi og virkið innaneftirlit er á kreditorøkinum.

### Tøknilig viðurskifti

Skipanin verður vanliga nevnd “Kreditorskipanin”, men í Búskaparskipan landsins og Leiðslukunningarskipanini vísir upprunaheitið, at dáturnar koma frá “FSL-Kred”.

Gjaldstovan hevur ábyrgd av Kreditorskipanini, og rindar útreiðslurnar fyri skipanina av sínari játtan á høvuðskontu 3.15.1.07, undirkontu 24 “Búskaparskipan landsins”.

Kreditorskipanin er partur av størri heild, sum Gjaldstovan rindar EBS[42] lisensir fyri, fyri at brúka Oracle dátugrunnar. Vegna Kreditorskipanina rindar Gjaldstovan lisensirnar í fleiri stigum; bæði fyri sjálva EBS-applikatiónina og fyri aðrar pallar, sum t.d. “Oracle application server” og dátugrunslisensir, tí Gjaldstovan hevur broytt í kjarnuskipanini, og hevur eisini ment egnar loysnir, so sum rokningaworkflowið, ið koyrir “oman á” Kreditorskipanini.

Gjaldstovan ger nógv fyri at rinda lisensirnar til tíðina, og hevur gjørt lisensgrann-skoðan, fyri at tryggja, at nýtslan av skipanini er innan fyri heimilaðu loyvini.

Tøknin er Oracle, og kreditorskipanin verður nevnd “Oracle Payables”. Skipanin er hýst á kervi hjá Elektron. Í rakstrar- og viðlíkahaldssáttmála millum Gjaldstovuna og Elektron, um rakstur og hýsing av skipanum hjá Gjaldstovuni, er ásett, at hildnir verða mánaðarligir SLA-fundir og árligir strategi- og SLA-planleggingarfundir. Sambært Gjaldstovuni verða fundirnir hildnir og fundarfrágreiðingar skrivaðar.

### Roknskaparlig viðurskifti

Allir stovnar, ið móttaka rokningar, bóka í Kreditorskipanini. Tó ikki Rúsdrekkasøla landsins og Apoteksverkið, sum hava egnar skipanir.

***Kreditorskipanin avstemmað við BSL.***

Gjaldstovan stemmar regluliga av millum Kreditorskipanina og rájavnan í Búskapar-skipan landsins. Landsgrannskoðanin kannaði avstemmanina pr. 31. desember 2020. Saldan í báðum skipanunum var kr. 172.741.709 kr.; harvið stemmaðu skipanirnar.

### Avstemman við uttanhýsis skjøl

Landsgrannskoðanin vísti á, at umframt innanhýsis avstemmanir hevur tað týdning, at dáturnar eru stemmaðar av við uttanhýsis skjøl.

[42] E-Business Suite.

Gjaldstovan heldur seg ikki hava ábyrgdina av, at kreditorsaldur hjá einstøkum stovnum eru rættar. Stovnar góðkenna hvør í sínum lagi roknskapirnar í roknskapargóðkenningarskipanini hvønn mánað. Gjaldstovan sendir stovnunum, ið hava óavgreiddar rokningar liggjandi í Rokningaverkgongdarskipanini frá undanfarna ári, tríggjar áminningar.

Gjaldstovan rindar rokningarnar, sum eru í Kreditorskipanini, tá ið gjaldsfreistin nærkast. Mannagongdin er í høvuðsheitum, at stovnar kontera, góðkenna og leysgeva rokningar og kreditnotur í Rokningaverkgongdarskipanini. Síðani verða tær lisnar inn í Kreditorskipanina og goldnar út.

Um ein rokning skal bókast, og peningurin ikki skal gjaldast út t.d. vegna ósemju, ber til at seta rokningina í bíðistøðu í Kreditorskipanini við at seta útsetta gjaldsfreist á rokningina.

Tá ið stovnur hevur bókað kreditnotu uttan samsvarandi rokning, standast ofta munir av tí ímillum Kreditorskipanina og kontuavrit frá kreditorum. Tá setir Gjaldstovan seg í samband við stovnin ella seljaran fyri at fáa upphæddina endurrindaða í landskassan.

Sambært Gjaldstovuni hava hesar støður skapt stórar trupulleikar, og tí hevur Gjaldstovan gjørt eina nýggja funku til at bóka inngjøld í Kreditorskipanina við, soleiðis at inngjøld vegna kreditnotu síggjast í skipanini, og á henda hátt stemma Búskaparskipan landsins og kreditorarnir.

Til ber ikki at skriva aldursgreinaðar listar úr Kreditorskipanini. Gjaldstovan kunnaði um, hvussu óavgreiddar rokningar í Rokningaverkgongdarskipanini síggjast í Leiðslukunningarskipanini.

Landsgrannskoðanin mælti til:

- at gera aldursgreinaðar útskriftir og greiningar, sum vísa, um gamlar og ikki aktuellar saldur eru í Kreditorskipanini,
- at hava skipað samskifti við stovnar um kreditoravstemmanir og tryggja, at avstemmanirnar verða framdar á nøktandi støði, og
- at skipa samskiftið somikið væl, at ábyrgdarpersónur á Gjaldstovuni kann vátta, at kreditorposturin í Landsroknskapinum er rættur.

Gjaldstovan hevur nú ment eina funku í Leiðslukunningarskipanini, soleiðis at til ber at síggja, hvussu leingi ein rokning hevur ligið í verkgongd.

Gjaldstovan vísir á, at einstaki stovnurin ábyrgist fyri at stemma kreditorar av. Tó at Gjaldstovan hjálpir nógvum stovnum, hevur hon ikki orku at stemma allar kreditorar av. Gjaldstovan ætlar at kalla stovnarnar inn, at leggja teimum lag á at stemma kreditorar av, og kunna teir um amboðini, ið eru.

### Kreditorsaldan sæst ikki í fíggjarstøðuni hjá stovnum

Kreditorsaldan sæst ikki í fíggjarstøðuni hjá einstaka stovninum, men samlaða saldan hjá øllum stovnum er savnað á *einum* stovnsnummari, t.e. 009999 “Landskassin”.

Stovnsleiðarar kanna og góðkenna rakstrarroknskap og fíggjarstøðu á egnum stovnsnummari, harvið er kreditorsaldan ikki partur av góðkenningini. Tó at stovnar meginregluliga ikki góðkenna samlaðu kreditorsalduna, heldur Gjaldstovan, at stovnsleiðslurnar skulu síggja til, at alt er bókað, og tikið við í roknskapin.

Landsgrannskoðanin mælti Gjaldstovuni til at gera stovnunum greitt, at kreditoravstemmanir eru partur av roknskapargóðkenningini.

Í august 2022 hevur Gjaldstovan víst á, at spurningurin, sum Landsgrannskoðanin peikar á, um at stovnarnir hava ikki egnan fíggjarstøðupost við kreditorum, men at

posturin er á kontu hjá Gjaldstovuni, hevur ofta verið umrøddur. Orsøkin til hesa støðuna er, at skipanin er sett upp soleiðis, at hon kann ikki kontera á kreditorar.

Sambært Gjaldstovuni hevur støðan reist nógvar spurningar seinastu árini, og stovnurin hevur umrøtt spurningin enn eina ferð. Gjaldstovan umhugsar, at gera eitt "script", sum útkonterar út frá tí, tey kalla SLS, sum eru kreditorabólkarnir, skipanin arbeiðir við.

Gjaldstovan vísir á, at hon hevur eisini trupulleikar av, at fakturar eru settir í bíðistøðu. Hjá stovnunum gongur ikki væl at umsita tað, og avleiðingin er, at stovnar ikki avgreiða fakturar, har eitthvørt ivamál er í kreditor, men bóka upphæddirnar sum skuld í høvuðsbók. Tað ger, at upphæddir, sum skuldu verið tiknar við sum útreiðslur, verða ikki avgreiddar, tí stovnarnir óttast fyri, at um teir bóka upphæddirnar, verða tær útgoldnar, og tí gera teir einki. Gjaldstovan arbeiðir tí við at fáa tryggari og smidligari grundarlag fyri at seta upphæddir í bíðistøðu í Kreditorskipanini.

***Ábyrgd av at góðkenna rokningar ikki nóg greið.***

Gjaldstovan vísir eisini á, at samanumtikið er tað ikki nóg greitt, hvørja ábyrgd stovnarnir hava, tá ið teir góðkenna rokningar, t.d. um at kontunummur og valuta eru røtt. Tí er tað ein uppgáva hjá Gjaldstovuni at kunna um, og at fáa tað við í roknskaparrundskrivið, og møguliga tillaga skipanina soleiðis, at tað er meira eintýðugt, hvat tað er, stovnarnir skulu hyggja at.

### Skriv um roknskapargóðkenning og avstemman av kreditorum

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið nøkur skriv, ið viðvíkja mánaðarligu roknskapargóðkenningini. Vit kannaðu, um Gjaldstovan hevur greiðar og ítøkiligar ásetingar um, at stovnar skulu stemma kreditorar av, áðrenn teir góðkenna roknskapir í Roknskapargóðkenningarskipanini.

Avstemman av kreditorum er ikki ítøkiliga nevnd í fylgiskrivinum[43], sum víst verður til í sambandi við mánaðarligu roknskapargóðkenningina. Har eru bert yvirskipaðar orðingar um, at "alt skal vera við" og "at tað liggja ikki týðandi upphæddir óbókaðar".

Í skrivinum, ið ber heitið "Alment um roknskapargóðkenning" er ítøkilig áheitan um at stemma kreditorar av og at seta av, um ivi er um, hvat stovnur skal rinda fyri eina vøru ella tænastu.

Í skrivinum, ið ber heitið "Avstemman – partur av roknskapargóðkenningini" er ítøkilig umrøða av avstemman av kreditorum.

Sambært Gjaldstovuni gera nakrir stovnar sær ómak at stemma kreditorarnar av, meðan aðrir ikki stemma av. Fleiri veitarar gera sær heldur ikki nóg stóran ómak at senda kontuúrrit. Gjaldstovan stemmar ofta av stovnanna vegna, tó at tey ikki hava skyldu til tað.

### Stakroyndir

Landsgrannskoðanin sendi saldufrásagnir til 13 ymiskar kreditorar, sum 31. desember 2021 áttu ella høvdu átt pening á hjá 20 almennum stovnum sambært Búskaparskipan landsins. Í saldofrásagnunum bað Landsgrannskoðanin kreditorarnar upplýsa, hvussu nógv teir áttu á henda dagin.

Av teimum spurdu svaraðu 9, hvussu nógv teir áttu á hjá 14 stovnum. Samanumtikið stemmaði kreditorskuldin hjá 12 av 14 stovnum. Har saldan ikki stemmaði, vóru munirnir smáir, ávikavist 4 t.kr. og 1 t.kr. Landsgrannskoðanin hevur kannað, hví munir eru.

[43] Góðkenning í Roknskapargóðkenningarskipanini (RGS) av mánaðarroknskapum.

## 10.2 Útjavningarkonta (LG 2021/300-203)

Útjavningarkontan líkist ikki "kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Ognirnar í landsroknskapinum verða virðismettar øðrvísi, og í roknskapinum eru virði ikki sett á. Materiellu støðisognirnar, so sum bygningar, skip og vegir, eru ikki virðisásett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

*t.kr.*

| | 2020 | 2021 |
|---|---|---|
| Salda 1. januar | 1.327.229 | 1.223.792 |
| RLÚ-úrslit | -298.437 | 212.146 |
| Búskapargrunnur Føroya | 26.072 | 140.778 |
| Ymiskar broytingar | 168.928 | 105.315 |
| **Salda 31. desember** | **1.223.792** | **1.682.031** |

"Ymiskar broytingar" eru broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskapar-meginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

### Javning av fíggjarstøðu við ársbyrjan

Í landsroknskapinum 2021 er ein rætting gjørd í fíggjarstøðuni við ársbyrjan av postinum "Útjavningarkonta".[44]

Rættingin av útjavningarkontuni er greinað soleiðis[45]:

*t.kr.*

| Heiti | 31. des. 2020 | Javning av primo | 1. jan. 2021 |
|---|---|---|---|
| Útjavningarkonta tilsamans | 1.240.601 | -16.810 | 1.223.792 |

Fíggjarstøðuposturin "Útjavningarkonta" er lækkaður við 16,8 mió.kr., orsakað av at broytingar eru gjørdar í útrokningargrundarlagnum fyri avseting móti tapi fyri skatti. Farið er frá at meta um virðið á skuldini hjá einstaka skuldaranum til at rokna avsetingina matematiskt frá hvørjum skattaári skuldin stavar. Frammanundan vóru avsettar 61 mió.kr., og eftir nýggja útrokningarháttinum skal upphæddin vera 78 mió.kr. Mótkontan til rættingina er "Skatta-, toll- o.t. skuldarar".

## 10.3 Fyrisiting av gjaldføri og skuld (LG 2021/300-104 og 202)

Landsbanki Føroya fyrisitur gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins. Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" kom í gildi 1. januar 2017, og setti úr gildi Ll. nr. 140/2012 "um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting".

Í broti 10.1 undir fíggjarstøðuni er stutt greitt frá um tøkan pening og skuld landsins.

### 10.3.1 Porteføljuskipanin

Landsbankin brúkar donsku skipanina, PandaConnect, til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti. Bankin hevur einans rættindi til at spyrja í skipanini.

***Bókingar fara ikki sjálvvirkandi í BSL.***

Bókingarnar í PandaConnect fara ikki sjálvvirkandi yvir í Búskaparskipan landsins. Tá ið mánaður er liðugur, sendir skipanin Landsbankanum eina fílu við broytingum frá mánaðinum frammanundan. Tølini verða bókað í Búskaparskipan landsins umvegis kontubrúgv. Landsbankin stemmar PandaConnect av við Búskaparskipan landsins.

[44] Primojavningarnar eru greinaðar í yvirlitum á síðu 236 og 237 í landsroknskapinum 2020.
[45] Sí landsroknskapin 2021 s. 244.

Bankin hevur ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum til PandaConnect skipanina, men hevur heitt á Gjaldstovuna um at fáa loyvi.

### 10.3.2 Gjaldførið hjá landinum

Við árslok 2021 vóru 3.849 mió.kr. í tøkum peningi skrásettar í landsroknskapinum; harav 3.449 mió.kr. í virðisbrøvum o.t. Við árslok 2020 var tøki peningurin 4.729 mió.kr., tá vóru 4.191 mió.kr. í virðisbrøvum o.t.

Í talvuni er tøki peningurin sambært Búskaparskipan landsins sundurgreinaður:

*t.kr.*

| Tøkur peningur | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Lánsbrøv | 2.855.638 | 2.523.675 | 3.637.450 | 2.809.239 |
| Lánsbrøv, rentuáogn | 8.071 | 8.211 | 11.177 | 8.824 |
| Partabrøv | 543.231 | 644.146 | 727.212 | 727.693 |
| Onnur virðisbrøv | 105.173 | 132.976 | 100.542 | 166.032 |
| Ogn hjá øðrum | -234.421 | -256.548 | -285.301 | -263.277 |
| ***Virðisbrøv tilsamans*** | ***3.277.692*** | ***3.052.460*** | ***4.191.080*** | ***3.448.511*** |
| Bankakontur, landskassin | 231.786 | 274.505 | 160.585 | 35.655 |
| Útlendskar bankakontur | 82.686 | 123.245 | 301.099 | 273.298 |
| Ogn hjá øðrum | 371 | 0 | 0 | 0 |
| Aðrar bankakontur og kassar | 73.731 | 27.437 | 76.356 | 91.234 |
| **Tilsamans** | **3.666.266** | **3.477.647** | **4.729.120** | **3.848.698** |

Virðisbrøvini eru skrásett í landsroknskapinum við marknaðarvirðinum. Landsbankin hevur greitt frá, at øll virðisbrøvini eru skrásett í PandaConnect. Somuleiðis eru útlendskar peningastovnskontur, sum hava við virðisbrøv at gera, skrásettar í Panda-Connect, og svara upphæddirnar á teimum til nærum allan peningin á útlendsku kontunum.

Aðrar peningastovnskontur eru ikki skrásettar í PandaConnect, hvørki útlendskar ella føroyskar. Talan er um kontur, sum Gjaldstovan og aðrir almennir stovnar umsita.

*Plasering av gjaldførinum*

Reglurnar, um hvussu gjaldførið hjá landinum skal handfarast, standa m.a. í lógini um Landsbankan og í ásetingum frá nevndini fyri bankan.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at transaktiónsslóðin millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins er ikki nóg góð, tá ið ikki ber til at finna allar skrásetingar av bókingum í Búskaparskipan landsins, uttan at fara aftur til porteføljuskipanina at finna transaktiónirnar.

Landsbankin hevur víst á, at bankin hevur transaktiónsslóðina, tí at bankin goymir øll skjalprógv. Landsbankin kundi viðheft skjalprógvini í Búskaparskipan landsins, men heldur, at tað er ov nógv og kann ørkymla.

*Úrslitið av plasering av gjaldførinum*

Sambært landsroknskapinum 2021 vóru rentur av innistandandi 141,9 mió.kr. Ávika-vist 29,2 mió.kr. og 73,2 mió.kr. eru fluttar til Búskapargrunnin (§ 89 og internur grunnur) og “Frávik fyri rentuinntøkur” á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.2.01.01 “Rentur av innistandandi” samsvarar við játtanina, sum er 39,5 mió.kr. í inntøkum. Av teimum 29,2 mió.kr. til Búskapargrunnin, hevur Landsbankin fingið 778 t.kr. í ómaksgjaldi.

Í talvuni niðanfyri eru rentuinntøkur o.a. sundurgreinaðar.

*t.kr.*

| Heiti | 2020 | | 2021 | |
|---|---|---|---|---|
| | *Játtan* | *Roknskapur* | *Játtan* | *Roknskapur* |
| Rentur og ógreinað | | -18.038 | | -12.371 |
| Vinningsbýti | | -38.766 | | -42.661 |
| Staðfestir kurs-/gjaldoyramunir | | 39.177 | | 25.692 |
| Ikki staðfestir kurs-/gjaldoyramunir | | -56.695 | | -112.878 |
| Rentur, bankar | | 1.123 | | 751 |
| Kostnaðir | | -19 | | -435 |
| Innanh. flyt. millum alm. grunnar | | 13.947 | | 29.160 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovnar | | 22.770 | | 73.242 |
| **Tilsamans** | **-36.500** | **-36.500** | **-39.500** | **-39.500** |

Sum sæst í talvuni, eru stórar broytingar í kursmunum, serliga í ikki staðfestu mununum.

Sambært ársfrágreiðingini hjá Landsbankanum var avkastið av íløgurøktini 3,75% í 2021. Í 2020 var tað 1,91%, og miðal avkastið 2017 til 2021 var 2,67%.

Landsbankin hevur eftirlitsfund hvønn mánað. Bankin skrivar frágreiðing um fundin, og tað, sum er gjørt fyri at fylgja fundinum upp.

Sambært Landsbankanum er benchmarkið ásett fyri hvønn aktivklassa sær, og er ásett eftir miðalvektunum á teimum ymisku aktivklassunum. Benchmark eru ikki fyri alternativar íløgur og kontur.

Í ársfrágreiðingini 2021 er avkastið býtt eftir ymisku virðisbrøvunum, sum bankin hevur gjørt íløgur í:

| Slag | Miðal íløga mió.kr. | Avkast mió.kr. | Avkast % | Býtið % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 680 | 170,4 | 25,1 | 16,9 |
| Statslánsbrøv | 43 | 1,4 | 3,2 | 1,1 |
| Realkredittlánsbrøv | 2.636 | -44,9 | -1,7 | 65,6 |
| Kredittlánsbrøv | 131 | -2,4 | -1,7 | 3,3 |
| Hárentulánsbrøv | 258 | 1,0 | 0,4 | 6,4 |
| Alternativar íløgur | 121 | 25,8 | 21,3 | 3,0 |
| Onnur fíggjaraktiv | 151 | -0,7 | -0,4 | 3,7 |
| **Tilsamans** | **4.019** | **150,7** | **3,75** | **100,0** |

Sum sæst í talvuni, standa partabrøvini fyri 16,6% av samlaðu íløguupphæddini, men avkastið av partabrøvunum er 92% av samlaða avkastinum.

### 10.3.3 Landskassaskuld - brævalán

*Heimild at læna*

Sambært § 42 í Ll. nr. 103/1994 "um stýrisskipan Føroya" kunnu lán ella borgan, ið skuldbinda Løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, ikki verða tikin ella veitt uttan við heimild í lóg. Sambært § 1 í Ll. nr. 116/1991 “um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum” verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað lániheimildirnar fyri árini 2011 til 2020. Einki var at finnast at.

*Lánini í samsvari við prospektini*

Í sambandi við lántøku ger Landsbankin prospekt (kunningartilfar) til íleggjarar o.o. Í prospektinum er m.a. kunning um búskaparviðurskifti, upplýsingar um útgevaran av

lánsbrøvunum og upplýsingar um lánsbrøvini, so sum samlað upphædd, renta, kursur, lánitíð og fondskota.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lánini, sum vóru virkin við árslok 2021, eru í samsvari við prospektini. Einki nýtt brævalán er stovnað í 2021. Einki var at finnast at.

### *Skráseting av brævalánum*

Í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum síggjast brævalánini sum langfreistað innanlandsskuld. Í notu 8 eru sundurgreiningar, sum vísa marknaðarvirði og viðhangandi rentu. Notan vísir eisini samanhangin millum navnvirði og marknaðarvirði, eitt yvirlit yvir einstøku brævalánsrøðirnar, umframt hvussu stórur partur av skuldini fellur til gjaldingar í komandi ári, og hvussu stór restskuldin er um 5 ár.

Við árslok 2021 er bókaða virðið á brævalánunum 3.961 mió.kr. Við ársbyrjan var tað 5.309 mió.kr. Lánsupphæddirnar í landsroknskapinum eru grundaðar á marknaðarvirðið umframt tíðargreinaðar rentur sambært roknskaparmeginreglunum.

*t.kr.*

| **Brævalán** | **2020** | | | **2021** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | *Lán* | *Lánsbýti* | *Tilsamans* | *Lán* | *Lánsbýti* | *Tilsamans* |
| Marknaðarvirði | 5.295.758 | 111.763 | 5.407.521 | 3.950.492 | 80.251 | 4.030.743 |
| Viðhang. renta | 13.372 | -1.558 | 11.814 | 10.247 | -1.955 | 8.292 |
| **Tilsamans** | **5.309.130** | **110.205** | **5.419.335** | **3.960.739** | **78.296** | **4.039.035** |

*Lánsbýti*: Sonevndur swap, sum t.d. kann fevna um lán, rentu og gjaldoyra.
*Viðhangandi renta*: Tíðargreinað renta viðvíkjandi roknskaparárinum, goldin eftir roknskaparlok.

Síðani 2016 eru brævalánini virðisásett til marknaðarvirði, og kursbroytingar rakstrarførdar.

***Kursmunurin er lækkaður.***

Í talvuni niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin greinað restskuldina á brævalánunum, sum vóru virkin, ávikavist við árslok 2020 og við árslok 2021. Við árslok 2021 er samlaði kursmunurin lægri, enn hann var við ársbyrjan. Broytingin er tikin við í raksturin, sum ikki staðfestur kursmunur, undir høvuðskontu 20.50.1.01 “Rentur at gjalda”.

*t.kr.*

| **FO-LB** | **Restskuld við byrjan 2021** | **Virði við byrjan 2021** | **Munur** | **Restskuld við árslok 2021** | **Virði við árslok 2021** | **Munur** | **Broytt markn. virði** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 210622 | 1.350.000 | 1.355.819 | - | - | - | - | - |
| 320503 | 550.000 | 550.000 | 0 | 550.000 | 589.765 | 39.765 | 39.765 |
| 320503 | -162.085 | -162.085 | 0 | -139.755 | -149.859 | 12.226 | 12.226 |
| 320503 | | 111.763 | 111.763 | | 80.251 | 80.251 | -31.513 |
| 230627 | 550.000 | 562.370 | 12.370 | 550.000 | 558.250 | 8.250 | -4.120 |
| 220602 | 1.300.000 | 1.308.021 | 8.021 | 1.300.000 | 1.302.730 | 2.730 | -5.291 |
| 250602 | 1.645.000 | 1.681.634 | 36.634 | 1.645.000 | 1.649.606 | 4.606 | -32.028 |
| **Tils.** | **5.232.915** | **5.407.521** | **168.788** | **3.905.245** | **4.030.742** | **147.827** | **-20.961** |

*FO-LB 320503*: Lánið er í norskum krónum, men er býtt um við (swappað til) danskar krónur. Áljóðandi virðið á láninum er NOK 550 mió. við árslok 2021, svarandi til DKK 410 mió. Gjaldoyramunurin og virðið á lánsbýtinum eru víst fyri seg.

Landsbankin ætlar ikki at rinda lánið, sum er í norskum krónum, og swappað aftur til danskar krónur fyri tíð. Tá ið lánið verður rindað aftur í 2032, verður kursmunurin 0.

Sambært Landsbankanum er Nordea “marketmaker” á landskassans lánsbrøvum, t.v.s. at Nordea regluliga ásetir kursir á lánsbrøvum til besta kursin, tey kunnu koma fram til.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við árslok 2021 | Tíðargr. renta | Rentudagur | Dagar | Roknað renta í % | Ásett renta í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 320503 | 410.245 | 7.292 | 03-05-2021 | 237 | 2,7000 | 2,7000 |
| 230627 | 550.000 | 1.761 | 27-06-2021 | 187 | 0,6250 | 0,6250 |
| 220602 | 1.300.000 | 0 | 02-06-2021 | 212 | 0,0000 | 0,0000 |
| 250602 | 1.645.000 | 1.194 | 02-06-2021 | 212 | 0,1250 | 0,1250 |
| | ***3.905.245*** | ***10.248*** | | | | |
| 320503 - lánsbýti | -410.245 | -7.292 | 03-05-2021 | 237 | -2,7000 | -2,7000 |
| 320503 - lánsbýti | 447.883 | 5.337 | 03-05-2021 | 237 | 1,8100 | 1,8100 |
| **Tilsamans** | **3.942.883** | **8.292** | | | | |

*Rentudagar*: Í FO-LB 320503 verða nýttir 30/360 dagar í mánaðinum/árinum; í øðrum lánum eitt vanligt ár.
*FO-LB 320503*: Lánið í norskum krónum er til kursvirðið í donskum krónum við árslok 2021; lánið er býtt um við danskar krónur.

Í talvuni hevur Landsgrannskoðanin eftirroknað tíðargreinaðu rentuna av hvørjum láni sær í mun til restskuldina við árslok 2021. Rentan á norska láninum er 2,7%, men er býtt um til danskar krónur við 1,81% rentu. Rentumunurin verður góðskrivaður landinum.

### *Skráseting av rentuútreiðslum o.ø.*

Sambært landsroknskapinum 2021 eru rentuútreiðslur o.a. -9,2 mió.kr., og 35,1 mió.kr. eru fluttar til "Frávik fyri rentuútreiðslur" á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.1.01 "Rentur at gjalda" samsvarar við játtanina, ið er 25,9 mió.kr. Í talvuni eru rentuútreiðslur o.a. sundurgreinað:

*t.kr.*

| Heiti | 2020 | | 2021 | |
|---|---|---|---|---|
| | *Játtan* | *Roknskapur* | *Játtan* | *Roknskapur* |
| Goldnar rentur | | 30.381 | | 20.903 |
| Broytt tíðaravmarkað renta o.a. | | -5.904 | | -3.488 |
| ***Rentur tilsamans*** | | ***24.476*** | | ***17.414*** |
| Staðfestir kursmunir | | -7.998 | | -6.427 |
| Ikki staðfestir kursmunir | | 20.416 | | -20.994 |
| ***Kursmunir tilsamans*** | | ***12.418*** | | ***-27.421*** |
| Ómaksgjøld o.a. | | 5.909 | | 0 |
| Aðrar rentuútreiðslur | | 1.099 | | 806 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovnar | | -17.802 | | 35.100 |
| **Tilsamans** | **26.100** | **26.100** | **25.900** | **25.900** |

*Goldnar rentur*: Í Búskaparskipan landsins eru renturnar ikki greinaðar í goldnar og tíðargreinaðar rentur – upphæddirnar eru roknaðar sambært yvirliti úr Pandaskipanini.

***Nettoútreiðslurnar av rentum og kursmunum eru lækkaðar.***

Nettoútreiðslurnar av rentum og kursmunum av brævalánunum eru -10,0 mió.kr. í 2021; í 2020 vóru tær 36,9 mió.kr.

Í talvuni niðanfyri eru goldnar rentur og tíðargreinaðar rentur í 2021 býttar á brævalánini. Landsgrannskoðanin hevur roknað, hvat samlaða rentuupphæddin fyri hvørt lánið er út frá einari miðalsaldu á lánunum í árinum. Roknaða rentan er samanborin við ásettu rentuna á hvørjum láni sær.

*t.kr.*

| FO-LB | Miðalsalda í 2021 | Goldin renta | Broytt tíðargr. renta | Renta tilsamans | Roknað renta í % | Ásett renta í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 210622 | 675.000 | 6.750 | -3.551 | 3.199 | 0,5000 | 0,5000 |
| 320503 | 399.080 | 11.025 | 426 | 11.452 | 2.9095 | 2,7000 |
| 230627 | 550.000 | 3.438 | 0 | 3.438 | 0,6242 | 0,6250 |
| 220602 | 1.300.000 | 0 | 0 | 0 | 0,0000 | 0,0000 |
| 250602 | 1.645.000 | 2.056 | 0 | 2.056 | 0,1250 | 0,1250 |
| ***Tilsamans*** | ***4.569.080*** | ***23.270*** | ***-3.125*** | ***20.145*** | | |
| Lánsbýti | -399.080 | -10.474 | -397 | -10.871 | -2,6498 | -2,7000 |
| Lánsbýti | 447.883 | 8.107 | 0 | 8.107 | 1,8100 | 1,8100 |
| **Tilsamans** | **4.617.883** | **20.903** | **-3.522** | **17.381** | | |

Sambært landsroknskapinum 2021 eru rentuútreiðslurnar til uttanlandsskuld 17.414 t.kr. Samanborið við landsroknskapin er munurin 33 t.kr. Hinvegin var "ikki staðfesta kurstapið" í landsroknskapinum 20.994 t.kr. Tað gevur 33 t.kr. størri inntøku, samanborið við útrokningina í talvuni á síðu 223, har munurin á marknaðarvirðinum á brævalánunum við árslok samanborið við virðið við ársbyrjan er eftirroknaður. Samanlagt er eingin munur. Sambært Pandaskipanini er talan um ikki staðfestan gjaldoyravinning.

***Miðalrentan á lánum og lánsbrævaskuldin eru lækkað.***

Í 2021 eru renturnar av brævalánunum 17.414 t.kr., og í 2020 vóru tær 24.476 t.kr. Høvuðsorsøkin til lækkingina er, at miðalrentan á lánunum er lækkað. Sambært ársfrágreiðingini hjá Landsbankanum frá 2021, var miðalrentan við ársenda 2020 0,51%, meðan hon er lækkað til 0,35% við ársenda 2021. Eisini minkaði lánsbræva-skuldin við 1,35 mia.kr. í 2021.

### *Útreiðslur av rentu, kursi og lánsbýti í árinum*

Í talvuni niðanfyri eru brævalánini samanhildin við samlaðu rakstrarbroytingarnar av lánunum í árinum.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við árslok 2021 | Renta smb. roknskapi | Kursbroyt. o.a. smb. roknskapi | Rakstrar-broytingar tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 210622 | 0 | 3.199 | 0 | 3.199 |
| 320503 | 410.245 | 8.688 | 20.478 | 29.166 |
| 230627 | 550.000 | 3.438 | -4.120 | -682 |
| 220602 | 1.300.000 | 0 | -5.291 | -5.291 |
| 250602 | 1.645.000 | 2.056 | -32.028 | -29.972 |
| **Tilsamans** | **3.905.245** | **17.381** | **-20.961** | **-3.579** |

### *Aðrar rentuútreiðslur*

Aðrar útreiðslur, enn rentur og kursmunir av brævalánunum, eru 806 t.kr., t.e. gjøld fyri skráseting, eftirlit o.a. Nakað av útreiðslum eru av føroyskum peningastovnskontum hjá Landsbankanum og Gjaldstovuni.

Játtanin til Landsbankan rindar útreiðslurnar av sjálvari porteføljuskipanini. Útreiðslur í sambandi við plasering av gjaldføri, t.d. kurtaga, fara av høvuðskontu 20.50.2.01 "Rentuinntøkur av innistandandi".

### Játtanir undir § 20 til rentur av brævalánum og plaseringum

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum ársfrágreiðingum umrøtt meginreglurnar fyri virðisásetingum av skuld, sum Landsbankin fyrisitur. Í 2016 vóru meginreglurnar broyttar soleiðis, at brævalánini verða tikin við í roknskapin til marknaðarvirði. Fígging landsins mælti til broytingina í 2015, soleiðis at somu meginreglur eru galdandi fyri fíggjarliga ogn og skuld. Fígging landsins vísti á, at onnur lond hava tjóðbanka, sum hevur tiltøkupeningin hjá landinum um hendi, og tá síggjast rentur o.a. ikki beinleiðis í landsroknskapinum.

***Roknskaparmegin-reglur eiga at endur-spegla avgerðir, tiknar í fíggjarárinum.***

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at roknskaparmeginreglurnar eiga á bestan hátt at endurspegla tær avgerðir, sum eru tiknar í fíggjarárinum. Eitt høvuðsendamál við fíggjarlógini og landsroknskapinum er at halda saman tað, sum er brúkt ella rátt yvir, við tað, sum er samtykt. Tann mest rættvísandi myndin av landsroknskapinum er tí, tær upphæddir, sum samsvara við tær avgerðir, sum ein landsstýrismaður ella stovns-leiðsla tekur.

Er endamálið við at taka lán einans at fíggja almennan rakstur, og lánini ætlandi ikki verða innfríað fyri tíð, hava kursbroytingar í einstøku árunum ikki útreiðslur ella inntøkur við sær í samlaðu lánstíðini. Rentan, sum hevur útreiðslur við sær hvørt ár, endurspeglar veruligu avgerðirnar. Árligu kursbroytingarnar geva tí ikki betri upp-lýsingar, sum við plaseringunum, men kunnu hinvegin heldur órógva veruligu myndina av útreiðslunum av skuldini.

Játtanir og roknskapir fyri ávikavist rentur av skuld og rentur av innistandandi síðani 2017:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rentur av skuld** | | | | | |
| Játtan | 20.000 | 18.000 | 43.500 | 26.100 | 25.900 |
| *Roknskapur* | | | | | |
| Rentur | 54.331 | 50.746 | 39.726 | 24.476 | 17.414 |
| Kursbroytingar | 21.079 | -27.702 | 13.380 | 12.418 | -27.421 |
| Ómaksgjøld o.a. | 4.114 | 649 | 1.950 | 7.008 | 806 |
| Javning | -59.524 | -5.693 | -11.557 | -17.802 | 35.100 |
| **Rentur av innistandandi** | | | | | |
| Játtan | -25.800 | -31.900 | -40.700 | -36.500 | -39.500 |
| *Roknskapur* | | | | | |
| Samlaður vinningur | -79.724 | 45.193 | -191.305 | -73.217 | -141.902 |
| Javning | 53.924 | -77.093 | 150.605 | 36.717 | 102.402 |

Í ársfrágreiðingini 2017 vísti Landsgrannskoðanin á, at útreiðslurnar av rentum, kursbroytingum o.ø. vóru 80 mió.kr. Játtanin var 20 mió.kr. Sjálv rentan var 54 mió.kr. Landsgrannskoðanin ivaðist tí í, um broyttu roknskaparmeginreglurnar høvdu við sær, at bókaðu útreiðslurnar á bestan hátt endurspeglaðu tær avgerðir og tiltøk, sum vóru framd innan játtanarøkið.

Í 2021 er játtanin 25,9 mió.kr. til rentur av skuld. Í talvuni sæst, at rentuútreiðslurnar eru 17,4 mió.kr., og inntøkurnar av kursbroytingum eru 27,4 mió.kr.

Í 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at í fíggjarlógini fyri 2019 var játtanin til rentuútreiðslur á § 20 "Inntøkur" ásett sum effektiva rentan við upptøku av lánsbrævaskuldini, soleiðis at hon endurspeglar miðalrentustig í mun til støddina á skuldini.

### Javning av rentuútreiðslum og -inntøkum millum § 20 og § 80

***Ivasamt, um tað er rætt at javna ella flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.***

Í undanfarnum ársfrágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin eisini umrøtt broytingarnar í upplýsingunum um rentu o.a. Nú er viðgerðin av rentuinntøkum og rentuútreiðslum, kursbroytingum o.ø. soleiðis, at inntøkur og útreiðslur, sum hava verið í árinum, eru tiknar við undir § 20, sum er partur av RLÚ I, meðan tær mánaðarliga eru javnaðar soleiðis, at frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 "Rentur", sum er partur av RLÚ II. Landsgrannskoðanin helt tað vera ivasamt, um tað var rætt at javna ella flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.

Í fíggjarlógini 2020 er greitt frá undir høvuðskontu 20.50.1.01 "Rentur at gjalda", at fyri rentuútreiðslurnar verður effektiva rentan brúkt. Metingin av rentuútreiðslunum er grundarlag undir bæði játtan og roknskapi, og frávik ímillum játtan og nýtslu verða skrásett sum óvanligar útreiðslur og inntøkur.

Landsbankin hevur greitt frá, at frá 2015 hevur bankin mett um rentuútreiðslurnar við at brúka effektivu rentuna á lánsbrævarøðunum, tá ið metingin var gjørd. Tað er viðkomandi, um broytingar verða gjørdar í lántøkuni í úrtíð, men av tí at ætlanin ikki er at rinda lánini aftur fyri tíð, hevur Landsbankin, frá og við 2019, brúkt effektivu rentuna á lánunum, við upptøku. Tað eigur í framtíðini at endurspegla rættari rentukostnað í fíggjarlógini.

Í landsroknskapinum 2021 eru rentuútreiðslurnar undir § 20 javnaðar við -35,1 mió.kr. og rentuinntøkurnar við 102,4 mió.kr. Í javningini av rentuinntøkunum eru 13,9 mió.kr. í muni, sum sambært Búskaparskipan landsins er nettopartur hjá Búskapargrunninum av samlaðu íløgurøktini, frádrigið 778 t.kr. í umsitingargjaldi til Landsbankan.

# 11. Orðalisti

**Benchmark** – er ein miðvís kanning og meting, sum verður gjørd fyri at samanbera úrslitini hjá fyritøkum.

**Búskaparskipan landsins (BSL)** – felagsheiti fyri allar skipanirnar, sum Gjaldstovan umsitur.

**Dygdarskipan** – samanløgd skipan hjá kommunulæknunum til eftirútbúgving og gransking.

**Eksternir grunnar** – grunnar, sum ikki eru tiknir við í fíggjarstøðu landskassans, og sum hava sjálvstøðugan roknskap.

**Eykajáttanarlóg** – broytingar, sum Løgtingið ger í játtanum, eftir at fíggjarlógin er samtykt.

**FAS** – Føroya Altjóða Skipaskrá.

**FAS-skipanin** – skipan hjá TAKS til afturbering av skatti.

**Felagskassar** – peningur, sum búfólk á einstøku sambýlunum eiga.

**Fígging Landsins** – fyrrverandi deild hjá Gjaldstovuni, sum umsat gjaldførið hjá landinum.

**Fíggjargrannskoðan** – er at ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

**Flekssalda** – tal av tímum, eitt starvsfólk eigur á ella skyldar.

**Fyrisitingargrannskoðan** – er at ansa eftir, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

**Grannskoðanarlógin** – løgtingslóg nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

**Heildarskipanin** – í frágreiðingini meinast við nýggju Heildarskipanina hjá Almannaverkinum.

**Høvuðskonta** – játtanir verða veittar á høvuðskontum, og tað er høvuðskontan, ið er sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um.

**Innaneftirlit** – tey tiltøk, sum leiðslan setir í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at roknskapurin er rættur og álítandi, at raksturin er effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

**Inntøkufíggjað virksemi** – er virksemi, ið ber handilsligan dám. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann loyva stovnum at hava inntøkufíggjað virksemi. Nærri reglur um inntøkufíggjað virksemið eru í kap. 6 í K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan”.

**ISAE 3000** – altjóða standardur, sum verður brúktur í sambandi við váttan um at stovnur lýkur dátuverndarlógina (GDPR).

**ISAE 3402** – altjóða standardur, sum verður brúktur í sambandi við grannskoðanir og váttanir, sum skulu geva høga vissu fyri tryggum umhvørvi hjá tænastuveitarum, herundir KT-veitarum.

**Løgujáttan** – játtanarslagið løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum, skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.

**Kervisgrannskoðan** – grannskoðan av KT-skipanum.

**Keypsportalurin** – portalur har lýst verður alment, tá ið almennir stovnar skulu keypa vørur ella tænastur.

**Kontuskipan landsins** – kontuplanur fyri tað almenna. Reglur fyri, hvussu útreiðslur og inntøkur skulu flokkast í landsroknskapinum.

**KT Landsins** – deild hjá Gjaldstovuni, sum hevur til uppgávu at veita almennum stovnum KT-tænastur og at samskipa KT á yvirskipaðum stigi.

**Landsnet** – tænasta, sum KT Landsins veitir. Tænasturnar fevna um hýsing og rakstur av servarum og netverkum, uppseting og atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum og KT-support til brúkarar.

**Landsroknskapurin** – samlaði ársroknskapurin hjá landinum og eigur at fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri farið fíggjarár og ogn og skuld landsins. Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

**Løgfrøðiliga-kritisk grannskoðan** – grannskoðan av, at roknskapurin er samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

**PandaConnect** – porteføljuskipan til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti.

**Rakstrarjáttan** – játtan, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslur í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur, tænastur o.a.

**RLÚ** – er ein stytting fyri Rakstur, Løga og Útlán.

**RLÚ I** – ársúrslit av vanligu postunum í landsroknskapinum.

**RLÚ II** – RLÚ I pluss úrslit av óvanligum postum.

**Roknskapargóðkenningarskipanin** – stytt RGS, er ein KT-skipan, sum góðskutryggjar almenna roknskapin við góðkenningum av stovnsroknskapum.

**Roknskaparkunngerðin** – kunngerð nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins”.

**Roknskaparlógin** – løgtingslóg nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.”

**Roknskaparreglugerð** – reglugerð við ábyrgdar- og heimildarreglum fyri roknskaparhaldið hjá stovnum.

**Roknskaparrundskrivið** – roknskaparrundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001 um vegleiðing um roknskaparreglugerðir.

**Ræðisrættur** – er at hava ræði á einari játtan ella kontu.

**Setanarpolitikkur landsins** – partur av starvsfólkapolitikkinum hjá landinum. Setanarpolitikkurin hevur til endamáls at tryggja, at stovnar seta umsøkjarar, ið eru best egnaðir til starvið, og tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan hátt.

**SLA** – Service Level Agreement er heiti á einari KT-rakstrar- og viðlíkahaldsavtalu millum partar.

**Standardkonta (St.kt.)** – Sundurgreinar inntøkurnar og útreiðslurnar í t.d. sølu, lønir, vørukeyp, tænastuveitingar o.a.

**Standardroknskaparkonta (StRk)** – Neyvari útgreining av standardkontu.

**Stuðulsfíggjað virksemi** – virksemi undir rakstrarjáttan, sum ikki er av handilsligum slag, og sum er fíggjað við stuðli. Nærri reglur um stuðulsfíggjað virksemið eru í kap. 7 í K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan".

**Stýrisskipanarlógin** – Ll. nr. 103/1994 "um stýrisskipan Føroya".

**Støðla** – er í verandi fíggjarárið at útreiðsluføra eina útreiðslu, ið fer at verða hildin í komandi fíggjarárum/seta av til væntaðar útreiðslur.

**Samleikin** - er talgild innritan og undirskrift hjá føroyingum.

**TotalView** – er skipan, sum fleiri almennir stovnar brúka til at skráseta tíðarnýtslu v.m.

**Transaktiónsslóð** – eisini nevnd viðskiftisslóð er treytin um, at allar skrásetingar skulu kunna finnast í roknskapinum, og at tølini í roknskapinum skulu kunna loysast upp í tær skrásetingar, sum tey eru samansett av.

**Trygdarpolitikkur** – er ein yvirskipaður politikkur, ið tekur atlit at váðum, ið hótta.

**Undirkonta** – verður brúkt, tá ið neyðugt er at býta eina játtan sundur í fleiri virkisøki.

**ÚS-skipan** – er skipan hjá Studna til at skráseta og gjalda út studning og lán.

**ÚSUN-skipan** – er stuðulsskipan til lesandi uttan fyri Norðurlond.

**Útjavningarkonta** – minnir um eginpeningskontuna í roknskapum hjá privatum virkjum, men er tó meiri tøknilig, m.a. tí at ogn og skuld vera virðisásett øðrvísi.

**Vangin** – er tænasta frá Talgildu Føroyum, har tænastur hjá almennum stovnum og kommunum eru savnaðar.

**Váðameting** – er at eyðmerkja og greina teir vandar, sum mest sannlíkt kunnu raka stovnin meint.

**Vaktætlan (el. Vaktplan)** – KT-skipan at ráðleggja arbeiðstíð í og at avgreiða lønir við.

**Verklagslóg** – er lóg, sum eigur at verða løgd fyri Løgtingið, tá ið íløguætlan er 10 mió.kr. ella størri.

**Verkætlan** – er t.d. bygging av einum bygningi ella vegi og granskingarverkætlanir.

**Víðkað fyrisitingargrannskoðan** – ein størri og meira víðfevnd kanning, enn vanlig fyrisitingar-grannskoðan, sum løgtingsgrannskoðararnir kunnu biðja um.

**Vinnugluggin** – skipan hjá TAKS til at lata inn roknskapir o.a.